ALTARBÓK

FØROYA KIRKJU



Royndarútgáva

ALTARBÓK

ALTARBÓK
FØROYA KIRKJU

TEKSTABÓK
FYRRA TEKSTARØÐ

ROYNDARÚTGÁVA

FØROYSKT KIRKJUMÁL

Altarbók Føroya kirkju – Fyrra tekstarað – royndarútgáva
© Føroyskt Kirkjumál 2012
Umbrotið, prentað og bundið: Føroyaprent

ISBN 978-99918-821-4-7

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

INNIHALDSYVIRLIT

Kollektir og bíbliulestrar til sunnu- og halgidagar
í kirkjuárinum eftir fyrru tekstarød 7

Yvirlit yvir bíbliulestrar til barnagudstænastu
í vanligari kirkjutíð (uppskot) 246

Pínslusøga várs Harra Jesu Krists 252

Uppskot til lestrar úr Pínslusøguni biðikvøldini
í føstu 273

Uppskot til bíbliulestrar biðikvøldini í føstu. 274

Kollekt aftan á prædiku, tá ið ikki er altargangur 278

Kollektir til føstugudstænastu / lestur 279

Kollektir til messu / gudstænastu / lestur
vanligar gerandisdagar. 282

Kollektir og bíbliulestrar til serstakar
gudstænastur í kirkjuárinum 283

Kollektir og bíbliulestrar til mishalgidagar
og aðrar minnisdagar. 297

Yvirlit yvir bíbliulestrar í kirkjuárinum,
til mishalgidagar og aðrar dagar í raðfylgju 322

Yvirlit yvir kirkjuárið 360

Yvirlit yvir serstakar gudstænastur í kirkjuárinum 363

Yvirlit yvir mishalgidagar og aðrar minnisdagar 363

Inngangsbøn 365

Útgangsbøn 366

Kollektir og bíbliulestrar til sunnu- og halgidagar í kirkjuárinum

Sum inngangskollekt verður ein av hesum kollektum messað ella lisin.

Útgangskollektir til tær stóru hátíðirnar standa eftir bíbliulestrarnar til dagarnar.

Lisnir verða tveir ella tríggir bíbliulestrar. Tá ið tríggir bíbliulestrar vanliga verða lisnir, kann annar av lestrunum undan evangeliinum falla burtur, t.d. tá ið dópur er undir messuni / gudstænastuni. Fyrsti lestur er úr Gamla testamenti, annar úr Nýggja testamenti (epistul / lestur) og triði er dagsins evangelium. Verður bert ein bíbliulestur lisin undan evangeliinum, eigur tann lesturin, ið hevur stjørnu sum frámerki, at verða lisin sum fyrri lestur.

Navnið á sunnu- og halgidøgum, sum er í klombrum, kann verða nýtt í staðin fyri tað navnið, ið stendur frammanfyri.

Tey kirkjuár, har høvuðsparturin fellur á stakt tal, verður lisið eftir fyrru tekstarød, og tey kirkjuár, tá ið høvuðsparturin fellur á makað tal, verður lisið eftir seinnu tekstarød.

Advent – jólaføsta

1. SUNNUDAG Í ADVENT

Nýggjársdag kirkjunnar
Litur: Viólbláur, hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Viólbláur.

KOLLEKT
Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú miskunnaði okkum, sum fyri syndarinnar skuld vóru í deyðans og Sátans valdi, og gav okkum son tín, hin spaklynda og rættvísa kong til frelsara frá synd og ævigum deyða. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt leiða og stýra okkum, so at vit halda okkum at hesum kongi og frelsara okkara, og ikki eins og verðin ger, taka okkum meinboga av honum, men verða varðveitt í fastari trúgv á hann og harvið verða sæl um allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harri Jesus Kristus, tú, sum í miskunn tíni letur okkum byrja eitt nýtt náðiár. Vit biðja teg, reis teg í tínum veldi og kom okkum til hjálpar. Halt verndarhond tína yvir okkum og bjarga okkum í náði frá teimum vandum, sum hótta okkum vegna syndaskuld okkara, og ver okkum endurloysn og frelsa, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:

Foldin er Harrans og fylli hennar, heimurin og tey, ið heimin byggja. Tí hann hevur lagt hennar grundvøll í havið, yvir streymum hann hevur hana fest. Hvør torir ganga niðan á fjall Harrans, hvør torir standa á hans heilaga staði? Sá, ið sakleysar hevur hendur og hjarta reint, ikki hevur vent sínum huga at lygnum og ikki svør svikara eið. Hann skal av Harranum fáa signing og rættlæti frá sínum frelsunnar Guði. Slík er tann ætt, ið leitar til Harrans og søkir ásjón Jákups Guðs. Hevjið tykkara høvur, borglið! Reisist tit avgomlu portur, at dýrdarinnar kongur kann koma! Hvør er hesin dýrdar kongur? Harrin, veldigur og sterkur, Harrin, sterkur í stríðum. Hevjið tykkara høvur, borglið! Reisist tit avgomlu portur, at dýrdarinnar kongur kann koma! Hvør er hann, hesin dýrdar kongur? Harri herskaranna. Hann er tað, ið er dýrdar kongur. Sl 24

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*

Og hetta eiga tit tess heldur at gera, sum tit vita tíðina, at tað longu er tíð hjá tykkum at vakna úr svøvni; tí at nú er frelsa okkara nærri, enn tá vit tóku við trúnni. Liðið er á náttina, og dagurin er í nánd. Latið okkum tí leggja av verk myrkursins og lata okkum í herklæði ljósins. Latið okkum hava sømiligan atburð sum á degi, ikki í ováti ella drykkjuskapi, ikki í ólevnaði ella siðloysi, ikki í klandri ella øvund; men íklæðist heldur Harran Jesus Krist, og havið ikki tílíka umsorgan fyri holdinum, at tað elvir girndir. Róm 13,11-14

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og tá ið teir nærkaðust Jerúsalem og komu til Betfage við Oljufjallið, tá sendi Jesus tveir lærusveinar undan og segði við teir: „Farið í bygdina her beint framman fyri tykkum, og brátt munnu tit finna eitt ásin standa bundið og eitt fyl hjá tí; loysið tey og leiðið mær tey higar. Og um onkur sigur nakað við tykkum, so skulu tit siga, at Harranum tørvar tey; tá man hann alt fyri eitt lata tey avstað.“ Men hetta hendi, til tess at tað skuldi ganga út, sum talað er av profetinum, tá ið hann sigur: „Sions dóttur berið tit boð: Sí, kongur tín til tín kemur, lítillátur, á asna hann ríður, á ungum klyvjadjórs fyli.“ Men lærusveinarnir fóru avstað og gjørdu, sum Jesus hevði boðið teimum; og teir komu við ásininum og fylinum og løgdu klæði síni á tey, og hann setti seg oman á tey. Men flest øll av mannamúgvuni breiddu klæði síni á vegin, og summi brutu greinar av trøunum og løgdu á vegin. Men mannamúgvurnar, sum gingu undan honum og sum gingu aftaná, rópaðu og søgdu: „Hosianna, Dávids sonur! Vælsignaður veri tann, ið kemur í Harrans navni! Hosianna í hægsta himli!“ Matt 21,1-9

2. SUNNUDAG Í ADVENT

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur opinberað okkum, at himmal og jørð skulu ganga undir, men at vit skulu rísa upp og koma

fram fyri dómstól tín. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt halda okkum fast við orð títt. Varða okkum í náði fyri synd og varðveit okkum í øllum freistingum, so at vit ikki tyngja hjørtu okkara við marglæti og tímiligari stúran, men altíð vaka og biðja og við føstum áliti á náði tína vænta komu sonar tíns við gleði og tá verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harri Jesus Kristus, tú, sum á evsta degi kemur aftur í dýrd at døma livandi og deyð. Vit biðja teg, búgv tú hjørtu okkara til, so at vit ikki liva í følskum tryggleika, men altíð vaka og biðja og við føstum áliti á náði tína tæna tær við reinum hjørtum og fagna komu tíni við gleði, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Málaki profetur:
So sigur Harrin: Sí, eg sendi ørindreka mín; hann skal greiða vegin undan mær; og brádliga kemur hann í tempul sítt, Harrin, ið tit søkja, og boðberi sáttmálans, ið tit stunda eftir; sí, hann kemur, sigur Harri herliðanna. Men hvør kann halda við tann dagin, tá ið hann kemur? Og hvør kann standast, tá ið hann birtist? Tí at hann er eins og eldur málmbræðarans, eins og lútur tváarans. Og hann man sita og bræða og reinsa silvurið; og hann man reinsa synir Levi og gera teir skírar eins og gull og silvur, so at teir bera Harranum offurgávur í rættlæti. Mál 3,1-3

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Tí at alt tað, sum áður er skrivað, er skrivað okkum til lærdóms, fyri at vit skulu hava vón okkara av tí tolmóði og teirri uggan, sum skriftirnar geva. Men Guð, sum veitir tolmóðið og ugganina, gevi tykkum, at tit mega sita væl um sátt hvør við annan, soleiðis sum Kristus Jesus vil tað, til tess at tit samhugaðir við einum munni mega prísa Guði og faðir várs harra Jesu Krists. Takið tí hvør annan at sær, líkasum eisini Kristus tók tykkum at sær til Guðs æru. Róm 15,4-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Jesus segði: „Og tað skulu verða tekin í sól og mána og stjørnum, og á foldini munnu tjóðflokkar kvíða í ráðloysi, tí at hav og sjógvar bróta, meðan menn ørmaktast av ótta og stúran fyri tí, ið koma skal yvir jarðarríkið; tí at skakast skulu himmalsins kreftur. Og tá skulu tey síggja menniskjusonin koma í ský við mátti og miklari dýrd. Men tá ið hetta fer at henda, tá lítið upp og hevjið upp høvdum tykkara, av tí at loysn tykkara nærkast.“ Og hann segði teimum eitt líknilsi: „Hyggið at fikutræinum og øllum trøum; tá ið tit síggja, at tey fara at spretta, tá skilja tit av tykkum sjálvum, at summarið nú er í nánd. Á sama hátt skulu tit eisini vita, tá ið tit síggja hetta henda, at Guðs ríki er í nánd. Sanniliga sigi eg tykkum: henda slekt skal als ikki forganga, áðrenn alt samalt er hent. Himin og heimur skulu ganga undir, men orð míni skulu als ikki forganga. Men verið varnir, at hjørtu tykkara ikki skulu verða tyngd av svirri og drykkjuskapi og sút fyri hesum lívi, so at tann dagurin kemur dáttliga á tykkum sum ein snara; tí at koma skal hann á øll tey,

sum búgva um allan jarðarkring. Vakið tí á hvørji stund og biðið, so at tit kunnu verða førir fyri at komast undan øllum hesum, ið henda skal, og at standast fyri menniskjusoninum!“ Luk 21,25-36

3. SUNNUDAG Í ADVENT

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, gerast menniskja, til tess at hann skuldi bjarga okkum frá synd, deyða og djevuli og gera okkum sæl allar ævir. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt leiða og stýra hjørtum okkara, so at vit halda okkum at orði hansara eina og harvið sleppa undan teimum meinbogum, sum sjálvklókskapur okkara freistar okkum til, til tess at vit altíð mega vera teirra millum, sum ikki taka sær ilt av einborna syni tínum, Jesusi Kristi, várum harra, men allar ævir verða sæl fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harri Jesus Kristus, tú, sum ert ljós heimsins og lýsir fyri teimum, sum sita í myrkri og í skugga deyðans. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Ver okkum miskunnsamur og birt tú ljós í hjartans myrkri, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:*

Oyðimørkin og hitt turra landið skulu gleðast, reynið skal fegnast og blóma eins og lilja, ja, blóma fagurliga og fegnast við fagnaðarrómi. Libanons dýrd skal tað fáa og fagurleika Karmels og Sárons. Tey skulu fáa dýrd Harrans at sjá og fagurleika Guðs várs. Styrkið hinar máttleysu hendur og magnið tey knø, sum riða. Sigið við hini dirvislítlu: Verið hugreyst, óttist ikki! Síggið Guð tykkara! Nú kemur hevndin, endurgjald frá Guði: Hann kemur sjálvur at frelsa tykkum! Tá skulu eygu hinna blindu latast upp og oyru hinna deyvu opnast, haltir lætta sær á sum hjørtur, og málleys tunga lovsyngur. Tí at í oyðimørkini vatnslindir spretta og løkir í reynum. Sólbrendir oyðisandar skulu verða at vatnræsum og tystandi land at kelduvaði; í sjákálahølinum skal fenaður savnast, og har sum strutsarnir hølaðust áður, skulu sevvøkstir spretta. Har skal verða lagdur vegur; hann skal verða kallaður vegurin halgi; hann má eingin óreinur ganga; hann skal vera fyri fólk hans; fákunnir skulu ikki villast á honum. Har skal einki ljón vera og einki ránsdjór fara um; tey síggjast ikki har; á honum skulu hini endurloystu ganga; hini útloystu Harrans venda heim aftur; við fagnaði koma tey til Zion, krýnd við ævigari gleði; fagnaður og gleði teimum fylgja; burtur flýggja sorg og sút. Jes 35

Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:

Soleiðis haldi menn okkum fyri tænarar Krists og húshaldarar yvir loyndardómum Guðs. Annars verður her kravt av húshaldarum, at ein og hvør má roynast trúgvur.

Men mær liggur tað ógvuliga lítið á at verða dømdur av tykkum ella av menniskjuligum dómstóli; ja, eg dømi meg ikki sjálvur heldur. Tí at eg veit einki við mær sjálvum, men fyri tað eri eg tó ikki rættvísgjørdur; men tann, sum dømir meg, er Harrin. Dømið tí ikki nakað fyri tíðina, áðrenn Harrin kemur, hann sum eisini skal leiða tað fram í ljósið, sum er fjalt í myrkrinum, og opinbera ráð hjartnanna; og tá skal ein og hvør fáa rós sítt av Guði. 1 Kor 4,1-5

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Jóhannes í fangahúsinum frætti um verk Krists, tá sendi hann boð við lærusveinum sínum og læt siga við hann: „Ert tú tann, ið koma skal, ella eiga vit at vænta ein annan?“ Og Jesus svaraði og segði við teir: „Farið og berið Jóhannesi boð um tað, sum tit hoyra og síggja: Blind fáa sjón og lamin ganga, spitølsk verða rein og deyv hoyra og deyð rísa upp og fátækum verða gleðiboð borin. Og sælur er tann, ið ongan meinboga fær av mær.“ Men tá ið teir vóru farnir avstað, fór Jesus at tala til mannamúgvurnar um Jóhannes: „Hvat fóru tit út í oyðimørkina at síggja? Ein sevlegg, ið sveiggjar higar og hagar í vindinum? Ella hvat fóru tit út til? At síggja ein mann skrýddan í skart? Sí, teir, sum mjúkan búna bera, eru í kongshøllum. Ella hvat fóru tit út til? At síggja ein profet? Ja, eg sigi tykkum, enntá meir enn ein profet. Tí at hetta er tann, ið skrivað stendur um: „Sí, eg sendi sendiboð mítt undan tær. Hann skal greiða veg tín fyri tær.“ Matt 11,2-10

4. SUNNUDAG Í ADVENT

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur sent profetar og boðberar at bera vitnisburð um son tín, Jesus Krist. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt hjálpa okkum at trúgva vitnisburði teirra, so at vit taka ímóti Jesusi sum frelsara okkara og við sannari gleði og tøkk halda hina heilagu hátíð í kirkju tíni fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harri Jesus Kristus, tú, sum letur okkum hoyra hin sæla boðskapin um komu tína í heimin. Vit biðja teg, reis teg í tínum veldi og kom okkum til hjálpar við náði tíni, so at vit taka ímóti tær við opnum hjørtum og fagna komu tíni við gleði, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:

Hvør yndisligir eru á fjøllunum føtur fagnaðarboðarans, ið kunnger friðin og ber gleðitíðindini, boðar frelsu og sigur við Zion: „Guð tín er vorðin kongur.“ Hoyr varðmenn tínar; teir hevja allir samlir fagnaðarróp; við egnum eygum síggja teir Harran koma aftur til Zions. Skerið í fagnaðarróp allar oyðirustir Jerúsalems, tí at Harrin

hevur uggað fólk sítt og endurloyst Jerúsalem. Harrin hevur nektað sín heilaga arm fyri eygum alra tjóða; um alla ta víðu jørð hevur frelsa Guðs várs verið eyðsæð. Jes 52,7-10

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Filippimanna:*
Gleðið tykkum í Harranum altíð! Eg sigi uppaftur: Gleðið tykkum! Spaklyndi tykkara verði øllum menniskjum kunnigt! Harrin er í nánd! Verið ikki stúrnir fyri nøkrum, men latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Guð í ákallan og bøn við tøkk, og Guðs friður, sum ber av øllum viti, skal varðveita hjørtu tykkara og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi. Fil 4,4-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Og hetta er vitnisburður Jóhannesar, tá ið Jødarnir sendu prestar og Levitar frá Jerúsalem til tess at spyrja hann: „Hvør ert tú?“ Og hann ásannaði og noktaði ikki, og hann ásannaði: „Eg eri ikki Kristus.“ Og teir spurdu hann: „Hvat tá? Ert tú Elia?“ Hann sigur: „Ikki eri eg tað.“ „Ert tú profeturin?“ Og hann svaraði: „Nei.“ Teir søgdu tá við hann: „Hvør ert tú? fyri at vit kunnu geva teimum svar, sum hava sent okkum. Hvat sigur tú um teg sjálvan?“ Hann segði: „Eg eri rødd á einum, sum rópar í oyðimørkini: Gerið beinan veg Harrans, eins og Jesaja profetur hevur sagt.“ Men teir, sum sendir vóru, vóru úr flokki Farisearanna. Og teir spurdu hann og søgdu við hann: „Hví doypir tú tá, um tú ikki ert Kristus, ei heldur Elia, ei heldur profeturin?“ Jóhannes svaraði teimum og segði: „Eg doypi við vatni; mitt ímillum tykkara stendur hann, sum tit ikki kenna, hann sum kemur

aftan á meg, sum eg ikki eri verdur at loysa tveingirnar hjá.“ Hetta hendi í Betániu, hinumegin Jórdan, har sum Jóhannes doypti. Jóh 1,19-28

Jól

JÓLAAFTAN

Litur seinnapart ella um kvøldið: Hvítur ella gyltur.

Seinnaparts- / kvøldgudstænasta uttan altargang – aftansangur. Prædikað verður yvir ein av hesum tekstum ella ein frítt valdan tekst. Fellur 4. sunnudagur í advent jólaaftan, verður messan / gudstænastan um middagsleitið hildin sum vanligt við bønum, tekstum og sálmum til 4. sunnudag í advent.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Vit takka tær, Guð faðir, tí at tú hevur givið okkum einborna son tín, Jesus Krist, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Vit takka tær, Jesus Kristus, tí at tú vart faðir tínum lýðin, setti teg sjálvan lágt og gjørdist menniskja. Vit takka tær, tú góði heilagi andi, tí at tú við orðsins ljósi letur okkum síggja, at Jesus Kristus er sonur Guðs og einasti frelsari okkara. Gev okkum, Guð, náði tína, so at vit við trúgvandi og takksomum hjørtum av nýggjum mega hoyra henda fagnaðarríka boðskapin, at okkum er ein frelsari føddur, og halda jól saman hvør við øðrum í kærleika okkara millum. Tað biðja vit øll í várs harra Jesu navni, hann, sum við tær og hinum heilaga anda livir og ræður um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú læt son tín,

Jesus Krist, gerast menniskja okkum til frelsu. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín, so at vit við trúgvandi og takksomum hjørtum av nýggjum mega hoyra henda fagnaðarríka boðskapin, at okkum er ein frelsari føddur, so at vit við honum mega fáa eina signaða jólahátíð í kærleika okkara millum. Tað biðja vit fyri einborna son tín, harra og frelsara okkara, Jesus Krist, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum sendi heilagu einglar tínar til hirðarnar úti á markini við gleðiboðum um son tín, Jesus Krist, og boðaði teimum, at teir ikki skuldu óttast, men gleðast, tí at frelsarin var borin í heim. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt reka allan ótta úr hjørtum okkara og veita okkum hina sonnu og ævigu gleði fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við hinum sanna ljósi, syni tínum, Jesusi Kristi, læt hina heilagu jólanátt lýsa eins og bjartan dag. Vit biðja teg, gev okkum her á foldum at skoða dýrd hansara og einaferð í himlinum at eiga gleðina í honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við hinum sanna ljósi, syni

tínum, Jesusi Kristi, læt hina heilagu jólanátt lýsa eins og bjartan dag. Vit biðja teg, gev okkum her á foldum at ganga í hesum ljósi og at eiga gleðina í honum, so at vit einaferð í himlinum mega skoða dýrd hansara í hinum æviga ljósi, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:

Men eina ferð skal ikki vera myrkur í tí landi, sum nú er í neyðum statt. Í forðum læt hann Zebulons land og Naftali land verða fyri vanvirðing, men eina ferð skal hann aftur lata heiður koma yvir vegin til havið, yvir landið handan Jórdan og yvir heidninganna kring. Tað fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós, og ljós skal lýsa yvir teimum, sum sita í deyðaskuggans landi. Tú økir fagnaðin í stórum, tú gert gleðina mikla; tey gleðast fyri ásjón tíni eins og á kornskurðartíð, fegnast, eins og tá ið herfongur verður býttur. Tí hitt tunga okið, stongina á herðum hans, og rakstrarmansins broddstav hevur tú brotið eins og á Midians degi. Ja, hvør heglandi hermanna stivli, hvør blóðdálkað skikkja skal brend verða og oydd í eldi. Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla; navn hans skal verða kallað undur, ráðgevi, veldigur Guð, ævinnar faðir, friðarhøvdingi. Stórt skal høvdingadømið verða, og friðurin skal ongan enda taka á hásæti Dávids og í kongsríki hans til tess at reisa tað og menna tað við rætti og rættvísi hiðan ífrá og um allar ævir. Vandlæti Harra herliðanna skal gera hetta. Jes 9,1-7

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar Mika profetur
Men tú, Betlehem Efrata, eina minst av Júda túsundum, frá tær skal tó koma hann, sum høvdingi skal vera yvir Ísrael; frá forðum er upphav hans, frá ævinleikans døgum; tessvegna gevur hann tey yvir eina tíð, til hon, ið føða skal, hevur átt; tá skulu leivdir ættbrøðra hans koma heim aftur til Ísraelsmanna. Og hann skal standa og goyma at teimum í kraft Harrans, í tignarnavni Guðs síns. Ekkaleys munnu tey tá búgva, tí at mikil skal hann vera alt at endamarkum jarðar. Hann skal vera friður. Mika 5,1-4a

Epistulin skrivar Paulus ápostul til Titusar:
Tí at Guðs náði er vorðin opinberað til frelsu fyri allar menniskjur, og hon uppsiðar okkum til at avnokta gudloysið og hinar veraldligu girndirnar og liva hóvliga og rættvísiliga og gudiliga í hesum heimi, væntandi hina sælu vón og opinberingina av dýrd hins stóra Guðs og frelsara várs, Jesu Krists, hann sum gav seg sjálvan fyri okkum, fyri at hann kundi loysa okkum út úr øllum lógloysi og reinsa sær sjálvum eitt eigindómsfólk, áhugað til góðar gerningar. Tit 2,11-14

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tað hendi í teimum døgum, at tað komu boð frá Augustusi keisara um, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal. (Hetta fyrsta manntalið var, meðan Kvirinius var landshøvdingi í Sýriulandi). Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína. Men eisini Jósef fór úr Galileu, úr bygdini Nasaret, niðan til Júdeu, til Dávids

bygd, sum eitur Betlehem, tí at hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn. Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín, hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum. Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: „Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.“ Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: „Heiður veri Guði í hægsta himli, [og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!“]

(Og tað hendi, tá ið einglarnir vóru farnir frá teimum aftur til himmals, tá søgdu hirðarnir hvør við annan: „Latið okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum.“ Og teir fóru við skundi hagar og funnu bæði Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni. Og tá ið teir sóu tað, søgdu teir frá teimum orðum, sum talað høvdu verið til teirra um hetta barn. Og øll, ið hoyrdu tað, undraðust á tað, sum teimum varð sagt av hirðunum. Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum. Og hirðarnir fóru avstað

aftur, og teir lovaðu og prísaðu Guði fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir). Luk 2,1-14 ella 1-20

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men við føðing Jesu Krists gekk tað soleiðis til: Tá ið Maria, móðir hansara, var trúlovað Jósefi, so kendist tað á henni, áðrenn tey komu saman, at hon var við barn av hinum heilaga anda. Men við tað at Jósef, maður hennara, var ein rættvísur maður og ikki vildi gera hana opinberliga til skammar, ætlaði hann í loyndum at skilja seg frá henni. Men meðan hann hugsaði um hetta, sí, tá sýndi eingil Harrans seg í dreymi fyri honum og segði: „Jósef, sonur Dávids! Óttast ikki fyri at taka Mariu, konu tína, til tín; tí at tað, sum hon ber undir belti, er av hinum heilaga anda. Og hon skal føða ein son, og Jesus skalt tú kalla navn hansara, tí at hann skal frelsa fólk sítt frá syndum teirra.“ Men hetta hendi alt samalt, fyri at tað skuldi ganga út, ið talað var av Harranum við profetinum, ið sigur: „Sí, moyggin skal verða við barn og eiga son, og á navni skulu tey nevna hann Immanuel“; tað merkir: „Guð við okkum.“ Men tá ið Jósef vaknaði upp úr svøvni, gjørdi hann, soleiðis sum eingil Harrans hevði boðið honum, og tók konu sína til sín. Men hann kom henni ikki nær, fyrr enn hon hevði átt son, og hann kallaði navn hansara Jesus. Matt 1,18-25

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú hevur latið

jólaboð tíni koma eisini til okkara, so at hin stóra gleðin verður boðað øllum fólki okkara. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at orð títt má bera ávøkst í hjørtum okkara og verða boðað eisini við okkum um allan heimin. Gev okkum at enda saman við øllum einglum tínum at vera við í hinum æviga lovsonginum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

JÓLADAG (FØÐINGARDAG KRISTS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú í miklu náði og miskunn tíni hevur latið son tín, Jesus Krist, gerast menniskja og í náði givið okkum hann til frelsara frá syndini og ævigum deyða. Vit biðja teg, upplýs hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit mega vera takksom fyri hesa náði tína, søkja alla hjálp og troyst hjá honum, og so at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt einborna son tín, Jesus Krist, verða føddan av Mariu moy og gerast menniskja. Vit biðja teg, at tú við honum vilt loysa okkum úr træl-

dómi syndarinnar og gera okkum til nýggj og fræls menniskju, honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Men eina ferð skal ikki vera myrkur í tí landi, sum nú er í neyðum statt. Í forðum læt hann Zebulons land og Naftali land verða fyri vanvirðing, men eina ferð skal hann aftur lata heiður koma yvir vegin til havið, yvir landið handan Jórdan og yvir heidninganna kring. Tað fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós, og ljós skal lýsa yvir teimum, sum sita í deyðaskuggans landi. Tú økir fagnaðin í stórum, tú gert gleðina mikla; tey gleðast fyri ásjón tíni eins og á kornskurðartíð, fegnast, eins og tá ið herfongur verður býttur. Tí hitt tunga okið, stongina á herðum hans, og rakstrarmansins broddstav hevur tú brotið eins og á Midians degi. Ja, hvør heglandi hermanna stivli, hvør blóðdálkað skikkja skal brend verða og oydd í eldi. Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla; navn hans skal verða kallað undur, ráðgevi, veldigur Guð, ævinnar faðir, friðarhøvdingi. Stórt skal høvdingadømið verða, og friðurin skal ongan enda taka á hásæti Dávids og í kongsríki hans til tess at reisa tað og menna tað við rætti og rættvísi hiðan ífrá og um allar ævir. Vandlæti Harra herliðanna skal gera hetta. Jes 9,1-7

* *Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:*
Eftir at Guð í forðum mangar ferðir og á mangan hátt

hevði talað til fedrarnar gjøgnum profetarnar, hevur hann við endan á hesum døgum talað til okkara gjøgnum sonin, sum hann setti til arvinga til allar lutir, og sum hann eisini hevur gjørt heimin við. Hann sum er ljómin av dýrd hansara og avmyndin av veru hansara og ber allar lutir við orði veldis síns, hann settist, tá ið hann hevði gjørt reinsan fyri syndirnar, við høgru hond á hátignini á høgum himni, og er vorðin tann mun mætari enn einglarnir, sum hann hevur arvað dýrabærari navn enn teir. Tí at við hvønn av einglunum hevur hann á nøkrum sinni sagt: „Sonur mín ert tú, í dag havi eg føtt teg!“ og uppaftur: „Eg vil vera honum faðir, og hann skal vera mær sonur“? Hebr 1,1-5

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tað hendi í teimum døgum, at tað komu boð frá Augustusi keisara um, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal. (Hetta fyrsta manntalið var, meðan Kvirinius var landshøvdingi í Sýriulandi). Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína. Men eisini Jósef fór úr Galileu, úr bygdini Nasaret, niðan til Júdeu, til Dávids bygd, sum eitur Betlehem, tí at hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn. Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín, hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum. Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rund-

an um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: „Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.“ Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: „Heiður veri Guði í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!“ Luk 2,1-14

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú hevur latið jólaboð tíni koma eisini til okkara, so at hin stóra gleðin verður boðað øllum fólki okkara. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at orð títt má bera ávøkst í hjørtum okkara og verða boðað eisini við okkum um allan heimin. Gev okkum at enda saman við øllum einglum tínum at vera við í hinum æviga lovsonginum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Seinnapart ella um kvøldið til aftansang

Sí frammanfyri kollektir til jólaaftan ella jóladag.

Henda heilaga lesturin skrivar Mika profetur:

Men tú, Betlehem Efrata, eina minst av Júda túsundum, frá tær skal tó koma hann, sum høvdingi skal vera yvir Ísrael; frá forðum er upphav hans, frá ævinleikans døg-

um; tessvegna gevur hann tey yvir eina tíð, til hon, ið føða skal, hevur átt; tá skulu leivdir ættbrøðra hans koma heim aftur til Ísraelsmanna. Og hann skal standa og goyma at teimum í kraft Harrans, í tignarnavni Guðs síns. Ekkaleys munnu tey tá búgva, tí at mikil skal hann vera alt at endamarkum jarðar. Hann skal vera friður. Mika 5,1-4a

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Men eina ferð skal ikki vera myrkur í tí landi, sum nú er í neyðum statt. Í forðum læt hann Zebulons land og Naftali land verða fyri vanvirðing, men eina ferð skal hann aftur lata heiður koma yvir vegin til havið, yvir landið handan Jórdan og yvir heidninganna kring. Tað fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós, og ljós skal lýsa yvir teimum, sum sita í deyðaskuggans landi. Tú økir fagnaðin í stórum, tú gert gleðina mikla; tey gleðast fyri ásjón tíni eins og á kornskurðartíð, fegnast, eins og tá ið herfongur verður býttur. Tí hitt tunga okið, stongina á herðum hans, og rakstrarmansins broddstav hevur tú brotið eins og á Midians degi. Ja, hvør heglandi hermanna stivli, hvør blóðdálkað skikkja skal brend verða og oydd í eldi. Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla; navn hans skal verða kallað undur, ráðgevi, veldigur Guð, ævinnar faðir, friðarhøvdingi. Stórt skal høvdingadømið verða, og friðurin skal ongan enda taka á hásæti Dávids og í kongsríki hans til tess at reisa tað og menna tað við rætti og rættvísi hiðan ífrá og um allar ævir. Vandlæti Harra herliðanna skal gera hetta. Jes 9,1-7

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Titusar:*
Tí at Guðs náði er vorðin opinberað til frelsu fyri allar menniskjur, og hon uppsiðar okkum til at avnokta gudloysið og hinar veraldligu girndirnar og liva hóvliga og rættvísiliga og gudiliga í hesum heimi, væntandi hina sælu vón og opinberingina av dýrd hins stóra Guðs og frelsara vár, Jesu Krists, hann sum gav seg sjálvan fyri okkum, fyri at hann kundi loysa okkum út úr øllum lógloysi og reinsa sær sjálvum eitt eigindómsfólk, áhugað til góðar gerningar. Tit 2,11-14

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tað hendi í teimum døgum, at tað komu boð frá Augustusi keisara um, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal. (Hetta fyrsta manntalið var, meðan Kvirinius var landshøvdingi í Sýriulandi). Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína. Men eisini Jósef fór úr Galileu, úr bygdini Nasaret, niðan til Júdeu, til Dávids bygd, sum eitur Betlehem, tí at hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn. Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín, hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum. Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: „Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið.

Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.“ Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: „Heiður veri Guði í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!“

(Og tað hendi, tá ið einglarnir vóru farnir frá teimum aftur til himmals, tá søgdu hirðarnir hvør við annan: „Latið okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum.“ Og teir fóru við skundi hagar og funnu bæði Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni. Og tá ið teir sóu tað, søgdu teir frá teimum orðum, sum talað høvdu verið til teirra um hetta barn. Og øll, ið hoyrdu tað, undraðust á tað, sum teimum varð sagt av hirðunum. Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum. Og hirðarnir fóru avstað aftur, og teir lovaðu og prísaðu Guði fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir.) Luk 2,1-14 ella 1-20

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tað hendi, tá ið einglarnir vóru farnir frá teimum aftur til himmals, tá søgdu hirðarnir hvør við annan: „Latið okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum.“ Og teir fóru við skundi hagar og funnu bæði Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni. Og tá ið teir sóu tað, søgdu teir frá teimum orðum, sum

talað høvdu verið til teirra um hetta barn. Og øll, ið hoyrdu tað, undraðust á tað, sum teimum varð sagt av hirðunum. Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum. Og hirðarnir fóru avstað aftur, og teir lovaðu og prísaðu Guði fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir. Luk 2,15.-20

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men við føðing Jesu Krists gekk tað soleiðis til: Tá ið Maria, móðir hansara, var trúlovað Jósefi, so kendist tað á henni, áðrenn tey komu saman, at hon var við barn av hinum heilaga anda. Men við tað at Jósef, maður hennara, var ein rættvísur maður og ikki vildi gera hana opinberliga til skammar, ætlaði hann í loyndum at skilja seg frá henni. Men meðan hann hugsaði um hetta, sí, tá sýndi eingil Harrans seg í dreymi fyri honum og segði: „Jósef, sonur Dávids! Óttast ikki fyri at taka Mariu, konu tína, til tín; tí at tað, sum hon ber undir belti, er av hinum heilaga anda. Og hon skal føða ein son, og Jesus skalt tú kalla navn hansara, tí at hann skal frelsa fólk sítt frá syndum teirra.“ Men hetta hendi alt samalt, fyri at tað skuldi ganga út, ið talað var av Harranum við profetinum, ið sigur: „Sí, moyggin skal verða við barn og eiga son, og á navni skulu tey nevna hann Immanuel“; tað merkir: „Guð við okkum.“ Men tá ið Jósef vaknaði upp úr svøvni, gjørdi hann, soleiðis sum eingil Harrans hevði boðið honum, og tók konu sína til sín. Men hann kom henni ikki nær, fyrr enn hon hevði átt son, og hann kallaði navn hansara Jesus. Matt 1,18-25

2. JÓLADAG (SANKTA STEFANS DAG)

Litur: Reyður. Dagin eftir: Hvítur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt hin heilaga Stefan líða pínslarváttardeyðan og verða steinaðan fyri trúgv sína. Vit biðja teg, um eisini vit skulu líða fyri orðs og navns tíns skuld, tá styrk hjørtu okkara við heilaga anda tínum og gev okkum, eins og Stefan, at elska fíggindar okkara og í tolni at biðja fyri teimum. Veit okkum, tá okkara tími kemur, sæl at sovna burtur í trúnni og vónini um hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt hin heilaga Stefan líða pínslarváttardeyðan og verða steinaðan fyri trúgv sína. Vit biðja teg, gev okkum náði til at líkjast hinum heilaga Stefani, so at eisini vit mega læra at elska fíggindar okkara og biðja fyri teimum, ið forfylgja okkum, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum doyði fyri syndir okkara, og nú við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar. Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:

Og orð Harrans kom aftur til mín soljóðandi: Men gyrð nú lendar tínar, statt upp og tala til teirra alt tað, sum eg bjóði tær, og óttast teir ikki, at eg ikki skal gera teg

ræddan fyri teimum! Og eg, sí, eg vil í dag gera teg til víggirda borg, til jarnsúlu og koparmúr móti øllum landinum, móti kongum og høvdingum Júda, móti prestunum og øllum fólkinum í landinum. Og tá ið teir berjast ímóti tær, skulu teir ikki vera tær yvirmentir; tí at eg eri við tær til tess at frelsa teg, sigur Harrin, drottin.
Jer 1,13a og 17-19

** Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:*
Men Stefan gjørdi, fullur av náði og kraft, undur og stór tekin millum fólkið. Men tá stigu upp nakrir menn frá tí samkomuhúsinum, sum er kallað eftir Libertinum og Kýreneingum og Aleksandriumonnum, og nakrir av teimum frá Kilikíu og Ásiu og høvdu orðadrátt við Stefan. Og teir kundu ikki standa móti tí vísdómi og tí anda, sum hann talaði av. Tá fingu teir loyniliga nakrar menn til at siga: „Vit hava hoyrt hann tala spottorð móti Mósesi og móti Guði.“ Og teir østu upp fólkið og hinar elstu og hinar skriftlærdu, og teir fóru eftir honum og tóku hann og fóru við honum til ráðið. Og teir førdu fram lygivitni, sum søgdu: „Hesin maður heldur ikki uppat at tala móti hesum heilaga staði og móti lógini; tí at vit hava hoyrt hann siga, at hesin Jesus úr Nasaret skal bróta niður henda staðin og broyta teir siðir, sum Móses hevur fingið okkum.“ – Men tá ið teir hoyrdu hetta, neit tað teimum at hjarta, og teir bitu á kampi móti honum. Men hann hugdi upp til himmals, fullur av heilagum anda, og sá Guðs dýrd og Jesus standandi við høgru hond Guðs. Og hann segði: „Sí, eg síggi himlarnar opnar og menniskjusonin standandi við høgru hond Guðs!“ Men teir skóru í eitt hart róp og hildu fyri oyruni á sær og lupu á hann

allir sum ein; og teir koyrdu hann út úr staðinum og steinaðu hann. Og vitnini løgdu klæði síni niður við føturnar á einum ungum manni, sum æt Saul. Og teir steinaðu Stefan; meðan bað hann og segði: „Harri Jesus, tak tú móti anda mínum!“ Og hann fell á knæ og rópaði við harðari rødd: „Harri, rokna teimum ikki hesa synd uppí!“ Og í tí hann hetta segði, sovnaði hann burtur. Áps 6,8-14 og 7,54-60

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði við teir skriftlærdu og Farisearanar: „Tess vegna, sí, eg sendi til tykkara profetar og vísar og skriftlærdar; summar av teimum skulu tit taka av lívi og krossfesta, og summar av teimum skulu tit húðfleingja í samkomuhúsum tykkara, og tit skulu elta teir úr bygd í bygd; til tess at alt hitt rættvísa blóð skal koma yvir tykkum, ið úthelt er á jørðini líka frá blóði hins rættvísa Ábels til blóðs Sakaria Barakiasonar, sum tit drópu millum tempuls og altars. Sanniliga sigi eg tykkum: alt hetta skal koma yvir hesa ætt. Jerúsalem, Jerúsalem! Tú, ið drepur profetarnar og steinar teir, sum eru sendir til tín, hvussu ofta havi eg viljað savnað børn tíni saman, eins og hønan savnar ungar sínar undir veingirnar! Og tit vildu ikki. Sí, oyðið skal hús tykkara leivast tykkum. Tí at eg sigi tykkum: Tit skulu frá hesi stund ongalunda síggja meg, fyrr enn tit siga: „Vælsignaður veri tann, ið kemur í Harrans navni!“ Matt 23, 34-39

JÓLASUNNUDAG (SUNNUDAG MILLUM JÓLA OG NÝGGJÁRS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum ert ljósins kelda og sendi son tín, Jesus Krist, í heimin at lýsa fyri øllum fólkasløgum. Vit biðja teg, at tú í náði vilt beina og stýra leiðum okkara, so at vit mega liva eftir vilja tínum, vaksa og fara fram í gudiligum levnaði, og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum ert ljósins kelda og sendi son tín, Jesus Krist, í heimin at lýsa fyri øllum fólkasløgum. Vit biðja teg, leið og stýr í kærleika tínum gerningum okkara, so at vit í navni einborna sonar tíns mega fáa náði til at liva sum ljósins børn eftir vilja tínum, og at enda fara hiðani í friði fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:

Eg vil siga frá miskunnsemi Harrans og hálova honum fyri alt tað, sum hann hevur gjørt ímóti okkum, ríkur av góðsku móti Ísraels húsi, ja alt, sum hann hevur gjørt ímóti okkum av síni miklu miskunn og náði. Hann segði:

„Tey eru jú fólk mítt, børn, sum ikki svíkja.“ Og frelsari varð hann teimum hvørja ferð, tey vóru í neyð, ikki ørindreki, ikki eingil, men ásjón hansara frelsti tey; av kærleika og várkunn síni hann endurloysti tey; hann tók tey upp og bar tey allar fortíðardagar teirra. Jes 63,7-9

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:*
Men eg sigi: Alla ta tíð, sum arvingin er óviti, er eingin munur á honum og træli, tó at hann er harri yvir øllum; men hann er undir umsjónarmonnum og ráðsmonnum til ta tíð, sum faðirin hevur ásett. Soleiðis vóru vit eisini, tá ið vit vóru ómyndingar, trælabundnir undir barnalærdómi heimsins. Men tá ið fylling tíðarinnar kom, sendi Guð son sín, føddan av kvinnu, føddan undir lóg, til tess at hann kundi keypa tey leys, sum vóru undir lóg, so at vit kundu fáa sonarættin. Men av tí at tit eru synir, tá hevur Guð sent anda sonar síns í hjørtu okkara, sum rópar: „Abba, faðir!“ So ert tú tá ikki longur trælur, men sonur; men ert tú sonur, tá ert tú eisini arvingi fyri Guðs sakir. Gal 4,1-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og faðir Jesu og móðir hansara undraðust á tað, ið sagt varð um hann. Og Símeon vælsignaði tey og segði við Mariu, móður hansara: „Sí, hesin er settur mongum í Ísrael til fals og til uppreisingar og til eitt mótmælismerki, – ja, eisini tína egnu sál skal svørð fara ígjøgnum, – til tess at hjartans hugsan hjá mongum má gerast kunn.“ Og har var ein profetkvinna, Anna Fanuelsdóttir, av Assers ætt; hon var avgomul, hevði livað saman við manni sínum sjey ár aftan á jomfrúdagar sínar, og hevði

nú sitið einkja fram at fýra og áttati ára aldri. Hon veik ikki úr halgidóminum, og tænaði Guði við føstu og bønahaldi nátt og dag. Eisini hon kom til í teirri somu stund og lovaði Guði og talaði um hann við øll, sum væntaðu bjarging Jerúsalems. Og tá ið tey høvdu útint alt tað, sum var fyriskipað í lóg Harrans, fóru tey avstað aftur til Galileu, til Nasaret, heimbygd sína. Men barnið vaks og styrknaði og varð fult av vísdómi, og náði Guðs var yvir honum. Luk 2,33-40

NÝGGJÁRSAFTAN

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum í skjótt farna ári hevur sýnt okkum góðsku tína og umsorgan. Vit biðja teg, at tú eisini vilt vera við okkum í nýggja árinum við signing tíni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum letur dagin enda og fjalir nýggja dagin fyri okkum. Vit takka tær fyri árið, sum er um at vera liðið, við tess gleði og sorg, við øllum tí, sum tað gav og tók. Vit biðja teg, loys okkum frá vónloysinum og stúranini um tað, ið farið er, og frá óttanum fyri tí, ið koma skal. Lær okkum at nýta hvønn nýggjan dag, tú gevur okkum, eftir vilja tínum. Í

tínar hendur geva vit tað gamla árið, og í áliti á trúfesti tína fara vit inn í tað nýggja fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrru Sámuelsbók:
Tá tók Sámuel stein og reisti hann millum Mizpa og Jesjana og kallaði hann Ebenezer og segði: „Higartil hevur Harrin hjálpt okkum.“ 1 Sám 7,12

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Tí forløg vár hann kennir, honum kemur í hug, at dust vit eru. Mansins dagar eru sum grasið, sum blómin á markini so blómar hann. Tá vindurin yvir hann fer, er hann horvin, og heimstað hans hann ei kennir meir. Men Harrans miskunn heldur á um aldur og ævir, og rættvísi hans røkkur til barnabørn móti teim, sum halda sáttir hans og boð hans minnast, tey at útinna. Harrin hevur í himni grundað hásæti sítt, og kongsdømi hans yvir øllum ræður! Einglar hans, tit avrekskappar, Harranum lovið, tit, ið boð hans fremja og geva orðum hans ljóð! Harranum lovið, øll herlið hans, sveinar hans, ið fremja hans vilja! Harranum lovið, øll verk hans, á hvørjum bletti í ríki hans! Sál mín, Harranum lova! Sl 103,14-22

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar Prædikarin:
Fyri øllum er ein avmarkað stund, og ein og hvør lutur undir himlinum hevur sína tíð: At føðast hevur sína tíð,

og at doyggja hevur sína tíð; at seta niður hevur sína tíð, og at taka upp tað, sum niður er sett, hevur sína tíð. At gráta hevur sína tíð, og at læa hevur sína tíð; at syrgja hevur sína tíð, og at dansa hevur sína tíð. At kasta steinar hevur sína tíð, og at henta steinar hevur sína tíð; at fevnast hevur sína tíð, og at halda sær frá favntaki hevur sína tíð. At leita hevur sína tíð, og at missa hevur sína tíð; at goyma hevur sína tíð, og at forkoma hevur sína tíð. At skræða sundur hevur sína tíð, og at seyma aftur hevur sína tíð; at tiga hevur sína tíð, og at tala hevur sína tíð. Alt hevur hann gjørt lagaligt til sína tíð, eisini ævina hevur hann lagt í hjørtu teirra, men tó so at menniskjan ikki er før fyri at skilja tað verk, sum Guð ger, frá upphavi og til enda. Præd 3,1-2 og 4-7 og 11

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:
Tí at eg veit, hvørjar ætlanir eg havi í hyggju við tykkum, sigur Harrin, ætlanir um frið og ikki um ógævu, til tess at veita tykkum vónríka framtíð. Jer 29,11

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Harmljóðunum:
Hetta vil eg leggja mær í geyma, og tessvegna vóni eg: Náði Harrans er ikki uppi, miskunn hans ikki á enda; hon er nýggj á hvørjum morgni, mikil er trúfesti hans. Mín lutur er Harrin, sigur mín sál, tí vil eg troysta á hann. Góður er Harrin teimum, ið honum bíða, teirri sál, ið eftir honum leitar. Gott er kvirrur at bíða eftir hjálp frá Harranum. Latið okkum rannsaka, kanna várar vegir og snúgva okkum til Harrans, hevja várum hjørtum

og hondum til Guðs á himnum! Harmlj 3,21-26 og 40-41

Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:
Er Guð við okkum, hvør er tá ímót okkum? Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki eisini geva okkum alt við honum? Hvør vil ásaka Guðs útvaldu? Guð er tann, sum rættvísger. Hvør er tann, sum fordømir? Kristus Jesus er tann, sum deyður er, og meira enn tað, er risin upp frá deyðum, hann sum er við høgru hond Guðs, hann sum eisini gongur í forbøn fyri okkum. Hvør skal skilja okkum frá kærleika Krists! Trongd? Ella angist? Ella atsókn? Ella hungur? Ella nakni? Ella váði? Ella svørð? Tað er sum skrivað stendur: „Tín vegna verða vit dripnir allan dagin, verða mettir javnt við skurðseyð.“ Men í øllum hesum vinna vit meira enn sigur við honum, sum elskaði okkum. Tí at eg eri fullvísur í tí, at hvørki deyði ella lív, hvørki einglar ella harradømi, hvørki tað, sum nú er, ella tað, sum koma skal, ella kreftur, hvørki hædd ella dýpd ella nakar annar skapningur skal kunna skilja okkum frá kærleika Guðs í Kristi Jesusi, harra okkara. Róm 8,31b-39

Ella:
Epistulin skrivar Jákup ápostul:
Og nú tit, sum siga: „Í dag ella í morgin skulu vit fara í ta ella ta bygdina og verða har eitt ár og handla og hava vinning,“ tit sum ikki vita, hvat ið verða skal í morgin! Tí at hvørjum er lív tykkara líkt? Tí at tit eru ein roykur, sum eina stutta stund er sjónligur og so hvørvur burtur. Í staðin fyri at tit áttu at sagt: „Um Harrin vil, og vit liva, tá skulu

vit gera hetta ella hatta!“ Men nú rósa tit tykkum í breggjan tykkara. Alt tílíkt rós er vánt. Hvør, sum tí hevur vit at gera gott og ikki ger tað, honum er tað synd. Ják 4,13-17

Ella:
Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum:
Reinsið sálir tykkara í lýdni móti sannleikanum til falsleysan bróðurkærleika, og elskið hvør annan inniliga av hjarta, tit sum eru endurføddir, ikki av forgongiligum, men av óforgongiligum sáði, við Guðs livandi og varandi orði. Tí at: alt kjøt er sum gras og øll tess dýrd sum blóma á grasi; grasið følnar og blóman fellur av; men orð Harrans varir um allar ævir. Og hetta er tað orðið, sum er tykkum boðað í gleðiboðskapinum. 1 Pæt 1,22-25

Ella:
Epistulin skrivar Pætur ápostul í seinna brævi sínum:
Men vit vænta eftir fyrijáttan hansara nýggjar himnar og eina nýggja jørð, har sum rættvísi býr. Við tað at tit nú vænta hetta, elskaðu tit, tá leggið tykkum eina við, at tit mega verða funnir lýtaleysir og óspiltir frammi fyri honum í friði, og haldið langmóð várs harra fyri frelsu. Tá ið tit nú, elskaðu tit, vita hetta frammanundan, tá varið tykkum fyri, at tit ikki skulu verða drignir við av hinum óryggjuligu í teirra villu og falla frá tykkara egnu føstu støðu; men vaksið í náði og kunnskapi várs harra og frelsara Jesu Krists. Honum veri dýrdin bæði nú og til ævigar tíðir! Amen. 2 Pæt 3,13-15a og 17-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og

ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu. Takið upp á tykkum ok mítt og lærið av mær; tí at eg eri spaklyntur og eyðmjúkur av hjarta, og tá skulu tit finna hvílu fyri sálum tykkara. Tí at gagnligt er ok mítt, og lætt er byrði mín.“ Matt 11,28-30

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og Jesus segði hetta líknilsi: „Ein maður átti eitt fikutræ, sum var sett niður í víngarði hansara; og hann kom og leitaði eftir frukt á tí og fann onga. Hann segði tá við víngarðsmannin: „Sí, nú havi eg í trý ár komið og leitað eftir frukt á hesum fikutræi og havi onga funnið; høgg tað upp; hví skal tað arma jørðina út aftrat?“ Men hann svaraði og segði við hann: „Harri, lat tað standa enn hetta árið, til eg fái grivið uttan um tað og taðað tað; hvør veit, um tað tá ikki fer at bera frukt í komandi tíð; men verður tað ikki, so kanst tú tá høgga tað upp.“ Luk 13,6-9

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði við lærusveinar sínar: „Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki!“ Jóh 14,27

Presturin kann frítt velja prædikutekst.

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum ikki

broytist ella umskiftist eins og skuggin. Vit takka tær fyri náði yvir náði, sum tú í undanfarnum tíðum hevur sýnt okkum og fedrum okkara. Vit biðja teg, fyrigev okkum syndir okkara fyri Jesu Krists skuld og ger navn títt dýrmett til frelsu og styrki hjá fólki okkara í tí ári, sum vit nú fara undir í hesum forgeingiliga heimi. Gev okkum, um í hesum ári okkara tími kemur, sæl at fara inn í hitt himmalska ríkið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

NÝGGJÁRSDAG (ÁTTANDA DAG JÓLA)

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum við umskering sonar tíns læt hann liva undir lógini og gav honum navnið Jesus, til tess at hann skuldi loysa okkum frá syndini og veita okkum hitt æviga lívið. Vit biðja teg, gev okkum í trúnni á frelsaranavn hansara lut í hesi frelsu og at verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, vit takka tær, tí at tú í náði og góðsku tíni hevur tikið okkum at tær sum børn tíni og okkum til frelsu hevur latið son tín gerast

menniskja og liva undir lógini, til tess at hann við fullkomna lýdni sínum skuldi taka á seg revsingina fyri ólýdni okkara. Vit biðja teg, lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit trúgva hesum av hjarta, finna troyst í hesi náði tíni og vilja til at tæna tær av heilum huga fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, vit lovprísa heilaga navni tínum, nú vit eru farin undir nýggja árið í Jesu navni. Vit takka tær, tí at tú til henda dag í góðsku tíni og trúfesti hevur hildið hond tína yvir okkum. Vit biðja teg, varðveit okkum eisini í komandi tíðum í kærleika tínum. Gev okkum at hava gott treysti og hvønn dag at hvíla við friði í fyrigeving tíni fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Hann vælsignaður verður allar ævir; alt meðan sólin er til, man navn hans standa. Øll fólkasløg munnu seg signa í honum, allar ættir munnu hann sælan prísa. Lovaður veri Harrin, Guð, Ísraels Guð, ið undurverk ger eina! Lovað veri hans dýra navn allar ævir, av dýrd hans veri allur heimurin fullur! Amen, amen! Sl 72,17-19

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:*
Men áðrenn trúgvin kom, vórðu vit hildnir innibyrgdir í

varðhaldi av lógini, inntil tann trúgvin, sum skuldi koma, opinberaðist, so at lógin er vorðin agari okkara til Krists, fyri at vit skuldu verða rættvísgjørdir av trúgv. Men nú, tá ið trúgvin er komin, eru vit ikki longur undir agara; tí at tit eru øll Guðs børn við trúnni á Krist Jesus. Tí at tit, so mong sum eru doypt til Krists, tit hava íklæðst Krist. Her er ikki Jødi ella Grikki, her er ikki trælur ella frælsur maður, her er ikki kallur ella kona; tí at tit eru øll ein maður í Kristi Jesusi. Men um tit hoyra Kristi til, tá eru tit eisini avkom Ábrahams, arvingar eftir fyrijáttan. Gal 3,23-29

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tá ið átta dagar vóru lidnir, og hann skuldi verða umskorin, tá varð navn hansara kallað Jesus, soleiðis sum tað var kallað av einglinum, áðrenn hann var gitin í móðurlívi. Luk 2,21

SUNNUDAG EFTIR NÝGGJÁR

Litur: Hvítur, gyltur ella reyður.
Dagin eftir: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt einborna son tín, Jesus Krist, verða fremmandan og í útlegd í Egyptalandi fyri okkara skuld og førdi hann í øllum góðum heim aftur til heimland sítt. Vit biðja teg, gev okkum náði tína, so at vit, sum eru fremmand og í útlegd í hesum heimi, mega koma bjargað heim í himmiríkis ríki, okkara sanna heim-

land, og har liva í ævigari sælu fyri sonar tíns, Jesu Krists skuld, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum letur himmalska ljós títt lýsa í heimsins myrkri. Vit biðja teg, upplýs tú hjørtu okkara við hesum himmalska ljósi tínum, so at vit mega skýggja myrkursins gerningar, liva sum ljósins børn og at enda finnast hjá tær í æviga ljósi tínum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í aðru Mósebók:
Tá beyð Fárao øllum fólki sínum og segði: „Øll sveinbørn, ið fødd verða hjá Hebreunum, skulu tit blaka í Nílánna, men øll gentubørn skulu tit lata vera á lívi!“ Nú fór maður av Levi ætt og tók sær til konu gentu, sum eisini var av Levi ætt. Og konan varð við barn og føddi son; og tá ið hon sá, at barnið var frálíka vakurt, krógvaði hon tað í tríggjar mánaðir. Men tá ið hon ikki fekk krógvað hann longur, bant hon honum kistu úr sevi, bræddi hana við jarðlími og biki, legði dreingin í kistuna og setti hana út í sevið við Níláarbakkan. Systir hansara tók støðu eitt sindur har frá til tess at vita, hvussu honum mundi fara at gangast. Men tá ið dóttir Fáraos fór oman í Nílánna at tváa sær, og ternur hennara gingu eftir áarbakkanum, bar hon eyga við kistuna mitt úti í sevinum og sendi eina ternu sína eftir henni. Og tá ið hon opnaði hana, sá hon, at har lá sveinbarn og græt;

henni tókti synd í tí, og helt hon fyri: „Hetta man vera eitt av børnum Hebrea!“ Tá segði systir hansara við dóttur Fáraos: „Skal eg fara tær eftir einihvørjari hebráiskari bróstakonu, sum kann hava sveinin á brósti fyri teg?“ Dóttir Fáraos svaraði henni: „Ja, far tú.“ Men gentan fór eftir móður barnsins. Dóttir Fáraos segði við hana: „Tak hetta barnið við tær og hav tað á brósti fyri meg; eg skal geva tær løn afturfyri.“ Konan tók tá barnið og hevði tað á brósti. Men tá ið drongurin var vaksin, kom hon aftur við honum til dóttur Fáraos; og hon tók hann í sonar stað og nevndi hann Móses; „tí“, segði hon, „eg havi drigið hann upp úr vatninum.“ 2 Mós 1,22-2,1-10

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Og hann man ráða frá havi at havi, frá Ánni at jarðarinnar marki. Fyri fótum hans munnu hans fíggindar níga, og hans mótstøðumenn sleikja dustið. Kongar frá Tarsis og fjarløgdum strondum munnu gávur honum bera. Kongar av Sába og kongar av Sjeba munnu skattir gjalda; og allir kongar fyri honum níga, øll fólkasløg honum tæna. Tí at hann bjargar tí fátæka, ið rópar eftir hjálp, arminganum og honum, ið ongan góðan hevur. Hann eymkar tey vesælu og veiku og hjálpir fátækra sálum. Hann sálum teirra bjargar frá valdi og meini, blóð teirra dýrt er í eygum hans. Sl 72,8-14

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Men vit vita, at alt tað, sum lógin sigur, tað talar hon til teirra, sum eru undir lógini, til tess at hvør muður skal verða teptur, og allur heimurin verða sekur fyri Guði, við

tað at einki hold verður rættvísgjørt fyri honum av lógargerningum; tí at við lóg kemur kunnugleiki um synd. Men nú er rættvísi Guðs, sum vitnað er um av lógini og profetunum, vorðin opinberað uttan lóg, tað er: rættvísi Guðs við trúgv á Jesus Krist fyri øllum teimum og yvir øll tey, sum trúgva. Róm 3,19-22a

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Heródes var deyður, sí, tá sýndi eingil Harrans seg í dreymi fyri Jósefi í Egyptalandi og segði: „Statt upp og tak barnið og móður tess við tær og far til Ísraelslands; tí at teir eru deyðir, ið vildu taka barnið av lívi.“ Og hann fór upp, tók barnið og móður tess og kom til Ísraelslands. Men tá ið hann hoyrdi, at Arkelaus var kongur í Júdeu eftir Heródes, faðir sín, óttaðist hann fyri at fara hagar; og hann fekk ávaring frá Guði í dreymi og fór avstað til Galileubygdirnar. Og hann kom hagar og búsettist í eini bygd, ið eitur Nasaret, at tað skuldi ganga út, ið talað var av profetunum, at hann skuldi kallast Nasareari. Matt 2,19-23

TRETTANDI (TRETTANDA DAG JÓLA)

Litur: Hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við stjørnuni í eystri leiddi vísmenninar, so at teir funnu son tín í Betlehem. Vit takka tær, tí at tú letur heilaga orð títt lýsa fyri okkum og leiða okkum til hin sama einborna son tín. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín í hjørtu okkara, so at vit

fylgja hesum orðsins ljósi tínum, tæna einborna syni tínum, harra og frelsara okkara, av heilum hjarta, og fegin ofra av okkara tímiligu ognum til frama fyri ríki títt, til tess at orð títt má lýsa fyri teimum, sum enn sita í myrkri, og tey saman við okkum mega tilbiðja son tín, Jesus Krist, í sannari trúgv, vón og kærleika, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt stjørnu tína fylgja vísmonnunum úr Eysturlondum og opinberaði einborna son tín fyri heidningum. Vit biðja teg, gev eisini okkum av náði tíni einaferð at verða leidd inn til dýrd tína, har vit skulu skoða teg andlit til andlits fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

* *Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:*
Statt upp og skín, tí at ljós títt kemur og dýrd Harrans rennur upp yvir tær! Tí sí, myrkur hylur jørðina og sorti fólkini; men yvir tær rennur Harrin upp, og dýrd hans birtist yvir tær. Og heidningarnir stevna at ljósi tínum og kongar at ljómanum, sum rennur upp yvir tær. Hav upp eygu tíni og lít teg um: teir savnast allir saman og koma til tín; synir tínir koma av fjarløgdum londum, og døtur tínar verða bornar á ørmum. Tá skalt tú síggja og lýsa av gleði, og hjartað í tær skal titra og víðkast; tí at havsins ríkidømi skal horva til tín, heidninganna ognir skulu koma til tín. Mongd av kamelum skal fjala teg, kamelfolar

úr Midian og Efa; allir skulu teir koma úr Sába, gull og roykilsi skulu teir bera, og lov Harrans skulu teir kunngera. Jes 60,1-6

Epistulin skrivar Paulus ápostul til Titusar:
Men tá ið góðska og mannakærleiki Guðs, frelsara vár, vórðu opinberað, frelsti hann okkum, ikki fyri rættferðar gerninganna skuld, sum vit høvdu gjørt, men av miskunn síni, við baði endurføðingar og endurnýggjanar í heilagum anda, sum hann ríkliga úthelti yvir okkum við Jesusi Kristi, frelsara várum, fyri at vit, rættvísgjørdir við náði hansara, skuldu í vón verða arvingar til ævigt lív. Tit 3,4-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Jesus var føddur í Betlehem í Júdeu, á døgum Heródesar kongs, sí, tá komu nakrir vísmenn úr Eysturlondum til Jerúsalem og søgdu: „Hvar er hin nýføddi Jødakongurin? Tí at vit hava sæð stjørnu hansara har eysturi, og vit eru komnir at tilbiðja hann.“ Men tá ið Heródes kongur hoyrdi hetta, varð hann óttafullur og øll Jerúsalem við honum; og hann sendi boð eftir øllum høvuðsprestum og skriftlærdum monnum fólksins og spurdi teir, hvar Kristus átti at verða føddur. Og teir søgdu honum: „Í Betlehem í Júdeu; tí at soleiðis stendur skrivað hjá profetinum: „Og tú Betlehem, Júdaland, als ikki ert tú minst millum høvdinga í Júda; tí at frá tær skal koma ein høvdingi, ið skal verða hirði fyri fólki mínum Ísrael.“ Tá rópaði Heródes vísmenninar til sín á loynum og spurdi teir gjølla um tíðina, tá ið stjørnan var komin til sjóndar; og hann sendi teir avstað til Betlehem og segði við teir: „Farið

avstað og sóknist væl eftir barninum; og tá ið tit hava funnið tað, sigið mær so frá, at eg eisini kann koma og tilbiðja tað.“ Men tá ið teir høvdu lýtt á kongin, fóru teir avstað; og sí, stjørnan, sum teir høvdu sað har eysturi, gekk framman undan teimum, líka til hon kom og stóð uppi yvir har, sum barnið var. Men tá ið teir sóu stjørnuna, vórðu teir heilt avbera glaðir. Og teir fóru inn í húsið og sóu barnið hjá Mariu, móður síni; og teir løgdust á knæ og tilbóðu tað; og teir lótu upp goymslur sínar og bóru tí gávur: gull og roykilsi og myrru. Og av tí at teir í dreymi høvdu fingið eina ávaring frá Guði um, at teir ikki skuldu fara aftur til Heródesar, tóku teir eina aðra leið heim aftur til land sítt. Matt 2,1-12

Sunnudagar eftir trettanda

1. SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við Mariu og Jósefi leiddi son tín, Jesus, niðan í halgidómin í Jerúsalem. Vit biðja teg, ver tú við náði tíni hjá øllum foreldrum og øllum, sum tú hevur sett til at vera leiðbeinarar hjá børnum og ungum, so at tey ganga teimum fyri við góðum fyridømi og saman við teimum hugaliga søkja títt heilaga hús til tess at hoyra títt heilaga orð. Gev okkum heilaga anda tín og náði tína, so at orð títt má bera góðan ávøkst í hjørtum okkara, til tess at vit mega liva tær til lovs og æru og at enda saman við øllum trúgvandi verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú av náði tíni hevur latið okkum koma til hin heilaga dóp. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín, so at vit hugaliga hoyra orð títt og goyma tað í reinum hjørtum. Lat tað bera ávøkst í hjørtum okkara, so at vit liva eftir vilja tínum, vaksa í sannari trúgv og sonnum gudsótta og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert náðigur og miskunnsamur, tolin og ríkur av góðsku. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Sýn okkum, hvør vilji tín er, og veit okkum styrki til at útinna hann fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fimtu Mósebók:
Harrin, Guð tín, man vekja upp av brøðrum tínum profet, tílíkan sum meg; hann skulu tit lýða á; og hetta var tað, sum tú baðst Harran, Guð tín, um hin dagin við Hóreb, har tit vóru samankomin og søgdu, at tit ikki longur vildu lýða á rødd Harrans, Guðs tykkara, og ikki líta at tí øgiliga eldi til tess ikki at týna lívið; tá segði Harrin við meg: „Rætt er tað, sum tey siga. Eg skal vekja teimum profet upp av brøðrum teirra, tílíkan sum teg; orð míni skal eg leggja í munn hansara, og hann skal mæla til teirra øllum tí, sum eg bjóði honum. 5 Mós 18,15-18

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrru Sámuelsbók:
Og Sámuel gjørdi tænastu fyri ásjón Harrans, og sveinurin var ílatin línakul. Og móðir hansara var von at geva honum lítlan møttul, sum hon hevði við til hansara á hvørjum ári, tá ið hon fór niðan við manni sínum til tess at bera fram hitt árliga ofrið. Og Eli vælsignaði Elkana og konu hansara og segði: „Harrin gevi tær avkom við hesi konu aftur fyri hann, ið givin varð Harranum.“ Síðan fóru tey

heim aftur til sín sjálvs. Og sveinurin Sámuel vaks og mentist og vann yndi bæði hjá Guði og monnum. 1 Sám 2,18-20 og 26

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
So áminni eg tá tykkum, brøður, at tit, fyri Guðs miskunnar skuld, bjóða fram likam tykkara til eitt livandi, heilagt, Guði hugnaligt offur – og hetta er andlig gudsdýrkan hjá tykkum –; og háttið tykkum ikki eftir hesum heimi; men verðið umskapaðir við endurnýggjan av hugi tykkara, so at tit mega fáa at royna, hvat ið er Guðs vilji, hitt góða og hugnaliga og fullkomna. Tí at við teirri náði, sum mær er givin, sigi eg við ein og hvønn tykkara millum, at hann ikki skal hugsa hægri um seg, enn hann eigur at hugsa, men heldur hugsa við skynsemi, alt eftir sum Guð hevur býtt einum og hvørjum sítt mál av trúgv. Tí at líkasum vit á einum likami hava nógvar limir, men limirnir hava ikki allir sama gerning, soleiðis eru vit hinir mongu eitt likam í Kristi, men hvør fyri seg eru vit limir hvør hjá øðrum. Róm 12,1-5

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og foreldur Jesu ferðaðust á hvørjum ári til Jerúsalem um páskirnar. Og ta ferðina, tá ið hann var vorðin tólv ára gamal, og tey fóru niðan, sum siðurin var um hátíðina, og tey høvdu verið har teir dagarnar, tá varð drongurin Jesus eftir í Jerúsalem, tá ið tey fóru heim aftur; og foreldur hansara varnaðu tað ikki. Men av tí at tey hildu, at hann mundi vera við í ferðalaginum, hildu tey leiðini fram ein dag, og tey leitaðu eftir honum hjá skyldfólki teirra og kunningum. Og tá ið tey ikki funnu hann,

vendu tey um aftur til Jerúsalem og leitaðu eftir honum. Og ikki fyrr enn tríggir dagar vóru farnir, tá funnu tey hann í halgidóminum, har sum hann sat mitt ímillum lærumeistaranna og bæði lýddi á teir og spurdi teir. Men øll, ið hoyrdu hann, vóru heilt bilsin av vitsku hansara og svørum. Og tá ið tey bóru eyga við hann, kom ræðsla á tey; og móðir hansara segði við hann: „Barn mítt, hví gjørdi tú okkum hetta? Sí, faðir tín og eg hava við sorg og sút leitað eftir tær.“ Og hann segði við tey: „Hví leitaðu tit eftir mær? Vistu tit ikki, at eg eigi at vera í tí, sum faðirs míns er?“ Men tey fataðu ikki hetta orðið, sum hann talaði til teirra. Og hann fór oman við teimum og kom til Nasaret og var teimum lýðin. Og móðir hansara goymdi øll hesi orð í hjarta sínum. Og Jesus tók til í vísdómi og aldri og yndi hjá Guði og monnum. Luk 2,41-52

2. SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur innsett hitt heilaga hjúnalagið. Vit biðja teg, ver tú við náði tíni hjá øllum kristnum hjúnum. Gev teimum signing til at liva saman í gudsótta og kærleika og onga orsøk geva til ilnar og ósemju. Lat tey bæði í viðgangi og mótgangi fáa at kenna náðigu hjálp tína. Gev teimum og okkum øllum at liva lív okkara soleiðis her á foldum í trúgv og lýdni, at vit mega verða sæl allar ævir fyri ein-

borna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert lívsins kelda og í guddómsdýrd tíni ræður yvir øllum lutum bæði í himli og á jørð. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara og veit okkum frið og gleði í tær fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í aðru Mósebók:
Men Móses segði við Harran: „Lat meg tó síggja dýrd tína.“ Hann svaraði: „Eg skal fara fram við tær í allari dýrd míni og nevna Harran við navni fyri tær; tí at øllum, sum eg vil, veiti eg náði og miskunn.“ Og hann segði: „Tú kanst ikki síggja andlit mítt; tí at eingin fær sæð andlit mítt og verið á lívi!“ Síðan segði Harrin: „Kom og statt her í námindu hjá mær, har á klettinum; og tá ið so dýrd mín fer framvið, skalt tú standa í klettasprunguni; og eg skal halda hond mína hyljandi yvir tær, til eg eri farin framvið; síðan vil eg taka hond mína burtur og lata teg síggja meg aftan ífrá; men andlit mítt má maður ikki síggja!“ 2 Mós 33,18-23

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Og við tað at vit hava ymisligar náðigávur, samsvarandi teirri náði, sum okkum er givin, hvørt tað nú er profetagáva, tá latum okkum nýta hana eftir sum vit hava trúgv

til, ella tað er ein tænasta, tá latum okkum varða um tænastuna, ella um einhvør lærir, um læraragerningin, ella um einhvør áminnir, um áminningina; tann, sum býtir út, geri tað við trúlyndi; tann, sum stendur fyri, geri tað við ídni; tann, sum ger miskunnarverk, geri tað við gleði! Kærleikin veri falsleysur; havið andstygd fyri hinum illa, haldið fast við hitt góða. Verið í bróðurkærleikanum hjartans blíðir hvør við annan; kappist um at veita hvør øðrum virðing. Verið ikki linir í áhuga tykkara; verið brennandi í andanum; tænið Harranum! Verið glaðir í vónini, tolnir í neyðini, áhaldandi í bønini. Sýnið samhug við hini heilagu í tí, sum teimum er tørvur á; leggið tykkum eina við gestablídni. Vælsignið teir, sum søkja at tykkum, vælsignið, og bannið ikki! Gleðist við glaðum, grátið við grátandi! Verið samhugaðir hvør við annan. Róm 12,6-16a

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Og triðja dagin varð hildið brúdleyp í Kána í Galileu, og móðir Jesu var har. Men eisini Jesus varð boðin í brúdleypið og lærusveinar hansara. Og tá ið har treyt vín, sigur móðir Jesu við hann: „Tey hava einki vín.“ Og Jesus sigur við hana: „Kvinna, hvat vilt tú mær? Enn er ikki mín tími komin.“ Móðir hansara sigur við tænararnar: „Hvat hann so sigur við tykkum, tað skulu tit gera.“ Men har vóru sett seks vatnsker av steini eftir reinsanarsiði hjá Jødum, og tók hvørt teirra tvær ella tríggjar kannur. Jesus sigur við teir: „Fyllið vatnskerini við vatni!“ Og teir fyltu tey á tremur. Og hann sigur við teir: „Oysið nú upp og berið høvuðskokkinum!“ Og teir bóru honum. Men tá ið høvuðskokkurin smakkaði á vatnið, sum var vorðið vín,

og ikki visti, hvaðan tað var, – men tænararnir, sum høvdu oyst vatnið upp, vistu tað – kallar høvuðskokkurin á brúðgómin og sigur við hann: „Hvør maður setir fyrst hitt góða vínið fram, og tá ið teir eru vorðnir druknir, hitt ringara; tú hevur goymt hitt góða vínið líka til nú.“ Hesa byrjan av teknum sínum gjørdi Jesus í Kána í Galileu og opinberaði dýrd sína, og lærusveinar hansara trúðu á hann. Jóh 2,1-11

3. SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit biðja teg, lít í náði til veikleika okkara og rætt út veldishond tína okkum til verndar fyri øllum illum. Fyrigev okkum allar syndir okkara og styrk okkum í trúnni á, at orð títt er ment at gera alt tað, sum tær líkar, og til at geva okkum arv millum øll hini heilagu í himmiríkis ríki fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum í mikla kærleika tínum og miskunn tíni hevur givið okkum son tín, Jesus Krist, læt hann gerast menniskja og doyggja á krossinum fyri syndir okkara. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín í hjørtu okkara, so at vit halda fast við

ord títt og líta á, at vit í Kristi eiga fyrigeving syndanna og ævigt lív, honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum við heilaga anda tínum skapar trúnna í hjørtum okkara. Vit biðja teg, lít við mildni at máttloysi okkara og rætt út veldishond tína okkum til verndar fyri øllum illum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fimtu Mósebók:
Tí at Harrin, Guð tykkara, hann er Guð gudanna og drottin drotnanna, hin mikli, sterki og øgiligi Guð, sum ikki ger mannamun og ikki tekur við mutri; hann veitir hinum faðirleysa og einkjuni rætt, er góður við útisetan og gevur honum føði og klæði. Og somuleiðis skulu tit vera góðir við útisetan, tí at eisini tit vóru útisetar í Egyptalandi. Harran, Guð tín, skalt tú óttast, hann skalt tú dýrka og halda teg aftur at honum; og við navn hansara skalt tú svørja. Hann er lovsongur tín, og hann er Guð tín, sum hevur útint fyri teg hesi stórverk og miklu undur, sum tú hevur sað við egnum eygum. 5 Mós 10,17-21

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Tráið ikki eftir tí høga, men haldið tykkum at tí lága; verið ikki klókir í tykkum sjálvum! Gjaldið ongum ilt fyri

ilt; leggið tykkum eina við tað, sum gott er fyri alra manna ásjón. Alt tað er møguligt, tá haldið tit fyri tykkara part frið við øll fólk. Hevnið tykkum ikki sjálvar, elskaðu tit, men latið vreiðina sleppa framat; tí at skrivað stendur: „Mær hoyrir hevndin til, eg skal endurgjalda, sigur Harrin.“ Nei, er fíggindi tín svangur, tá gev honum mat; er hann tystur, tá gev honum drekka, tí at við tað at tú gert hetta, savnar tú eldgløður á høvur hans. Lat ikki hitt illa vinna á tær; men vinn tú á illum við góðum! Róm 12,16b-21

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Jesus gekk oman av fjallinum, fylgdu honum stórar mannamúgvur. Og sí, ein spitalskur maður kom og fell til jarðar fyri honum og segði: „Harri, um tú vilt, so kanst tú gera meg reinan.“ Og hann rætti út hondina, nam við hann og segði: „Eg vil, verð reinur!“ Og við tað sama varð spitalska sjúka hansara reinsað. Og Jesus sigur við hann: „Síggj til, at tú ikki sigur nøkrum frá hesum; men far avstað og sýn teg fyri presti, og ber fram ta gávu, sum Móses hevur ásett, til ein vitnisburð fyri teimum.“ Men tá ið hann var komin inn í Kapernaum, kom til hansara ein herhøvdingi og bað hann og segði: „Harri, drongur mín liggur giktsjúkur heima við hús og hevur svára pínu.“ Hann sigur við hann: „Eg skal koma og gera hann frískan.“ Men herhøvdingin svaraði og segði: „Harri, eg eri ikki verdur, at tú kemur á gátt hjá mær; men sig tað bert við einum orði, so verður drongur mín frískur. Tí at eg eri sjálvur ein maður, ið standi undir øðrum og havi hermenn undir mær; og sigi eg við henda: „Far!“ so fer hann; og við ein annan: „Kom!“ so kemur

hann; og við húskall mín: „Ger hetta!“ so ger hann tað.“ Tá ið Jesus hoyrdi hetta, undraðist hann og segði við tey, ið fylgdust við honum: „Sanniliga sigi eg tykkum, ikki í sjálvum Ísrael havi eg funnið slíka trúgv. Men eg sigi tykkum, at mong skulu koma eystaneftir og vestaneftir at sita til borðs við Ábrahami og Ísaki og Jákupi í himmiríki; men ríkisins børn skulu verða koyrd út í myrkrið fyri uttan; har skal verða grátur og tannagríSl“ Og Jesus segði við herhøvdingan: „Far tú heim; tær verði, sum tú trúði!“ Og drongurin varð frískur í somu stund. Matt 8,1-13

4. SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum ikki sleppir børnum tínum undan sorg og mótgangi. Vit biðja teg, miskunna okkum og hjálp okkum í allari neyð og øllum freistingum. Styrk okkum í trúnni, vónini og áhaldandi bøn, so at vit mega kenna náði tína og varðveitslu í øllum, sum møtir okkum á lívsleið okkara, og saman við øllum heilagum lova og prísa tær allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum hjálpir í neyðum og veitst, at vit í

máttloysi okkara ikki kunnu standast. Vit biðja teg, kom okkum til hjálpar og veit okkum styrki bæði til likams og sálar, so at vit í øllum, sum vit skulu líða vegna syndaskuld okkara, tó mega vinna sigur við tær fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Jobsbók:

Tá svaraði Harrin Job út úr storminum og segði: „Hvør er hetta, sum myrkir fyri ráðagerðum mínum við skilaleysum orðum? Gyrð nú sum ein maður tínar lendar; so skal eg spyrja teg, og tú skalt læra meg. Hvar vart tú, tá ið eg legði grundvøll jarðarinnar? Sig fram, um tú hevur tílíkan kunnleika! Hvør setti mál hennar – tú veitst tað jú – ella hvør tandi út mátingarband yvir hana? Hvar vóru stólpar hennar niðurslignir? Ella hvør legði hornstein hennar, meðan allar morgunstjørnur fegnaðust, og allir synir Guðs rópaðu av gleði? Hvør byrgdi fyri havinum við hurðum, tá ið tað ymjandi breytst fram úr móðurkviði, tá ið eg fekk tí skýggið til klædnabúna og bølamyrkrið til reiv, tá ið eg breyt mark fyri tí, setti upp hurðar og lokur og mælti: „Higar og ikki longur! Her steðgi tínir stoltu streymar!“ Job 38,1-11

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*

Skyldið ongum nakað uttan tað at elska hvør annan; tí at tann, sum elskar næsta sín, hevur uppfylt lógina. Tí at hetta: „Tú mást ikki dríva hor, tú mást ikki slaa í hel, tú mást ikki stjala, tú mást ikki girnast,“ og hvat annað boð so er, tað verður tikið undir einum í hesum orði: „Tú

skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.“ Kærleikin ger ikki næstanum nakað ilt; tí er kærleikin uppfylling av lógini. Róm 13,8-10

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og tá ið Jesus steig í bátin, fylgdu honum lærusveinar hansara. Og sí, tá varð harðveður á vatninum, so at báturin fjaldist av aldunum; men hann lá og svav. Og teir fóru og vaktu hann og søgdu: „Harri, bjarga okkum! Vit ganga burtur!“ Og hann sigur við teir: „Hví eru tit ræddir, fátrúnu menn!“ So reistist hann og hóttaði at vindi og aldum, og tað varð blikalogn. Men menninir undraðust og søgdu: „Hvør maður er hetta, at bæði vindur og veður eru honum lýðin?“ Matt 8,23-27

5. SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú sáar títt góða sáð, heilaga orð títt, í mannahjørtu. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt lata hetta góða sáð títt vaksa og bera ávøkst í hjørtum okkara. Varða okkum fyri hinum ónda fígginda og hjálp okkum í øllum freistingum og vandum, so at sáðið kann búnast til heystar, og vit verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert trúfastur í kærleika og gávumildur sáar títt góða sáð í hjørtu okkara. Vit biðja teg, varðveit fólk títt. Gev øllum, hvørs einasta vón er himmalska náði tín, altíð at vera undir vernd tíni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Lít tú á Harran og ger tað góða, búgv tú í landinum og stunda á trúskap, so skalt tú í Harranum hava gleði tína, og hann man tær geva tíni hjartans ynski. Legg tú á Harran tínar leiðir, og lít tú á hann, hann man tað útinna, lata rætt tín koma upp sum ljósið, tína rættferð sum middagskláran. Sl 37,3-6

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:*
So íklæðist tá eins og Guðs útvaldu, heilagu og elskaðu, hjartaliga miskunn, góðvild, eyðmýkt, spaklyndi, langmóð, so at tit umbera hvør annan og fyrigeva hvør øðrum, um einhvør hevur kærumál móti einumhvørjum; eins og Kristus fyrigav tykkum, soleiðis eisini tit! Men fram um alt hetta íklæðist kærleikan, sum er band fullkomileikans! Og latið frið Krists ráða í hjørtum tykkara, sum tit eisini vórðu kallaðir til í einum likami, og verðið takksamir! Latið orð Krists búgva ríkliga hjá tykkum í øllum vísdómi, so at tit læra og áminna hvør annan við sálmum og lovsongum og andligum ljóðum, og syngja yndisliga Guði lov í hjørtum tykkara. Og alt, hvat tit so

gera í orði ella verki, gerið tað alt í Harrans Jesu navni, takkandi Guði faðir við honum. Kol 3,12-17

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus flutti fram eitt annað líknilsi fyri teir og segði: „Himmiríki er líkt einum manni, ið sáaði gott sáð í veltu sína. Men meðan fólkini svóvu, kom óvinur hansara og sáaði illgresi upp í hveitina og fór so avstað. Men tá ið sáðið vaks upp, og akurin var aksaskotin, tá kom eisini illgresið til sjóndar. Og húskallar húsbóndans komu tá og søgdu við hann: „Harri, sáaði tú ikki gott sáð í veltu tína? Hvaðani hevur hon tá fingið illgresið?“ Men hann segði við teir: „Hetta hevur ein illviljaður maður gjørt.“ Men húskallarnir siga við hann: „Vilt tú tá, at vit skulu fara at lúka tað burtur?“ Men hann segði: „Nei, fyri at tit, tá ið tit royta illgresið burtur, ikki skulu slíta hveitina upp við.“ Latið bæði sløgini vaksa saman til heysta; og á heystadegi vil eg siga við akurskurðarmenninar: Hentið fyrst illgresið saman og bindið tað í bundi til at brenna, men berið hveitina inn í løðu mína.“ Matt 13,24-30

SEINASTA SUNNUDAG EFTIR TRETTANDA

Litur: Hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum á umbroytingarfjallinum sýndi okkum son tín, Jesus Krist, í guddómsdýrd síni og beyð okkum at lýða á hann, sum tú hevur góðan tokka til. Vit biðja teg, upplýs tú hjørtu okkara við heilaga anda

tínum og orði, so at vit framvegis mega skoða dýrd hansara, seta alla vón og alt álit á deyða og fullgjørda verk hansara eina, og soleiðis vinna fram til hina ævigu dýrdina fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, sýnir okkum guddómsdýrd tína. Vit biðja teg, varðveit fólk títt. Gev okkum av náði tíni at elska heilaga navn títt og tæna tær í øllum góðum verki. Gev okkum at fáa lut bæði í tímiligu og himmalsku gávum tínum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í aðru Mósebók:
Og Harrin segði við Móses: „Skriva tær hesi orð upp, tí at samsvarandi hesum orðum geri eg sáttmála við teg og við Ísrael.“ Hann varð nú har hjá Harranum í fjøruti dagar og fjøruti nætur og bragdaði hvørki vátt ella turt; og hann skrivaði á talvurnar sáttmálaorðini, tey tíggju orðini. Men tá ið Móses kom oman aftur av Sinai fjalli við báðum vitnisburðartalvunum í hendi, skein ljómin av andliti hansara, av tí at hann hevði talað við hann; men sjálvur visti hann ikki av tí. Tá ið tá Áron og allir Ísraelsmenn sóu Móses, sí, tá skein ljómin av andliti hansara, so at teir tordu ikki at nærkast honum. Men Móses rópaði á teir; tá snúðust teir, Áron og allir høvdingar savnaðarins, aftur til hansara;

og Móses talaði við teir. Síðan komu allir Ísraelsmenn til hansara, og hann beyð teimum at halda alt tað, sum Harrin hevði sagt honum á Sinai fjalli. Tá ið Móses hevði lokið talu sína við teir, legði hann skýli yvir andlit sítt. Men hvørja ferð, ið Móses gekk fram fyri Harran til tess at tala við hann, tók hann skýlið frá, til hann fór út aftur; og tá ið hann var komin út aftur, segði hann fyri Ísraelsmonnum tað, sum honum hevði verið boðið. Tá sóu Ísraelsmenn andlit Mósesar, hvussu ljómin skein av tí; Móses dró tá aftur skýlið fyri andlit sítt, til hann næstu ferð gekk inn at tala við Harran. 2 Mós 34,27-35

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í seinna brævi sínum:*
Tí at tað vóru ikki snildiliga samanpentaðar søgur, sum vit fylgdu, tá ið vit kunngjørdu tykkum vár harra Jesu Krists mátt og komu, men vit høvdu verið eygnavitni til hátign hansara. Tí at hann fekk av Guði faðir heiður og dýrd, tá ið ein tílík rødd kom til hansara frá hini hátignarmiklu dýrd: „Hetta er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi tokka til.“ Og hesa rødd hoyrdu vit sjálvir koma av himni, tá ið vit vóru við honum á hinum heilaga fjallinum. 2 Pæt 1,16-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og seks dagar aftaná tekur Jesus Pætur og Jákup og Jóhannes, bróður hansara, við sær og fer við teimum einsæris niðan á eitt høgt fjall. Og hann umbroyttist fyri eygum teirra, og andlit hansara skein sum sólin, og klæði hansara vórðu hvít sum ljósið. Og sí, Móses og Elia sýndu seg fyri teimum í samtalu við hann. Men Pætur tók til orða og segði við Jesus: „Harri, tað er gott, at vit eru her!

Um tú vilt, skal eg her gera tríggjar búðir, tær eina og Mósesi eina og Elia eina.“ Meðan hann enn hevði hetta á máli, sí, tá skuggaði eitt bjart skýggj yvir teimum, og sí, ein rødd mælti út úr skýnum: „Hesin er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til. Lýðið á hann!“ Og tá ið lærusveinarnir hoyrdu hetta, fullu teir fram eftir rommum og vórðu ógvuliga ræddir. Og Jesus kom fram at teimum og nam við teir og segði: „Reisið tykkum upp og óttist ikki!“ Men tá ið teir hugdu upp, sóu teir ongan uttan Jesus einsamallan. Og meðan teir gingu oman av fjallinum, beyð Jesus teimum og segði: „Tit skulu ongum siga frá hesi sjón, fyrr enn menniskjusonurin er risin upp frá deyðum.“ Matt 17,1-9

Forføsta

3. SUNNUDAG FYRI FØSTU (SUNNUDAG SEPTUAGESIMA)

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við heilaga orði tínum kallar okkum inn í víngarð tín. Vit biðja teg, lat heilaga anda tín styrkja og leiða hjørtu okkara, so at vit arbeiða hugaliga í hesum víngarði tínum, varða okkum fyri synd og meinbogum, halda okkum í lýdni eftir orði tínum og seta alla vón okkara til náði tína eina, sum tú so ríkliga hevur veitt okkum í einborna syni tínum, Jesusi Kristi, várum harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum kallar okkum til tænastu í ríki tínum. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara, so at vit, sum av røttum áttu at verðið revsað fyri syndir okkara, av náði tíni kunnu verða bjargað, navni tínum til heiðurs fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:*

So sigur Harrin: Hin vitri skal ikki rósa sær av vitsku

síni, hin sterki ikki av styrki síni og hin ríki ikki av ríkidømi sínum; nei, tann sum vil rósa sær, hann rósi sær av, at hann hevur vitsku til at kenna meg, at tað eri eg, Harrin, sum inni miskunnsemi, rætt og rættlæti á jørðini; tí at í tílíkum havi eg tokka, sigur Harrin. Jer 9,23-24

Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:
Vita tit ikki, at teir, sum renna kapp á skeiði, renna fullvæl allir, men ein fær sigursprísin? Rennið soleiðis, at tit mega fáa hann! Men ein og hvør, sum er uppi í kappleikum, er fráhaldandi í øllum; hinir fyri at kunna fáa forgongiligan krans, men vit óforgongiligan. So renni eg tá soleiðis, ikki líkasum upp á óvist; eg berjist eins og tann, sum ikki slær í bera luft. Men eg temji likam mítt og kúgi tað, fyri at ikki eg, sum havi prædikað fyri øðrum, sjálvur skal verða rikin aftur. 1 Kor 9,24-27

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Tí at himmiríkið er líkt einum húsbónda, sum fór út snimma á morgni at leiga sær bønarmenn í víngarð sín. Og tá ið hann var komin ásamt við bønarmenninar um ein denar um dagin, sendi hann teir út í víngarð sín. Og hann fór út aftur um landsuðurstíð, og sá nakrar aðrar menn standa fyri einki á torginum. Og hann segði við teir: „Farið tit við út í víngarðin, og eg vil lata tykkum fáa tað, ið hóskandi er.“ Og teir fóru. Uppaftur fór hann út um middagsleitið og um nón og gjørdi tað sama. Og um hálvgavestur fór hann út og hitti nakrar aðrar, sum stóðu har fyri einki, og hann sigur við teir: „Hví standa tit her allan dagin fyri einki?“ Teir siga við

hann: „Tí at eingin hevur leigað okkum.“ Hann sigur við teir: „Farið tit við út í víngarðin.“ Men tá ið komið var at kvøldi, sigur víngarðsharrin við formann sín: „Rópa bønarmenninar inn og fá teimum lønina, og legg fyri við teimum seinastu og síðan til teir fyrstu.“ Og teir, ið bidnir vóru um hálvgavestur, komu og fingu ein denar hvør. Men tá ið teir fyrstu komu, hildu teir seg fara at fáa meira; og teir fingu eisini ein denar hvør. Men tá ið teir fingu hann, illkendust teir við húsbóndan og hildu fyri: „Hesir seinastu hava ikki arbeitt meira enn ein tíma, og tú hevur mett teir javnt við okkum, sum borið hava dagsins sveitta og møði.“ Men hann svaraði og segði við ein teirra: „Vinur mín, eg geri tær ongan órætt. Ert tú ikki komin ásamt við meg um ein denar? Tak tú títt og far hiðani! Men eg vil geva hesum seinasta líka við teg. Ella havi eg ikki loyvi at gera við mítt, sum eg vil? Ella er eyga títt ilt fyri tað, at eg eri góður? Soleiðis skulu teir seinastu verða fyrstir og teir fyrstu seinastir, [tí at mong eru kallað, men fá útvøld“]. Matt 20,1-16

2. SUNNUDAG FYRI FØSTU (SUNNUDAG SEKSAGESIMA)

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú við syni tínum, Jesusi Kristi, sáar títt góða sáð, heilaga orð títt, okkara millum. Vit biðja teg, búgv tú sjálvur hjørtu okkara til við heilaga anda tínum, so at vit hugaliga

hoyra orð títt, taka við tí, varðveita tað og bera ávøkst til ævigt lív fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum gávumildur sáar títt góða sáð í mannahjørtu og veitst, at vit ikki kunnu líta á egnar gerningar. Vit biðja teg, ver okkum miskunnsamur. Varða okkum í náði fyri fíggindans veldi og veit okkum styrki í tær fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

* *Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:*
Leitið til Harrans, meðan hann er at finna, kallið á hann ta stund, hann er nær. Hin gudleysi vendi um frá vegi sínum, og órættarmaður frá svikaráðum sínum og vendi sær til Harrans, tá skal hann miskunna honum, til Guðs várs, tí at hann fyrigevur ríkliga. Tí at hugsanir mínar eru ikki hugsanir tykkara og vegir tykkara ikki vegir mínir, sigur Harrin; nei, sum himin er hægri enn jørðin, soleiðis eru vegir mínir hægri enn vegir tykkara og hugsanir mínar hægri enn hugsanir tykkara. Tí at eins og regn og kavi falla av himni og ikki fara aftur hagar, fyrr enn jørðin er vætað og vorðin gróðursom og hevur latið tað spretta og givið sáð til at sáa og breyð til at eta, soleiðis skal orð mítt, ið fer av mínum munni, ikki venda aftur við ongum, men útinna tað, sum mær líkar, og fremja tað, sum eg sendi tað til. Jes 55,6-11

Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:
Tí at væl er orð krossins dárskapur fyri teimum, sum glatast, men fyri okkum, sum verða frelstir, er tað Guðs kraft. Tí at skrivað stendur: „Eg vil týna vísdóm vísmanna, og vitsku vitra manna vil eg gera til einkis.“ Hvar er vísmaður? Hvar skriftlærdur? Hvar orðakappi í hesum heimi? Hevur Guð ikki gjørt til dárskapar vísdóm heimsins? Tí at við tað at heimurin við vísdómi sínum ikki kendi Guð í vísdómi Guðs, líkaði tað Guði við boðanardárskapi at frelsa tey, sum trúgva; við tað at bæði Jødar krevja tekin og Grikkar søkja vísdóm, men vit boða Krist krossfestan, Jødum meinboga, men heidningum dárskap, men sjálvum hinum kallaðu, bæði Jødum og Grikkum, Krist, Guðs kraft og Guðs vísdóm. Tí at dárskapurin hjá Guði er vísari enn menniskjan, og veikleikin hjá Guði er sterkari enn menniskjan. 1 Kor 1,18-25

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tá ið stór mannamúgva var saman komin, og tey fóru út til hansara úr eini bygd fyri og aðrari eftir, segði Jesus við einum líknilsi: „Ein sáðmaður fór út at sáa sáð sítt; og í tí hann sáaði, fell sumt sáðið fram við veginum og varð niðurtraðkað, og himmalsins fuglar ótu tað upp. Og sumt fell á hellubotn, og tá ið tað vaks, følnaði tað, av tí at tað fekk onga vætu. Og sumt fell mitt niður millum tornir, og tornirnar vuksu upp við og køvdu tað. Og sumt fell í góða jørð, og tað vaks upp og bar hundraðfaldan ávøkst. Tá ið hann hetta segði, rópaði hann: „Tann, ið

oyru hevur at hoyra við, hann hoyri!“ Men lærusveinar hansara spurdu hann, hvat hetta líknilsi hevði at týða. Men hann segði: „Tykkum er tað givið at kenna loyndarmál Guðs ríkis, men hinum í líknilsum, til tess at tey, tó at tey síggja, ikki mega síggja, og tó at tey hoyra, ikki mega fata. Men hetta hevur líknilsið at týða: Sáðið er Guðs orð. Og tey fram við veginum eru tey, sum hoyra á; síðan kemur djevulin og tekur orðið úr hjarta teirra, til tess at tey ikki skulu trúgva og verða frelst. Men tey á hellubotninum eru tey, sum taka við orðinum við gleði, tá ið tey hoyra tað; men hesi hava onga rót; tey trúgva eitt skifti; og á royndarstund falla tey frá. Men tað, sum fell millum tornirnar, tað eru tey, sum hoyra og síðan verða køvd av lívsins sorgum og ríkidømi og njótingum og ikki bera búna frukt. Men tað í teirri góðu jørðini, tað eru tey, sum tá ið tey hava hoyrt orðið, goyma tað í einum vøkrum og góðum hjarta og bera frukt í tolni. Luk 8,4-15

SUNNUDAG FYRI FØSTU (SUNNUDAG Í FØSTUINNGANGI)

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum opinberaði teg við heilaga anda tínum, tá ið einborni sonur tín varð doyptur, og við reyst tíni vísti okkum til hansara, sum hevur tikið á seg allar syndir okkara, til tess at vit við honum kunnu fáa náði og fyrigeving syndanna. Vit biðja teg, varðveit okkum, sum eftir boðum sonar tíns eru doypt til at hoyra

tær til. Styrk trúgv okkara við heilaga anda tínum og veit okkum hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum okkara vegna læt son tín, Jesus Krist, ganga líðingarvegin. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Loys okkum úr syndabondum, og varðveit okkum í øllum freistingum og vandum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Hví láta heidnir menn so illa og hava fólk fáfongt í ráði? Reisast heimsins kongar, og høvdingar ganga saman í ráð mót Harranum og hinum salvaða hans: „Slítum bond teirra og kastum av okkum fjøtur teirra.“ Hann, sum í himni situr, brosar, Harrin spottar teir. So talar hann til teirra í vreiði síni, og í harmi sínum hann ræðir teir: „Kosið eg havi mær kong mín á Zion, mínum heilaga fjalli.“ Greina vil eg frá ráðagerð, Harrin segði við meg: „Sonur mín ert tú, í dag havi eg føtt teg; heit á meg, og eg gevi tær heidningafólk í arv og í ogn jarðarríkið alt. Og nú, varnist tit heimsins kongar, sissist tit jarðarríkis drotnar! Tænið Harranum við ótta, fegnist við bivan! Heilsið syninum, at hann ei skal ilskast og vegur tykkara bera av leið; tí brátt birtist vreiði hans. Sælir eru allir teir, ið á hann troysta! Sl 2,1-8 og 10-12

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum.*
Tí at Kristus leið eisini eina ferð fyri syndarar, ein rættvísur fyri órættvísar, fyri at hann kundi leiða okkum fram til Guðs, hann, sum leið deyðan í likaminum, men varð livandi gjørdur í andanum, sum hann eisini fór í og prædikaði fyri andunum, sum vóru í varðveitslu, teimum, sum í forðum høvdu verið ólýdnir, ta ferðina Guðs langmóð bíðaði á døgum Nóa, meðan ørkin varð smíðað, sum nøkur fá, – tað eru átta sálir – vórðu bjargað í gjøgnum vatn, sum nú eisini frelsir tykkum í sínum mótbílæti, dópinum, hann sum ikki er burturtekt av óreinskuni á likaminum, men bøn til Guðs um góða samvitsku fyri uppreisn Jesu Krists, hann sum er uppfarin til himna og er við Guðs høgru hond, men einglar og máttir og kreftur eru honum undirløgd. 1 Pæt 3,18-22

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Tá kemur Jesus úr Galileu til Jórdans til Jóhannesar at verða doyptur av honum. Men Jóhannes vildi forða honum og segði: „Mær kundi gjørst neyðugt at verða doyptur av tær, og so kemur tú til mín!“ Men Jesus svaraði og segði við hann: „Lat tær nú eftirlíka, tí at soleiðis sømir tað okkum at gera alt tað, ið rætt er.“ Tá eftirlíkaði hann honum. Men tá ið Jesus var doyptur, kom hann við tað sama upp úr vatninum aftur; og sí, himmalin opnaðist fyri honum, og hann sá Guðs anda fara niður sum eina dúgvu og koma yvir hann. Og sí, ein rødd kom av himli, ið segði: „Hesin er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til.“ Matt 3,13-17

Føsta

Føstan byrjar øskudag – fyrsta mikudag eftir sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi).

1. SUNNUDAG Í FØSTU

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur fríað okkum út úr valdi myrkursins og sett okkum yvir í ríki einborna sonar tíns. Vit biðja teg, at tú fyri líðingar og deyða hans skuld vilt koma okkum til hjálpar við tínum heilaga anda og styrkja okkum við orði tínum, so at hin óndi fíggindin ikki skal fáa vald á okkum, men at vit altíð mega verða verandi í náði tíni og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, verða freistaðan á allan hátt líka við okkum, tó uttan synd. Vit biðja teg, lít við mildni at fólki tínum. Gev okkum av miskunn tíni at komast undan vreiði tíni og revsing fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:*

Men ormurin var sniðfundigari enn øll onnur djór á markini, sum Harrin Guð hevði skapað. Og hann mælti við konuna: „Man nú Guð hava sagt, at tit ikki mega eta av nøkrum træi í aldingarðinum?“ Konan svaraði orminum: „Av ávøkstum træanna í aldingarðinum mega vit eta; men av ávøksti træsins, ið stendur í miðjum aldingarði, hevur Guð sagt, at vit mega ikki eta og ikki nerta hann, tí annars verður deyðin okkum vísur.“ Men ormurin segði við konuna: „Tit skulu als ikki doyggja. Men Guð veit, at so skjótt sum tit eta av tí trænum, munnu eygu tykkara verða upplatin, og tit munnu verða eins og Guð og duga at skyna á illum og góðum.“ Tá ið nú konan sá, at træið var gott til matna og frálíkt á at líta og avbært til at fáa vit av, tá tók hon av ávøksti tess og át; somuleiðis gav hon eisini manni sínum, ið hjá henni var, og hann át. Men tá lótust eyguni upp á teimum báðum; og tá ið tey vórðu vør við, at tey vóru nakin, tóku tey at seyma sær belti úr bløðunum av fikutrøum. Men tá ið Ádam og kona hans í kvøldarlotinum hoyrdu Harran Guð koma gangandi gjøgnum aldingarðin, royndu tey at krógva seg fyri honum millum trøini í aldingarðinum. Tá kallaði Harrin Guð á Ádam og segði: „Hvar ert tú?“ Hann svaraði: „Eg hoyrdi teg í aldingarðinum og varð bangin og krógvaði meg, av tí at eg eri nakin.“ Tá segði hann: „Hvør hevur sagt tær, at tú ert nakin? Mestur hevur tú etið av trænum, sum eg beyð tær ikki at eta av!“ Ádam svaraði: „Konan, ið tú setti mær við lið, gav mær av trænum, og eg át.“ Tá segði Harrin Guð við konuna: „Hvat hevur tú gjørt?“ Konan svaraði: „Tað var ormurin, ið

tøldi meg, so at eg át.“ Tá mælti Harrin Guð við ormin: „Fyri at tú gjørdi hetta, skalt tú verða bannaður millum allan fenaðin og millum øll djór á markini; á búki tínum skalt tú skríða og eta mold allar ævidagar tínar! Og eg seti fjandskap millum teg og konuna, millum avkom títt og avkom hennara; tað skal morla høvur títt, og tú skalt bíta tað í hælin!“ Við konuna segði hann: „Við miklum treytum skalt tú ganga við barni; og við pínu skalt tú føða; men tó skal tráan tín vera eftir manni tínum; og hann skal valda tær!“ Við Ádam segði hann: „Av tí at tú lýddi konu tíni og átst av tí træi, sum eg hevði sagt, at tú skuldi ikki eta av, tí skal jørðin verða tær bannað tín vegna; við strevi skalt tú vinna tær føðslu av henni allar ævidagar tínar. Tornir og tistlar skal hon bera tær; og tú skalt eta urtir markarinnar. Í sveitta andlits tíns skalt tú eta breyð títt, hagar til tú aftur fert í jørðina, sum tú ert tikin av; tí av mold ert tú, og at mold skalt tú aftur verða!“ 1 Mós 3,1-19

Epistulin skrivar Paulus ápostul í seinna brævi sínum til Korintmanna:

Men sum starvsfelagar áminna vit eisini tykkum, at tað ikki má vera til einkis, tit taka ímót Guðs náði. Tí at hann sigur: „Á gævustund bønhoyrdi eg teg, og á frelsudegi hjálpti eg tær.“ Sí, nú er tað ein sonn gævustund, sí, nú er tað ein frelsudagur! Í ongum luti eru vit til nakran meinboga, fyri at tænastan ikki skal verða lastað. Men í øllum lutum bjóða vit okkum sjálvar fram sum tænarar Guðs, í nógvum toli, í trongdum, í neyðum, í trongum viðurskiftum, í høggum, í fongslum, í umflakkan, í møði, í náttarvøkum, í føstum, við reinleika, við kunn-

leika, við langmóði, við mildleika, við heilagum anda, við falsleysum kærleika, við sannleiksorði, við Guðs kraft, við rættferðar vápnum til sóknar og varnar, í æru og vanæru, í lasti og lovi, sum villleiðarar og tó sannførir, sum ókendir og tó alkendir, sum komnir til deyða, og sí, vit liva, sum revsaðir, og tó ikki avlívaðir, sum sorgarfullir, men tó altíð glaðir, sum fátækir, men gera tó mangar ríkar, sum teir, ið einki hava, og tó eiga alt. 2 Kor 6,1-10

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Tá varð Jesus av andanum førdur niðan í oyðimørkina at verða freistaður av djevulinum. Og tá ið hann hevði fastað fjøruti dagar og fjøruti nætur, hungraði hann til endans. Og freistarin kom til hansara og segði við hann: „Um tú ert sonur Guðs, tá sig, at hesir steinarnir skulu verða breyð.“ Men hann svaraði og segði: „Skrivað stendur: „Menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, ið gongur út av Guðs munni.“ Tá tekur djevulin hann við sær inn í staðin halga og fer við honum upp á eitt torn í halgidóminum og sigur við hann: „Um tú ert sonur Guðs, tá stoyt teg sjálvan oman her, tí at skrivað stendur: „Einglum sínum man hann geva boð um teg, og á hondum munnu teir bera teg, at tú ikki meiðir fót tín á nøkrum steini.“ Jesus segði við hann: „Uppaftur stendur skrivað: „Tú mást ikki freista Harran, Guð tín.““ Uppaftur tekur djevulin hann við sær niðan á eitt óføra høgt fjall og sýnir honum øll ríki heimsins og alla dýrd teirra og segði við hann: „Alt hetta vil eg geva tær, um tú vilt falla á knæ og tilbiðja meg.“ Tá sigur Jesus við hann: „Vík frá mær, Sátan! Tí at skrivað stendur: „Harran, Guð tín, eigur tú at tilbiðja og tæna honum eina.““ Tá fór djevulin

frá honum, og sí, einglarnir komu og tæntu honum. Matt 4,1-11

2. SUNNUDAG Í FØSTU

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit biðja teg, at tú vilt styrkja hjørtu okkara við heilaga anda tínum og gera okkum føst í trúnni og vónini um náði tína og miskunn, so at vit, eins og hin kánaneiska konan mega halda fast við son tín, Jesus Krist, og finna hjálp og bjarging hjá honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum kennir máttloysi okkara og veitst, at vit í okkum sjálvum einki megna. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir teirra stríðandi og hjálparleysu. Varðveit okkum bæði til likams og sálar. Ver okkum vernd og skjól fyri øllum tí, sum myrkir og tyngir huga og sinn fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:*

Sum hjørtur tráar eftir rennandi áum, so tráar mín sál eftir tær, o Guð! Sál mín tystir eftir Guði, eftir tí livandi

Guði. Nær skal eg koma og skoða Guðs ásjón? Mín grátur er vorðin føði mín um dagar og nætur, tí at teir allan dagin við meg siga: „Hvar er Guð tín?“ Tá ið eg hugsi um tað, má eg oysa út mína sál av sorg, hvussu eg gekk í mannatrongd á ferðum til Guðs hús við gleði og fagnaðarsongi, við miklum hátíðarrómi. Hví ert tú, sál mín, stúrin og bylgist so stórum í mær? Bíða eftir Guði, tí aftur enn skal eg honum lova, ásjónar frelsu mínar og mínum Guði. Sl 42,2-6

Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Tessalónikumanna:
Annars biðja vit nú tykkum, brøður, og áminna tykkum í Harranum Jesusi, at líkasum tit hava lært av okkum, hvussu tit eiga at liva og toknast Guði, soleiðis sum atferð tykkara eisini er, at tit soleiðis mega gera alt meiri og meiri framstig. Tit vita jú, hvørji boð vit góvu tykkum við Harranum Jesusi. Tí at hetta er Guðs vilji, halgan tykkara, at tit halda tykkum frá ólevnaði, at ein og hvør av tykkum veit at vinna sær sítt egna ker í heilagskapi og heiðuri, og ikki í girndarfýsni eins og heidningar, sum ikki kenna Guð; at eingin órættar ella svíkur bróður sín í nøkrum viðurskifti; tí at Harrin er hevnari av øllum slíkum, soleiðis sum vit eisini áður hava sagt tykkum og vitnað fyri tykkum. Tí at ikki kallaði Guð okkum til óreinsku, men til halganar. 1 Tess 4,1-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og Jesus fór burtur haðani og helt ferðini móti bygdaløgunum við Týrus og Sidon. Og sí, ein kánaneisk kona kom út um markaskjalini har og rópaði og segði: „Harri,

Dávids sonur, miskunna mær! Dóttir mín er stødd í neyð av einum illum anda.“ Men hann ønti henni ikki aftur. Og lærusveinar hansara komu og bóðu hann og søgdu: „Slepp tær frá henni, tí at hon gongur og rópar eftir okkum.“ Men hann svaraði og segði: „Eg eri ikki sendur út uttan til teir burturvilstu seyðirnar úr Ísraels húsi.“ Men hon kom og fell á knæ fyri honum og segði: „Harri, hjálp mær!“ Men hann svaraði og segði: „Tað er ikki vakurt at taka breyðið hjá børnunum og blaka hundunum tað.“ Men hon segði: „Satt er tað, Harri, men hundarnir eta tó av molunum, sum detta niður av húsbóndans borði.“ Tá svaraði Jesus og segði við hana: „Kona, stór er trúgv tín! Verði tær sum tú vilt!“ Og dóttir hennara varð frísk frá teirri somu stund. Matt 15,21-28

3. SUNNUDAG Í FØSTU

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, gerast menniskja, til tess at hann skuldi bróta niður djevulsins gerningar og varða okkum fyri hinum ónda fígginda. Vit takka tær fyri hesa náði tína og biðja teg, kom okkum til hjálpar. Varða okkum fyri følskum tryggleika. Lær okkum við heilaga anda tínum at hoyra orð títt rætt og varðveita tað í sonnum gudsótta, so at vit til síðstu stund mega verða bjargað frá Sátans valdi og verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika

heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, vit biðja teg, hoyr við mildni bønir teirra hjálparleysu og rætt út veldishond tína okkum til hjálpar og verndar fyri myrkursins veldi fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fimtu Mósebók:*
Móses mælti við Ísraelsfólk: „Tá ið tú kemur inn í tað landið, sum Harrin, Guð tín, gevur tær, tá mást tú ikki læra teg tær andstygdir, sum tjóðirnar havast at. Eingin má finnast hjá tær, sum letur son sín ella dóttur sína ganga gjøgnum eldin, eingin, sum fæst við at spáa og gera eftir og mana; eingin gandakallur ella rúnarmaður, eingin, sum leitar ráð við dreyg og spásagnaranda og víkur á teir deyðu. Tí at hvør, ið fæst við tílíkt, er Harranum andstyggiligur, og aftur fyri tílíkar andstygdir er tað, at Harrin, Guð tín, rekur teir burtur undan tær. Men tú skalt einans halda teg aftur at Harranum, Guði tínum. Tí at hesar tjóðir, sum tú skalt reka burtur, lýða á spásagnarmenn og gandakallar; men tílíkt hevur Harrin, Guð tín, ikki loyvt tær. Harrin, Guð tín, man vekja upp av brøðrum tínum profet, tílíkan sum meg; hann skulu tit lýða á.“ 5 Mós 18,9-15

Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:
Verðið tí eftirfylgjarar Guðs eins og elskað børn, og livið

í kærleika, líkasum eisini Kristus elskaði okkum og gav seg sjálvan fyri okkum til eina gávu og eitt offur, Guði til yndis anga. Men ólevnað og alskyns óreinska ella ágirnd eiga ikki so mikið sum at verða nevnd tykkara millum, soleiðis sum tað sømir heilagum; og ikki heldur ófólkaligur atburður ella illavorðið tos ella leyslátað teiti, sum alt er ósømiligt, men heldur takkargerð! Tí at hetta vita tit og skyna tit, at eingin horkallur ella óreinur ella gírigur, sum er ein avgudadýrkari, hevur arv í ríki Krists og Guðs. Eingin villi tykkum við tómum orðum, tí at fyri slíkt kemur vreiði Guðs yvir børn ólýdnisins! Verðið tí ikki lagsmenn teirra! Tí at tit vóru áður myrkur, men nú eru tit ljós í Harranum; livið sum børn ljósins – tí at ávøkstur ljósins kemur fram í allari góðsku og rættlæti og sannleika. Ef 5,1-9

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og Jesus rak út ein illan anda, og hann var málleysur; men tað hendi, tá ið hin illi andin var farin út, tá talaði hin málleysi. Og mannamúgvurnar undraðust. Men summi av teimum søgdu: „Við Beelsebul, høvdinga hinna illu andanna rekur hann hinar illu andarnar út.“ Men summi freistaðu hann og kravdu av honum eitt tekin av himli. Men tá ið hann kendi hugsan teirra, segði hann við tey: „Hvørt ríki, sum er í ósemju við seg sjálvt, legst í oyði, og hús fellur á hús. Men um nú eisini Sátan er í ósemju við sjálvan seg, hvussu kann tá ríki hansara standa við? Tí at tit siga meg reka út hinar illu andarnar við Beelsebul. Men um eg reki út hinar illu andarnar við Beelsebul, við hvørjum reka tá synir tykkara teir út? Teir skulu tí vera dómarar tykkara. Men um eg reki út hinar

illu andarnar við fingri Guðs, tá er Guðs ríki komið á tykkum. Tá ið hin sterki alvápnaður heldur vakt um garð sín, tá eru allir ognarlutir hansara í friði; men tá ið ein, sum sterkari er enn hann, kemur á hann og vinnur hann, tá tekur hann øll herklæðini og vápnini, sum hann leit á, frá honum og býtir sundur fongin frá honum. Tann, ið ikki er við mær, er ímóti mær; og tann, ið ikki savnar við mær, hann skilir sundur. Tá ið hin óreini andin er farin út úr menniskjuni, fer hann um vatnleysar staðir og leitar sær hvílu; og tá ið hann onga finnur, sigur hann: „Eg vil venda við aftur til hús mítt, sum eg fór úr.“ Og tá ið hann kemur, finnur hann tað sópað og prýtt. Tá fer hann og tekur við sær sjey aðrar andar, verri enn hann sjálvur, og teir fara inn og festa búgv har, og hitt seinna hjá teirri menniskjuni verður verri enn hitt fyrra.“ Men tað hendi, í tí hann segði hetta, tá hevði ein kvinna úr mannfjøldini upp rødd sína og segði við hann: „Sælt er tað móðurlív, sum teg hevur borið, og sæl tey bróst, sum tú hevur sogið!“ Men hann segði: „Ja, men sæl eru tey, sum hoyra Guðs orð og varðveita tað.“ Luk 11,14-28

MIÐFØSTU SUNNUDAG
4. SUNNUDAG Í FØSTU

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, mettaði hin hungrandi skaran við fimm breyðum og tveimum fiskum. Vit biðja teg, ver eisini

miskunnsamur hjá okkum við signing tíni, og hjálp okkum at nýta gávur tínar rætt. Varða okkum fyri gírni og tímiligari stúran, so at vit fyrst søkja ríki títt og rættvísi tína og av náði tíni fáa at kenna faðirligu umsorgan tína í øllum, sum okkum er tørvur á bæði til likams og sálar fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum við syni tínum gevur okkum lívsins breyð, orð títt og sakramenti tíni. Vit biðja teg, gev okkum í øllum mótgangi, sum vit vegna syndir okkara hava uppiborið, at finna styrki og troyst í hesi náði tíni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

* *Hesin heilagi lesturin er skrivaður í aðru Mósebók:*
Og Harrin talaði við Móses og segði: „Eg havi hoyrt meylan Ísraelsmanna; tala til teirra og sig: Um ljósatendring skulu tit eta kjøt og um morgunin metta tykkum við breyði; og tit skulu viðurkenna, at eg eri Harrin, Guð tykkara.“ Tá ið tað nú var komið at kvøldi, kom flokkur av lynghønum dettandi niður og huldi búðirnar; og um morgunin dreiv døggin um búðirnar. Og tá ið mjørkin lætti í, sí, tá lá yvir oyðimørkini eitthvørt tunt og skurvut, tunt eins og mjøll á jørðini. Tá ið Ísraelsmenn sóu hetta, søgdu teir hvør við annan: „Hvat er hetta?“ Tí at teir vistu ikki, hvat tað var; men Móses segði við teir: „Hetta er tað

breyðið, sum Harrin gevur tykkum til føðslu. Og soleiðis hevur Harrin fyriskipað: Savnið av tí so nógv, sum hvørjum er tørvur á til matna, ein omer til mans; hvør tykkara skal henta eftir fólkatalinum í tjaldi sínum." Ísraelsmenn gjørdu nú soleiðis og hentaðu saman, summir meira og summir minni. Og tá ið teir mettu tað í omermáti, tá hevði hann, sum hevði hentað nógv, ikki ov mikið, og hann, sum hevði hentað lítið, ikki ov lítið; hvør hentaði tað, sum honum tørvaði til matna. 2 Mós 16,11-18

Epistulin skrivar Paulus ápostul í seinna brævi sínum til Korintmanna:
Men hetta sigi eg: Tann, sum sparsamliga sáar, skal eisini sparsamliga heysta; og tann, sum sáar við signingum, skal eisini heysta við signingum. Ein og hvør gevi, eins og hann hevur sett sær fyri í hjarta sínum, ikki av óhugi ella av neyð; tí at Guð elskar glaðan gevara. Men Guð er mentur at lata alla náði verða tykkum ríkliga fyri, so at tit í øllum lutum altíð kunnu hava alt tað, ið tykkum tørvast, og hava almikið til alt gott verk; soleiðis sum skrivað stendur: „Hann stroyddi út, hann gav hinum fátæku, góðgerð hans varir allar ævir." Men tann, sum gevur sáðmanninum sáð og breyð til føðslu, hann skal eisini geva tykkum sáð og gera tað margfalt og geva avgrøðini av góðgerð tykkara vøkst, so at tit í øllum lutum verða ríkir til alla gávumildi, sum við okkum virkar takksemi til Guðs. 2 Kor 9,6-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Eftir hetta fór Jesus avstað til økið hinumegin Galileuvatnið ella Tiberiasvatnið. Og stór mannamúgva fylgdi honum,

tí at tey sóu tey tekin, sum hann gjørdi á hinum sjúku. Men Jesus fór niðan á fjallið og settist har saman við lærusveinum sínum. Men páskir, hátíðin hjá Jødum, vóru í nánd. Tá ið Jesus nú lyfti upp eygum sínum og sá, at stór mannamúgva kom til hansara, sigur hann við Filippus: „Hvar skulu vit keypa breyð, so at hesi kunnu fáa nakað at eta?“ Men hetta segði hann fyri at royna hann; tí at sjálvur visti hann, hvat hann ætlaði sær at gera. Filippus svaraði honum: „Breyð fyri tvey hundrað denarar røkkur ikki til hjá teimum, so at hvør teirra kann fáa eitt lítið sindur.“ Ein av lærusveinum hansara, Andrias, bróðir Símun Pæturs, sigur við hann: „Her er ein smádrongur, sum hevur fimm byggbreyð og tveir fiskar; men hvat munar tað hjá so mongum?“ Jesus segði: „Latið fólkið setast niður!“ Men har var nógv gras á staðinum. Tá settust kallmenninir niður, okkurt um fimm túsund í tali. Jesus tók tá breyðini, og tá ið hann hevði takkað, býtti hann tey til teirra, sum setstir vóru niður, somuleiðis eisini av fiskunum so mikið, sum teir vildu hava. Men tá ið teir vóru mettir, sigur hann við lærusveinar sínar: „Hentið saman breyðmolarnar, sum leypa av, so at einki fer til spillis!“ Teir hentaðu teir so saman og fyltu upp í tólv tægur av molum, sum vóru til avlops av teimum fimm byggbreyðunum hjá teimum, sum høvdu etið. Tá ið nú fólkini sóu tað tekinið, sum hann hevði gjørt, søgdu tey: „Hesin er av sonnum profeturin, sum koma skal í heimin.“ Tá ið Jesus tí skildi at teir ætlaðu at koma og taka hann við valdi, til tess at gera hann til kong, fór hann aftur avsíðis niðan á fjallið, einsamallur í einingi.
Jóh 6,1-15

BOÐANARDAG MARIU
5. SUNNUDAG Í FØSTU

Litur: Hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum í miklu náði og miskunn tíni vildi, at einborni sonur tín skuldi verða gitin av heilagum anda og borin í heim sum menniskja av Mariu moy. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín og náði tína, so at vit, eins og hin heilaga Maria moy, hoyra orð títt, leggja okkum tað í geyma og fylgja tær í trúgv og lýdni, til vit verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt eingil tín bera hini heilagu og sælu Mariu moy boð um vilja tín, at hon skuldi verða við barn av heilagum anda og sonur tín gerast menniskja í móðurlívi hennara. Vit biðja teg í trúnni á, at hon av sonnum er Guðs móðir, gev okkum ævigt lív við syni hennara, Jesusi Kristi, várum harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt eingil tín bera hini heilagu og sælu Mariu moy boð um vilja tín, at hon skuldi verða við barn av heilagum anda og tú í syni tínum gerast menniskja í móðurlívi hennara. Vit biðja teg í trúnni á, at

hon av sonnum er Guðs móðir, gev okkum ævigt lív við syni hennara, Jesusi Kristi, várum harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja proftetur:*
Og Harrin helt fram at tala við Ákaz og segði: „Krev tær tekin av Harranum, Guði tínum, krev tað annaðhvørt niðan úr helheimi ella oman av himni.“ Men Ákaz svaraði: „Eg krevji einki, eg vil ikki freista Harran.“ Tá segði Jesaja: „Hoyrið nú tit av Dávids húsi! Er tað tykkum ikki nóg mikið at møða menniskju, at tit eisini vilja møða Guð mín? Tí skal Harrin sjálvur geva tykkum tekin: Sí, moyggin verður við barn og føðir son, og hon kallar hann Immanuel.“ Jes 7,10-14

Epistulin skrivar Jóhannes ápostul í fyrsta brævi sínum:
Tað, sum var frá upphavi, tað, sum vit hava hoyrt, tað, sum vit hava sæð við eygum okkara, tað, sum vit skoðaðu og hendur okkara numu við, tað er lívsins orð; – og lívið varð opinberað, og vit hava sæð og vitna og boða tykkum hitt æviga lívið, sum var hjá faðirinum og varð opinberað okkum; – tað, sum vit hava sæð og hoyrt, boða vit eisini tykkum, fyri at eisini tit mega hava samfelag við okkum; men samfelag okkara er við faðirin og við son hansara Jesus Krist. 1 Jóh 1,1-3

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men í sætta mánaði varð Gabriel eingil sendur av Guði til eina bygd í Galileu, sum eitur Nasaret, til eina jomfrú,

ið var trúlovað einum manni, sum æt Jósef, av Dávids ætt; og navn jomfrúnnar var Maria. Og eingilin kom inn hjá henni og segði: „Heil veri tú, sum náði hevur fingið! Harrin er við tær, [tú sum ert vælsignað av kvinnum!“] Men hon var heilt óttafull av hesum orðum, og hon hugsaði um, hvat henda heilsan mundi hava at týða. Og eingilin segði við hana: „Óttast ikki, Maria! Tí at tú hevur funnið náði hjá Guði. Og sí, tú skalt verða við barn og eiga ein son, og navn hansara skalt tú kalla Jesus. Hann skal verða stórur og verða kallaður sonur hins hægsta, og Guð Harrin skal geva honum hásæti Dávids, faðirs hansara; og hann skal verða kongur yvir ætt Jákups allar ævir, og á kongadømi hansara skal eingin endi verða.“ Men Maria segði við eingilin: „Hvussu kann hetta bera til, við tað at eg ikki veit av manni?“ Og eingilin svaraði og segði við hana: „Heilagi andin skal koma yvir teg, og kraft hins hægsta skal skugga yvir teg, tí skal eisini hitt heilaga, sum borið verður í heim, verða kallað sonur Guðs. Og sí, Elisabet, skyldkona tín, eisini hon ber son undir belti í elli síni, og hetta er nú hin sætti mánaður hjá henni, sum kallað var ein ófrukt. Tí at hjá Guði man ikki nøkur søk vera ógjørlig.“ Men Maria segði: „Sí, eg eri tænastukvinna Harrans; verði mær eftir orðum tínum!“ Og eingilin fór frá henni. Luk 1,26-38

PÁLMASUNNUDAG
INNGANGUR TIL DYMBILDAGAVIKU

Litur: Viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum læt einborna son tín, Jesus Krist, seta seg sjálvan lágt, so at hann gjørdist menniskja og varð lýðin til deyða á krossi. Vit biðja teg, gev okkum náði til at halda okkum at hesum frelsara okkara í sannari trúgv, so at vit fylgja honum eftir í eyðmýkt og lýdni og at enda verða sæl fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum í faðirligu náði tíni ikki spardi einborna son tín, Jesus Krist, men læt hann doyggja á krossinum. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín í hjørtu okkara, so at vit mega finna troyst í hesi náði tíni, varða okkum fyri syndini, tolin bera tær líðingar, sum verða lagdar á okkum, og um allar ævir verða sæl hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum læt frelsara okkara, son tín, Jesus Krist, gerast menniskja og doyggja á krossinum, mannaættini til frelsu og fyrimyndar í eyðmýkt. Vit biðja teg, gev okkum náði til at læra av tolmóði sonar tíns, so

at vit fylgja honum eftir í eyðmýkt og lýdni líka til deyða og at enda fáa lut í uppreisn hansara frá deyðum, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Zakarja profetur:
Rópa av gleði, Zions dóttir, og fegnast tú, Jorsala dóttir; Sí, kongur tín til tín kemur, rættvísur er hann og sigursælur, lítillátur á asna hann ríður, á ungum øsnufola. Hann oyðir hervagnar úr Efraim og hestar úr Jerúsalem; stríðsbogan brýtur hann sundur og birtir frið millum tjóða við sínum orði; frá havi til havs skal vald hans røkka, frá Ánni alt at endamarkum jarðar. Zak 9,9-10

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Filippimanna:*
Sama sinnalagið veri í tykkum, sum eisini var í Kristi Jesusi, hann, sum, tá ið hann var í Guðs mynd, ikki helt tað fyri rán at vera Guði líkur, men avklæddi seg hana, í tí at hann tók á seg tænara mynd og gjørdist monnum líkur; og tá ið hann í framkomu var sum maður, setti hann seg sjálvan lágt, og varð lýðin til deyða, ja, til deyða á krossi. Fyri tað hevur eisini Guð hátt upphevjað hann og givið honum navnið, sum er yvir hvørjum einum navni, fyri at í Jesu navni skal hvørt knæ boyggja seg, teirra, sum eru á himni, og teirra, sum eru á jørð, og teirra, sum eru undir jørðini, og hvør tunga skal ásanna, at Jesus Kristus er harri, til dýrdar Guðs faðirs. Fil 2,5-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og tá ið teir nærkaðust Jerúsalem og komu til Betfage við

Oljufjallið, tá sendi Jesus tveir lærusveinar undan og segði við teir: „Farið í bygdina her beint framman fyri tykkum, og brátt munnu tit finna eitt ásin standa bundið og eitt fyl hjá tí; loysið tey og leiðið mær tey higar. Og um onkur sigur nakað við tykkum, so skulu tit siga, at Harranum tørvar tey; tá man hann alt fyri eitt lata tey avstað.“ Men hetta hendi, til tess at tað skuldi ganga út, sum talað er av profetinum, tá ið hann sigur: „Sions dóttur berið tit boð: Sí, kongur tín til tín kemur, lítillátur, á asna hann ríður, á ungum klyvjadjórs fyli.“ Men lærusveinarnir fóru avstað og gjørdu, sum Jesus hevði boðið teimum; og teir komu við ásininum og fylinum og løgdu klæði síni á tey, og hann setti seg oman á tey. Men flest øll av mannamúgvuni breiddu klæði síni á vegin, og summi brutu greinar av trøunum og løgdu á vegin. Men mannamúgvurnar, sum gingu undan honum og sum gingu aftaná, rópaðu og søgdu: „Hosianna, Dávids sonur! Vælsignaður veri tann, ið kemur í Harrans navni! Hosianna í hægsta himli!“ Matt 21,1-9

SKÍRHÓSDAG

Litur: Hvítur, gyltur ella viólbláur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harri Jesus Kristus, vit takka tær, tí at tú í miklu náði tíni hevur givið okkum heilagu kvøldmáltíð tína, har tú veitir okkum heilaga likam títt og blóð og sameinir okkum við teg og kirkju tína bæði í himli og á jørð. Vit biðja teg, hjálp okkum við heilaga anda tínum at taka ímóti

hesum gávum tínum við røttum sinni, so at vit av hjarta játta syndir okkara, minnast líðing tína og deyða, trúgva, at vit eiga fyrigeving syndanna í tær og soleiðis dag frá degi vaksa í trúgv, vón og kærleika, til máltíð tín verður fullbúgvin í ríki tínum, har tú við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harri Jesus Kristus, vit takka tær fyri heilagu kvøldmáltíð tína, har tú gevur okkum lut í lívsins breyði og frelsunnar kaliki okkum til fyrigevingar syndanna, styrki og sálarbótar. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum í hesi felagsmáltíð við røttum sinni og sannari gleði at taka ímóti gávum tínum, heilaga likami tínum og blóði, so at vit endurnýggjað og frígjørd í fyrigeving syndanna mega vaksa í trúgv, vón og kærleika, til vit verða sæl allar ævir við tær, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harri Jesus Kristus, vit takka tær fyri heilagu kvøldmáltíð tína, har tú sameinir okkum við teg og kirkju tína bæði í himli og á jørð. Vit biðja teg, gev okkum við eyðmjúkum og røttum sinni, gleði og tøkk, at taka ímóti gávum tínum, heilaga likami tínum og blóði, so at vit endurnýggjað og frígjørd í fyrigeving syndanna mega vaksa í trúgv, vón og kærleika, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í aðru Mósebók:
Síðan talaði Harrin við Móses og Áron í Egyptalandi og segði: „Hesin mánaður skal vera byrjanarmánaður hjá tykkum; við honum skal árið byrja hjá tykkum. Talið við allan savnað Ísraelsmanna og sigið: Tíggjunda dagin í hesum mánaði skal hvør húsfaðir taka sær eitt lamb, eitt lamb fyri hvørt húski. Men um húskið er ov lítið fyri eitt lamb, skal hann og granni hansara, ið næstur honum býr, taka eitt lamb í felag eftir tali húsfólkanna; men ikki lata fleiri vera um lambið, enn at teir kunnu eta seg mettar. Lambið skal vera lýtaleyst, veturgamalt veðurlamb, ið má vera annaðhvørt undan seyði ella geit. Tit skulu hava tað gangandi til hin fjúrtanda dagin í hesum sama mánaði; tá skal øll samkoma Ísraels savnaðar slátra tað um sólsetur. Og teir skulu taka av blóðinum og rýða tað á báðar durastavirnar og duratræið á teimum húsum, har teir eta lambið. Somu náttina skulu tit eta kjøtið, steikt í eldi; aftur við ósúrgaðum breyði og beiskum urtum skulu tit eta tað. Tit mega ikki eta nakað av tí rátt ella soðið í vatni, men einans steikt í eldi við høvdi, fótum og innvøli. Einki mega tit leiva av tí til um morgunin; og er nakað eftir av tí morgunin eftir, skulu tit brenna tað upp í eldi. Og tit skulu eta tað, meðan tit standa gyrdir um lendar, skøddir um føtur og við stavi í hendi; í bræði skulu tit eta tað. Hetta eru páskir Harrans. 2 Mós 12,1-11

** Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrri brævi sínum til Korintmanna:*
Tí at eg havi fingið frá Harranum tað, sum eg eisini havi latið tykkum fáa, at Harrin Jesus, ta náttina sum hann

varð svikin, tók breyð, og takkaði og breyt tað og segði: „Hetta er likam mítt, sum er fyri tykkum; gerið hetta til mínar áminningar!“ Somuleiðis tók hann eisini kalikin aftan á kvøldmáltíðina og segði: „Hesin kalikur er hin nýggi sáttmálin í blóði mínum; gerið hetta, so ofta sum tit tað drekka, til mínar áminningar!“ Tí at so ofta sum tit eta hetta breyðið og drekka kalikin, boða tit deyða Harrans, inntil hann kemur. 1 Kor 11,23-26

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men á fyrsta degi hinna ósúrgaðu breyðanna komu lærusveinarnir til Jesus og søgdu: „Hvar vilt tú, at vit skulu gera alt til reiðar til tín at eta páskalambið?“ Men hann segði: „Farið inn í staðin til tann mannin, tit vita, og sigið við hann: „Meistarin sigur: Mín tími er í nánd; hjá tær vil eg halda páskir saman við lærusveinum mínum.““ Og lærusveinarnir gjørdu, sum Jesus bað teir, og teir gjørdu páskalambið til. Men tá ið kvøldið var komið, settist hann til borðs saman við teimum tólv lærusveinunum. Og meðan teir fingu sær at eta, segði hann: „Sanniliga sigi eg tykkum: ein tykkara fer at svíkja meg.“ Og teir vórðu ógvuliga harmfullir og fóru at siga við hann hvør fyri seg: „Harri, tað man tá ikki vera eg?“ Men hann svaraði og segði: „Tann, ið dyppaði hondina í fatið við mær, hann fer at svíkja meg. Satt er tað, at menniskjusonurin fer burtur, soleiðis sum skrivað stendur um hann; men vei tí manni, sum menniskjusonurin verður svikin av! Betri hevði verið tí manni, at hann aldri var føddur.“ Men Judas, ið sveik hann, tók til orða og segði: „Tað man tá ikki vera eg, rabbi?“ Hann sigur við hann: „Nú segði tú tað sjálvur.“ Men meðan teir fingu sær at eta, tók Jesus

breyð, og hann vælsignaði og breyt tað og gav lærusveinunum tað og segði: „Takið, etið; hetta er likam mítt.“ Og hann tók ein kalik og takkaði, gav teimum og segði: „Drekkið allir úr honum; tí at hetta er blóð mítt, blóð sáttmálans, sum verður úthelt fyri mongum til fyrigevingar syndanna. Men eg sigi tykkum, at frá hesi stund skal eg ikki meira drekka av hesi frukt víntræsins, til tann dag, tá ið eg drekki hana nýggja saman við tykkum í ríki faðirs míns.“ Og tá ið teir høvdu sungið lovsongin, fóru teir út til Oljufjallið. Matt 26,17-30

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tá ið tímin kom, settist Jesus til borðs og ápostlarnir við honum. Og hann segði við teir: „Mær hevur hjartaliga longst eftir at eta hetta páskalambið við tykkum, áðrenn eg líði; tí at eg sigi tykkum, at eg skal onga tíð meira eta tað, fyrr enn tað verður fullbúgvið í Guðs ríki.“ Og hann tók ein kalik, takkaði og segði: „Takið henda og skiftið hann ímillum tykkara; tí at eg sigi tykkum, eg skal frá hesi stund ikki drekka av fruktum víntræsins, fyrr enn Guðs ríki kemur.“ Og hann tók breyð, takkaði, breyt tað og gav teimum tað og segði: „Hetta er likam mítt, sum fyri tykkum verður givið. Gerið hetta til áminning mína!“ Somuleiðis tók hann eisini kalikin aftan á kvøldmáltíðina og segði: „Hesin kalikur er hin nýggi sáttmálin í mínum blóði, sum verður helt út fyri tykkum. Luk 22,14-20

LANGA FRÍGGJADAG

Litur: Svartur.

Langa fríggjadag verða altarljósini ikki tendrað, men er altargangur, verða tey tendrað beint undan kvøldmáltíðartænastuni (Harrans máltíð). Ein (Gamla ella Nýggja testamenti) ella tveir bíbliulestrar (Gamla og Nýggja testamenti) kunnu verða lisnir undan lestrinum úr samansettu Pínslusøguni ella úr einum av evangeliunum. Tað stóra Litaniið kann verða biðið í staðin fyri kirkjubønina, ella tað lítla Litaniið kann verða biðið eftir inngangssálmin. Presturin kann frítt velja prædikutekst.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Vit takka tær, Guð faðir, tí at tú hevur givið okkum einborna son tín, Jesus Krist, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Vit takka tær, Jesus Kristus, tí at tú hevur borið á heilaga likami tínum allar syndir okkara og við blóði tínum strikað út allar misgerðir okkara. Vit takka tær, tú góði heilagi andi, tí at tú hevur givið okkum í hjørtu okkara ta trúgv, at vit einki annað vita okkum til sælu uttan hin krossfesta Jesus Krist. Gev okkum, Guð, náði tína, so at vit trúgva av hjarta, at allar syndir okkara eru okkum fyri Jesu Krists líðingar og deyða skuld fyrigivnar, og lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit dag undan degi við Jesu deyða kraft fara fram í kristiligum levnaði og aldri sleppa Jesusi úr hjørtum okkara, fyrr enn vit síggja hann klárliga í hinum æviga lívi, har hann við tær og hinum heilaga anda livir og ræður um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur fríað okkum út úr valdi myrkursins og sett okkum yvir í ríki einborna sonar tíns. Vit biðja teg, at tú fyri líðingar og deyða hans skuld vilt koma okkum til hjálpar við tínum heilaga anda og styrkja okkum við orði tínum, so at hin óndi fíggindin ikki skal fáa vald á okkum, men at vit altíð mega verða verandi í náði tíni og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum læt frelsara okkara, son tín, Jesus Krist, gerast menniskja og doyggja á krossinum, mannaættini til frelsu og fyrimyndar í eyðmýkt. Vit biðja teg, gev okkum náði til at læra av tolmóði sonar tíns, so at vit fylgja honum eftir í eyðmýkt og lýdni líka til deyða og at enda fáa lut í uppreisn hansara frá deyðum, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, líða krossdeyðan fyri syndir okkara. Vit biðja teg, lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit trygt kunnu líta á fullgjørda verk hansara og fyrigeving syndanna í honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Eftir hesar tilburðir royndi Guð Ábraham; og hann rópaði á hann: „Ábraham!“ Hann svaraði: „Ja, eg eri her!“ Og hann segði: „Tak tú einkarson tín, Ísak, sum tú elskar, og far til Mórialands og ofra hann har sum brennioffur uppi á einum av fjøllunum, sum eg skal vísa tær á!“ Snimma morgunin eftir legði Ábraham á asna sín, tók tveir av sveinum sínum við sær og Ísak, son sín, kleyv viðin til brennioffurið og helt avstað hagar, ið Harrin hevði sagt honum. Triðja dagin, tá ið Ábraham leit seg um, sá hann staðin langt burturi. Tá segði Ábraham við sveinar sínar: „Bíðið tit her hjá asnanum, meðan eg og smádrongurin fara yvir hagar at tilbiðja; vit koma so aftur til tykkara.“ Ábraham tók tá viðin til brennioffurið og legði hann upp á herðar Ísaks, sonar síns; sjálvur tók hann eldin og offurknívin; og so gingu teir báðir saman. Tá talaði Ísakur á Ábraham, faðir sín, og segði: „Faðir mín!“ Hann svaraði: „Ja, sonur mín.“ Hann segði: „Her er eldurin og viðurin, men hvar er lambið til brennioffurið?“ Ábraham svaraði: „Guð man sjálvur finna sær lambið til brennioffurið, sonur mín.“ Og so gingu teir aftur báðir saman. Og tá ið teir komu á staðin, sum Guð hevði sagt honum, reisti Ábraham har altar og legði viðin til rættis; síðan bant hann Ísak, son sín, og legði hann upp á altarið oman á viðin. Og Ábraham rætti út hond sína og tók knívin til at slátra son sín. Men tá rópaði eingil Harrans á hann av himni og segði: „Ábraham, Ábraham!“ Hann svaraði: „Her eri eg.“ Og hann segði: „Legg tú ikki hond á sveinin og ger honum einki mein; tí at nú veit eg, at tú óttast Guð, við tað at tú ikki sýtti mær einkarson tín.“ Tá ið Ábraham hugdi upp

og leit seg um, bar hann eyga við veðr, sum við hornunum var komin fastur í ein runn. Ábraham fór tá og tók veðrin og ofraði hann sum brennioffur í stað sonar síns. Og Ábraham nevndi henda stað: „Guð sær." Tí sigur orðafellið enn: „Á fjallinum, har Guð birtist." Tá kallaði eingil Harrans aftur á Ábraham av himni og segði: „Eg svørji um sjálvan meg, sigur Harrin: av tí at tú gjørdi hetta og ikki sýtti mær son tín, einkarson tín, skal eg av sonnum vælsigna teg og gera eftirkomarar tínar fjølmentar sum stjørnurnar á himni, sum sandin við sævarstrond; og eftirkomarar tínir skulu taka borgarlið fígginda sína til ognar. Og av avkomi tínum skulu allar ættir á foldini fáa signing, fyri at tú lýddi rødd míni." 1 Mós 22,1-18

Ella:
Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Hvør trúði tí, sum okkum var boðað, og hvørjum varð armur Harrans opinberaður? Hann rann upp eins og kvistur fyri ásjón hans og sum rótarskot úr turrari jørð. Hann var hvørki fagur ella glæsiligur, so at tað kundi vera hugaligt hjá okkum á at líta, og ikki ásýniligur, so at vit kundu hava hugnað í honum. Vanvirdur var hann, skýggjaður av fólki, harmamaður, royndur í sjúkdómum, líkur manni, sum tey krógva andlit sítt fyri, vanvirdur, og vit mettu hann fyri einki; men tó – várir sjúkdómar vóru tað, sum hann bar, og várar kvalir, sum hann legði á seg; vit hildu hann revsaðan, slignan av Guði og gjørdan neyðarsligan. Men hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót. Allir vit viltust sum seyðir, hildu hvør sína leið,

men Harrin læt koma niður á hann ta skuld, sum lá á okkum øllum. Hann varð nívdur, men stillisliga bar hann tað, og hann læt ikki upp munn sín eins og lamb, ið verður leitt at verða dripið, eins og seyður, ið er tigandi, tá ið teir royta hann; hann læt ikki upp munn sín. Frá trongd og dómi varð hann burturtikin; men hvør av samtíðarmonnum hans hugsaði um tað, tá ið hann varð ryktur burtur úr landi teirra livandi, at hann fyri synda sakir fólks míns varð raktur? Millum gudleysa teir góvu honum grøv, leggstað hjá ríkum, tó at hann ongan órætt hevði gjørt, og svik vóru ikki í munni hans. Men Harranum hugaði at ráma hann við sjúku; tá ið sál hans hevði framborið sektaroffur, skuldi hann fáa avkom at síggja, liva langa ævi, og Harrans vilji við hans hond verða framdur. Fyri sálarmøði sína skal hann fáa tað at síggja og verða mettaður. Tá ið hann verður kendur, skal hann, hin rættvísi tænari mín, gera mangar rættvísar, hann sum bar misgerðir teirra. Tí gevi eg honum mangar í lut, og hann skal fáa máttugar sum herfong, fyri tað at hann tømdi sál sína til deyða og varð taldur millum misgerðarmanna – hann, sum bar syndina hjá mongum og bað fyri misgerðarmonnum. Jes 53

Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:
Kristus keypti okkum undan banning lógarinnar, við tað at hann varð banning fyri okkum, – tí at skrivað er: „Bannaður er hvør tann, sum á træi hongur“ – fyri at signing Ábrahams kundi koma til heidningarnar í Kristi Jesusi, so at vit við trúnni kundu fáa fyrijáttan andans. Gal 3,13-14

Ella:
Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:
Tí at í Jesusi líkaði tað Guði, at øll fyllingin skuldi búgva, og við honum at gera allar lutir sáttar við seg, hvørt tað so eru teir, sum eru á jørðini, ella teir, sum eru í himnunum, við tað at hann íbirti frið við blóðinum á krossi hansara. Eisini tykkum, sum áður vóru vorðnir fremmandir og fíggindar í huga tykkara, soleiðis sum tit livdu í illum gerningum, hevur hann tó nú gjørt sáttar í holdslikami hansara við deyðanum, til tess at lata tykkum koma fram fyri ásjón sína heilagar og lýtaleysar og ólastandi, so satt sum tit verða verandi í trúnni. Kol 1,19-23a

Ella:
Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:
Við tað at vit tá hava ein stóran høvuðsprest, sum er farin ígjøgnum himnarnar, Jesus, son Guðs, tá latum okkum halda fast við játtingina! Tí at vit hava ikki ein høvuðsprest, sum ikki kann hava várkunn við veikleikum okkara, men ein, sum er freistaður á allan hátt líka við okkum, tó uttan synd. Latið okkum tí við frímóði ganga fram at hásæti náðinnar, fyri at vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálpar í tímiligari tíð! Hebr 4,14-16

Ella:
Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:
Og Jesus hevur á døgum holds síns við hørðum rópi og tárum borið fram bønir og eyðmjúkar ákallanir til hansara, sum var mentur at frelsa hann frá deyða, og varð bønhoyrdur fyri angist sína, og soleiðis lærdi hann, tó at hann var sonur, lýdni av tí, sum hann leið; og tá ið hann

varð vorðin fullkomin, gjørdist hann hjá øllum teimum, sum lýða honum, upphav til æviga frelsu. Hebr 5,7-9

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og tá ið teir høvdu spottað hann, lótu teir hann úr aftur skikkjuni og lótu hann í hansara egnu klæði; og teir fóru avstað við honum at krossfesta hann. Men á veginum út hittu teir ein mann frá Kýrene, sum æt Símun. Hann noyddu teir til at bera kross hansara. Og tá ið teir komu út til ein stað, ið nevnist Golgata, tað merkir: ennistaður, góvu teir honum vín blandað við galli at drekka; og tá ið hann hevði smakkað tað, vildi hann ikki drekka. Men tá ið teir høvdu krossfest hann, býttu teir klæði hansara sundur ímillum sín og lutaðu um tey, [fyri at tað skuldi ganga út, ið talað er av profetinum: „Klæði míni býttu teir sín ámillum, og um kyrtil mín kastaðu teir lut.“] Og teir sótu har og hildu vakt yvir honum. Og uppi yvir høvdi hansara settu teir sakarmál hansara, soleiðis skrivað: Hetta er Jesus, kongur Jødanna. Síðan vórðu krossfestir saman við honum tveir ránsmenn, annar høgrumegin og annar vinstrumegin. Men tey, ið gingu tvørturvið, spottaðu hann og ristu við høvdinum og søgdu: „Tú, sum brýtur templið niður og byggir tað upp aftur eftir trimum døgum, bjarga nú tær sjálvum! Um tú ert sonur Guðs, tá stíg niður av krossinum!“ Somuleiðis háðaðu høvuðsprestarnir hann í felagi við hinum skriftlærdu og hinum elstu og søgdu: „Øðrum hevur hann hjálpt, men sær sjálvum er hann ikki mentur at hjálpa! Hann er kongur Ísraels! Lat hann nú stíga niður av krossinum, so skulu vit trúgva á hann! Hann leit á Guð. Hann bjargi honum nú, um hann leggur nakað í hann! Tí at hann hevur sagt: „Eg eri

sonur Guðs."" Á sama hátt spottaðu eisini ránsmenninir hann, sum vóru krossfestir saman við honum. Men frá sætta tíma kom myrkur um alt landið líka til níggjunda tíma. Men um níggjunda tíma rópaði Jesus við harðari rødd og segði: „Eli, eli, lama sabaktani?" Tað er: „Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær?" Men nakrir av teimum, ið har stóðu, søgdu, tá ið teir hoyrdu hetta: „Hann rópar eftir Elia." Og við tað sama leyp ein teirra til og tók ein svamp og fylti hann við ediki og setti hann á ein rørstav og gav honum at drekka. Men hinir søgdu: „Bíða, lat okkum síggja, um Elia kemur at bjarga honum." Men Jesus rópaði aftur við harðari rødd og gav upp andan. (Og sí, forhangið í templinum skrædnaði í tvey úr erva og líka niður ígjøgnum, og jørðin skalv og fjøllini klovnaðu, og gravirnar opnaðust, og mong likam av teimum heilagu, sum farin vóru til hvílu, risu upp; og tey gingu út úr grøvunum aftan á uppreisn hansara og fóru inn í hin heilaga staðin og sýndu seg fyri mongum. Men tá ið høvuðsmaðurin og teir, sum saman við honum hildu vakt yvir Jesusi, sóu landskjálvtan og tað, ið til barst, vórðu teir ógvuliga ræddir og søgdu: „Sanniliga var hesin sonur Guðs!" Men har vóru mangar kvinnur, sum stóðu burtur frá og hugdu at, tær, sum høvdu fylgt Jesusi úr Galileu og høvdu tænt honum. Teirra millum var Maria Magdalena og Maria, móðir teirra Jákups og Jósefs, og móðirin at Sebedeusarsonunum.) Matt 27,31-50 ella 56

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur:
Og tá ið teir høvdu spottað hann, lótu teir hann úr

skarlaksskikkjuni og lótu hann í hansara egnu klæði. Og teir fara út við honum at krossfesta hann. Og teir noyða ein mann, sum kom gangandi har framvið, Símun frá Kýrene, sum kom heim av markini, faðir teirra Aleksanders og Rufusar, at bera kross hansara. Og teir fara við honum út á tann staðin, ið eitur Golgata, tað merkir: ennistaður. Og teir góvu honum vín at drekka við myrru í; men hann tók ikki við tí. Og teir krossfestu hann, og teir býttu klæði hansara millum sín og teir kastaðu lut um tey, hvat hvør teirra skuldi taka. Men tað var um landsuðurstíð, tá ið teir krossfestu hann. Og yvirskriftin um sakarmál hansara stóð skrivað omanfyri: Kongur Jødanna. Og teir krossfesta tveir ránsmenn saman við honum, annan høgrumegin og annan vinstrumegin við hann. [Og skriftin gekk út, ið sigur: „Og hann varð roknaður javnt við lógbrotsmenn.“] Og tey, ið gingu framvið, spottaðu hann, og tey ristu við høvdinum og søgdu: „Tví vorði tær! Tú, sum brýtur templið niður og byggir tað upp eftir trimum døgum! Stíg niður av krossinum og bjarga nú tær sjálvum!“ Somuleiðis hildu eisini høvuðsprestarnir hann fyri spott sín ámillum í felagi við hinum skriftlærdu og søgdu: „Øðrum hevur hann bjargað; men sær sjálvum er hann ikki mentur at bjarga! Kristus, Ísraels kongur – hann stígi nú niður av krossinum, so at vit kunnu síggja tað og trúgva!“ Eisini teir, ið vóru krossfestir saman við honum, hildu hann fyri háð. Og tá ið middagur var komin, legðist myrkur um alt landið líka til nóns. Og um nón rópaði Jesus við harðari rødd: „Eloï, Eloï, lama sabaktani?“ tað er: „Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær?“ Og nakrir av teimum, ið hjá stóðu, søgdu, tá ið teir hoyrdu tað: „Sí, hann rópar eftir Elia.“ Men ein leyp til og fylti ein svamp

við ediki og setti hann á ein rørstav og gav honum at drekka og segði: „Bíðið! Latið okkum síggja, um Elia kemur at taka hann niður.“ Men Jesus rópaði so hart eitt róp og gav upp andan. (Og forhangið í templinum skrædnaði í tvey, úr erva og líka niður ígjøgnum. Men tá ið herhøvdingin, sum stóð har hjá, beint yvir av honum, sá, at hann gav upp andan á slíkan hátt, segði hann: „Sanniliga var hesin maður sonur Guðs!“ Men har vóru eisini nakrar kvinnur, sum stóðu langt burtur frá og hugdu at; millum teirra var bæði Maria Magdalena og Maria, móðir teirra Jákups lítla og Jóses, og Salóme, tær, sum høvdu fylgt honum og tænt honum, meðan hann var í Galileu; og mangar aðrar kvinnur, sum høvdu verið í ferðini við honum niðan til Jerúsalem.) Mark 15,20-37 ella 41

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tá ið teir førdu hann út, tóku teir fatur á einum manni, Símuni frá Kýrene, sum kom uttan av markini, og teir løgdu krossin upp á hann, at hann skuldi bera hann aftan á Jesus. Men honum fylgdi ein stórur skari av fólkinum, og av kvinnum, sum bæði harmaðu hann og grótu um hann. Men Jesus vendi sær á ímóti teimum og segði: „Jerúsalem-døtur, grátið ikki um meg, men grátið um tykkum sjálvar og um børn tykkara! Tí at, sí, teir dagar skulu koma, tá ið sagt man verða: „Sælar eru ófruktirnar, og sæl eru tey móðurlív, sum ikki hava føtt, og tey brót, sum ikki hava givið at súgva! Tá skulu tey fara at siga við fjøllini: „Fallið yvir okkum!“ og við heyggjarnar: „Fjalið okkum!“ Tí at gera tey hetta við hitt

grøna træið, hvussu fer tá at gangast hinum turra?“ Men tveir aðrir, tveir illgerðarmenn, vórðu førdir út við at verða tiknir av døgum saman við honum. Og tá ið teir komu á tann staðin, sum kallast Skallin, krossfestu teir hann har og illgerðarmenninar, annan høgrumegin og annan vinstrumegin. Men Jesus segði: „Faðir, fyrigev teimum; tí at teir vita ikki, hvat teir gera!“ Men teir býttu klæði hansara millum sín og kastaðu lut um tey. Og fólkið stóð og hugdi at. Men høvuðsprestarnir hildu hann fyri spott og søgdu: „Øðrum hevur hann hjálpt, lat hann nú hjálpa sær sjálvum, um hann er Guðs Kristus, hin útvaldi!“ Somuleiðis spottaðu eisini hermenninir hann; teir komu og rættu honum edik og søgdu: „Ert tú kongur Jødanna, so bjarga tær sjálvum!“ Men ein yvirskrift var eisini uppi yvir honum: Hetta er kongur Jødanna. Men annar av illgerðarmonnunum, sum hongdir vóru, spottaði hann og segði: „Ert tú ikki Kristus? Bjarga tær sjálvum og okkum!“ Men annar svaraði og hevði at honum og segði: „Óttast tú heldur ikki Guð, tá ið tú ert undir sama dómi? Og vit eru tað við rættum; tí at vit fáa tað afturlønt, sum vit hava gjørt; men hesin hevur einki ósámiligt gjørt.“ Og hann segði: „Jesus, minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!“ Og hann segði við hann: „Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við mær í páradís!“ Og tað var nú okkurt um hin sætta tíman, og myrkur kom um alt landið líka til hin níggjunda tíman, við tað at sólin myrknaði. Og forhangið í templinum skrædnaði í tvey eftir miðjuni. Og Jesus rópaði við harðari rødd og segði: „Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín!“ Og í tí hann hetta segði, andaðist hann. (Men tá ið herhøvdingin sá tað, sum hendi, gav hann Guði æruna og segði: „Av

sonnum var hesin maður rættvísur!“ Og allar tær mannamúgvur, sum saman vóru komnar at síggja hesa sjón, slógu seg fyri bringuna, tá ið tær sóu, hvat ið hendi, og fóru avstað aftur. Men allir kunningar hansara, og tær kvinnur, sum høvdu fylgt honum úr Galileu, stóðu langt burtur frá og hugdu at hesum.) Luk 23,26-46 ella 49

Ella:
Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Teir tóku nú Jesus; og hann bar sjálvur kross sín og gekk út á tann staðin, sum kallast Ennistaðurin, og sum á hebráiskum eitur Golgata. Har krossfestu teir hann og saman við honum tveir aðrar, ein hvørjumegin, men Jesus í miðjuni. Men Pilatus skrivaði eisini eina yvirskrift og setti hana á krossin; har stóð skrivað: „Jesus úr Nasaret, kongur Jødanna.“ Hesa yvirskriftina lósu nú mangir av Jødunum, tí at staðurin, har sum Jesus varð krossfestur, var nær við bygdina, og hon var skrivað á hebráiskum og rómverskum og grikskum máli. Tá søgdu høvuðsprestar Jødanna við Pilatus: „Skriva ikki: Kongur Jødanna; men: Hann segði: Eg eri kongur Jødanna.“ Pilatus svaraði: „Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað.“ Tá ið nú hermenninir høvdu krossfest Jesus, tóku teir klæði hansara og býttu tey sundur í fýra lutir, hvørjum hermanni ein lut, somuleiðis kyrtilin; men kyrtilin var óseymaður, vovin í einum oman ígjøgnum. Teir søgdu tí hvør við annan: „Latið okkum ikki skera hann sundur, men latum okkum heldur kasta lut um hann, hvør ið skal fáa hann;“ tí at skriftin skuldi ganga út: „Teir býttu klæði míni millum sín, og kastaðu lut um klædning mín.“ Hetta gjørdu nú hermenninir. Men við Jesu kross

stóð móðir hansara og móðursystir hansara, Maria, kona Kleopasar, og Maria Magdalena. Tá ið nú Jesus sá móður sína og lærusveinin, sum hann elskaði, standa har, sigur hann við móður sína: „Kvinna, har er sonur tín!“ Síðan sigur hann við lærusveinin: „Sí, har er móðir tín!“ Og frá teirri stund tók lærusveinurin hana heim til sín. Eftir hetta, tá ið Jesus visti, at alt nú longu var fullgjørt, til tess at skriftin skuldi ganga út, sigur hann: „Eg eri tystur.“ Har stóð eitt ker fult av ediki. Teir settu tá ein svamp fullan av ediki á ein ýsopslegg og bóru honum at munni. Tá ið Jesus nú hevði fingið edikin, segði hann: „Tað er fullgjørt!“ Og hann boygdi høvdið og gav upp andan. (Við tað at tað var atfangadagur og fyri tann skuld at likamini ikki skuldu verða hangandi á krossinum um hvíludagin, tí at tann hvíludagurin var mikil, bóðu nú Jødarnir Pilatus um, at beinini í teimum máttu verða brotin sundur, og at tey máttu verða tikin niður. Hermenninir fóru tí og brutu beinini bæði í hinum fyrra og hinum øðrum, sum hevði verið krossfestur saman við honum. Men tá ið teir komu til Jesus og sóu, at hann longu var deyður, brutu teir ikki bein hansara. Men ein av hermonnunum stakk eitt spjót inn i síðuna á honum, og har kom við tað sama blóð og vatn útúr. Og tann, sum hevur sæð tað, hevur vitnað um tað, og vitnisburður hansara er sannur, og hann veit, at hann sigur tað, sum satt er, til tess at eisini tit mega trúgva. Tí at hetta hendi, til tess at skriftin skuldi ganga út: „Bein skal ikki verða brotið í tí.“ Og upp aftur sigur eitt annað skriftorð: „Teir skulu líta til hansara, sum teir stungu.“) Jóh 19,17-30 ella 37

Ella Pínslusøgan stk. 17-21 ella stk. 17-23

Øll Pínslusøgan kann verða lisin annaðhvørt úr samansettu Pínslusøguni ella úr einum av evangeliunum.

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum í faðirligu náði tíni ikki spardi einborna son tín, Jesus Krist, men læt hann doyggja á krossinum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit mega finna troyst í hesi náði tíni, varða okkum fyri syndini, tolin bera tær líðingar, sum verða lagdar á okkum, og um allar ævir verða sæl hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Vit takka tær, Guð faðir, tí at tú hevur givið okkum einborna son tín, Jesus Krist, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Vit takka tær, Jesus Kristus, tí at tú hevur borið á heilaga likami tínum allar syndir okkara og við blóði tínum strikað út allar misgerðir okkara. Vit takka tær, tú góði heilagi andi, tí at tú hevur givið okkum í hjørtu okkara ta trúgv, at vit einki annað vita okkum til sælu uttan hin krossfesta Jesus Krist. Gev okkum, Guð, náði tína, so at vit trúgva av hjarta, at allar syndir okkara eru okkum fyri Jesu Krists líðingar og deyða skuld fyrigivnar, og lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit dag undan degi við Jesu deyða kraft fara fram í kristiligum levnaði og

aldri sleppa Jesusi úr hjørtum okkara, fyrr enn vit síggja hann klárliga í hinum æviga lívi, har hann við tær og hinum heilaga anda livir og ræður um aldur og ævir allar! Amen.

Páskir

PÁSKADAG

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú í miklu náði og miskunn tíni læt son tín doyggja fyri syndir okkara og reisti hann upp frá deyðum, okkum til æviga rættvísi. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt leiða og stýra okkum eftir vilja tínum, varðveita okkum í sannari og livandi trúgv og eftir hetta lívið vekja okkum upp til hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við deyða sonar tíns gjørdi synd og deyða til einkis og við uppreisn hansara læt upp fyri okkum himmiríkis dyr. Vit biðja teg, gev okkum náði til at trúgva hesum av hjarta, so at vit mega eiga hina sonnu páskagleðina og altíð lova og takka tær fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Eg árendur varð og var komin til fals, men Harrin var mær til hjálpar. Máttur mín og lovsongur Harrin var, og hann

varð mær til frelsu. Gleðiróp hoyrast og sigursljóð í tjaldbúðum rættvísra manna: „Harrans høgra hond kraftarverk innir, Harrans høgra hond hevjað er, Harrans høgra hond kraftarverk innir!“ Ikki eg doyggja skal, men liva og siga frá gerningum Harrans. Harðliga hevur Harrin meg revsað, men ikki hann til deyðans meg gav. Latið upp fyri mær rættvísiportur, at eg kann fara inn og Harranum lova! Hetta er Harrans portur, rættvísir her ganga inn! Eg tær lovi, tí at tú meg bønhoyrdi, og tú mær til frelsu ert vorðin! Steinurin, ið smiðirnir vrakaðu, er vorðin hornsteinur. Frá Harranum hetta er komið, tað er undurfult í várum eygum. Hetta er dagurin, ið Harrin hevur gjørt, lat okkum fegnast og gleðast á honum! Sl 118,13-24

** Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:*
Reinskið burtur hitt gamla súrdeiggið, fyri at tit mega vera nýtt deiggj, eins og tit eru ósúrgaðir; tí at eisini páskalamb okkara er dripið, Kristus. Latið okkum tí halda hátíð, ikki við gomlum súrdeiggi ella við ilsku og óargaskapar súrdeiggi, men við reinleiks og sannleiks ósúrgaðu breyðum! 1 Kor 5,7-8

Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur:
Og tá ið hvíludagurin var farin, keyptu Maria Magdalena og Maria, móðir Jákups, og Salóme vælangandi smyrsl fyri at fara at salva hann. Og reiðuliga árla á morgni hin fyrsta dagin í vikuni koma tær til grøvina, um sólarris. Og tær søgdu hvør við aðra: „Hvør skal velta okkum steinin burtur frá gravarmunnanum?“ Og tá ið tær hugdu upp, vórðu tær varar við, at steinurin var veltur

frá, tí at hann var ógvuliga stórur. Og tær fóru inn í grøvina og sóu ein ungan mann sitandi høgrumegin í síðum, hvítum klæðum, og tær ræddust. Men hann sigur við tær: „Ræðist ikki! Tit leita eftir Jesusi úr Nasaret, hinum krossfesta; hann er risin upp, hann er ikki her. Hyggið, har er staðurin, har sum teir løgdu hann. Men farið avstað, sigið við lærusveinar hansara og við Pætur: Hann fer undan tykkum til Galileu; har skulu tit síggja hann, soleiðis sum hann hevur sagt tykkum!“ Og tær fóru út og flýddu burtur frá grøvini, tí at ótti og ræðsla var komin á tær; og ongum søgdu tær frá nøkrum, tí at tær vóru óttafullar. Mark 16,1-8

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú í miklu náði og miskunn tíni hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit mega kenna kraftina í uppreisn hansara og felagsskapin við hann í líðingum hansara, fáa náði til at liva í nýggjum levnaði og soleiðis vinna fram til uppreisn teirra sælu og hina ævigu gleðina hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Seinnapart ella um kvøldið til aftansong

Sí frammanfyri kollektir til páskadag.

Onkrir av tekstunum, sum ikki eru lisnir um dagin. Prædikutekstur t.d. Luk 24,1-12

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men fyrsta dagin í vikuni, tíðliga á morgni, komu tær til grøvina og høvdu við tær angandi urtirnar, sum tær høvdu gjørt til. Og tær funnu steinin veltan frá grøvini. Og tá ið tær fóru inn, funnu tær ikki Harrans Jesu likam. Og tað hendi, meðan tær vóru í døpurhuga um hetta, tá stóðu alt í einum tveir menn hjá teimum í skínandi klæðum. Og meðan tær vórðu ógvuliga skakkar og boygdu andlit síni til jarðar, søgdu teir við tær: „Hví leita tit eftir hinum livandi millum hinna deyðu? Hann er ikki her, men hann er risin upp. Minnist til, hvussu hann talaði við tykkum, meðan hann enn var í Galileu, og segði, at menniskjusonurin átti at verða givin upp í syndiga manna hendur og at verða krossfestur og at rísa upp á triðja degi.“ Og orð hansara komu teimum í huga. Og tær vendu aftur frá grøvini og kunngjørdu alt hetta fyri teimum tólv og fyri øllum hinum. Men tað vóru tær Maria Magdalena og Jóhanna og Maria, móðir Jákups, og so hinar, sum vóru saman við teimum; tær søgdu ápostlunum frá hesum. Og teir hildu hesi tíðindi vera nakað møsn, sum ikki var farandi eftir, og teir trúðu ikki kvinnunum. Men Pætur fór tó á føtur og rann út til grøvina, og tá ið hann kagaði inn, sá hann línklæðini liggja har og einki annað; og hann fór heim aftur til sín sjálvs og undraðist á tað, sum var hent. Luk 24,1-12

2. PÁSKADAG

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum opinberaði son tín fyri teimum báðum lærusveinunum, ið fóru til Emmaus. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum eisini vilt upplýsa hjørtu okkara, so at vit áhaldandi í trúnni mega halda fast við orð títt, brúka tað hugaliga, fegin tala um tað og í tí finna hjálp og styrki, til vit eftir hetta lívið verða vakt upp til hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum opinberaði son tín, Jesus Krist, fyri teimum báðum lærusveinunum, ið fóru til Emmaus. Vit biðja teg, lýs eisini fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit í orði tínum mega finna hjálp, troyst og leiðbeining, og í hini heilagu kvøldmátíðini síggja son tín, hin upprisna harra og frelsara okkara, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við hini heilagu páskahátíð veitti heiminum heilsubót. Vit biðja teg, ver alsamt hjá fólki tínum við hesi himmalsku gávu tíni, og lat hana bera ávøkst í hjørtum okkara, so at vit mega fáa lut í hini fullkomnu frelsuni og at enda náa fram til hitt æviga lívið

fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Eg vil boða títt navn fyri brøðrum mínum; á mannafundi vil eg tær lova. Lovið honum, tit, ið óttast Harran! Ära hann øll Jákups ætt, hav fyri honum ótta øll Ísraels ætt! Tí ikki hevur hann vanvirt og ikki varnast fyri armingans neyð, og ikki fjalt andlit sítt fyri honum; men hoyrt, tá ið hann rópaði á hann. Frá tær mín lovsangur kemur á miklum mannafundi; míni heitorð eg haldi fyri eygum teirra, ið hann óttast. Eymir skulu eta og verða mettir. Teir, ið søkja Harran, skulu honum lova, teirra hjørtu eiga lív allar ævir. Allir heimsins endar skulu minnast hará, allar heidninga ættir falla á knæ fyri ásjón tíni. Tí ríkið er Harrans, hann er fólkanna drottin. Bert fyri honum skulu níga allir mætir á fold, falla á knæ fyri hans ásjón øll, ið fóru undir mold, og tann, ið ikki kann halda síni sál í lívi. Eftirmenn skulu honum tæna, tey skulu tala um Harran til komandi ættir. Tey skulu koma og boða um rættlæti hans fyri tí fólki, ið føðist; tí hann hevur útint sítt verk. Sl 22,23-32

** Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:*
Men Pætur læt upp munn sín og mælti: „Av sonnum skilji eg nú, at Guð ger ikki mannamun; men í einum og hvørjum fólki er tann, sum óttast hann og innir rættvísi, honum væl toknaður. Hitt orðið, hann sendi Ísraels monnum, tá ið hann boðaði gleðiboðskapin um frið við

Jesusi Kristi, – hann er harri yvir øllum, – hitt orðið vita tit um, sum farið er út um alla Júdeu, men tók seg upp í Galileu aftan á tann dópin, sum Jóhannes prædikaði, søguna um Jesus úr Nasaret, hvussu Guð salvaði hann við heilagum anda og kraft, hann sum gekk umkring og gjørdi væl og grøddi øll, sum vóru illa stødd av djevlinum; tí at Guð var við honum. Og vit eru vitni um alt tað, sum hann gjørdi bæði í Jødalandi og í Jerúsalem, hann sum teir eisini tóku av lívi, við tað at teir hongdu hann á eitt træ. Hann reisti Guð upp triðja dagin og læt hann opinberast, ikki fyri øllum fólkinum, men fyri vitnunum, sum áður vóru vald út av Guði, okkum, sum ótu og drukku við honum, eftir tað at hann var risin upp frá deyðum. Áps 10,34-41

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og sí, tveir av lærusveinunum vóru sama dagin á ferð til eina bygd, sum nevnist Emmaus og var seksti stádiur frá Jerúsalem; og á leiðini talaðu teir sín ámillum um alt hetta, ið tilborist hevði. Og tað hendi, meðan teir samtalaðu og skiftu orð um hetta, kom Jesus sjálvur til teirra og fór í ferðini við teimum. Men eygu teirra vórðu hildin aftur, so at teir kendu hann ikki. Og hann segði við teir: „Hvørjar eru tær samtalur, sum tit halda tykkara millum, meðan tit ganga?“ og teir steðgaðu daprir í ásjón. Men annar teirra, sum æt Kleofas, svaraði og segði við hann: „Ert tú einsamallur ókunnigur í Jerúsalem og veitst ikki tað, sum har er hent í hesum døgum?“ Og hann segði við teir: „Hvat tá?“ Men teir søgdu við hann: „Viðvíkjandi Jesusi úr Nasaret, sum var ein profetur, mektigur í verki og í orði fyri Guði og fólkinum øllum, og hvussu høvuðs-

prestarnir og ráðsharrar okkara góvu hann inn undir deyðadóm og krossfestu hann. Men vit vónaðu, at hann var tann, ið skuldi loysa út Ísrael. Men ið hvussu er, so er tað tó nú triði dagurin, síðan hetta barst til. Og so hava eisini nakrar av kvinnum okkara gjørt okkum í ørviti, av tí at tær árla vóru komnar at grøvini; og tá ið tær ikki funnu likam hansara, komu tær og søgdu, at tær høvdu eisini sað eina sjón av einglum, sum søgdu hann liva. Og nakrir av feløgum okkara fóru út til grøvina, og funnu alt soleiðis vorðið, sum kvinnurnar høvdu sagt, men hann sóu teir ikki." Og hann segði við teir: „O, tykkara óvitigu menn og seinføru í hjarta til at trúgva øllum tí, sum profetarnir hava talað! Átti ikki Kristus at líða hetta og fara inn til dýrd sína?" Og hann byrjaði frá Mósesi og frá øllum profetunum og legði út fyri teimum í øllum skriftunum tað, sum skrivað var viðvíkjandi honum. Og teir nærkaðust bygdini, sum teir ætlaðu sær til; og hann lætst, sum hann ætlaði at fara longur. Men teir noyddu hann almikið og søgdu: „Verð hjá okkum, tí at tað tekur at kvølda og dagur aftnar!" Og hann fór inn at verða hjá teimum. Og tað bar so á, meðan hann sat at borði við teimum, tók hann breyðið og vælsignaði og breyt tað og gav teimum. Tá opnaðust eygu teirra, og teir kendu hann; men tá varð hann ósjónligur fyri teimum. Og teir søgdu hvør við annan: „Brann ikki hjartað í okkum, meðan hann talaði við okkum á veginum, tá ið hann læt upp skriftirnar fyri okkum?" Og teir fóru á føtur í teirri somu stund og vendu við aftur til Jerúsalem og funnu teir ellivu saman komnar og teir, sum við teimum vóru, sum søgdu: „Sanniliga er Harrin upprisin og er sæddur av Símuni." Og hesir søgdu frá tí, sum hent var á vegin-

um, og hvussu hann varð kendur av teimum, við tað at hann breyt breyðið. Luk 24,13-35

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú í miklu náði og miskunn tíni hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit mega kenna kraftina í uppreisn hansara og felagsskapin við hann í líðingum hansara, fáa náði til at liva í nýggjum levnaði og soleiðis vinna fram til uppreisn teirra sælu og hina ævigu gleðina hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

1. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú í miklu náði tíni við syni tínum, upprisna Harra og frelsara okkara, okkum til troystar og fyrigevingar syndanna hevur givið okkum orð títt og sakramenti tíni. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín, so at vit av hjarta mega trúgva orði tínum og við dópi og kvøldmáltíð verða styrkt í trúnni, til vit verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar!

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, vit biðja teg, gev okkum, sum hildið hava hina heilagu páskahátíð, uppreisnarhátíð Harrans, náði til at liva í ljósi hennara og tæna tær í sannari gleði, trúgv, vón og kærleika fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Leiðið fram hitt blinda fólkið, sum hevur eygu, hini deyvu, sum kortini hava oyru. Latið allar heidningarnar koma til fundar og tjóðirnar savnast saman. Hvør av teimum kann kunngera tílíkt ella sanna fyri okkum, at spádómar teirra eru útgingnir? Komi teir fram við vitnum sínum og lati mál sítt sannast, at menn mega siga, táið teir hoyra tað: „Tað er satt!“ Men tit eru vitni míni, sigur Harrin, tænari mín, sum eg havi útvalt, at tit skulu vita tað og trúgva á meg og skilja, at tað er eina eg; undan mær er eingin gud vorðin til, og eftir meg kemur eingin; eg, eina eg, eri Harrin, uttan meg er eingin frelsari til. Tað var eg, sum boðaði frá og hjálpti, eg, sum kunngjørdi tað, og eingin fremmandur tykkara millum, tit eru vitni míni, sigur Harrin. Eg eri Guð frá upphavi og verði tað allar tíðir. Jes 43,8-13a

* *Epistulin skrivar Jóhannes ápostul í fyrsta brævi sínum:*
Tí at alt, sum er føtt av Guði, vinnur sigur á heiminum; og hetta er tann sigur, sum hevur vunnið á heiminum, trúgv okkara. Hvør er tann, sum vinnur sigur á heiminum, uttan tann, sum trýr, at Jesus er Guðs sonur. Hann er

tann, sum er komin við vatni og blóði, Jesus Kristus; ikki við vatninum eina, men við vatninum og við blóðinum. Og andin er tann, sum vitnar, tí at andin er sannleikin. Tí at trý eru tey, sum vitna: Andin og vatnið og blóðið, og hesi trý eru sameind til eitt. Um vit taka ímót manna vitnisburði, tá er Guðs vitnisburður størri; tí at hetta er Guðs vitnisburður, at hann hevur vitnað um son sín. Tann, sum trýr á Guðs son, hevur vitnisburðin í sær sjálvum; tann, sum ikki trýr Guði, hevur gjørt hann til lygnara, tí at hann ikki hevur trúð á tann vitnisburð, sum Guð hevur vitnað um son sín. Og hetta er vitnisburðurin, at Guð hevur givið okkum ævigt lív, og hetta lívið er í syni hansara. Tann, sum hevur sonin, hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guðs son, hevur ikki lívið. 1 Jóh 5,4-12

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Pætur segði: „Tit Ísraelsmenn, hoyrið hesi orð: Jesus úr Nasaret, ein mann, sum av Guði var sannaður fyri tykkum við kraftargerningum og undurum og teknum, sum Guð læt hann gera tykkara millum, so sum tit sjálvir vita, hann, sum eftir Guðs fyriskipaða ráði og fyrivitan var vorðin givin upp, hava tit krossfest við vándra manna hondum og tikið av lívi; men hann reisti Guð upp, í tí hann lætti av deyðans ríðum, við tað at tað ikki var møguligt, at hann skuldi verða hildin av honum; tí at Dávid sigur viðvíkjandi honum: „Altíð hevði eg Harran fyri eygum mínum; tí at hann er við høgru hond mína, til tess at eg ikki skal vikast. Harfyri gleddist hjarta mítt, og tunga mín fegnaðist; ja, enntá meira skal eisini likam mítt hvíla í vón; tí at ikki vilt tú lata sál mína verða eftir

í helheimi, og ikki heldur vilt tú lata tín heilaga síggja rot. Tú hevur kunnar gjørt mær lívsins vegir; tú vilt meg fylla við gleði fyri ásjón tíni.“ Áps 2,22-28

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Men tá ið komið var at kvøldi henda sama fyrsta dag í vikuni og meðan dyrnar, har sum lærusveinarnir vóru, vóru læstar, av ótta fyri Jødunum, kom Jesus og stóð mitt ímillum teirra og sigur við teir: „Friður veri við tykkum!“ Og tá ið hann hevði sagt hetta, sýndi hann teimum hendurnar og síðuna. Nú vórðu lærusveinarnir glaðir, tá ið teir sóu Harran. Jesus segði tá aftur við teir: „Friður veri við tykkum! Eins og faðirin hevur sent meg, soleiðis sendi eg eisini tykkum.“ Og tá ið hann hevði sagt hetta, andaði hann á teir og sigur við teir: „Takið við heilagum anda. Hvørjum, sum tit fyrigeva syndirnar, teimum eru tær fyrigivnar, og hvørjum, sum tit halda teimum aftur, teimum eru tær afturhildnar.“ Men Tummas, ein av teimum tólv, hann, sum kallast Didymos (tað merkir: tvíburður) var ikki saman við teimum, tá ið Jesus kom. Hinir lærusveinarnir søgdu tá við hann: „Vit hava sað Harran!“ Men hann segði við teir: „Síggi eg ikki naglamerkini í hondum hansara og fái eg ikki lagt hond mína í síðu hansara, vil eg als ikki trúgva tí.“ Og átta dagar seinni vóru lærusveinar hansara aftur inni og Tummas við teimum. Jesus kemur, meðan dyrnar vóru læstar, og stóð mitt ímillum teirra og segði: „Friður veri við tykkum!“ Síðan sigur hann við Tummas: „Kom higar við fingri tínum og síggj hendur mínar, og rætt hond tína higar og legg hana í síðu mína, og ver ikki vantrúgvin, men trúgvandi.“ Tummas svaraði og segði við hann: „Harri

mín og Guð mín!“ Jesus sigur við hann: „Av tí at tú hevur sæð meg, hevur tú trúð. Sælir eru teir, sum ikki sóu, og trúðu tó!“ Mong onnur tekin gjørdi Jesus eisini fyri eygunum á lærusveinum sínum, sum ikki eru skrivað í hesi bók. Men hetta er skrivað, til tess at tit skulu trúgva, at Jesus er Kristus, sonur Guðs, og til tess, at tit, tá ið tit trúgva, skulu hava lív í navni hansara. Jóh 20,19-31

2. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum í miskunn tíni reisti upp son tín, Jesus Krist, frá deyðum, og hevur givið okkum hann til hirða og frelsara, til tess at hann skal føða okkum við orði sínum og verja okkum fyri syndini, deyðanum og djevlinum. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum av sonnum at kenna henda hirða okkara og at hoyra reyst hansara, so at vit fylgja honum, sum kennir okkum, og tekur okkum at sær í allari neyð okkara, og at enda verða sæl allar ævir fyri hann, einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum í miskunn tíni reisti upp son tín, Jesus Krist, frá deyðum og hevur givið okkum hann til hirða og frelsara. Vit biðja teg, tú, sum við honum reisti upp hin falna mannaheim, gev okkum, sum tú við

syni tínum hevur bjargað frá ævigum deyða, náði til at halda út í trúnni á henda góða hirða okkara og at eiga hina ævigu gleðina í honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Ezekiel profetur:
Tí at so sigur Harrin, drottin: Sí, eg vil sjálvur sóknast eftir seyði mínum og goyma at honum. Eins og hirðin goymir at fylgi sínum á illveðursdegnum, soleiðis vil eg goyma at seyðum mínum og heimta teir aftur av øllum teimum støðum, ið teir spjaddust um á degi skýsortans og niðamyrkursins. Eg skal føra teir út frá tjóðunum og savna teir úr londunum og leiða teir inn í land teirra; eg skal røkta teir á Ísraels fjøllum, í dølunum og á øllum bygdum bólum í landinum. Á góðum grasfløtum goymi eg at teimum, á Ísraels háfjøllum skal beitilendi teirra vera; á góðum haglendi skulu teir bólast og ganga á biti á feitum grasfløtum á Ísraels fjøllum. Eg vil sjálvur halda seyði mínum til haga og sjálvur lata teir leggja seg á ból, sigur Harrin, drottin; hinum farna vil eg leita eftir og fáa tað burturvilsta aftur á leið, binda um hitt løstaða og magna hini veiku; eisini hinum feita og sterka skal eg goyma at; eg vil røkta teir rættvísiliga. Ez 34,11-16

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum:*
Tí at hvat rós er í tí, um tit eru tolnir, tá ið tit synda og fáa revsing afturfyri? Men um tit eru tolnir, tá ið tit gera gott og líða ilt kortini, tað finnur náði hjá Guði. Tí at til tess eru tit kallaðir, av tí at Kristus leið eisini fyri tykkum

og eftirlæt tykkum eina fyrimynd, fyri at tit skulu fylgja fótasporum hansara. Hann gjørdi ikki synd, og svik vórðu ikki funnin í munni hansara. Hann deildi ikki aftur ímót, tá ið hann varð deildur, og hann hóttaði ikki, tá ið hann leið, men hann læt tað til hansara, sum dømir rættvísliga. Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið, fyri at vit, deyðir frá syndunum, skulu liva fyri rættvísini. Við sár hansara eru tit grøddir. Tí at tit vóru vilstir sum seyðir, men nú hava tit vent við til hirðan og tilsjónarmannin fyri sálum tykkara. 1 Pæt 2,20-25

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Pætur segði: „Tí skal alt Ísraels hús vita tað av sonnum, at Guð hevur gjørt hann bæði til harra og Krist, henda Jesus, sum tit krossfestu.“ Men tá ið teir hoyrdu hetta, fingu teir sum ein sting í hjartað, og teir søgdu við Pætur og hinar ápostlarnar: „Hvat eiga vit at gera, góðu menn og brøður?“ Men Pætur segði við teir: „Vendið um, og ein og hvør tykkara lati seg doypa í navni Jesu Krists til fyrigevingar syndanna, og tit skulu fáa gávu heilaga andans. Tí at tykkum er fyrijáttanin ætlað og børnum tykkara og øllum teimum, sum eru langt burtur, so mongum sum Harrin Guð vár vil kalla til sín.“ Og við mongum øðrum orðum vitnaði hann, og hann áminti tey og segði: „Latið tykkum frelsast frá hesi rongu slekt!“ Tey, sum nú tóku við orði hansara, vórðu doypt, og tann dagin løgdust okkurt um trý túsund sálir til. Áps 2,36-41

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði: „Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setir lív sítt til fyri seyðirnar. Leigusveinurin, sum ikki er hirði og sum ikki eigur seyðirnar, sær úlvin koma og fer frá seyðunum og rýmir, og úlvurin rænir teir og spjaðir teir sundur, av tí at hann er leigusveinur og hann einki leggur í seyðirnar. Eg eri hin góði hirðin, og eg kenni mínar, og mínir kenna meg, eins og eg kenni faðirin, og faðirin kennir meg; og eg seti lív mítt til fyri seyðirnar. Eg havi eisini aðrar seyðir, sum ikki hoyra upp í hetta fylgið. Eisini teir eigi eg at leiða, og teir skulu hoyra reyst mína, og tað skal verða eitt seyðafylgi, ein hirði.“ Jóh 10,11-16

3. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum ikki sleppir børnum tínum undan trongdum her á jørðini. Vit biðja teg, troysta tú okkum í sorg og mótgangi við heilaga anda tínum, so at vit ikki ivast um náði tína og kærleika, men altíð líta á lyfti sonar tíns og halda fast við ta troyst, at trongdin bert skal vara stutta stund, og so skal ævig gleði fylgja, til tess at vit í hesi vón við tolni kunnu halda út og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum letur sannleikans ljós títt lýsa fyri teimum, ið farin eru av leið, so at tey aftur mega finna rætta kós. Vit biðja teg, gev øllum, sum bera kristinnavnið, at skýggja tað, ið stríðir ímóti hesum navni, og at stunda á tað, sum er tí verdigt fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Skamma stund eg segði teg burtur, men í miklari miskunn eg taki teg aftur at mær. Í ovurvreiði eg fjaldi um bil mítt andlit fyri tær, men miskunni tær aftur við ævigum kærleika, sigur tín loysnari, Harrin. Hetta er mær sum á Nóa døgum: Eins og eg svór, at Nóaflóðin skuldi ikki aftur jørðina hylja, soleiðis svørji eg nú, at ikki meira skal eg reiðast og ilskast inn á teg. Tí at um so fjøllini vikast, og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki frá tær víkja og friðarsáttmáli mín ikki gretta, sigur Harrin, miskunnari tín. Jes 54,7-10

* *Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:*
Tí leið eisini Jesus uttan fyri liðið, fyri at hann við sínum egna blóði kundi halga fólkið. Latið okkum tí fara út til hansara út um herbúðirnar og bera vanvirðing hansara! Tí at vit hava her ikki verðandi stað, men vit søkja tann komandi. Latið okkum tí við honum altíð bera fram lovprísingaroffur fyri Guð, tað er ávøkst av vørrum, sum lova navni hansara! Men gloymið ikki vælgerðina og beinasemina! Tí at slík offur líka Guði væl. Hebr 13,12-16

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Tá ið Pætur og Jóhannes í halgidóminum høvdu grøtt ein haltan mann, vórðu teir leiddir fram fyri ráðið, sum spurdi teir: „Við hvørjum mátti ella í hvørjum navni hava tit gjørt hetta?“ Tá segði Pætur við teir, fyltur av heilagum anda: „Tit, ráðharrar fólksins og elstu! Tá ið vit í dag verða rannsóktir fyri eina góðgerð móti einum vanførum manni, um hvat hann er vorðin heilskapaður við, so skal tað vera øllum tykkum og øllum Ísraels fólki kunnigt, at í navni Jesu Krists úr Nasaret, sum tit krossfestu og Guð reisti upp frá deyðum, fyri hansara navns skuld stendur hesin maður frískur og ferðugur her fyri eygum tykkara. Hann er tann steinurin, sum varð vrakaður av tykkum, húsasmiðunum, men sum er vorðin hornasteinur. Og ikki er frelsa í nøkrum øðrum; tí at ikki er heldur nakað annað navn undir himlinum, givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við.“ Áps 4,7-12

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði við lærusveinar sínar: „Um lítla stund, og tit síggja meg ikki longur, og aftur um lítla stund, tá skulu tit síggja meg.“ Tá søgdu nakrir av lærusveinum hansara hvør við annan: „Hvat er hetta, sum hann sigur við okkum: Um lítla stund, og tit síggja meg ikki, og aftur um lítla stund, og tit skulu síggja meg, og: Eg fari til faðirin?“ Teir søgdu tí: „Hvat er hetta, sum hann sigur: Um lítla stund. Vit skilja ikki, hvat hann talar.“ Jesus visti, at teir ætlaðu at spyrja hann, og hann segði við teir: „Er tað hetta, tit skifta orð um tykkara millum, at eg segði: Um lítla stund, og tit síggja meg ikki, og aftur um lítla stund,

og tit skulu síggja meg? Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Tit skulu gráta og eymka tykkum, men heimurin skal fegnast: Tit skulu verða sorgarbundnir, men sorg tykkara skal verða vend til gleði. Konan, sum skal eiga barn, hevur sorg, tí at tími hennara er komin; men tá ið hon hevur átt barnið, kemur henni ikki longur neyðina í hug fyri gleðina um, at ein menniskja er fødd í heimin. Eisini tit hava tá nú sorg, men eg skal síggja tykkum aftur, og tá skal hjarta tykkara gleðast, og eingin skal taka gleði tykkara frá tykkum.“ Jóh 16,16-22

DÝRA BIÐIDAG
4. FRÍGGJADAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Viólbláur. Dagin eftir: Hvítur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Náðigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum fyrigevur ríkliga og fegin vilt miskunna øllum, sum í sannari iðran leita til tín. Vit biðja teg, fyrigev okkum allar syndir okkara og gev okkum náði til av heilum hjarta at venda okkum til tín, so at vit við hjálp heilaga anda tíns mega vaksa í trúarlýdni og bera ávøkst, sum samsvarar við umvendingina fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Náðigi Guð, miskunnsami faðir, vit hava í neyð okkara einki annað at líta á enn guddómligu miskunn tína. Tí

biðja vit teg, varðveit okkum frá øllum tí, sum ræðir og hóttir okkum, og ver okkara fasta vernd fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

** Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:*
Leitið til Harrans, meðan hann er at finna, kallið á hann ta stund, hann er nær. Hin gudleysi vendi um frá vegi sínum, og órættarmaður frá svikaráðum sínum og vendi sær til Harrans, tá skal hann miskunna honum, til Guðs várs, tí at hann fyrigevur ríkliga. Jes 55,6-7

Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:
Tí at hetta er sáttmálin, sum eg skal gera við Ísraels hús aftan á teir dagarnar, sigur Harrin: Eg skal geva lógir mínar í huga teirra og skriva tær á hjørtu teirra, og eg skal vera Guð teirra, og teir skulu vera fólk mítt. Og teir skulu ikki læra ein og hvør samborgara sín og ein og hvør bróður sín og siga: „Kenn Harran!“ tí at allir skulu teir kenna meg, frá hinum minsta til hin størsta teirra. Tí at eg skal verða miskunnsamur móti misgerðum teirra, og eg skal ikki longur minnast syndir teirra.“ Hebr 8,10-12

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men í teimum døgum stígur Jóhannes doyparin fram og prædikar í oyðimørkini í Júdeu, og hann sigur: „Vendið um, tí at himmiríkið er í nánd.“ Tí at hann er tann, ið talað er um av Jesaja profeti, tá ið hann sigur: „Ein rødd á einum, ið rópar í oyðimørkini: Slættið veg Harrans,

gerið beinar leiðir hansara.“ Men hesin sami Jóhannes hevði klæði síni av kamelhárum og eitt leðurbelti um lendar sínar; og føði hansara var grashoppur og villur hunangur. Tá fóru tey út til hansara, Jerúsalem og øll Júdea og alt landið íkring Jórdan; og tey vórðu doypt av honum í ánni Jórdan, í tí tey játtaðu syndir sínar. Men táið hann sá mangar av Farisearum og Saddukearum koma til dóps hjá sær, segði hann við teir: „Tykkara ormaungar! Hvør lærdi tykkum at flýggja undan hini komandi vreiðini? Berið tá ávøkst, sum samsvarar við umvendingina, og hugsið ikki, at tit kunnu siga við tykkum sjálvum: Vit hava Ábraham til faðir; tí at eg sigi tykkum, at Guð er mentur at vekja Ábrahami børn av hesum steinunum. Men øksin liggur longu við røturnar á trøunum, so at hvørt eitt træ,ið ikki ber góðan ávøkst, verður avhøgt og kastað í eldin.“ Matt 3,1-10

4. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við einborna syni tínum, Jesusi Kristi, hevur sent okkum talsmannin, heilaga anda tín,ið skal sannføra heimin um synd, rættvísi og dóm og vegleiða okkum til allan sannleikan. Vit biðja teg, upplýs tú hjørtu okkara, so at vit viðkennast syndir okkara og í trúnni á Krist halda fast við ta troyst, at hann er harri yvir øllum lutum, av náði síni vil bjarga okkum frá øllum illum og at enda gera okkum sæl allar ævir, hann,

sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við heilaga anda tínum skapar trúnna í hjørtum okkara og vegleiðir okkum til allan sannleikan. Vit biðja teg, gev okkum at elska boð tíni og líta á lyfti tíni, so at hjørtu okkara bæði í viðgangi og mótgangi mega vera rótfest, har hin sanna gleðin er at finna, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Ezekiel profetur:
So sigur Harrin: Eg gevi tykkum nýtt hjarta og leggi nýggjan anda tykkum í bróst; steinhjartað taki eg burtur úr likami tykkara og gevi tykkum hjarta av holdi. Anda mín leggi eg tykkum í bróst og fái tað so í lag, at tit fara eftir fyriskipanum mínum og varðveita boðorð míni og halda tey. Tit skulu búgva í tí landinum, sum eg gav fedrum tykkara, og tit skulu vera fólk mítt, og eg skal vera Guð tykkara. Ez 36,26-28

** Epistulin skrivar Jákup ápostul:*
Hvør ein góð gáva og hvør ein fullkomin gáva er omanfrá og kemur niður frá faðir ljósanna, og hjá honum er ikki umbroyting ella umskiftingarskuggi. Eftir sínum egna vilja føddi hann okkum við sannleiks orði, fyri at vit skuldu vera ein frumgróður av skapningum hansara. Tað vita tit, elskaðu brøður mínir! Men hvør menniskja veri

snar til at hoyra, sein til at tala, sein til vreiði; tí at vreiði mans virkar ikki rættlæti fyri Guði. Leggið tí av allan óreinskap og allar leivdir av illskapi, og takið við spaklyndi móti orðinum, sum er gróðursett í tykkum og sum er fört fyri at frelsa sálir tykkara! Ják 1,17-21

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Men Saul, sum enn froysti hóttir og manndráp móti lærusveinum Harrans, fór til høvuðsprestin og bað hann um bræv til Damaskus, til samkomuhúsið har, fyri at hann, um hann hitti nøkur, sum hoyrdu til „vegin“, menn ella konur, kundi føra tey í bondum til Jerúsalem. Men táið hann á ferðini var komin nær til Damaskus, ljómaði knappliga eitt ljós av himni um hann; og hann fell til jarðar og hoyrdi eina rødd siga við seg: „Saul, Saul, hví søkir tú at mær?“ Men hann segði: „Hvør ert tú, Harri?“ Og hann svaraði: „Eg eri Jesus, sum tú søkir at. Men statt upp og far inn í staðin, og har skal tær verða sagt, hvat tú eigur at gera.“ Men menninir, sum vóru í ferðini við honum, stóðu málleysir; teir hoyrdu fullvæl røddina, men sóu ongan. Og Saul reistist upp av jørðini; men táið hann læt eyguni upp, sá hann einki, og teir leiddu hann við hondunum og fóru við honum inn í Damaskus. Og tríggjar dagar sá hann einki, og hann hvørki át ella drakk. Men í Damaskus var ein lærusveinur, sum æt Ánanias, og Harrin segði við hann í eini sjón: „Ánanias!“ Og hann segði: „Sí, her eri eg, Harri!“ Men Harrin segði við hann: „Statt upp og far í ta gøtuna, sum kallast hin beina, og spyr í húsinum hjá Judasi eftir einum manni frá Tarsus, sum eitur Saul; tí, sí, hann biður.

Og hann hevur (í eini sjón) sæð ein mann, sum eitur Ánanias, koma til sín og leggja hendurnar á seg, so at hann kundi fáa sjónina aftur!“ Men Ánanias svaraði: „Harri, eg havi hoyrt av mongum um henda mann, hvussu nógv ilt hann hevur gjørt tínum heilagu í Jerúsalem. Og her hevur hann í umboði frá høvuðsprestunum at binda øll tey, sum ákalla navn títt.“ Men Harrin segði við hann: „Far tú, tí at hesin maður er mær eitt útvalt ílat til at bera navn mítt fram fyri heidningar og kongar og Ísraels børn; tí at eg vil sýna honum, hvussu mikið hann eigur at líða fyri navns míns sakir.“ Og Ánanias fór tá avstað og kom inn í húsið og legði hendurnar á hann og segði: „Saul, bróðir, Harrin hevur sent meg, Jesus, tann sum birtist fyri tær á veginum, sum tú komst, til tess at tú skalt fáa sjón tína aftur og verða fyltur við heilagum anda.“ Og alt fyri eitt fell tað eins og skøl fra eygum hansara, og hann fekk sjónina aftur; og hann stóð upp og varð doyptur. Áps 9,1-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði við lærusveinar sínar: „Men nú fari eg burtur til hansara, sum sendi meg; og eingin tykkara spyr meg: „Hvar fert tú?“ Men av tí at eg havi talað hetta til tykkara, hevur sorg fylt hjarta tykkara. Men eg sigi tykkum sannleikan: Tað er tykkum at gagni, at eg fari burtur. Tí at fari eg ikki burtur, kemur talsmaðurin ikki til tykkara; men fari eg burtur skal eg senda hann til tykkara. Og tá ið hann kemur, skal hann sannføra heimin um synd og um rættvísi og um dóm. Um synd, av tí at teir ikki trúgva á meg; um rættvísi, av tí at eg fari til faðirin, og tit síggja meg ikki longur; men um dóm, av tí at høvdingin í

hesum heimi er dømdur. Enn havi eg nógv at siga tykkum; men tit eru ikki mentir at bera tað nú. Men tá ið hann kemur, sannleikans andi, tá skal hann vegleiða tykkum til allan sannleikan; tí at hann skal ikki tala av sær sjálvum, men hvat sum hann hoyrir, skal hann tala, og tað, sum skal koma, skal hann kunngera tykkum. Hann skal dýrmeta meg; tí at hann skal taka av mínum og kunngera tykkum. Alt tað, sum faðirin hevur, er mítt. Tí segði eg, at hann tekur av mínum og kunnger tykkum. Jóh 16,5-15

5. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur lovað okkum, at alt, sum vit biðja um í navni hansara, vilt tú geva okkum. Vit biðja teg, lat heilaga anda tín leiða og stýra hjørtum okkara eftir vilja tínum, so at vit halda fast við orð títt, kenna náðigu hjálp tína og signing í øllum, sum okkum er tørvur á, og bæði her á fold og hinumegin lova og prísa tær sum náðiga faðir okkara fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gevur allar góðar gávur. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Gev okkum við

heilaga anda tínum at hugsa tað, ið rætt er, undir tíni leiðbeining at gera hareftir og soleiðis æra heilaga navn títt fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Men sjálvur varð Jákup eftir eina. Tá tók maður at berjast við hann, alt til dagur tók at lýsa. Og tá ið hann sá, at hann ikki kundi fella hann, sló hann hann á mjødnina; og mjødnin á Jákupi fór úr liði, meðan hann bardist við hann. Tá segði hann við hann: „Slepp mær, tí at nú lýsir fyri degi!“ Men hann svaraði: „Eg sleppi tær ikki, fyrr enn tú vælsignar meg!“ Tá mælti hann við hann: „Hvat er navn títt?“ Hann svaraði: „Jákup.“ Tá segði hann: „Ikki skalt tú longur eita Jákup, men Ísrael; tí at tú hevur barst við Guð og menn og hevur vunnið sigur!“ Tá mælti Jákup og segði: „Sig mær navn títt.“ Men hann svaraði: „Hví spyrt tú meg um navn mítt?“ Og hann vælsignaði hann har. Jákup nevndi henda stað Pnuel, tí hann segði: „Eg havi sað Guð andlit til andlits og slapp tó undan við lívinum.“ Og sólin reis í somu stund, sum hann fór fram við Pnuel; men tá var hann lamin í mjødnini. 1 Mós 32,24-31

* *Epistulin skrivar Jákup ápostul:*
Men verðið slíkir, sum gera eftir orðinum og ikki bert hoyra tað og við tað svíkja tykkum sjálvar. Tí at um einhvør hoyrir orðið og ikki ger eftir tí, tá er hann líkur manni, sum skoðar sín náttúrliga andlitsskap í spegli; tí

at hann skoðar seg sjálvan og fer avstað og gloymir við tað sama, hvussu hann sá út. Men tann, ið lítur inn í hina fullkomnu lóg frælsisins og heldur á við tí, so at hann ikki verður ein gloymskur áhoyrandi, men ein, sum ger gerningin, hann skal verða sælur í verki sínum. Um einhvør heldur seg dýrka Guð, og ikki hevur teymahald á tungu síni, men villleiðir sítt egna hjarta, tá er gudsdýrkan hansara ónýtt. Ein rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Guði og faðirinum er hetta: at vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra, og at varða seg sjálvan óspiltan av heiminum. Ják 1,22-27

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Men í hesum døgunum, tá ið talið á lærusveinunum vaks, kom upp eitt illmæli millum Hellenistar mót Hebrearum um tað, at einkjur teirra vórðu misbýttar við hina dagligu útbýtingina. Og teir tólv kallaðu tá lærusveinaflokkin saman og søgdu: „Tað sømir seg ikki, at vit skulu geva Guðs orð yvir fyri at tæna við borðini. Hyggið tykkum tí, brøður, um eftir sjey monnum tykkara millum, sum hava gott orð á sær og eru fullir av heilagum anda og vísdómi, teir vilja vit so seta yvir hesum starvi. Men vit vilja halda trúliga á í bønini og í tænastu orðsins.“ Áps 6,1-4

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði við lærusveinar sínar: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Hvat tit so biðja faðirin um, tað skal hann geva tykkum í navni mínum. Higartil hava tit einki biðið um í navni mínum. Biðið, og tit skulu fáa, fyri at

gleði tykkara kann verða fullkomin. Hetta havi eg talað til tykkara í líknilsum. Tann stund kemur, tá ið eg ikki longur skal tala til tykkara í líknilsum, men beint fram kunngera tykkum um faðirin. Tann dagin skulu tit biðja í navni mínum, og eg sigi tykkum ikki, at eg skal biðja faðirin fyri tykkum; tí at faðirin sjálvur elskar tykkum, av tí at tit hava elskað meg og trúð, at eg eri gingin út frá faðirinum. Eg eri gingin út frá faðirinum og eri komin í heimin; eg fari úr heiminum aftur og fari til faðirin.“ Jóh 16,23b-28

KRISTI HIMMALSFERÐARDAG

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harri Jesus Kristus, Guðs sonur, tú, sum situr við høgru hond faðirsins og hevur alt valdið í himli og á jørð. Vit takka tær, tí at tú ert við kirkju tíni allar dagar alt til veraldar enda. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum altíð vilt geva okkum trúfastar orðsins tænarar og lata gleðiboðskap tín bera út til øll fólkasløg. Halt kirkju tíni uppi, varðveit hana í orði tínum og í áliti á lyfti tíni, so at hon at enda má sigra við tær, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harri Jesus Kristus, Guðs sonur, tú, sum situr við høgru hond faðirsins og gongur í forbøn fyri okkum. Vit biðja

teg, gev okkum her á foldum í trúnni at eiga bústað hjá tær, og at enda síggja teg andlit til andlits í teimum ævigu bústøðum, sum tú hevur tilbúgvið okkum, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Harrin segði við harra mín: „Set teg við høgru hond mína, til tess at eg fái tínar fíggindar lagt sum eina fótskør undir føtur tínar. Frá Zion skal Harrin rætta út veldis tíns kongastav, ráð tú mitt millum fígginda tína. Á herstevnudegi kemur fúsliga fólk títt til funda á heilagum fjøllum; úr fangi morgunroðans kemur til tín ungdóms tíns døgg. Svorið hevur Harrin og ikki tað angrar: Tú prestur skalt verða um allar ævir á Melkisedeks vísi.“ Sl 110,1-4

* *Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:*
Hina fyrru frásøgnina skrivaði eg, Teofilus, um alt tað, sum Jesus fór undir bæði at gera og læra, líka til tann dagin, tá ið hann varð upp tikin, eftir tað at hann hevði givið ápostlunum, sum hann hevði valt, boð við heilagum anda; teimum, sum hann eisini sýndi seg fyri livandi aftan á pínslu sína við mongum prógvum, við tað at hann læt teir síggja seg í fjøruti dagar og talaði um tað, sum hoyrir Guðs ríki til. Og meðan hann var saman við teimum, beyð hann teimum ikki at fara burtur úr Jerúsalem, men at bíða eftir fyrijáttan faðirsins, „sum tit,“ segði hann, „hava hoyrt um av mær; tí at Jóhannes doypti við vatni, men tit skulu verða doyptir við heilagum

anda ikki mangar dagar hereftir.“ Og tá ið teir nú vóru saman komnir, spurdu teir hann og søgdu: „Harri, ætlar tú á hesi tíð at endurreisa ríkið fyri Ísrael?“ Hann segði við teir: „Tað er ikki fyri tykkum at vita tíðir ella tímar, sum faðirin hevur ásett í sínum egna valdi. Men tit skulu fáa kraft, tá ið heilagur andi kemur yvir tykkum, og tit skulu verða vitni míni bæði í Jerúsalem og í allari Júdeu og Sámáriu og líka til ytstu endamark á jørðini.“ Og tá ið hann hevði sagt hetta, varð hann upp tikin, so teir sóu tað, og eitt skýggj tók hann burtur úr eygum teirra. Og sum teir stardu upp til himmals, í tí hann fór burtur, sí, tá stóðu tveir menn hjá teimum í hvítum klæðum, og teir søgdu: „Tit Galileumenn, hví standa tit og hyggja upp til himmals? Hesin Jesus, sum er upp tikin frá tykkum til himmals, skal koma aftur á sama hátt, sum tit sóu hann fara til himmals.“ Áps 1,1-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur:
Seinni opinberaðist hann fyri teimum ellivu, meðan teir sótu til borðs, og hann átalaði teir fyri vantrúgv og hjartans harðleika teirra, at teir ikki høvdu trúð teimum, sum høvdu sæð hann upprisnan. Og hann segði við teir: „Farið út um allan heimin og kunngerið gleðiboðskapin fyri øllum skapninginum! Tann, ið trýr og verður doyptur, skal verða frelstur; men tann, ið ikki trýr, skal verða dømdur. Og hesi tekin skulu fylgja teimum, sum trúgva: í navni mínum skulu tey reka út illar andar; tey skulu tala við nýggjum tungum; tey skulu taka um ormar; og um tey drekka okkurt eiturbland, skal tað ikki saka tey; tey skulu leggja hendurnar á sjúk, og tey skulu verða frísk.“ Síðan varð Harrin, eftir tað at hann hevði talað við teir,

tikin upp til himmals, og hann settist við høgru hond Guðs. Men teir fóru út og prædikaðu allar staðir, og Harrin arbeiddi við og staðfesti orðið við teimum tekinunum, sum við fylgdu.] Mark 16,14-20

6. SUNNUDAG EFTIR PÁSKIR

Litur: Hvítur ella gyltur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú við heilaga anda tínum hevur sett okkum at bera vitnisburð um einborna son tín, Jesus Krist. Men av tí at heimurin ikki kann tola henda vitnisburðin og tí stendur honum ímót, biðja vit teg, at tú vilt geva okkum frímóð og treysti, so at vit eisini í øllum mótgangi halda fast við vitnisburðin um teg og altíð finnast teirra millum, sum vilja kennast við teg og son tín, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum hevur gjørt einborna son tín dýrmætan, og givið honum lut í guddómsdýrd tíni. Vit biðja teg, at vilji okkara altíð má vera halgaður tær, so at vit av heilum huga vitna um teg og tæna tær, sum eigur alt valdið um ævir, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum hevur gjørt einborna son tín dýrmætan, og givið honum lut í guddómsdýrd tíni. Vit biðja teg, sannfør okkum við heilaga anda tínum, so at vilji okkara altíð má vera halgaður tær, og vit av heilum huga vitna um teg og tæna tær, sum eigur alt valdið um ævir, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Haggai profetur:
Og verið tit øll, sum í landinum eru, hugreyst og haldið áfram við verkinum, tí at eg eri við tykkum, sigur Harri herliðanna, og andi mín skal vera tykkara millum samsvarandi tí sáttmála, sum eg gjørdi við tykkum, tá ið tit fóru út úr Egyptalandi; óttist ikki! Tí at so sigur Harri herliðanna: Áður enn langt um líður man eg skaka himni og jørð, havi og turrlendi. Eg man skaka øllum tjóðum, so at allir dýrgripir fólkanna savnast higar, og eg man fylla hetta hús við dýrd, sigur Harri herliðanna. Mítt er silvurið, mítt er gullið, sigur Harri herliðanna. Hetta seinna templið skal hava størri dýrd enn hitt fyrra, sigur Harri herliðanna, og á hesum staði vil eg veita frið, sigur Harri herliðanna. Hagg 2,4b-9

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum:*
Verið tí vaknir og ódruknir til bønir! Fram um alt havið inniligan kærleika hvør til annan; tí at kærleiki fjalir fjøld av syndum; verið gestablíðir hvør móti øðrum uttan meinskan. Eftir sum ein og hvør hevur fingið eina náði-

gávu, so tænið hvør øðrum við henni sum góðir húshaldarar yvir Guðs margfaldu náði. Um einhvør talar, tá tali hann sum Guðs orð; um einhvør hevur eina tænastu, tá tæni hann eftir teirri megi, sum Guð gevur, til tess at Guð má verða æraður í øllum lutum fyri Jesus Krist; hansara er dýrdin og mátturin um aldur og allar ævir. Amen. 1 Pæt 4,7b-11

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Tá ið Jesus var farin til himmals, vendu ápostlarnir aftur til Jerúsalem frá tí fjallinum, sum kallast Oljufjallið, og sum er tætt við Jerúsalem, eina hvíludags gongd haðani. Og tá ið teir vóru inn komnir, fóru teir upp í ta loftsstovuna, har sum teir vóru vanir at vera, Pætur og Jóhannes og Jákup og Andrias, Filippus og Tummas, Bartolomeus og Matteus, Jákup sonur Alfeusar og Símun Zelotes og Judas sonur Jákups. Allir hesir vóru samhugaðir áhaldandi í bønini saman við nøkrum kvinnum og Mariu, móður Jesu, og við brøðrum hansara. Áps 1,12-14

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus segði við lærusveinar sínar: „Men tá ið talsmaðurin kemur, sum eg skal senda tykkum frá faðirinum, sannleikans andi, sum gongur út frá faðirinum, tá skal hann vitna um meg. Men eisini tit skulu vitna; tí at tit hava verið við mær av fyrstu tíð. Hetta havi eg talað til tykkara, fyri at tit ikki skulu fáa meinboga. Teir skulu koyra tykkum út úr samkomuhúsunum; ja, tann stund kemur, tá ið hvør tann, sum drepur tykkum, skal halda, at hann veitir Guði eina dýrkan. Og hetta gera teir, av tí at teir

hvørki kenna faðirin ella meg. Men hetta havi eg talað til tykkara, fyri at tit, tá ið tann stund kemur, skulu minnast, at eg havi sagt tykkum tað. Men hetta segði eg tykkum ikki av fyrstu tíð, við tað at eg var hjá tykkum.“ Jóh 15,26-16,1-4

Hvítusunna

HVÍTUSUNNUDAG FØÐINGARDAG KIRKJUNNAR

Litur: Reyður.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú við einborna syni tínum, Jesusi Kristi, hevur grundað kirkju tína her á foldum og kallað okkum inn í samfelag teirra heilagu. Vit biðja teg, at tú við tínum heilaga anda vilt vegleiða okkum í sannleika tínum, til tess at vit mega halda fast við orð títt og trúnna á náði tína, sum tú við deyða sonar tíns hevur vunnið okkum, vaksa í kærleika og øllum góðum gerðum, og at enda verða sæl allar ævir fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum á hvítusunnudegi upplýsti og vegleiddi hjørtu teirra trúgvandi við heilaga anda tínum. Vit biðja teg, upplýs og vegleið tú eisini okkum við heilaga anda tínum til allan sannleikan, so at vit altíð mega finna gleði og troyst í honum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Tá ið Harrin Guð skapaði jørð og himin – men á vøllum jarðar var enn als eingin runnur til; og ongar urtir vuksu enn á markini, av tí at Harrin Guð enn ikki hevði latið tað regna á jørðina, og eingir menn vóru til at dyrka jørðina; men upp úr jørðini kom kelda og vætaði alla markina – tá myndaði Harrin Guð mannin av mold jarðar og blásti lívsanda í nasar hans, og soleiðis varð maður til livandi skepnu. 1 Mós 2,5-7

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Og øll mannaættin hevði eitt mál og somu tungu. Men tá ið teir nú løgdu leiðina eystureftir, komu teir fram á ein slætta í Sinears landi og settust niður har. Tá søgdu teir hvør við annan: „Komið og latum okkum knoða tigulsteinar og herða teir væl í eldi.“ Soleiðis nýttu teir tigul í staðin fyri grót og jarðbik í staðin fyri kálk. Og teir søgdu: „Vit skulu byggja okkum borg og torn, hvørs tindur røkkur til himins og gera okkum navnframar, so at vit ikki spjaðast um alla jørðina!“ Men Harrin steig oman til tess at síggja borgina og tornið, sum mannabørnini fingust við at byggja. Og Harrin mælti: „Sí, teir eru ein tjóð og hava allir sama tungumál; hetta er fyrsta fyritøka teirra; og nú man neyvan nakað verða teimum óført, sum teir finna upp á at gera. Komið tí og latum okkum stíga oman og fløkja tungumál teirra, so at teir ikki skilja málið, hvør hjá øðrum.“ Tá spjaddi Harrin teir haðan út um alla jørðina, so at teir lættu av at byggja borgina. Tessvegna eitur hon Bábel, tí at har fløkti Harrin øll

tungumál jarðar; og haðan spjaddi Harrin tey út um alla jørðina. 1 Mós 11,1-9

** Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:*
Og táið nú hvítusunnudagurin var komin, vóru teir allir saman komnir á einum staði. Og tá kom brádliga eitt dun av himli, sum táið harðveður brestur á, og fylti alt húsið, sum teir sótu í. Og fyri teimum sýndust tungur líkasum av eldi, sum skildust sundur og settust á ein og hvønn teirra; og teir vórðu allir fyltir av hinum heilaga anda og tóku at tala á øðrum tungumálum eins og andin gav teimum at mæla. Men har vóru Jødar búsettir í Jerúsalem, menn, ið óttaðust Guð, av øllum tjóðum undir himni. Táið nú hetta ljóðið hoyrdist, kom mannamúgvan saman, og henni varð dátt við; tí at teir hoyrdu, ein og hvør, teir tala á sínum egna máli. Og teir vórðu allir bilsnir og undraðust og søgdu: „Sí, eru ikki allir hesir, ið tala, Galileumenn? Hvussu ber tað tá til, at vit, ein og hvør, hoyra teir tala á okkara egna máli, sum vit eru føddir við? Partar og Medar og Elamitar og vit, sum eru búsettir í Mesopotámiu, Júdeu, Kappadókíu, Pontus og Ásiu, í Frýgíu og Pamfýliu, Egyptalandi og Libyubygdunum við Kýrene, og vit Rómverjar, sum her hava setst niður, Jødar og proselýtar; Kretoyingar og Árábar, vit hoyra teir tala á okkara tungum um stórverk Guðs?“ Áps 2,1-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Judas, ikki Iskarjot, sigur við Jesus: „Harri, hvussu ber tað til, at tú vilt opinbera teg fyri okkum og ikki fyri heiminum?“ Jesus svaraði og segði við hann: „Elskar

nakar meg, tá varðveitir hann orð mítt, og faðir mín skal elska hann, og vit skulu koma til hansara og gera okkum bústað hjá honum. Tann, sum ikki elskar meg, hann varðveitir ikki orð míni; og orðið, sum tit hoyra, er ikki mítt, men faðirsins, sum sendi meg. Hetta havi eg talað til tykkara, meðan eg var verandi hjá tykkum. Men talsmaðurin, heilagi andin, sum faðirin skal senda í mínum navni, hann skal læra tykkum alt og minna tykkum á alt, sum eg havi sagt tykkum. Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki! Tit hoyrdu, at eg segði við tykkum: Eg fari burtur og komi til tykkara. Elskaðu tit meg, tá høvdu tit glett tykkum um, at eg fari til faðirin; tí at faðirin er størri enn eg. Og nú havi eg sagt tykkum tað, áðrenn tað hendir, fyri at tit skulu trúgva, tá ið tað er hent. Eg skal ikki longur tala nógv við tykkum, tí at høvdingin í hesum heimi kemur, og í mær eigur hann als einki; men fyri at heimurin skal kenna, at eg elski faðirin og at eg geri soleiðis, sum faðirin hevur boðið mær: Standið upp, latum okkum fara hiðani!“ Jóh 14,22-31

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú við heilaga anda tínum hevur kallað okkum við gleðiboðskapinum og miskunnsamur heldur kristinfólki tínum uppi í sannari trúgv. Vit biðja teg, tak ikki anda tín frá okkum, men lat hann upplýsa og vegleiða okkum dag frá degi við heilaga orði tínum, so at vit ikki villast og fara burtur av vegnum, men verða sæl allar ævir hjá tær fyri einborna son tín,

Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Seinnapart ella um kvøldið til aftansong
Sí frammanfyri kollektir til hvítusunnudag.

Onkrir av tekstunum, sum ikki eru eru lisnir um dagin.

2. HVÍTUSUNNUDAG

Litur: Reyður. Reyður alla vikuna.

KOLLEKT
Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum í kærleika tínum hevur givið okkum Son tín, til tess at vit skulu trúgva á hann og við honum hava ævigt lív. Vit biðja teg, gev okkum heilaga anda tín í hjørtu okkara, so at vit mega koma til ljósið, liva sum ljósins børn og verða varðveitt soleiðis í trúnni, at vit mega verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gav ápostlum tínum heilaga anda tín. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Gev eisini okkum henda sama anda, so at vit rætt mega ákalla teg og verða varðveitt soleiðis í trúnni, at vit liva eftir vilja tínum og eiga tín frið fyri son tín, Jesus Krist, váran

harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gav ápostlum tínum heilaga anda tín. Vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Lýs tín frið yvir kirkju tína. Og gev eisini henni henda sama anda, so at hon rætt má ákalla teg og prísa navni tínum fyri allar vælgerðir tínar fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Ezekiel profetur:
So sigur Harrin: Eg skal geva teimum nýtt hjarta og leggja teimum nýggjan anda í bróstið, taka burtur steinhjartað úr likami teirra og geva teimum hjarta av holdi, til tess at teir mega fara eftir fyriskipanum mínum og halda tær og gera eftir teimum. Tá skulu teir vera fólk mítt, og eg skal vera Guð teirra. Ez 11,19-20

* *Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:*
Pætur segði: „Og Jesus beyð okkum at prædika fyri fólkinum og at vitna, at hann er tann, sum av Guði er skilaður til sum dómari yvir livandi og deyðum. Honum bera allir profetarnir tann vitnisburð, at ein og hvør, sum trýr á hann, skal fáa fyrigeving syndanna fyri navns hans skuld.“ Meðan Pætur enn talaði hesi orð, fell heilagur andi yvir øll tey, sum hoyrdu orðið. Og hinir trúgvandi, sum umskornir vóru –, allir teir, sum vóru komnir við Pæturi – vórðu ógvuliga bilsnir, at gáva heilaga andans

varð úthelt eisini yvir heidningarnar; tí at teir hoyrdu tey tala í tungum og hálova Guði. Tá tók Pætur til orða: „Man nakar kunna meina vatnið, so at hesi ikki skulu verða doypt, sum hava fingið heilagan anda eins og vit?“ Og hann beyð, at tey skuldu verða doypt í navni Jesu Krists. Áps 10,42-48a

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Tí at ikki sendi Guð sonin í heimin, til tess at hann skal døma heimin, men til tess at heimurin skal verða frelstur við honum. Tann, sum trýr á hann, verður ikki dømdur. Tann, sum ikki trýr, er longu dømdur, við tað at hann ikki hevur trúð á navn hins einborna Guðs sonar. Men hesin er dómurin, at ljósið er komið í heimin og menniskjuni elskaðu myrkrið meira enn ljósið, tí at gerningar teirra vóru óndir. Tí at ein og hvør, sum ger tað, ið ilt er, hatar ljósið og kemur ikki til ljósið, til tess at gerningar hansara ikki skulu verða átalaðir. Men tann, sum ger sannleikan, kemur til ljósið, til tess at gerningar hansara mega verða opinberir, tí at teir eru gjørdir í Guði.“ Jóh 3,16-21

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, tí at tú við heilaga anda tínum hevur kallað okkum við gleðiboðskapinum og miskunnsamur heldur kristinfólki tínum uppi í sannari trúgv. Vit biðja teg, tak ikki anda tín frá okkum, men lat hann upplýsa og vegleiða okkum dag frá degi við heilaga

orði tínum, so at vit ikki villast og fara burtur av vegnum, men verða sæl allar ævir hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TRÍEINDARDAG (TRINITATIS SUNNUDAG)

Litur: Hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi og tríeindi Guð, faðir, sonur og heilagi andi, vit viðganga fyri tær, at vit uttan náði tína og miskunn vildu farið til grundar í synd og ævigum deyða, av tí at tað, ið er føtt av holdinum, er hold og ikki kann síggja Guðs ríki. Tí biðja vit teg, ver okkum náðigur og miskunnsamur. Ger okkum til nýggj menniskju, so at vit trúgva av hjarta, at vit við Jesusi Kristi í heilagum dópi eiga fyrigeving fyri allar syndir okkara, og dagliga vaksa í trúgv, vón og kærleika, til vit at enda verða sæl allar ævir fyri Jesus Krist, váran harra, sum við Guði faðir livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Alvaldi, ævigi Guð, faðir, sonur og heilagi andi, vit lova og prísa tær, tí at tú hevur opinberað teg fyri okkum og í heilagum dópi gjørt okkum til tíni. Vit biðja teg, heilagi, tríeini Guð, varðveit okkum í kærleika tínum, og gev okkum styrki til at halda út í trúnni og vónini um hitt

æviga lívið, tú, sum livir og ræður, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fjórðu Mósebók:
Síðan hildu teir ferðini frá Hórfjalli móti Reyðahavinum til tess at fara kring um Edóms land. Men eftir vegnum misti fólkið tolið og fór at tala móti Guði og Mósesi: „Hví leiddu tit okkum út úr Egyptalandi til at doyggja í oyðimørkini? Her er jú hvørki breyð ella vatn, og okkum stendst við henda ringa mat!“ Tá sendi Harrin eiturormar mitt upp í fólkið, og teir bitu fólkið, so at fjøldir doyðu av Ísrael. Tá kom fólkið til Mósesar og segði: „Vit hava syndað við at tala móti Harranum og tær. Men bið tú nú til Harrans, at hann má lata ormarnar fara frá okkum.“ Tá bað Móses fyri fólkinum. Og Harrin mælti við Móses: „Ger tær koparorm og set hann upp á stong; tá skal hvør, ið bitin er, verða á lívi, um hann lítur at honum.“ Móses gjørdi orm av kopari og setti hann upp á stong. Og hvørja ferð maður varð bitin av ormi, og hann leit at koparorminum, varð hann verandi á lívi. 4 Mós 21,4-9

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
O, slíkt dýpi av ríkdómi og vísdómi og kunnskapi hjá Guði! Hvør órannsakandi eru dómar hansara og ósporandi vegir hansara! Tí at hvør hevur kent hug Harrans? Ella hvør hevur verið ráðgevari hansara? Ella hvør hevur fyrst givið honum, so at tað skuldi verða honum afturgoldið? Tí at frá honum og við honum og til hansara eru allir lutir. Honum veri dýrd um ævir allar! Amen. Róm 11,33-36

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Men har var maður av Farisearunum, at navni nevndur Nikodemus, ein ráðharri hjá Jødum. Hesin kom til hansara á nátt og segði við hann: „Rabbi, vit vita, at tú ert lærari, komin frá Guði; tí at eingin kann gera hesi tekin, sum tú gert, uttan Guð er við honum.“ Jesus svaraði og segði við hann: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tær: Eingin kann síggja Guðs ríki, uttan hann verður føddur av nýggjum.“ Nikodemus sigur við hann: „Hvussu kann nakar verða føddur, tá ið hann er vorðin gamal? Man hann aðra ferð kunna koma inn í lívið á móður síni og verða føddur?“ Jesus svaraði: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tær: Eingin kann koma inn í Guðs ríki, uttan hann verður føddur av vatni og anda. Tað, sum er føtt av holdinum, er hold, og tað, sum er føtt av andanum, er andi. Undrast ikki um, at eg segði við teg: Tit mega verða fødd av nýggjum. Vindurin blæsur, hvar sum hann vil, og tú hoyrir dunið av honum; men tú veitst ikki, hvaðan hann kemur, og hvar hann fer; soleiðis er tað við einum og hvørjum, sum er føddur av andanum.“ Nikodemus svaraði og segði við hann: „Hvussu kann hetta bera til?“ Jesus svaraði og segði við hann: „Tú ert lærari í Ísrael, og veitst ikki hetta! Sanniliga, sanniliga sigi eg tær: Vit tala tað, sum vit vita, og vitna um tað, sum vit hava sað; og vitnisburði okkara taka tit ikki ímót. Tá ið eg sigi tykkum hinar jarðisku lutirnar, og tit trúgva ikki, hvussu skulu tit tá trúgva, tá ið eg sigi tykkum hinar himmalsku? Og eingin er farin upp til himmalin, uttan tann, sum fór niður av himlinum, menniskjusonurin, [sum er í himlinum]. Og eins og Móses hevjaði upp ormin í oyðimørkini, soleiðis eigur menniskjusonurin at verða upphevjaður, til

tess at ein og hvør, sum trýr, skal hava ævigt lív í honum.
Jóh 3,1-15

Sunnudagur eftir tríeindardag
(Trinitatis)

1. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit biðja teg leiða og stýra hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit ikki hoyra orð títt uttan ávøkst og fara soleiðis við hinum tímiligu lutunum, at vit fyri teir gloyma hinar ævigu, men við gleði og gávumildni eftir førimuni hjálpa fátækum menniskjum, og ikki í sjálvsøkni bert hugsa um okkum sjálv. Lat okkum ikki falla í fátt og ivast um náði tína, um so er, at vit verða rakt av sorg og neyð, men seta alla vón okkara til hjálp tína og náði fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert styrki teirra, ið líta á teg. Vit biðja teg, hoyr í náði bønir okkara, tí at uttan teg kunnu vit als einki gera. Kom okkum til hjálpar við náði tíni, so at vit bæði í huga, orði og verki mega liva eftir vilja tínum og vera tær til tokka. Gev okkum at nýta gávur tínar rætt, so at vit ikki fara soleiðis við hinum tímiligu lutunum, at vit fyri teir gloyma hinar ævigu fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika

heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Man hetta vera føsta, sum mær líkar, at maður ein dag pínir seg sjálvan? At boyggja sítt høvur sum sevið og breiða undir seg sekk og øsku! Kallar tú tílíkt føstu, ein dag til at vinna sær náði Harrans? Nei, føsta, sum mær líkar, er at loysa leinkjur gudloysis og slíta bond oksans, sleppa kúgaðum leysum og sorla hvørt eitt ok, at býta sítt breyð sundur til svong, húsa neyðstøddum og heimleysum, at tú klæðir tann nakna, sum tú sært, og noktar ikki landa tínum hjálp. Tá skal ljós títt renna upp sum morgunroðin, tá munnu sár tíni skjótt verða grødd; undan tær skal rættur ganga og dýrd Harrans fylgja tær; tá man Harrin svara, tá ið tú kallar, bønhoyra neyðarróp títt og siga: „Her eri eg;“ um tú lættir av allari kúgan, av øllum spotti og illmæli, gevur tú svongum breyð títt og mettar eina maktaða sál, tá rennur ljós títt upp í myrkrinum, og bølaniðan kring teg verður alljósur dagur. Støðugt skal Harrin leiða teg og metta teg í oyðisondum; hann gevur tær kraft av nýggjum, tú verður sum vatnríkur aldingarður, sum kelduvað, har vatnið ongantíð trýtur. Tá byggir tú aftur á aldargomlum toftum, fyrndargamlar rustir reisir tú aftur; tá verður tú nevndur: „Bøtari av borgargørðum“, „Endurnýggjari av bygdavegum“. Jes 58,5-12

* *Epistulin skrivar Jóhannes ápostul í fyrsta brævi sínum:*
Guð er kærleiki, og tann, sum verður verandi í kærleikanum, verður verandi í Guði og Guð í honum. Í hesum

er kærleikin vorðin fullkomin hjá okkum, at vit hava frímóð á dómadegi; tí at, eins og hann er, soleiðis eru eisini vit í hesum heimi. Ótti er ikki í kærleikanum, men hin fullkomni kærleikin rekur út óttan; tí at ótti hevur í sær revsing; men tann, sum óttast, er ikki fullkomin í kærleikanum. Vit elska, tí at hann elskaði okkum fyrst. Um einhvør sigur: „Eg elski Guð," og hann hatar bróður sín, hann er lygnari; tí at tann, sum ikki elskar bróður sín, sum hann hevur sæð, hvussu kann hann elska Guð, sum hann ikki hevur sæð? Og hetta boðið hava vit frá honum, at tann, sum elskar Guð, eigur eisini at elska bróður sín. 1 Jóh 4,16b-21

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Jesus segði: „Men tað var ein ríkur maður; og hann klæddi seg í skarlak og fínasta lín og livdi hvønn dag í fagnaði og góðgæti. Og tað var ein fátækur, nevndur Lázarus, sum var lagdur fyri dyr hansara, fullur í sárum; og hann tráaði eftir at mettast av molunum, sum fullu av borðinum hjá hinum ríka; men eisini hundarnir komu og sloktu sár hansara. So bar á, at hin fátæki doyði, og hann varð av einglunum borin í fang Ábrahams. Og hin ríki doyði við og fór til gravar. Og tá ið hann læt eygu síni upp í helheimi, har sum hann var í pínu, sær hann Ábraham langt burtur og Lázarus í fangi hansara. Og hann rópaði og segði: „Faðir Ábraham! Miskunna mær, og send Lázarus, at hann kann drepa ytsta liðin av fingri sínum í vatn og svala tungu mína; tí at eg pínist ræðuliga í hesum loga!" Men Ábraham segði: „Minst tú til, sonur, at tú hevur notið títt góða, meðan tú livdi, og Lázarus á sama hátt hitt ónda; men nú verður hann uggaður her,

og tú pínist. Og umframt alt hetta er millum okkara og tykkara staðfest eitt óført dýpi, til tess at tey, sum vilja fara hiðani yvir til tykkara, ikki skulu kunna, og at tey haðani ikki heldur skulu fara higar til okkara.“ Men hann segði: „So biði eg teg, faðir, at tú vilt senda hann í faðirs míns hús, tí at eg eigi fimm brøður, til tess at hann kann bera vitni fyri teimum, so at teir ikki við skulu koma í henda pínustað.“ Men Ábraham sigur: „Teir hava Móses og profetarnar, lýði teir á teir!“ Men hann segði: „Nei, faðir Ábraham, men hevði onkur frá hinum deyðu komið til teirra, tá mundu teir vent um.“ Men hann segði við hann: „Lýða teir ikki á Móses og profetarnar, tá munnu teir ikki heldur taka eftir, um onkur reis upp frá deyðum.“ Luk 16,19-31

2. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú við heilaga orði tínum býður okkum til máltíðar bæði í kirkju tíni her á foldum og í æviga ríki tínum í himli. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit taka við innbjóðing tíni við gleði og ikki lata okkum forða av nøkrum verðsligum verki. Send út tænarar tínar við gleðiboðskapinum um ríki títt til øll fólkasløg, so at hús títt má verða fult og gleðin fullkomin fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við

tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum kallar okkum til máltíðar bæði í kirkju tíni her á foldum og í æviga ríki tínum í himli. Vit biðja teg, gev okkum altíð at óttast og elska heilaga navn títt, so at vit verða verandi í kærleika tínum, eru kalli tínum lýðin og fylgja syni tínum í kærleika og góðum gerðum, honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Harri herliðanna man á hesum fjalli tilbúgva øllum tjóðum veitslu, veitslu við krásum og gomlum víni, veitslu við feitum krásum og gomlum, skírum víni; hann skal á hesum fjalli taka burtur skýluna, sum hylur allar tjóðir, og slørið, sum liggur yvir øllum heidningafólkum; deyðan ger hann til einkis um allar ævir; og Harrin drottin skal turka tárini av hvørjum andliti og taka burtur vanvirðing fólks síns um alla jørðina, so satt sum Harrin hevur talað. Á tí degi verður sagt: Sí, her er Guð vár, sum vit troystaðu á, hetta er Harrin, vón okkara! Latið okkum fegnast og gleðast yvir frelsu hans. Jes 25,6-9

* *Epistulin skrivar Jóhannes ápostul í fyrsta brævi sínum:*
Undrist ikki, brøður mínir, um at heimurin hatar tykkum. Vit vita, at vit eru komnir frá deyðanum yvir til lívið, tí at vit elska brøðurnar; tann, sum ikki elskar, verður

verandi í deyðanum. Hvør tann, sum hatar bróður sín, er manndrápari, og tit vita, at eingin manndrápari hevur ævigt lív verðandi í sær. Av hesum kenna vit kærleikan, at hann læt lívið fyri okkum; so eiga vit eisini at lata lívið fyri brøðurnar. Men tann, sum hevur heimsins góðs og sær bróður sín líða neyð og letur hjarta sítt aftur fyri honum, hvussu kann tá kærleiki Guðs verða verandi í honum? Børn míni, latum okkum ikki elska við orði og ikki elska við tungu, men í verki og sannleika. 1 Jóh 3,13-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Jesus segði: „Tað var ein maður, sum gjørdi eina stóra kvøldmáltíð og beyð mongum; og hann sendi út húskall sín um ta tíðina, tá ið kvøldmáltíðin skuldi verða hildin, at siga við teir, ið bodnir vóru: „Komið, tí at nú er alt tilgjørt!“ Men teir fóru allir sum ein at umbera seg. Hin fyrsti segði: „Eg havi keypt nakra jørð, og eg noyðist at fara út og hyggja at henni; eg biði teg halda mær til góða!“ Og annar segði: „Eg havi keypt fimm pør av oksum og fari nú út at royna teir; eg biði teg halda mær til góða!“ Og uppaftur ein annar segði: „Eg eri beint nú giftur, og tí kann eg ikki koma.“ Og húskallurin kom og segði harra sínum frá hesum. Tá varð húsbóndin vreiður og segði við húskallin: „Skunda tær og far út um gøtur og stræti í staðinum, og leið inn higar fátæk og kryplingar og blind og hølt.“ Og húskallurin segði: „Harri, gjørt er, sum tú skipaði fyri, og enn er rúm.“ Tá segði húsbóndin við húskallin: „Far út á bygdavegirnar og út at gørðunum, og noyð tey at koma inn, fyri at hús mítt kann verða fult. Tí at eg sigi tykkum, at eingin av teimum monnum, ið

bodnir vóru, skal smakka kvøldmáltíð mína.“ Luk 14,16-24

3. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit játta fyri tær, at vit sum vilstir seyðir hava latið okkum føra burtur av rættum vegi. Vit biðja teg, ver okkum náðigur. Vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum og leið okkum aftur á rætta kós. Hjálp okkum at halda fast við orð títt, so at vit í sannari trúgv verða varðveitt í kirkjuliði tínum til síðstu stund hjá okkum og at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum í náði tíni og kærleika leitar upp hitt burturfarna, og ert verndari og skjøldur teirra, sum líta á teg. Vit biðja teg, ver okkum miskunnsamur og vegleið okkum við heilaga anda tínum, so at vit ikki fara soleiðis við hinum tímiligu lutunum, at vit fyri teir missa hinar ævigu, sum tú hevur tilbúgvið okkum, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Tí at so sigur hin hátt hevjaði, sum valdið hevur um ævir og eitur hin heilagi: Eg búgvi á høgum, heilagum staði, hjá hinum sundurbrotna, hvørs hugur er niðurnívdur, til tess at lívga hug hinna niðurnívdu og hjarta hinna sundurbrotnu. Tí at eg seti ikki ævinliga at og reiðist ikki um allar ævir, annars mundi andin ørmaktast fyri mær, tær sálir, sum eg sjálvur havi skapað. Vegna misgerð hansara reiddist eg um bil og sló hann og fjaldi í vreiði mítt andlit; hann gekk í fráfalli sínar egnu leiðir. Eg sá vegir hans; men nú vil eg grøða og leiða hann og endurgjalda honum við miskunn; hjá øllum, ið syrgja, skapi eg varranna ávøkst; frið, ja, miklan frið eg veiti bæði teimum í nánd og teimum í fjarlegd, sigur Harrin; nú vil eg grøða hann. Jes 57,15-19

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum:*
Eyðmýkið tykkum tí undir Guðs veldigu hond, fyri at hann á sínum tíma má upphevja tykkum. Kastið alla sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum. Verið ódruknir, vakið! Mótstøðumaður tykkara, djevulin, gongur um sum ein ýlandi leyva, leitandi eftir tí, sum hann kann gloypa. Standið honum ímót, treystir í trúnni, við tað at tit vita, at tær somu líðingar henda brøður tykkara um allan heimin. Men Guð alrar náðar, sum kallaði tykkum til sína ævigu dýrd í Kristi Jesusi, aftan á líðing eina stutta tíð, hann skal sjálvur gera tykkum fulldugandi, menna, styrkja, grundfesta tykkum. Hansara er mátturin um aldur og allar ævir. Amen. 1 Pæt 5,6-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men allir tollarar og syndarar hildu seg nær at honum fyri at lýða á hann. Og bæði Farisearanir og hinir skriftlærdu knarraðu og søgdu: „Hesin fagnar syndarum og etur saman við teimum.“ Men hann talaði hetta líknilsi til teirra og segði: „Hvør tykkara, sum hevur hundrað seyðir og hevur mist ein teirra, letur ikki teir níggju og níti vera eftir í haganum og fer at leita eftir tí burturmista, inntil hann finnur hann? Og tá ið hann hevur funnið hann, leggur hann hann fegin á herðarnar; og tá ið hann kemur heim, kallar hann saman vinmenn sínar og grannar og sigur við teir: „Samgleðist við mær, tí at eg havi funnið seyð mín, sum burtur farin var.“ Eg sigi tykkum: Soleiðis skal verða meiri gleði í himni um ein syndara, sum vendir um, enn um níggju og níti rættvís, sum ikki hava umvending fyri neyðini. Ella hvør kona, sum hevur tíggju drakmur og missir eina drakmu, tendrar ikki ljós og sópar húsið og leitar væl, inntil hon finnur hana? Og tá ið hon hevur funnið hana, kallar hon saman vinkonur sínar og grannkonur og sigur: „Samgleðist við mær; tí at eg havi funnið ta drakmuna, sum eg misti.“ Soleiðis, sigi eg tykkum, verður gleði hjá Guðs einglum um ein syndara, sum vendir um.“ Luk 15,1-10

4. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum ert miskunnsamur og við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur lovað okkum, at tú ikki vilt døma ella fordøma okkum, men í náði fyrigeva okkum allar syndir okkara og fegin geva okkum tað, sum okkum er tørvur á. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt gera trúnna á hesa miskunn tína fasta og livandi í hjørtum okkara. Lær eisini okkum at sýna miskunn ímóti næsta okkara, so at vit ongan døma ella fordøma, men døma okkum sjálv, fegin fyrigeva hvør øðrum og liva saman í kærleika í trúnni á teg fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, miskunnsami faðir, tú, sum ert harri yvir øllum lutum og hevur alt valdið í himli og á jørð. Vit biðja teg, gev frið og semju á foldum, so at kirkja tín í friði og gleði, miskunn og kærleika má tilbiðja teg og tæna tær av heilum hjarta, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í seinnu Sámuelsbók:
Tá ið kona Uria frætti, at maður hennara var deyður, læt hon hevja harmljóð eftir hann. Men tá sorgardagarnir vóru lidnir, læt Dávid hana koma í hús sítt; hon varð tá kona hans og føddi honum son; men Harranum líkaði illa tað, sum Dávid hevði gjørt. Tá sendi Harrin Nátan til Dávids, og tá ið hann kom til hansara, segði hann við hann: „Tveir menn búðu í somu bygd; annar var ríkur og hin fátækur. Hin ríki átti nógv bæði av smalum og stórdýrum. Men hin fátæki átti einki uttan eitt lítið gimburlamb, sum hann hevði keypt og alt upp; tað vaks upp saman við børnum hansara; tað át av breyðbita hansara og drakk av bikari hansara, svav við barm hansara og var honum eins og dóttir. Tá ið hin ríki einaferð fekk vitjan av vallara, troystaði hann sær ikki at taka nakað av smalum og stórdýrum sínum til tess at matgera fyri ferðamanninum, ið var komin til hansara; men hann tók gimburlambið hjá hinum fátæka og gav gesti sínum tað til matna.“ Tá varð Dávid ógvuliga illur inn á mannin og mælti við Nátan: „So satt sum Harrin livir, eigur tann maður at láta lív, ið tílíkt hevur gjørt! Og lambið skal hann endurgjalda fjórfalt aftur fyri henda miskunnarleysa atburð sín!“ Men Nátan segði við Dávid: „Tú ert maðurin.“ 2 Sám 11,26-12,1-7a

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Tí at eg haldi tað, at líðingarnar í tíðini, sum nú er, einki eru aftur ímót teirri dýrd, sum skal verða opinberað á okkum. Tí at tráan skapningsins bíðar eftir opinbering Guðs barna. Tí at skapningurin er lagdur undir fáfongd-

ina, – ikki við sínum vilja, men fyri hansara skuld, sum legði hann undir hana, – í vón um, at eisini sjálvur skapningurin skal verða loystur úr trældómi forgongiligleikans til dýrdarfrælsis Guðs barna. Tí at vit vita, at allur skapningurin stynjar tilsaman og hevur føðingarverkir tilsaman líka til nú. Ja, ikki bert hann; men eisini vit, sum hava frumgróður andans, eisini vit stynja við okkum sjálvum, við tað at vit bíða eftir sonarættinum, endurloysing likams okkara. Róm 8,18-23

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Jesus segði: „Verið miskunnsom, eins og faðir tykkara er miskunnsamur. Og dømið ikki, tá skulu tit ikki verða dømd. Og fordømið ikki, tá skulu tit ikki verða fordømd. Umberið, tá skal tykkum verða umborið. Gevið, tá skal tykkum verða givið; eitt gott, stappað, stungið, høgrokað mál skulu tey geva tykkum í fang; tí at við tí máli, sum tit mála, skal tykkum aftur verða mált.“ Men hann segði teimum eisini eitt líknilsi: „Man blindur fáa leitt blindan? Munnu teir ikki báðir falla í veitina? Ikki er ein lærusveinur yvir meistara sínum; men ein og hvør, sum er fulllærdur, skal verða sum meistari hansara. Men hví sært tú flísina, sum er í eyganum á bróður tínum, men bjálkan í tínum egna eyga verður tú ikki varur við? Ella hvussu kanst tú siga við bróður tín: Bíða, bróðir, lat meg taka flísina út úr eyga tínum; tú sum sjálvur ikki sært bjálkan í tínum egna eyga? Tín falsari, tak fyrst bjálkan út úr tínum egna eyga, og tá skalt tú síggja væl at taka flísina út úr eyganum á bróður tínum.“ Luk 6,36-42

5. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur givið okkum títt heilaga orð og alskyns tímiliga signing. Vit viðganga við Símun Pæturi, at vit eru óverdig til at taka ímóti øllum hesum. Men vit biðja teg, fyrigev okkum syndir okkara og ger okkum til tænarar tínar. Gev okkum lukku og signing í kalli okkara. Halt okkum uppi og varðveit okkum bæði nú og altíð, so at vit allar ævir mega lova og prísa tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum kallar okkum til tænastu og hevur tilbúgvið teimum, ið teg elska, signing og dýrd, sum einki eyga hevur sæð. Vit biðja teg, gev okkum kærleikans anda í hjørtu okkara, so at vit í øllum lutum og yvir allar lutir elska teg og at enda fáa lut í lyftum tínum, ið bera av øllum tí, sum vit tráa eftir, hina ævigu sælu, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Tað árið, tá ið Uzzia kongur doyði, sá eg Harran sitandi á høgum hásæti, hátt hevjaðan, og sleipið av skikkju hansara fylti halgidómin; kring hann stóðu seráfar, hvør teirra hevði seks veingir; við tveimum huldu teir andlitið, við tveimum huldu teir føturnar, og við tveimum hildu teir sær á flogi. Og teir kallaðu hvør til annan og søgdu: „Heilagur, heilagur, heilagur er Guð herliðanna, jørðin øll er full av dýrd hans!“ Fyri rødd teirra skulvu durastavirnir, og húsið fyltist av royki. Tá segði eg: „Vei mær! Eg beri ikki boð í bý! Tí at eg eri maður við óreinum vørrum og búgvi mitt í fólki við óreinum vørrum; og nú havi eg við egnum eygum sað kongin, Harra herliðanna.“ Ein av seráfunum kom tá fljúgvandi til mín; í hondini hevði hann glóð, sum hann við klova hevði tikið av altarinum. Hana læt hann nerta við munn mín og mælti: „Sí, hon hevur nortið við varrar tínar; nú er misgerð tín burtur og synd tín fyrigivin.“ Síðan hoyrdi eg rødd Harrans, ið segði: „Hvønn skal eg senda? Hvør vil vera ørindreki okkara?“ Og eg svaraði: „Her eri eg – send meg!“ Jes 6,1-8

* *Epistulin skrivar Pætur ápostul í fyrra brævi sínum:*
Til endans, verið allir samhugaðir, samlíðandi, blíðir við brøðurnar, miskunnsamir, eyðmjúkir. Gjaldið ikki ilt fyri ilt ella deilan fyri deilan; men tvørtur ímót, vælsignið heldur, tí at til tess eru tit kallaðir, at tit skulu arva signing. Tí at tann, sum vil elska lívið og síggja góðar dagar, skal varða tungu sína frá illum og varrarnar frá at tala fals, hann víki frá tí illa og geri tað góða, hann søki frið

og stundi eftir honum! Tí at Harrans eygu eru yvir teimum rættvísu, og oyru hansara vend til teirra bøn; men Harrans ásjón er vend ímót teimum, sum ilt gera. Og hvør er tann, sum kann gera tykkum ilt, tá ið tit eru ágrýtnir fyri tí góða? Men um tit eisini skuldu liðið fyri rættvísi skuld, tá eru tit sælir. Havið ongan ótta fyri teimum og ræðist ikki; men halgið Krist sum Harran í hjørtum tykkara. 1 Pæt 3,8-15a

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men tað bar á, meðan mannamúgvan tyrptist um Jesus og lýddi á Guðs orð, og hann var staddur við Genesaret vatnið, at hann sá tveir bátar liggja í fjøruni, men útróðrarmenninir vóru farnir burtur frá teimum og sótu og reinskaðu gørnini. Og hann fór tá inn í annan bátin, sum Símun átti, og bað hann leggja eitt sindur út frá landi; og hann settist tá niður og lærdi mannfjøldina úr bátinum. Men tá ið hann var hildin uppat at tala, segði hann við Símun: „Legg út á dýpið, og setið gørn tykkara út eina setu!“ Og Símun svaraði og segði: „Meistari, vit hava roynt alla nátt og einki fingið; men eftir tínum orði vil eg seta gørnini út aftur.“ Og tá ið teir hetta gjørdu, fingu teir eina stóra mongd av fiski í; men gørnini hjá teimum skrædnaðu. Og teir veittraðu eftir lagsmonnum sínum á hinum bátinum at koma og hjálpa sær; og teir komu, og teir fyltu upp í báðar bátarnar, so at teir vóru søkkladnir. Men tá ið Símun Pætur hetta sá, fell hann Jesusi til kníggja og segði: „Far frá mær, Harri, tí at eg eri ein syndigur maður!“ Tí at ræðsla var komin á hann og á allar teir, sum við honum vóru, av hesi fiskaveiði, sum teir høvdu fingið; og somuleiðis eisini á Jákup og Jóhannes,

synir Sebedeusar, sum vóru lagsmenn Símunar. Og Jesus segði við Símun: „Óttast ikki, hereftir skalt tú veiða menn!“ Og teir drógu bátarnar upp á land og fóru frá øllum og fylgdu honum. Luk 5,1-11

6. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit viðganga fyri tær, at vit uttan náði tína og miskunn aldri kunnu koma inn í himmiríkis ríki. Tí biðja vit teg, fyrigev okkum allar syndir okkara. Reinsa hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit mega hava hug og kærleika til orð títt, liva eftir tí, og at enda av náði tíni verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum gevur allar góðar gávur. Vit biðja teg, legg kærleikan til heilaga navn títt í hjørtu okkara og gev okkum at vaksa í trúgv og gudsótta, so at einki forðar okkum í at fylgja tær. Fullfør í kærleika tínum tann góða gerning, sum tú hevur byrjað í okkum, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fimtu Mósebók:
Móses stevndi saman øllum Ísraelsfólki og mælti við tey: „Tí at hetta boð, sum eg í dag leggi fyri teg, er tær ikki ov torskilið ella fjarlagið. Tað er ikki uppi í himninum, so at tær er tørvur at siga: „Hvør vil fara fyri okkum upp í himinin og søkja okkum tað haðan og kunngera okkum tað, so at vit mega gera eftir tí.“ Heldur ikki er tað handan havið, so at tær er tørvur á at siga: „Hvør vil fara fyri okkum yvir um havið og flyta okkum tað higar og kunngera tað fyri okkum, so at vit mega gera eftir tí.“ Nei, orðið er tætt hjá tær, í munni og hjarta tínum, so at tú kanst gera eftir tí.“ 5 Mós 29,2a og 30,11-14

⋆ *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Ella vita tit ikki, at øll vit, sum doypt eru til Krist Jesus, eru doypt til deyða hansara. Vit eru tí grivin við honum við dópinum til deyðans, til tess at eins og Kristus varð vaktur upp frá deyðum við dýrd faðirsins, soleiðis skulu vit eisini ganga í nýggjum levnaði. Tí at eru vit vorðin samgrógvin við hann í líkingini við deyða hansara, tá skulu vit eisini verða tað í líkingini við uppreisn hansara, við tað at vit vita hetta, at okkara gamla menniskja er krossfest við honum, fyri at syndalikamið skuldi verða til einkis, so at vit ikki longur skulu tæna syndini; tí at tann, sum deyður er, er rættvísgjørdur frá syndini. Men eru vit deyð við Kristi, trúgva vit tí, at vit eisini skulu liva við honum, við tað at vit vita, at Kristus, vaktur upp frá deyðum, doyr ikki meir; deyðin hevur ikki longur vald á honum. Tí at tað, at hann doyði, doyði hann eina ferð fyri syndina; men tað, at hann livir, livir hann fyri Guði.

Soleiðis skulu tit eisini halda tykkum sjálv vera deyð fyri syndini, men livandi fyri Guði í Kristi Jesusi. Róm 6,3-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Tí at eg sigi tykkum, at um rættvísi tykkara ikki ber av rættvísi teirra skriftlærdu og Farisearanna, koma tit als ikki inn í himmiríki. Tit hava hoyrt, at tað hevur verið sagt við teir gomlu: „Tú mást ikki sláa í hel; men hvør tann, ið slær í hel, skal verða sekur fyri dóminum.“ Men eg sigi tykkum, at hvør, ið er vreiður inn á bróður sín, skal verða sekur fyri dóminum; og hvør, ið sigur við bróður sín: Raka (t.e. armingi), skal verða sekur fyri ráðinum; og hvør, ið sigur: More (t.e. dári), skal verða sekur til helvitis eld. Um tú tí bert fram gávu tína á altarið, og tað har kemur tær í huga, at bróðir tín hevur okkurt ímóti tær, so lat gávu tína verða liggjandi har framman fyri altarinum og far fyrst avstað og verð samdur við bróður tín og kom síðan og ber fram gávu tína. Ver skjótur til sættis við mótstøðumann tín, meðan tú ert enn við honum á leið, fyri ta søk at ikki mótstøðumaðurin skal lata teg til dómarans og dómarin til sveinsins og tú verða koyrdur í fangahús. Sanniliga sigi eg tær: Ikki skalt tú sleppa út aftur haðani, fyrr enn tú hevur rindað títt seinasta oyra.“ Matt 5,20-26

7. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, mettaði hin hungrandi skaran við sjey breyðum og nøkrum fáum fiskum. Vit biðja teg, ver eisini miskunnsamur hjá okkum við signing tíni, og hjálp okkum at nýta gávur tínar rætt. Varða okkum fyri gírni og tímiligari stúran, so at vit fyrst søkja ríki títt og rættvísi tína og av náði tíni fáa at kenna faðirligu umsorgan tína í øllum, sum okkum er tørvur á bæði til likams og sálar fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum í guddómligu og faðirligu umsorgan tíni aldri svíkur. Vit biðja teg, tak burtur alt tað, ið er okkum at meini og gev okkum tað, sum er okkum til lívs og sælu fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:

Halleluja! Gott tað er at leika fyri Guði várum, tí yndisligt tað er, og lovsongur væl høvir. Harrin byggir upp Jerúsalem og savnar saman tey sundurspjaddu av Ísrael.

Hann lekir tey, ið hava eitt sundurbrotið hjarta, og bindur um teirra sár. Hann talið á stjørnunum telur og kallar tær allar við navni. Mikil er drottin vár og stórur í veldi, einki er mark fyri vísdómi hans. Harrin heldur teim eyðmjúku uppi, men gudleysar nívir til jarðar hann niður. Fyri Harranum syngið við takkarsongi, leikið á saltri fyri Guði várum! Hann himmalin hylur við skýum, hann regn reiðir jørðini til, hann gras letur spretta á fjøllum. Hann djórunum gevur føðslu teirra og ravnsungunum, tá ið teir rópa. Hann hevur ei yndi til styrkleika hestsins, hevur ei tokka á beinum mansins. Harrin hevur tokka á teimum, ið hann óttast, teimum, ið bíða miskunnar hans. Sl 147,1-11

** Epistulin skrivar Jákup ápostul:*
Um ein bróðir ella ein systir eru nakin, og teimum vantar dagliga føði, og einhvør tykkara sigur við tey: „Farið í friði, vermið tykkum og etið tykkum mett!“ men tit ikki geva teimum tað, sum likaminum tørvast, hvat gagnar tað? Líkaleiðis eisini trúgvin; um hon ikki hevur gerningar, er hon deyð í sjálvari sær. Men einhvør kann siga: „Tú hevur trúgv, og eg havi gerningar; sýn mær trúgv tína uttan gerningarnar, og eg skal sýna tær trúnna av gerningum mínum! Ják 2,15-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur:
Um hetta leitið, tá ið aftur stór mannamúgva var saman komin, og tey einki høvdu at eta, rópar hann lærusveinarnar til sín og sigur við teir: „Mær tykir hjartaliga synd í hesi mannamúgvu, tí at í tríggjar dagar hava tey nú dvølt her hjá mær, og einki hava tey at eta. Og lati eg tey fara fast-

andi avstað heim til sín, tá munnu tey fáa maktarloysi á veginum, og summi av teimum eru komin langan veg.“ Og lærusveinar hansara svaraðu honum: „Hvaðani skal nakar her í oyðimørk kunna metta hesi við breyði?“ Og hann spurdi teir: „Hvussu mong breyð hava tit?“ Men teir søgdu: „Sjey.“ Og hann býður mannamúgvuni at seta seg niður á jørðina; og hann tók tey sjey breyðini, takkaði og breyt tey sundur og fekk lærusveinum sínum tey, at teir skuldu bera tey um; og teir bóru tey um í mannamúgvuni. Og teir høvdu nakrar fáar smáfiskar, og hann vælsignaði teir og segði, at teir eisini skuldu verða bornir um. Og tey fingu sær at eta og vórðu mett; og teir hentaðu upp í sjey tægur av molum, ið vóru til avlops. Men tey vóru okkurt um fýra túsund. Og hann læt tey fara avstað. Mark 8,1-9

8. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú letur okkum hoyra tín heilaga orð, sum er ein Guðs kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr. Vit biðja teg, ger hetta orð títt livandi í hjørtum okkara og lat tað bera ávøkst til ævigt lív. Gev okkum nú og altíð trúfastar orðsins tænarar, sum boða orð títt reint og rætt, og varðveit teir í náði tíni. Verj okkum ímóti følskum lærdómi og tómari gudsdyrkan, so at kirkja tín má verða

varðveitt óvikandi á hini føstu grund orðs tíns fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum elskar rættlæti, men stendur trúleysum ímót. Vit biðja teg, ver okkum náðigur og gev okkum av mildni tíni heilaga anda tín, so at vit, sum uttan teg einki megna, altíð mega stunda á tað, ið rætt er, og fáa styrki til at liva eftir vilja tínum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:
So sigur Harri herliðanna: Lurtið ikki eftir profetunum, ið profetera fyri tykkum; teir tøla tykkum við talu um sjónir, sum teir sjálvir hava upphugsað og ikki fingið frá Harranum. Við teir, ið havna orði Harrans, siga teir: Tykkum skal alt vignast væl! Og við hvønn, sum fer eftir treiski hjarta síns: Teg skal einki ilt raka! Tí at hvør hevur tikið lut í ráðagerð Harrans og sað og hoyrt orð hans? Hvør hevur gáað eftir orði hans og hoyrt tað? Sí, Harrans vreiði er sum stormur á ferð, sum hvirlur, ið mala um høvur hinna gudleysu! Ikki skal bræði Harrans lætta av, fyrr enn hjartans hugsanir hans eru evnaðar og framdar; tá ið síðstu dagar koma, skulu tit skilja tað. Eg havi ikki sent profetarnar, og kortini renna teir; eg havi ikki talað til teirra, og kortini profetera teir! Um teir høvdu staðið í

ráði mínum og hoyrt orð míni, tá høvdu teir fingið fólk mítt burtur av teirra vánda vegi og frá illverkum teirra. Eri eg tá einans Guð í námindu, sigur Harrin, og ikki Guð í fjarlegd? Kann nakar krógva seg burtur, so at eg ikki síggi hann? sigur Harrin. Er tað ikki eg, sum fylli himin og jørð? sigur Harrin. Jer 23,16-24

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
So standa vit tá, brøður, ikki í skuld til holdið, so at vit skuldu liva eftir holdinum. Tí at liva tit eftir holdinum, tá skulu tit doyggja; men deyða tit við andanum gerningar likamsins, tá skulu tit liva. Tí at so mong, sum verða leidd av anda Guðs, tey eru Guðs børn. Tí at ikki fingu tit trældómsanda aftur til ræðslu, men tit fingu sonarætt-aranda, sum vit rópa í: Abba, faðir! Sjálvur andin vitnar saman við anda okkara, at vit eru Guðs børn. Men eru vit børn, tá eru vit eisini arvingar, og tað Guðs arvingar, og Krists samarvingar, so framt sum vit líða við honum, til tess at vit eisini skulu verða dýrmett við honum. Róm 8,12-17

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Ápostlasøguni:
Men eg meti lív mítt einkis vert fyri meg sjálvan, um eg bara má fullføra skeið mítt og ta tænastuna, sum eg fekk frá Harranum Jesusi: at vitna um gleðiboðskapin um Guðs náði. Og nú, sí, eg veit, at tit ikki meira skulu síggja andlit mítt, allir tit, sum eg gekk ímillum og boðaði ríkið. Tess vegna vitni eg fyri tykkum henda dagin í dag, at eg eri reinur fyri alra manna blóð; tí at eg bar meg ikki undan at boða tykkum alt Guðs ráð. Gevið gætur um

tykkum sjálvar og um alt tað fylgið, sum heilagi andin hevur sett tykkum sum tilsjónarmenn fyri, til at røkta Harrans kirkjulið, sum hann hevur vunnið sær við sínum egna blóði. Eg veit, at aftan á burturferð mína skulu koma inn millum tykkara villir vargar, sum ikki eira fylginum; og frá tykkum sjálvum munnu menn stíga upp, sum tala tað, ið øvugt er, fyri at lokka lærusveinarnar aftan á seg. Vakið tí, og minnist til, at eg í trý ár, nátt og dag, ikki havi hildið uppat við tárum at áminna ein og hvønn. Og nú gevi eg tykkum yvir til Guðs og náðiorðs hansara, hann sum er mentur at uppbyggja tykkum og geva tykkum arvalut saman við øllum teimum, sum halgað eru. Eg havi ikki girnast silvur ella gull ella klæði hjá nøkrum manni. Tit vita sjálvir, at hesar hendur hava arbeitt fyri alt tað, sum mær sjálvum var tørvur á og teimum, sum við mær vóru. Í øllum lutum sýndi eg tykkum, at soleiðis eiga vit at arbeiða og vera teimum veiku til hjálpar og minnast orð Harrans Jesu, at hann sjálvur hevur sagt: „Sælari er at geva enn at taka.“ Áps 20,24-35

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Varið tykkum fyri svikaprofetum, ið koma til tykkara í seyðaklæðum, men eru óðir úlvar innan. Av fruktum teirra skulu tit kenna teir. Man nakar henta vínber av tornum ella fikur av tistlum? Soleiðis ber hvørt gott træ góðar fruktir; men hitt ringa træið ber ringar fruktir. Eitt gott træ kann ikki bera ringar fruktir, og ei heldur kann eitt ringt træ bera góðar fruktir. Hvørt tað træ, ið ikki ber góða frukt, verður høgt av og kastað í eldin. Tí skulu tit kenna teir av fruktum teirra. Ikki hvør tann, ið sigur til mín: „Harri, harri,“ skal koma inn í

himmiríkið; men tann, ið ger vilja faðirs míns, sum er í himlunum. “ Matt 7,15-21

9. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum vælsignar arbeiði okkara og gevur okkum dagligt breyð. Vit biðja teg, varða okkum fyri gírni og vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit gávumild og við gleði geva øðrum menniskjum lut í tí, sum tú vælsignar okkum við, og soleiðis roynast trúgvir húshaldarar yvir tínum margfaldu gávum. Gev okkum, tá ið vit verða sett frá hesum húshaldi og førd fram fyri dóm tín, av náði tíni at verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, vit leita fram fyri ásjón tína og biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara. Hjálp okkum at tæna tær við trúfesti og at nýta gávur tínar rætt. Lær okkum at biðja um tað, ið tær er til tokka, so at tú kanst geva okkum tað, sum vit biðja um, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Orðtøkunum:
Synja ikki honum nakað gott, ið tað tørvar, um tað er í tínum valdi at gera tað. Sig ikki við næsta tín: „Far og kom aftur, í morgin skal eg geva tær“ – um tú eigur tað til. Hugsa ikki um ilt móti næsta tínum, meðan hann situr hjá tær tryggur. Deil ikki við nakran uttan orsøk, um hann ikki hevur gjørt tær nakað mein. Øvunda ikki yvirgerðarmannin, og vel tær ongan av øllum vegum hans. Tí at ein falsari er Harranum ein andstygd, men við teir rættsintu hann samfelag hevur. Banning Harrans er í húsi hins gudleysa, men bústað teirra rættvísu signar hann. Spottarar spottar hann, men eyðmjúkum gevur hann náði. Vísir munnu heiður vinna, men dárar fáa skomm til býtis. Orðt 3,27-35

* *Epistulin skrivar Jóhannes ápostul í fyrsta brævi sínum:*
Og hetta er tann boðskapur, sum vit hava hoyrt av honum og boða tykkum, at Guð er ljós og at myrkur als ikki er í honum. Um vit siga, at vit hava samfelag við hann, og ganga í myrkrinum, tá ljúgva vit og gera ikki sannleikan. Men um vit ganga í ljósinum, eins og hann er sjálvur í ljósinum, tá hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd. Um vit siga, at vit ikki hava synd, tá svíkja vit okkum sjálv, og sannleikin er ikki í okkum. Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi. Um vit siga, at vit ikki hava syndað, tá gera vit hann til lygnara, og orð hansara eru ikki í okkum. Børn míni! Hetta skrivi eg til tykkara, fyri at tit ikki skulu synda. Og

tó at onkur syndar, tá hava vit ein talsmann hjá faðirinum, Jesus Krist hin rættvísa, og hann er bót fyri syndir okkara; tó ikki bert fyri okkara, men eisini fyri syndirnar í øllum heiminum. 1 Jóh 1,5-2,1-2

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men Jesus segði eisini við lærusveinarnar: „Eina ferð var tað ein ríkur maður, sum hevði ein húshaldara; og hann varð klagaður fyri honum, at hann forkom ognum hansara. Og hann rópaði hann og segði við hann: „Hvat er hetta, sum eg hoyri um teg? Legg fram roknskapin fyri húshald títt, tí at tú kanst ikki standa fyri húshaldinum longur!“ Men húshaldarin segði við sær sjálvum: „Hvat skal eg gera, við tað at húsbóndi mín tekur húshaldið av mær? At velta eri eg ikki mentur, at bidda komi eg mær ikki. Nú veit eg, hvat eg skal gera, fyri at tey skulu taka meg í hús síni, tá ið eg verði avsettur frá húshaldinum.“ Og hann kallaði til sín hvønn tann einasta av teimum, sum vóru í skuld hjá húsbónda hansara, og segði við hin fyrsta: „Hvussu mikið skyldar tú húsbónda mínum?“ Men hann segði: „Hundrað føt av olju.“ Og hann segði við hann: „Tak bræv títt og set teg niður og skriva sum skjótast fimmti.“ Síðan segði hann við ein annan: „Og hvussu nógv skyldar tú?“ Og hann segði: „Hundrað tunnur av hveiti.“ Hann sigur við hann: „Tak bræv títt og skriva áttati.“ Og húsbóndin rósaði tí órættvísa húshaldaranum fyri tað, at hann hevði borið seg klókliga at. Tí at børnini at hesum heimi eru klókari viðvíkjandi teirra egnu ætt enn børnini at ljósinum. Og eg sigi tykkum: Gerið tykkum vinir við hinum órættvísa mammon, til tess at teir, tá ið hann

trýtur, mega fagna tykkum í hinum ævigu heimbýlum. Luk 16,1-9

10. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur opinberað okkum, hvat ið er okkum til friðar. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit av sonnum hoyra orð títt og ikki lata tað ljóða út í tóman heim ella hoyra tað uttan ávøkst, men halda fast við tað, liva eftir tí og dagliga vaksa í trúnni á miskunn tína fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum fram um alt sýnir almátt tín við at fyrigeva og sýna miskunn. Vit biðja teg, ver eisini okkum miskunnsamur og lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit ikki vraka náði tína, men eru kalli tínum lýðin, og í trúnni á lyfti tíni fáa lut í himmalsku signing tíni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fimtu Mósebók:
Hoyr, Ísrael, Harrin, Guð vár, Harrin er einastur! Og tú skalt elska Harran, Guð tín, av øllum hjarta tínum, av allari sál og øllum mátti tínum. Hesi boðorð, sum eg í dag leggi fyri teg, skulu vera í hjarta tínum; og tey skalt tú leggja børnum tínum eina við og bera tey upp á mál, bæði tá ið tú situr heima við hús, og tá ið tú gongur úti, bæði tá ið tú leggur teg, og tá ið tú fert upp. Tú skalt binda tey sum tekin á hond tína og hava tey sum áminningarmerki á enni tínum; og tú skalt skriva tey á durastavirnar í húsi tínum og á borgarlið tíni. 5 Mós 6,4-9

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:*
Men viðvíkjandi hinum andligu gávunum, brøður, vil eg ikki, at tit skulu vera óvitandi. Tit vita, at meðan tit vóru heidningar, tá vórðu tit drignir at hinum málleysu skurðgudunum, alt sum tit vórðu drignir. Tí kunngeri eg tykkum, at eingin, sum talar av Guðs anda, sigur: „Bannaður er Jesus!“ og eingin kann siga: „Jesus er Harri,“ uttan av heilagum anda. Tað er munur á náðigávum, men andin er hin sami; og tað er munur á tænastum, og harrin er hin sami; og tað er munur á kraftargerðum, men Guð er hin sami, sum virkar alt í øllum. Men opinbering andans verður einum og hvørjum givin til tað, sum gagnligt er. Einum verður soleiðis givin við andanum vísdóms tala, øðrum kunnskapar tala eftir hinum sama anda; øðrum trúgv í sama anda; øðrum gávur til at grøða í hinum eina anda; øðrum at útinna kraftargerðir; øðrum profetagáva; øðrum at døma um andar; øðrum ymis tungutala; øðr-

um týðan av tungutalu. Men alt hetta virkar hin eini og sami andin, sum býtir sundur til ein og hvønn fyri seg eftir vild síni. 1 Kor 12,1-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tá ið Jesus kom nærri og sá staðin, græt hann um hann og segði: „Hevði tú tó eisini vitað, enntá á hesum degi tínum, hvat ið er tær at friði! Men nú er tað fjalt fyri eygum tínum. Tí at dagar skulu koma á teg, tá ið fíggindar tínir skulu laða upp eitt virki rundan um teg og kringseta teg og søkja at tær úr øllum ættum; og teir skulu slætta teg við jørðina og børn tíni í tær og ikki lata stein eftir á steini í tær, av teirri søk at tú ikki kendi vitjunartíð tína.“ Og hann gekk inn í halgidómin og tók at koyra út teir, sum har seldu, og segði við teir: „Skrivað stendur: „Og hús mítt eigur at vera eitt bønhús; men tit hava gjørt tað til eitt ránsmannaføli.““ Og hann lærdi dagliga í halgidóminum. Men høvuðsprestarnir og hinir skriftlærdu og teir mætastu menninir av fólkinum royndu at fáa hann tiknan av døgum. Men teir kundu ikki finna út, hvat teir skuldu gera, tí at alt fólkið hekk uppi í honum og lýddi á hann. Luk 19,41-48

11. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit biðja teg, at tú við

heilaga anda tínum vilt upplýsa og leiða okkum soleiðis, at vit ikki gloyma syndasekt okkara og gerast hugmóðig, men av hjarta angra syndir okkara, dag frá degi betra okkum og eina ugga okkum við, at tú vilt vera okkum miskunnsamur, fyrigeva okkum allar syndir okkara og gera okkum sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum í æviga kærleika tínum ert syndarum náðigur og veitir okkum, ið til tín leita, langt út um tað, sum vit hava uppiborið og biðja um. Vit biðja teg, ver okkum miskunnsamur og tak burtur alt tað, ið nívir samvitsku, huga og sinni. Gev okkum tað umframt, sum vit ikki duga ella hava dirvi at biðja um, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Jobsbók:
Nei, eg vildi leitað til Guðs og lagt málevni mítt fram fyri hann, hann, sum stórverk ger, ið ófatandi eru, og undurverk, ið óteljandi eru, sum gevur regn á jørðini og sendir vatn yvir markirnar, til tess at lyfta kúgaðum til hæddar, og at sorgarbundin mega fáa sælu; hann, sum spillir ætlan teirra snildu, so at hendur teirra einki virka, sum varir, hann, sum fangar vísmenn í snildum teirra, so at teir svikafullu leypa framav í ráðum sínum; um dagin

teir ganga seg í myrkur, trilva mitt á degi, sum var tað á nátt. Men hann bjargar hinum arma frá svørði og hinum fátæka úr hond hins sterka, so at tað verður vón fyri hin vesæla, og illskapurin má lata munnin aftur. Job 5,8-16

** Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra bærvi sínum til Korintmanna:*
Men eg kunngeri tykkum, brøður, tann gleðiboðskapin, sum eg boðaði tykkum, sum tit eisini tóku við, sum tit eisini standa fastir í, sum tit eisini verða frelstir við, um tit halda fast við orðið, sum eg boðaði tykkum gleðiboðskapin við, – uttan so skuldi verið, at tit hava trúð til einkis. Tí at eg læt tykkum fáa at vita fyrst og fremst, tað sum eg eisini havi tikið við, at Kristus doyði fyri syndir okkara samsvarandi við skriftirnar, og at hann varð grivin, og at hann stóð upp triðja dagin samsvarandi við skriftirnar, og at hann varð sæddur av Kefasi, og síðan av teimum tólv; og aftan á tað varð hann sæddur av meira enn fimm hundrað brøðrum í senn, – av teimum eru teir flestu á lívi enn, men nakrir eru sovnaðir burtur. Og aftan á tað varð hann sæddur av Jákupi, síðan av øllum ápostlunum. Men síðst av øllum varð hann sæddur eisini av mær eins og burði, sum ikki er komin av tíð, tí at eg eri hin ringasti av ápostlunum og eri ikki verdur at verða kallaður ápostul, við tað at eg forfylgdi Guðs kirkjuliði. Men av Guðs náði eri eg tað, sum eg eri, og náði hansara móti mær hevur ikki verið til ónýtis. 1 Kor 15,1-10a

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Men Jesus segði eisini hetta líknilsi við nakrar, sum litu á seg sjálvar, at teir vóru rættvísir, og roknaðu hinar fyri

einki: „Tveir menn fóru niðan í halgidómin at halda bøn, annar var Fariseari og annar tollari. Farisearin stóð og bað soleiðis fyri seg sjálvan: „Eg takki tær, Guð, at eg ikki eri sum aðrir menn: ránsmenn, órættvísir, horkallar ella líka sum hasin tollarin. Eg fasti tvær reisur um vikuna, eg lati tíggjund av øllum, sum mær ognast.“ Men tollarin stóð langt burtur og vildi enn ikki hevja upp eygu síni móti himli, men sló seg fyri bringuna og segði: „Guð náði meg syndara!“ Eg sigi tykkum: Hesin fór rættvísgjørdur heim til húsa, men hin ikki; tí at ein og hvør, sum setir seg sjálvan høgt, skal verða settur lágt; men tann, sum setir seg sjálvan lágt, skal verða settur høgt.“ Luk 18,9-14

12. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum hevur skapað allar lutir og givið okkum hetta likamið vit tungu, oyrum og øllum limum. Vit biðja teg, gev okkum av náði tíni heilaga anda tín, so at vit við oyrum okkara hugaliga hoyra orð títt og taka okkum tað til hjarta og við tungu okkara lova og prísa náði tíni, til tess at vit ikki við orðum okkara skulu verða nøkrum at meini, men at tala okkara má tæna navni tínum til heiðurs og næsta okkara til uppbyggingar fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum letur deyv hoyra og málleys tala. Vit biðja teg, gev okkum náði til at liva tær til gleði og tokka. Varða okkum fyri øllum meinbogum og hjálp okkum við lyftum tínum fyri eygum at halda út í trúnni og vónini um hina ævigu sælu fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Ikki okkum, Harri, ikki okkum, men navni tínum gevi tú æru fyri miskunnar tínar, fyri trúfesti tínar sakir! Hví skulu heiðin fólk siga: „Hvar er nú teirra Guð?“ meðan Guð vár tó er á himni og ger alt tað, ið hann lystir! Skurðgudar teirra eru silvur og gull, gjørdir av mannahondum. Teir hava munn, men tala ikki, hava eygu, men kunnu ei síggja, hava oyru, men kunnu ei hoyra, hava nasar, men kenna ikki lukt, hava hendur, men kunnu ei taka, hava føtur, men kunnu ei ganga, ei teir mæla við sínum barka. Teimum líkir verða teir, ið teir gjørdu, allir, ið líta á teir. Men Ísrael lítur á Harran, hann er teirra hjálp og verja. Sl 115,1-9

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul í seinna brævi sínum til Korintmanna:*
Men slíkt álit hava vit til Guðs fyri Krists skuld; ikki so, at vit av okkum sjálvum eru dúgligir til at hugsa nakað upp sum av okkum sjálvum, men dugnaskapur okkara er frá Guði, honum, sum eisini gjørdi okkum dúgligar til at vera tænarar fyri nýggjum sáttmála, ikki bókstavs, men

anda; tí at bókstavurin drepur, men andin lívgar. Men tá ið tænasta deyðans, sum við bókstøvum var innhøgd í steinar, kom fram í dýrd, so at Ísraelsmenn ikki toldu at líta at andliti Mósesar fyri ljómanum í andliti hansara, sum tó hvarv burtur, hvussu mikið meira má tá ikki tænasta andans vera í dýrd? Tí at hevði fordømingartænastan dýrd, tá er rættvísitænastan enn mikið meira rík í dýrd. 2 Kor 3,4-9

Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur:
Og Jesus fór avstað aftur úr bygdarløgunum við Týrus og ferðaðist gjøgnum Sidon til vatnið í Galileu mitt gjøgnum bygdarløgini í Dekapolis. Og tey koma til hansara við einum deyvum manni, sum eisini illa kundi tala, og tey biðja hann um at leggja hondina á hann. Og hann tók hann burtur frá einsæris úr mannfjøldini og stakk fingrarnar inn í oyru hansara og spýtti og nam við tungu hansara. Og hann leit upp til himmals og suffaði og sigur við hann: „Effata!“ – tað er: Opna teg! Og oyru hansara opnaðust, og við tað sama losnaði tunguband hansara, og hann talaði raðið. Og hann álegði teimum ikki at siga nøkrum frá, men tess meira hann álegði teimum tað, tess meira boðaðu tey frá. Og tey vóru heilt ovfarin av bilsni og søgdu: „Alt hevur hann gjørt væl, eisini deyv letur hann hoyra og málleys tala.“ Mark 7,31-37

13. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú letur okkum liva í hesi náðitíðini, tá ið vit kunnu hoyra títt heilaga orð, har tú letur okkum kenna faðirliga vilja tín ímóti okkum og síggja son tín, Jesus Krist, sum hevur útint miskunn ímóti okkum. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt lata hetta heilaga orð títt leiða og stýra hjørtum okkara, so at vit halda fast við tað, liva eftir tí og útinna miskunn ímóti næsta okkara, til vit at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum ert ríkur í miskunn. Vit biðja teg, gev okkum at elska boð tíni og at vaksa í trúgv, vón og kærleika, so at vit ikki í sjálvsøkni og hugmóð bert hugsa um okkum sjálv og egnan heiður, men tæna tær og næsta okkara í eyðmýkt og lýdni, til vit av náði tíni ognast tað, sum tú hevur lovað okkum, hina ævigu sælu, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í triðju Mósebók:
Harrin talaði framvegis við Móses og segði: „Tala við allan savnað Ísraelsmanna og sig við teir: Tit skulu vera heilagir, tí at eg Harrin, Guð tykkara, eri heilagur! Og tá ið tit skera akurin í landi tykkara, tá skalt tú ikki skera akurin heilt út á bakkarnar og ikki henta upp tey øks, ið eftir liggja; heldur ikki mást tú tína aftur um aftur víngarð tín og ikki henta upp niðurdottin aldin; tú skalt lata tað verða eftir til armingan og útisetan. Eg eri Harrin, Guð tykkara! Tit mega ikki stjala og ikki ljúgva og ikki fara við svikum hvør móti øðrum. Tit mega ikki gera rangan eið í navni mínum, so at tú vanhalgar navn Guðs tíns. Eg eri Harrin! Tú mást ikki níva næsta tín, ikki ræna hann og ikki hava dagløn bønarmansins eftir hjá tær um náttina til morguns. Tú mást ikki biðja ilt yvir tann dumba og ikki leggja snávingarstein fyri tann blinda. Tú skalt óttast Guð tín! Eg eri Harrin! Tú mást ikki fara við svikum í rættinum og hvørki geva tí fátæka ella tí ríka nakran fyrimun; við rættvísi skalt tú døma næsta tín. Tú mást ikki ganga um við sleyi móti tjóðfelaga tínum og ikki royna eftir lívi næsta tíns. Eg eri Harrin! Lat ikki hjarta títt hýsa hatri móti bróður tínum, men hav álvarsliga at honum, so at tú ikki verður syndasekur hansara vegna. Ver ikki hevnisamur og goym ikki meinhuga móti tjóðfelagum tínum; men tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg. Eg eri Harrin!“ 3 Mós 19,1-2 og 9-18

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:*
Men tá ið vit vita, at maður ikki verður rættvísgjørdur av lógargerningum, men eina við trúgv á Jesus Krist, so hava eisini vit trúð á Krist Jesus, fyri at vit kundu verða

rættvísgjørdir av trúgv á Krist og ikki av lógargerningum; tí at av lógargerningum verður einki hold rættvísgjørt. Men um vit, tá ið vit royndu at verða rættvísgjørdir í Kristi, eisini sjálvir royndust at vera syndarar, er tá Kristus vorðin tænari fyri synd? Á ongum sinni! Tí at tá ið eg aftur byggi tað upp, sum eg breyt niður, tá sýni eg meg sjálvan sum brotsmann. Tí at eg eri við lógini deyður frá lógini, fyri at eg kann liva fyri Guði. Eg eri krossfestur við Kristi; og tað eri ikki longur eg, sum livi, men Kristus livir í mær. Men tað sum eg nú livi í holdinum, tað livi eg í trúnni á Guðs son, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg. Eg taki ikki Guðs náði av; tí at er tað rættvísi við lógini, tá er jú Kristus deyður til einkis. Gal 2,16-21

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og Jesus vendi sær til lærusveinar sínar einsæris og segði við teir: „Sæl eru tey eygu, sum síggja tað, ið tit síggja! Tí at eg sigi tykkum, at mangir profetar og kongar vildu fegnir síggja tað, sum tit síggja, og fingu tað ikki at síggja, og hoyra tað, sum tit hoyra, og fingu tað ikki at hoyra.“ Og sí, ein lógkønur steig upp og freistaði hann og segði: „Meistari, hvat eigi eg at gera, fyri at eg kann arva ævigt lív?“ Men hann segði við hann: „Hvat stendur skrivað í lógini? Hvussu lesur tú?“ Men hann svaraði og segði: „Tú skalt elska Harran, Guð tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum alvi tínum og av øllum huga tínum og næsta tín sum sjálvan teg.“ Og hann segði við hann: „Beint svaraði tú; ger tú hetta og tú manst liva.“ Men hann vildi gera seg sjálvan rættvísan og segði við Jesus: „Og hvør er tá næsti mín?“ Jesus tók aftur til

orða og segði: „Ein maður ferðaðist frá Jerúsalem oman til Jeriko, og hann fell í ránsmannahendur. Teir bæði nøktaðu hann og slógu hann, og fóru so avstað og lótu hann liggja eftir hálvdeyðan. Men nú vildi so til, at ein prestur kom ferðandi sama vegin; hann sá hann, men gekk fram um hann. Somuleiðis eisini ein Levitur; hann kom til sama staðin og sá hann, men gekk fram um hann. Men ein Sámáriubúgvi, sum var á ferð, hitti við hann, og tá ið hann sá hann, tókti honum hjartaliga synd í honum; og hann fór til hansara og bant um sár hansara og læt olju og vín í, og hann lyfti honum upp á sítt egna djór og flutti hann til eitt gistihús og røktaði hann. Og dagin eftir tók hann upp tveir denarar og fekk vertinum og segði: „Røkta hann nú, og tað, sum tú leggur út aftrat, skal eg samsýna tær, tá ið eg komi aftur.“ Hvør av hesum trimum tykist tær er vorðin næsti hansara, sum fallin var í ránsmannahendur?“ Men hann segði: „Tann, sum gjørdi miskunnarverk ímóti honum.“ Og Jesus segði við hann: „Far tú og ger so við!“ Luk 10,23-37

14. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, grøddi tey sjúku og reisti tey falnu. Vit takka tær, tí at tú við lívsæla orði tínum og heilagum dópi reinsar okkum fyri synd og dagliga letur okkum kenna

náðigu hjálp tína í øllum, sum okkum er tørvur á bæði til likams og sálar. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit aldri gloyma hesar vælgerðir tínar, men nú og altíð veita tær tøkk og lovprísa tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert mentur at grøða tey sjúku og reisa tey falnu. Vit biðja teg, varðveit kirkju tína í miklu trúfesti tíni og miskunn. Kom henni til hjálpar. Varðveit hana frá øllum, ið er henni at meini og halt henni at tí, sum tænir henni til frelsu, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Halleluja! Sál mín, Harranum lova! Eg vil Harranum lova, so leingi eg livi, lovsyngja mínum Guði, meðan eg eri til! Lítið ei á høvdingar, á mann, ið onga hjálp kann veita! Út fer andi hans, hann fer aftur til moldar, á tí degi er fyri ongum hans ætlan. Sælur er tann, sum hevur Jákups Guð sær til hjálpar, sum vón sína setir á Harran, Guð sín, hann, sum skapað hevur himin og jørð, havið og alt, sum í teimum er; hann, sum varðveitir trúfesti sína um ævir, sum veitir teimum kúgaðu rætt og gevur teimum svongu breyð. Harrin teir bundnu loysir. Harrin opnar eyguni á teimum blindu, Harrin reisir upp teir

niðurboygdu, Harrin elskar teir rættvísu, Harrin varðar teir fremmandu, syrgir fyri einkjum og faðirleysum, men villir fyri teimum gudleysu vegin. Harrin er kongur um allar ævir, Guð tín, Zion, ætt eftir ætt. Halleluja! Sl 146

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:*
Men eg sigi: Gangið fram í andanum, og tá skulu tit als ikki fullføra girnd holdsins. Tí at holdið girnast móti andanum, og andin móti holdinum; tí at hesi standa hvørt móti øðrum, fyri at tit ikki skulu gera tað, sum tit vilja. Men um tit verða leiddir av andanum, tá eru tit ikki undir lógini. Men holdsins verk eru opinlýs, og tey eru: ólevnað, óreinskapur, ólíkligskapur, skurðgudadýrkan, gandur, fíggindskapur, klandur, meinhugi, vreiði, illfýsni, tvídráttur, ósemja, øvund, drykkjuskapur, fyllskapur og annað tílíkt; og um hetta sigi eg tykkum frammanundan, líkasum eg áður havi sagt, at teir, sum slíkt gera, skulu ikki arva Guðs ríki. Men ávøkstur andans er: kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildi, góðvild, trúskapur, spakføri, fráhald. Móti slíkum er lógin ikki. Men tey, sum hoyra Kristi Jesusi til, tey hava krossfest holdið við lystunum og girndunum. Um vit liva í andanum, tá latum okkum eisini ganga fram í andanum! Gal 5,16-25

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tað hendi, meðan Jesus var á ferðini til Jerúsalem, at leið hansara lá mitt ímillum Sámáriu og Galileu. Og í tí hann skuldi fara inn í eina bygd, møttu honum tíggju spitalskir menn, sum stóðu langt burtur, og teir rópaðu hart og søgdu: „Jesus, meistari, miskunna okkum!“ Og tá ið hann sá teir, segði hann við teir: „Farið og sýnið

tykkum fyri prestunum!“ Og tað bar so á, meðan teir fóru avstað, at teir vórðu reinsaðir. Men ein teirra vendi aftur, tá ið hann sá, at hann var lektur, og lovaði Guði við harðari rødd, og hann kastaði seg fram eftir rommum fyri føtur hansara og takkaði honum; og hann var ein Sámáriubúgvi. Men Jesus svaraði og segði: „Vórðu ikki teir tíggju reinsaðir? Hvar eru teir níggju? Var annars eingin, sum vendi aftur at geva Guði heiðurin uttan hesin fremmandi?“ Og hann segði við hann: „Statt upp og far tú leið tína; trúgv tín hevur frelst teg!“ Luk 17,11-19

15. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær fyri allar vælgerðir tínar, tú, sum hevur givið okkum lívið og av náði tíni hevur syrgt fyri okkum alt til henda dag. Vit biðja teg, tak ikki signing tína frá okkum, men varða okkum fyri gírni, stúran og sjálvgóðsku, til tess at vit kunnu tæna tær eina, elska teg, halda fast vit teg og ikki óreinska okkum við avgudadyrkan og peningagirnd, men seta alla vón okkara og álit til náði tína og kærleika fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum í ævigum kærleika hevur umsorgan fyri børnum tínum. Vit biðja teg, at tú í miskunn tíni alsamt vilt reinsa og varðveita kirkju tína. Stjórna henni í náði við heilaga anda tínum, tí at uttan teg fer hon til grundar. Gev henni altíð at vera fyriskipan tíni lýðin og at liva í kærleika tínum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Tá reisti Nóa Harranum altar og tók av øllum reinum djórum og øllum reinum fuglum og ofraði brennioffur á altarinum. Men tá ið Harrin kendi góðan royk, segði hann við sjálvan seg: „Eg vil ikki aftur banna jørðina mannanna vegna; tí at hjarta mansins stundar á tað illa alt frá ungdómi hans; eg vil ongantíð aftur deyða alt, sum livir, eins og eg nú havi gjørt. Meðan jørðin stendur, skal sáðtíð og heystingartíð, frost og hiti, summar og vetur, dagur og nátt ikki svitast.“ Og Guð segði: „Hetta skal vera merki sáttmálans, sum eg geri millum mín og tykkara og allar livandi skepnur, ið hjá tykkum eru, fyri øll komandi ættarlið: Boga mín seti eg í skýggið; og hann skal vera sáttmálamerkið ímillum meg og jørðina. Og hvørja ferð eg dragi skýggini saman yvir jørðina, og bogin sæst í skýggjunum, tá man eg minnast á sáttmálan, ið er millum mín og tykkara og allar skepnur av øllum holdi; og ikki skulu vøtnini aftur verða til vatnflóð til at oyða alt hold. Tá ið tá bogin stendur í skýggjunum, skal eg líta at honum til tess at minnast á hin æviga sáttmálan

millum Guð og allar skepnur av øllum holdi, sum eru á jørðini.“ 1 Mós 8,20-22 og 9,12-16

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Galatamanna:*
Um vit liva í andanum, tá latum okkum eisini ganga fram í andanum! Latið okkum ikki tráa eftir fáfongdari æru, so at vit erta hvør annan og øvunda hvør annan. Brøður! Um ein maður skuldi komið fyri einahvørja misgerð, tá hjálpið tit, sum andligir eru, honum til rættis við spakføris anda; men hygg um teg sjálvan, at ikki tú eisini skalt verða freistaður! Berið byrðar hvør hjá øðrum og uppfyllið soleiðis lóg Krists. Tí at um einhvør tykist at vera nakað, tó at hann einki er, tá svíkur hann seg sjálvan. Men ein og hvør skal rannsaka sítt egna verk, og tá skal hann hava rós eina eftir tí, sum hann sjálvur er, og ikki eftir tí, sum annar er. Tí at ein og hvør skal bera sína egnu byrði. Men tann, sum verður upplærdur í orðinum, skal geva tí, sum upplærir hann, lut við sær í øllum góðum. Villist ikki! Guð letur seg ikki spotta; tí at tað, sum maður sáar, tað skal hann eisini heysta. Tí at tann, sum sáar í holdi sínum, skal av holdinum heysta týning; men tann, sum sáar í andanum, skal av andanum heysta ævigt lív. Men latum okkum ikki troyttast av at gera tað, sum gott er! tí at í sínum tíma skulu vit heysta, um vit ikki gevast. Gal 5,25-6,1-9

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Eingin kann tæna tveimum harrum; tí at annaðhvørt vil hann hata annan og elska annan, ella vil hann halda seg aftur at øðrum og vanvirða annan. Tit kunnu ikki tæna Guði og mammon. Av hesi søk sigi eg

tykkum: Stúrið ikki fyri lívi tykkara, hvat tit skulu fáa at eta, og hvat tit skulu fáa at drekka; ei heldur fyri likami tykkara, hvat tit skulu fáa at fara í. Er ikki lívið meiri enn maturin og likamið meiri enn klæðini? Hyggið at himmalsins fuglum; teir sáa ikki, ei heldur teir heysta og bera ei heldur saman í løður, og himmalski faðir tykkara føðir teir; eru tit ikki mikið meir verdir enn teir? Men hvør tykkara kann við at stúra leggja eina alin aftur at ævi síni? Og hví stúra tit fyri klæðunum? Gevið tykkum far um liljurnar á markini, hvussu tær vaksa; ikki tær arbeiða, ei heldur tær spinna; men eg sigi tykkum, at ikki sjálvur Sálomon í allari dýrd síni var skrýddur eins og ein teirra. Men tá ið nú Guð soleiðis klæðir grasið, sum í dag stendur á markini, men í morgin verður blakað í ovnin, man hann tá ikki mikið meir klæða tykkum, tit fátrúnu? Tí eiga tit ikki at stúra og siga: Hvat skulu vit fáa at eta? ella: Hvat skulu vit fáa at drekka? ella: Hvat skulu vit fáa at lata okkum í? Tí at eftir øllum slíkum søkja heidnir menn; og tí at himmalski faðir tykkara veit, at tykkum tarvast alt slíkt. Men søkið fyrst Guðs ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt. Stúrið tí ikki fyri deginum í morgin; tí at morgindagurin man stúra fyri sínum egna. Hvør dagur hevur nóg mikið í síni plágu.“ Matt 6,24-34

16. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum læt einborna son tín gerast menniskja, til tess at hann við deyða sínum skuldi gjalda fyri syndir okkara og bjarga okkum frá hinum æviga deyða. Vit biðja teg, ger okkum føst í hesi trúgv, so at vit ikki ivast í, at eins og vár harri, Jesus Kristus, vakti upp sonin hjá einkjuni við sínum almáttuga orði, soleiðis vil hann eisini vekja okkum upp á evsta degi og gera okkum sæl allar ævir, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur bjargað okkum frá ævigum deyða. Vit biðja teg, gev okkum av náði tíni at trúgva hesum av sonnum og í hesum forgeingiliga lívi at tæna tær í øllum góðum verki, meðan vit liva í vónini um hitt æviga lívið fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrru Kongabók:

Tá kom orð Harrans til Elia soljóðandi: „Statt upp og far til Sáreptu við Zidon og búset teg har; tí at eg havi boðið

eini einkju har at geva tær vistir.“ Hann helt tá ferð síni til Sáreptu. Nakað eftir hetta sjúklaðist sonur húsfrúnnar, og sjúkan versnaði, til einki lív var eftir í honum. Tá mælti hon við Elia: „Hvat havi eg við teg at gera, tú Guðsmaður! Ert tú komin higar at minna á synd mína og deyða son mín?“ Men hann segði við hana: „Fá mær son tín.“ Og hann tók hann av fangi hennara og bar hann upp á loftið, har sum hann hølaðist, og legði hann í rekkju sína. Síðan rópaði hann til Harrans og segði: Harri, Guð mín! Ætlar tú tær av álvara at fara so illa við hesi einkju, sum eg gisti hjá, at tú letur son hennara doyggja? Og hann toygdi seg tríggjar ferðir yvir sveinin og rópaði á Harran og segði: „Harri, Guð mín, lat lívið koma aftur í henda svein!“ Og Harrin hoyrdi rødd Elia, og lívið kom aftur í sveinin, so at hann livnaði uppaftur. Elia tók sveinin og bar hann av loftinum niður í stovuna; og hann gav hann móður síni og mælti: „Sí, sonur tín livir!“ Tá mælti konan við Elia: „Nú veit eg av sonnum, at tú ert Guðsmaður, og at orð Harrans í munni tínum er sannleiki!“ 1 Kong 17,8-10a og 17-24

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:*
Tí biði eg, at tit ikki mega falla í fátt av trongdum mínum fyri tykkara skuld; tær eru heiður tykkara. – Tess vegna er tað, at eg boyggi knæ míni fyri faðirinum, sum allur faðirskapur fær navn av á himnum og á jørð, at hann av dýrdar ríkidømi sínum má geva tykkum veldigliga at styrkjast við anda sínum í hini innaru menniskju tykkara, at Kristus má búgva við trúnni í hjørtum tykkara, so at tit, rótfestir og grundfestir í kærleika, mega verða førir fyri at fata saman við øllum hinum heilagu, hvat ið er

breiddin og longdin og dýpdin og hæddin, og at kenna kærleika Krists, sum ber av øllum kunnleika, fyri at tit mega fyllast til alla fylling Guðs. Men honum, sum er mentur í øllum lutum at gera langt út um alt tað, sum vit biðja um ella skilja, eftir teirri kraft, sum virkar í okkum, honum veri æra í kirkjuliðinum og í Kristi Jesusi gjøgnum allar ættir, um aldur og allar ævir! Amen. Ef 3,13-21

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tað hendi dagin eftir, at Jesus fór til eina bygd, sum eitur Nain; og fleiri av lærusveinum hansara og ein stórur mannaskari vóru í ferðini við honum. Men tá ið hann nærkaðist bygdarliðinum, sí, tá varð ein deyður borin út, sum var einasti sonur hjá móður síni, og hon var einkja, og stórur skari úr bygdini fylgdist við henni. Og tá ið Harrin sá hana, tókti honum hjartaliga synd í henni, og hann segði við hana: „Grát ikki!“ Og hann gekk fram at líkbøruni og nam við hana; men teir, sum bóru, steðgaðu; og hann segði: „Ungi maður, eg sigi tær, reis teg upp!“ Og tann deyði settist upp undir seg og tók at tala; og hann gav móður hansara hann. Men ótti kom á øll, og tey lovaðu Guði og søgdu: „Stórur profetur er risin upp okkara millum,“ og: „Guð hevur vitjað fólk sítt.“ Og hesi tíðindi um hann komu út um alla Júdeu og allar staðir har í nánd. Luk 7,11-17

17. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt leiða og stýra hjørtum okkara, so at vit altíð mega liva í trúnni á teg og ikki í hugmóð seta okkum sjálv høgt, men hugaliga hoyra orð títt og goyma tað í reinum hjørtum, til tess at vit av tí mega læra at seta alt álit okkara á einborna son tín, Jesus Krist, okkara einasta frelsara og fylgja honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur loyst okkum úr lógartrældómi. Vit biðja teg, hjálp okkum at fylgja tær og at liva í kærleika tínum, so at vit skýggja allar lygnir og freistingar djevulsins. Gev okkum av heilum huga at halda okkum at tær eina, hinum einasta sanna Guði, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Orðtøkum Sálomons:

Oyra, sum lýðir á lívsins áminningar, man halda seg aftur at teimum vísu. Tann, sum aga havnar, sál sína vanvirðir, men tann, sum lýðir á áminning, fer fram í

vitsku. Ótti fyri Harranum er agi at vísdómi, og eyðmýkt gongur fram um æru. Vísdóm at vinna er betri enn gull, vitsku at vinna er meiri enn silvur. At víkja frá illum er leiðin hjá rættvísum, at varða um veg sín er at varðveita sál sína. Hugmóð gongur undan undirgongd, og dramblæti undan falli. Betri at vera lítillátur við armingum enn at býta veiði við hástórum. Erpa tær ikki inni fyri kongi, og stilla teg ikki á stórmanna stað. Tí at betri er, at menn siga við teg: „Førka teg higar upp!“ enn at teir flyta teg niður um frægan mann, sum tó eygu tíni hava sað. Orðt 15,31-33 og 16,16-19 og 25,6-7

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:*
Eg áminni tykkum tí, eg hin bundni í Harranum, til at liva soleiðis, sum hóskandi er fyri ta kallan, sum tit vórðu kallaðir við, við øllum lítillæti og spakføri og langmóði, so at tit umbera hvør annan í kærleika, og leggja tykkum eina við at varðveita einleika andans í bandi friðarins. Eitt likam og ein andi, eins og tit eisini vórðu kallaðir til eina vón í kallan tykkara, ein harri, ein trúgv, ein skírn; ein Guð og faðir at øllum, hann sum er yvir øllum og gjøgnum alt og í øllum. Ef 4,1-6

Hetta heilaga evangeliið skrivar Lukas evangelistur:
Og tað hendi ein hvíludag, tá ið Jesus kom inn í húsini hjá einum av teim hægstu Farisearunum at halda máltíð, at teir góvu gætur eftir honum. Og sí, ein vatnsjúkur maður stóð framman fyri honum. Og Jesus tók til orða og segði við hinar lógkønu og Farisearnar: „Er tað loyviligt at lekja um hvíludagin ella ikki?“ Men teir tagdu. Og hann nam við hann og lekti hann og læt hann

fara avstað. Og hann tók til orða og segði við teir: „Hvør tykkara, sum eigur ein son ella ein oksa, ið dettur í ein brunn, man ikki alt fyri eitt draga hann uppúr um hvíludagin?“ Og teir vóru ikki førir fyri at geva honum svar upp á hetta. Men hann segði eitt líknilsi til teirra, sum bodnir vóru, tá ið hann varð varur við, hvussu teir valdu sær teir ovastu sessirnar, og segði við teir: „Tá ið tú ert boðin av einumhvørjum í brúdleyp, tá set teg ikki í tann ovasta sessin, at ikki ein mætari enn tú skuldi verið boðin av honum; og tann, ið beyð tær og honum, skal koma og siga við teg: „Gev hesum sæti!“ og tú tá við skomm skuldi komið at sita niðastur. Men tá ið tú ert boðin, tá far og set teg niðastan, fyri at tann, sum boðið tær hevur, má siga við teg, tá ið hann kemur: „Vinur mín, flyt teg hægri upp!“ Tá skalt tú hava virðing hjá øllum teimum, sum sita til borðs saman við tær. Tí at ein og hvør, sum setir seg sjálvan høgt, skal verða settur lágt, og tann, sum setir seg sjálvan lágt, skal verða settur høgt.“ Luk 14,1-11

18. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit viðganga fyri tær, at vit eru so veik, at vit ikki til fulnar megna at gera eftir vilja tínum. Tí biðja vit teg, veit okkum heilaga anda tín, so at vit, føst í trúnni, halda okkum til son tín, Jesus

Krist, og líta á, at vit við líðing hansara og deyða eiga fyrigeving fyri allar syndir okkara og soleiðis liva eitt heilagt lív í lýdni her á foldum eftir vilja tínum, til vit av náði tíni verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, hvørs miskunn er okkara einasta vón. Vit biðja teg, stýr í náði hjørtum okkara, so at vit mega vera tær lýðin og gera eftir boðum tínum. Gev okkum at verða verandi í kærleika tínum og at vaksa í trúgv, vón og kærleika fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Við hvønn vilja tit sambera Guð, og hvønn seta tit fram sum javnlíka hans? Gudamyndina stoypir smiðurin; gullsmiðurin leggur hana við slignum gulli og ger henni festi av silvuri. Tann, sum vil gera sær hjágud, velur sær við, sum ikki fúnar; hann fær sær kønan smið til at reisa gudamynd, ið ikki vikast. Vita tit ikki, og hava tit ikki hoyrt tað, hevur tað ikki verið tykkum kunngjørt frá upphavi, og hava tit ikki havt kunnleika um tað, síðan jarðarinnar grundvøllur varð lagdur? Tað er hann, ið situr hátt yvir jarðarkringinum, og teir, sum har búgva, eru sum ongsprettur; tað er hann, ið tenur út himinin eins og dúk og breiðir hann út eins og tjald til at búgva

undir. Hann ger høvdingar at ongum og jarðarinnar dómarar at fáfongd. Valla eru teir settir niður og sáddir, valla hevur stovnur teirra fest rót í jørðini, fyrr enn hann andar á teir, so at teir følna og fúka sum hálmstrá fyri vindi. Við hvønn vilja tit sambera meg sum javnlíka mín, sigur hin heilagi. Jes 40,18-25

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Korintmanna:*
Eg takki altíð Guði mínum tykkara vegna, fyri ta Guðs náði, sum tykkum er givin í Kristi Jesusi, at tit í honum eru vorðin rík í øllum, í allari talu og í øllum kunnleika, líkasum eisini vitnisburðurin um Krist er staðfestur tykkara millum, so at tykkum ikki skortar nakra náðigávu, meðan tit vænta opinbering várs harra Jesu Krists, hann sum eisini skal staðfesta tykkum til endans, so at tit mega vera ólastandi á degi várs harra Jesu Krists. 1 Kor 1,4-8

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Farisearanir hoyrdu, at hann hevði málbundið Saddukearanar, komu teir saman; og ein teirra, ein lógkønur, spurdi hann til tess at freista hann: „Meistari, hvat er hitt stóra boðið í lógini?“ Men hann segði við hann: „ „Tú skalt elska Harran, Guð tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum huga tínum!“ Hetta er hitt stóra og fyrsta boðið. Men eitt annað er enn, ið er hesum líkt: „Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg!“ Í hesum báðum boðunum hongur øll lógin og profetarnir.“ Men meðan Farisearanir vóru saman komnir, spurdi Jesus teir og segði: „Hvat halda tit um Kristus? Hvørs sonur er hann?“ Teir siga við hann:

„Dávids.“ Hann sigur við teir: „Hvussu kann tá Dávid í andanum kalla hann harra, tá ið hann sigur: „Harrin segði við harra mín: Set teg við mína høgru lið, til eg leggi fíggindar tínar undir føtur tínar!“ Tá ið nú Dávid kallar hann harra, hvussu kann hann tá vera sonur hansara?“ Og eingin kundi svara honum eitt orð, ei heldur tordi nakar meira eftir tann dag at seta honum ein spurning. Matt 22,34-46

19. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, í náði grøddi tey sjúku og reisti tey falnu. Vit biðja teg, ver tú eisini hjá okkum við náði tíni, fyrigev okkum allar syndir okkara og hjálp okkum við heilaga anda tínum, so at vit ikki í kærleiksloysi ella vansketni eru atvoldin til sjúku ella aðra ólukku, men altíð óttast og elska teg og tæna tær og medmenniskjum okkara fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum hevur givið syni tínum, Jesusi Kristi, vald til at fyrigeva syndir. Vit biðja teg, ver okkum fyri hansara skuld miskunnsamur og halt okkum frá tí

illa, so at vit, styrkt til likams og sálar, við treysti mega fylgja kalli sonar tíns og tæna honum við gleði, honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
So sigur Harrin: „Sum royk eg striki út tíni misbrot og sum skýggj tínar syndir; vend við til mín, tí at eg eri loysnari tín. Fegnist, tit himnar, tí at Harrin hevur útint sítt verk, rópið av gleði, tit jarðarinnar grundir, hevjið fagnaðarljóð, tit fjøll, skógurin og øll trø hans, tí at Harrin endurloysir Jákup og ger seg dýrmætan í Ísrael. So sigur Harrin, loysnari tín, ið myndað teg hevur frá móðurlívi: Eg eri Harrin, ið skapað hevur alt, sum einsamallur tandi út himinin og breiddi út jørðina – hvør hjálpti mær? – sum ger lygnaranna tekin til einkis og spásagnarmenninar til dárar, sum rekur hinar vísu aftur og prógvar, at vitska teirra er fákunna, men staðfestir orð tænara sína og fremur ráðini hjá sendiboðum sínum – eg sigi um Jerúsalem: „Verði hon aftur bygd!“ um Júdaborgir: „Verði tær endurreistar!“ og toftir teirra byggi eg upp aftur. Eg sigi við djúpið: „Torna upp; eg turki nú upp tínar áir.“ Eg sigi um Kýros: „Hann er hirði mín; hann skal fremja allan vilja mín og siga um Jerúsalem: Hon skal verða upp aftur bygd, og templið aftur verða grundvallað!“ Jes 44,22-28

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:*
Tit skulu, hvat ið hini fyrru atferð tykkara viðvíkur, leggja av hina gomlu menniskju, sum verður spilt av hinum tølandi girndunum, men verða endurnýggjaðir í anda

huga tykkara, og íklæðast hina nýggju menniskju, sum er skapað eftir Guði í rættlæti og heilagleika sannleikans. Leggið tí lygnina av og talið sannleika, hvør við næsta sín, við tað at vit eru limir hvør hjá øðrum. Um tit verða illir, tá syndið ikki! Sólin má ikki seta yvir illskap tykkara! Og gevið ikki djevlinum nakað føri! Tann, sum stjelur, stjali ikki longur, men arbeiði heldur og geri tað, sum gott er, við hondum sínum, so at hann kann hava nakað at geva tí, sum líður neyð! Ef 4,22-28

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og Jesus steig inn í bátin og fór yvirum og kom til sína egnu bygd. Og sí, teir komu berandi til hansara við einum giktsjúkum manni, ið lá í eini song. Og tá ið Jesus sá trúgv teirra, segði hann við hin giktsjúka: „Sonur mín, hav tú gott treysti, syndir tínar eru tær fyrigivnar.“ Og sí, nakrir av teimum skriftlærdu hugsaðu við sær sjálvum: „Hesin maðurin spottar Guð.“ Og tá ið Jesus sá hugsan teirra, segði hann: „Hví hugsa tit ilt í hjørtum tykkara? Tí hvat er lættari at siga: „Syndir tínar eru tær fyrigivnar,“ ella at siga. „Statt upp og gakk?“ Men fyri at tit skulu vita, at menniskjusonurin hevur vald á jørð til at fyrigeva syndir“ – tá sigur hann við hin giktsjúka: – „Statt upp, tak song tína og far heim til húsa!“ Og hann stóð upp og fór heim til sín sjálvs. Men tá ið mannamúgvurnar sóu hetta, óttaðust tær og prísaðu Guði, sum hevði givið monnum slíkt vald. Matt 9,1-8

20. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær fyri miklu náði og miskunn tína, at tú við heilaga orði tínum býður okkum í hitt gleðiliga brúdleypið hjá hinum himmalska kongssyninum og við honum hevur fyrigivið okkum allar syndir okkara. Men av tí at freistingar, meinbogar og vandar dagliga eru uttan um okkum, og vit í okkum sjálvum eru veik og lættliga verða freistað til synd, so biðja vit teg, at tú við heilaga anda tínum vilt varðveita okkum í náði tíni, so at vit hóast føll okkara ikki falla frá tær, men í sannari trúgv og áliti á náði tína verða verandi íklædd ta rættvísi, sum tú við einborna syni tínum hevur givið okkum og verða sæl allar ævir fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, kallar okkum inn í ríki títt. Vit biðja teg, ver okkum náðigur og veit øllum trúgvandi tínum fyrigeving tína og frið. Reinsa okkum fyri allar syndir og gev okkum at tæna tær við gleði og treysti fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, býður okkum til brúdleyps í ríki tínum. Vit biðja teg, veit okkum av náði tíni fyrigeving tína og frið, so at vit reinsað fyri allar syndir mega tæna tær við gleði og treysti fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:
Orðið, sum kom til Jeremia frá Harranum soljóðandi: Far oman í hús leirkerasmiðarins; har vil eg lata teg hoyra orð míni. Eg fór tí oman í hús leirkerasmiðarins, og sí, tá arbeiddi hann við klingrurnar. Og hvørja ferð eitt kerið, sum hann fekst við, miseydnaðist, sum tað kann henda við leirinum undir hond leirkerasmiðarins, tá fór hann aftur at gera burtur úr tí annað ker, so sum hann nú vildi hava tað gjørt. Tá kom orð Harrans til mín soljóðandi: Skuldi eg ikki gjørt við Ísraels hús eins og hesin leirkerasmiðurin, sigur Harrin; sí, eins og leirið í hond leirkerasmiðarins soleiðis eru tit í hond míni, Ísraels hús! Jer 18,1-6

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:*
Gevið tí væl gætur eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvísir, men sum vísir, so at tit keypa hina lagaligu stundina, tí at dagarnir eru vándir. Verið tí ikki óskynsamir, men skiljið, hvat Harrans vilji er! Og drekkið tykkum ikki druknar í víni, sum førir óflýggjaskap við sær; men verðið fyltir av andanum, so at tit tala hvør til annan við

sálmum og lovsongum og andligum ljóðum og syngja og leika í hjarta tykkara fyri Harranum, og altíð siga Guði og faðirinum tøkk fyri allar lutir í navni vár harra Jesu Krists, og eru hvør øðrum undirgivnir í ótta Krists! Ef 5,15-21

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Og Jesus tók til orða og talaði aftur til teirra í líknilsum og segði: „Himmiríki er líkt einum kongi, ið gjørdi brúdleyp hjá syni sínum. Og hann sendi sveinar sínar avstað at boða teimum, ið boðin vóru í brúdleypið. Men tey vildu ikki koma. Hann sendi aðrar sveinar á øðrum sinni avstað og segði: Sigið teimum bodnu: „Sí, veitslu mína havi eg gjørt til reiðar, oksar mínir og feitineytini eru dripin, og alt er tilgjørt; komið í brúdleypið!“ Men tey løgdu einki í tað, men fóru burtur aðrar staðir, eitt út í akur sín og annað í handil sín; og hini tóku hendur á sveinar hansara og meinslaðu og drópu teir. Men kongurin varð vreiður og sendi út herlið sítt og tók hesi illgerðarfólkini av lívi og brendi borg teirra. Tínæst sigur hann við sveinar sínar: „Víst er tilgjørt til brúdleyps; men tey bodnu vóru tess ikki verd. Farið tit tí út á vegamótini og bjóðið í brúdleyp so mongum, sum tit hitta.“ Og hesir sveinarnir fóru út á vegirnar og savnaðu saman øll, teir hittu, bæði ónd og góð, og gildisskálin varð fullur av gestum. Men tá ið nú kongurin fór innar at síggja gestirnar, bar hann eyga við ein mann, sum ikki var klæddur í brúdleypsklæði. Og hann sigur við hann: „Vinur mín, hvussu ert tú komin inn higar, og ert ikki í brúdleypsklæðum?“ Men hann tagdi. Tá segði kongurin við sveinarnar: „Bindið hendur og føtur á honum og kastið

hann út í myrkrið fyri uttan; har skal verða grátur og tannagrísl! Tí at mong eru kallað, men fá eru útvøld.“ Matt 22,1-14

21. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur lovað okkum fyrigeving syndanna, rættvísi og hitt æviga lívið. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit í dagligari bøn søkja alla hjálp hjá honum og í fastari trúgv á orð og lyfti hansara kunnu fáa tað, sum vit biðja um eftir vilja tínum, til vit at enda verða sæl fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, hvørs miskunn varir um ævir. Vit biðja teg, varðveit okkum í æviga kærleika tínum. Varða okkum fyri øllum fíggindans veldi og gev okkum í fastari trúgv og góðum gerningum at lovprísa heilaga navni tínum fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í seinnu Kongabók:
Náaman, herhøvdingi hjá kongi Áramita, var í miklum metum hjá harra sínum og væl umtóktur, av tí at Harrin við honum hevði givið Áramitum sigur. Men maðurin var líktráur. Eina ferð, tá ið Áramitar høvdu verið á herferð í Ísraels landi, høvdu teir tikið unga gentu aftur við sær, ið var komin at tæna hjá konu Náamans. Hon segði nú við húsmóður sína: „Hevði harri mín bert verið hjá profetinum í Sámáriu, tá mundi hann ivaleyst grøtt hann fyri líktrá hansara!“ Náaman fór nú og segði harra sínum frá, hvat ið hin ísraelitiska gentan hevði sagt. Og kongur Áramita segði: „Far tú hagar! Eg skal senda við tær Ísraels kongi bræv!“ Síðan fór hann avstað og tók við tíggju talentir av silvuri og seks túsund siklar av gulli og tíggju skartbúnar. Tá kom Náaman við rossum og vagnum og steðgaði fyri durunum hjá Elisa. Elisa sendi út til hansara hesi boð: „Far og baða tær sjey ferðir í Jórdan, so skal hold títt grøðast, og tú verður reinur!“ Tá varð Náaman illur og fór burtur, meðan hann helt fyri: „Eg hevði hugsað mær, at hann fór at koma út, og at hann hevði staðið og ákallað Harran, Guð sín, og reiggjað hondum móti halgidóminum og soleiðis grøtt líktrá mína! Eru ikki áirnar í Dámaskus, Ábana og Parpar, ólíka betri enn allar áir í Ísrael? Kundi eg ikki tváað mær í teimum og vorðið reinur?“ Og hann snúðist við og fór burtur í vreiði. Tá komu sveinar hansara og talaðu við hann og søgdu: „Um profeturin hevði lagt stórar treytir á teg, mundi tú so ikki gingið undir tær? Hvussu nógv heldur nú, tá ið hann bert sigur við teg: Tváa tær, so verður tú reinur!“ Tá fór hann oman og stakk seg sjey

ferðir undir kav í Jórdan, eins og Guðsmaðurin hevði sagt. Og í sama bili varð hold hansara aftur eins og holdið á lítlum barni, og hann var reinur. Síðan snúðist hann aftur til Guðsmansins við øllum fylgismonnum sínum, og tá ið hann var komin aftur til hansara, gekk hann fram fyri hann og mælti: „Nú veit eg, at eingin Guð er til í nøkrum landi uttan Ísrael! Og tak nú við takkargávu av træli tínum!“ 2 Kong 5,1-5 og 9-15

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Efesusmanna:*
Annars, verðið sterkir í Harranum og í veldis mátti hansara! Latið tykkum í øll herklæði Guðs, so at tit kunnu vera førir fyri at standa ímót sniðlopum djevulsins. Tí at bardagi okkara er ikki móti blóði og holdi, men móti valdunum, móti ráðunum, móti heimshøvdingunum í hesum myrkri, móti andaherliðum illskaparins í himnarúmdum. Farið tí í øll herklæði Guðs, so at tit kunnu vera førir fyri at veita mótstøðu hin vánda dagin og at standa við, tá ið alt er vunnið. So standið tá gyrdir um lendar tykkara við sannleika og klæddir í brynju rættlætisins, og skøddir um føturnar við fúsleika til at boða gleðiboðskap friðarins; og havið í øllum førum trúarskjøldurin á lofti, sum tit kunnu vera førir fyri at sløkkja allar gløðandi ørvar frá hinum illa við; og takið hjálm frelsunnar og svørð andans, sum er Guðs orð. Ef 6,10-17

Hetta heilaga evangeliið skrivar Jóhannes evangelistur:
Jesus kom tá aftur til Kána í Galileu, har sum hann hevði gjørt vatnið til vín. Og har var ein kongsmaður í Kapernaum, sum sonurin lá sjúkur hjá. Tá ið hann hoyrdi, at Jesus var komin frá Júdeu til Galileu, fór hann til hansara

og bað hann koma oman og gera son sín frískan; tí at hann lá at doyggja. Jesus segði tá við hann: „Síggja tit ikki tekin og undurgerningar, vilja tit ikki trúgva.“ Kongsmaðurin sigur við hann: „Harri, kom oman, áðrenn barn mítt doyr!“ Jesus sigur við hann: „Far tú, sonur tín livir!“ Maðurin trúði tí orði, sum Jesus segði við hann, og fór avstað. Men longu á heimleiðini møttu húskallar hansara honum og bóru honum tey boðini, at barn hansara livdi. Tá spurdi hann teir um tíman, nær tað var farið at lætta hjá honum. Og teir søgdu við hann: „Í gjár um sjeynda tíma fór hitasóttin av honum.“ Tá skildi faðirin, at tað var í tí tíma, tá ið Jesus hevði sagt við hann: „Sonur tín livir.“ Og hann trúði sjálvur og alt hús hansara. Jóh 4,46-53

ALLA HALGANNA SUNNUDAG
1. SUNNUDAG Í NOVEMBER

Litur: Hvítur, gyltur ella reyður. Dagin eftir: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum vilt halga øll tíni útvaldu og elskaðu í syni tínum, Jesusi Kristi. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum náði til at líkjast tínum heilagu vitnum í trúgv, vón og kærleika, so at vit saman við teimum mega verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum hevur givið okkum at æra og minnast tíni heilagu og sælu vitni. Vit biðja teg, veit okkum ríkiliga av náði tíni og hjálp okkum at líkjast tínum heilagu vitnum í rættlæti, trúgv og lýdni, so at vit at enda mega náa fram til hina ævigu gleðina hjá tær og saman við teimum verða sæl allar ævir fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
So sigur Harrin: Eg bønhoyri teg á náðinnar stund og hjálpi tær á frelsudegnum; eg varðveiti teg og geri teg til sáttmála millum tjóða til tess at reisa landið aftur og skifta út arvalutir, sum liggja í oyði, til at siga hinum fjøtraðu: „Gangið út!“ teimum, sum í myrkri sita: „Komið út í ljósið!“ Fram við vegnum finna tey gras og beitilendi á hvørjum naknum hóli. Tey skulu hvørki hungra ella tysta, og ikki skal hitin ella sólin saka tey, tí at miskunnari teirra vísir teimum veg og leiðir tey at kelduvaði. Yvir hvørt fjall geri eg veg og hækki hvørja gøtu. Sí, higar koma tey úr fjarlegd, summi úr norðuri og summi úr vestri og onnur av Sinimslandi. Syngið lov, tit himnar, og fegnast, tú jørð, hevjið fagnaðarljóð, tit fjøll, tí at Harrin uggar fólk sítt og miskunnar sínum eymu. Jes 49,8-13

* *Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Jóhannesar opinbering:*
Eftir hetta sá eg, og sí, stórur skari, sum eingin var førur at telja, av øllum fólkasløgum og ættum og tjóðum og

tungumálum; teir stóðu frammi fyri hásætinum og frammi fyri lambinum, skrýddir í longum hvítum klæðum, og høvdu pálmagreinar í hondunum; og teir rópaðu við harðari reyst og søgdu: „Frelsan hoyrir Guði várum til, sum í hásætinum situr, og lambinum.“ Og allir einglarnir stóðu rundan um hásætið og hinar elstu og hinar fýra verurnar, og teir fullu niður fyri hásætinum á andlit síni og tilbóðu Guð og søgdu: „Amen! Signingin og dýrdin og vísdómurin og takkargerðin og heiðurin og mátturin og kraftin veri Guði várum um aldur og allar ævir! Amen.“ Og ein av hinum elstu tók til orða og segði við meg: „Hesir, sum skrýddir eru í teimum longu hvítu klæðunum, hvørjir eru teir, og hvaðan eru teir komnir?“ Og eg segði við hann: „Harri mín, tú veitst tað.“ Og hann segði við meg: „Hetta eru teir, sum komnir eru úr trongdini miklu, og hava tvigið klæði síni og gjørt tey hvít í blóði lambsins. Tess vegna eru teir frammi fyri hásæti Guðs og tæna honum dag og nátt í templi hansara; og tann, sum í hásætinum situr, skal tjaldra yvir teir. Ikki skulu teir longur hungra, og ikki skulu teir heldur longur tysta, og ikki skal heldur sól brenna teir, ikki heldur nakar hiti; tí at lambið, sum er fyri miðjum hásætinum, skal røkta teir og leiða teir til lívsins vatnkeldur, og Guð skal turka hvørt tár av eygum teirra.“ Opb 7,9-17

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Men tá ið Jesus sá mannamúgvurnar, fór hann niðan á fjallið; og tá ið hann var setstur niður, komu lærusveinar hansara til hansara. Og hann tók til orða og lærdi teir og mælti: „Sæl eru tey í andanum fátæku, tí at himmiríki er teirra. Sæl eru tey, ið syrgja, tí at tey skulu fáa troyst. Sæl

eru tey spaklyntu, tí at tey skulu fáa jørðina í arv. Sæl eru tey, ið hungra og tysta eftir rættvísi, tí at tey skulu verða mettað. Sæl eru tey miskunnsomu, tí at tey skulu miskunn fáa. Sæl eru tey hjartareinu, tí at tey skulu síggja Guð. Sæl eru tey friðsomu, tí at tey skulu verða kallað Guðs børn. Sæl eru tey, ið verða forfylgd fyri rættvísis sakir, tí at himmiríki er teirra. Sæl eru tit, tá ið tey spottreka tykkum og forfylgja tykkum og við lygnarorðum tala alt ilt um tykkum fyri mínar sakir. Gleðið tykkum og fegnist, tí at mikil er løn tykkara í himlinum; tí at somuleiðis forfylgdu tey profetunum, ið vóru undan tykkum. Matt 5,1-12

22. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur miskunnað okkum og fyrigivið okkum allar syndir okkara. Vit biðja teg, at tú av náði tíni vilt varðveita okkum í hesi trúgv og leiða okkum við heilaga anda tínum, so at vit ikki liva í illvilja, vreiði og hevndarhuga, men eftir vilja tínum í beinasemi, kærleika og mildni. Gev okkum at sýna miskunn, eins og tú hevur sýnt okkum miskunn fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, friðskjól okkara og styrki, tú, sum ert miskunnsamur og fyrigevur ríkliga. Vit biðja teg, hjálp eisini okkum at sýna miskunn ímóti næsta okkara og at fyrigeva honum. Lat okkum ikki vera nøkrum av teimum smáu til meinboga, men gev okkum at sýna kærleika og umsorgan fyri teimum, sum veikari eru, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Hesin heilagi lesturin er skrivaður í fyrstu Mósebók:
Men tá ið brøður Jósefs sóu, at faðir teirra var deyður, hugsaðu teir: Gævi at Jósef nú ikki verður fíggindi okkara og lønar okkum aftur tað illa, sum vit gjørdu honum! Teir sendu tí Jósefi hesi boð: „Áður enn faðir tín andaðist, beyð hann okkum at siga við teg: Fyrigev tú misgerð brøðra tína og synd teirra, tí at teir gjørdu ilt ímóti tær! Fyrigev tí tað illa, sum tænarar Guðs, faðirs tíns, hava gjørt!“ Jósef græt, tá ið hann hoyrdi hesi orð frá teimum. Síðan komu brøður hansara sjálvir og nigu fyri honum og søgdu: „Sí, vit eru trælir tínir!“ Men Jósef segði við teir: „Óttist ikki! Eg eri tó ikki í Guðs stað! Tit ætlaðu at gera mær ilt, men Guð vendi tí til góða, til tess at gera tað, ið nú er fram komið, at halda lívinum uppi í mongum fólkum. Verið nú óræddir, tí at eg skal hava umsorgan fyri tykkum, konum og børnum tykkara.“ Soleiðis uggaði hann teir, dirvdi hann teir. 1 Mós 50,15-21

** Epistulin skrivar Paulus ápostul til Filippimanna:*
Eg eri fullvísur í tí, at hann, sum byrjaði í tykkum góðan gerning, vil fullføra hann alt til Jesu Krists dag, soleiðis sum tað jú er beint av mær at hava hesa hugsan um tykkum allar, av tí at eg havi tykkum í hjarta mínum bæði í leinkjum mínum, og tá ið eg verji og staðfesti gleðiboðskapin, við tað at tit allir eru samfelagar við mær um náðina. Tí at Guð er vitni mítt, hvussu mær leingist eftir tykkum øllum við Krists Jesu inniliga hjartalagi. Og hetta biði eg um, at kærleiki tykkara enn má taka til alt meir og meir í kunnskapi og øllum skynsemi, so at tit mega kunna meta um hinar ymissu lutirnar, fyri at tit mega vera reinir og meinaleysir til Krists dag, fyltir við rættferðar frukt, sum fæst við Jesusi Kristi, Guði til dýrdar og lovs. Fil 1,6-11

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Tá steig Pætur fram og segði við Jesus: „Harri, hvussu ofta eigi eg at fyrigeva bróður mínum, tá ið hann syndar móti mær? Um sjey ferðir?“ Jesus sigur við hann: „Eg sigi tær: Ikki um sjey ferðir, men heldur um sjúti ferðir sjey ferðir. Tess vegna er himmiríki at líkna við ein kong, sum vildi halda roknskap við tænarum sínum. Og tá ið hann fór at gera upp, tá varð førdur fram til hansara ein, ið skyldaði honum tíggju túsund talentir. Men tá ið hann einki átti at rinda skuldina við, beyð kongurin at selja hann og konuna og børnini og alt tað, ið hann átti, og at skuldin skuldi verða rindað. Tá legði tænarin seg niður á knæ fyri honum og bønaði hann og segði: „Hav tol við mær, og eg vil rinda tær alt samalt aftur!“ Og harranum at hesum tænara tóktist hjartaliga synd í honum, og hann

gav hann leysan og gav honum skuldina eftir. Men tá ið hesin tænarin fór út aftur, hitti hann ein av lagsmonnum sínum, sum skyldaði honum hundrað denarar; og hann legði hond á hann, tók um kvørkrarnar á honum og segði: „Rinda mær tað, sum tú skyldar!“ Tá fell hesin lagsmaður hansara honum til fóta og bønaði hann og segði: „Hav tol við mær, og eg skal rinda tær tað!“ Men hann vildi ikki, men fór og kastaði hann í fangahús, inntil hann kundi rinda tað, ið hann skyldaði. Tá ið nú lagsmenn hansara sóu, hvat ið hent var, vórðu teir ógvuliga harmir; og teir komu og søgdu harra sínum frá øllum tilganginum. Tá sendir harri hansara boð eftir honum og sigur við hann: „Tín óndi tænari! Alla hina skuldina gav eg tær eftir, tí at tú baðst meg. Sømdi tað nú ikki eisini tær at vera miskunnsamur ímóti lagsmanni tínum, líka so væl sum eg var miskunnsamur ímóti tær? Og harri hansara varð vreiður og gav hann upp í bøðilshendur, inntil hann kundi fáa rindað aftur alt tað, ið hann skyldaði. Soleiðis skal eisini himmalski faðir mín gera ímóti tykkum, um tit ikki av hjarta fyrigeva ein og hvør bróður sínum.“ Matt 18,21-35

23. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær fyri hvønn ein friðardag, tú gevur okkum. Vit biðja teg, varða okk-

um frá kríggi og fremmandum harradømi. Gev okkum náði tína, so at vit mega liva eftir vilja tínum í øllum gudsótta og ikki geva orsøk til kríggj ella aðra ólukku. Leið og stýr tú yvirvøld okkara, so at hon ikki forðar, men fremur tað lýdni, vit skylda tær, til tess at vit mega fáa lukku og signing í landi okkara og at enda koma inn í hitt himmalska heimlandið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum rættir út veldishond tína teimum til hjálpar, ið leita til tín. Vit biðja teg, fyrigev okkum allar misgerðir okkara og loys okkum í miklu miskunn tíni úr teimum bondum, sum vit vegna synd og veikleika eru bundin av. Gev okkum eisini við tímiligu gávum tínum at tæna tær og næsta okkara fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Ámos profetur:
Hoyrið hetta, tit, ið níva fátæk og beina fyri armingum landsins, sum siga: „Nær eru tendringardagarnir lidnir, so at vit mega selja korn, og hvíludagurin, at vit mega opna kornbingini, minka um mátingarkerið, hækka um virðið og við svikum reingja vágskálirnar til tess at keypa neyðstødd fyri silvur og fátæk fyri einar skógvar og sleppa sær av við lættikornið.“ Svorið hevur Harrin við

hátign Jákups: Ongantíð skal eg gloyma alt hetta, sum teir hava gjørt. Ám 8,4-7

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Rómverja:*
Hvør maður veri fyriskipaðum yvirvøldum lýðin; tí at ikki er nøkur yvirvøld til uttan frá Guði; men tær, sum til eru, eru skipaðar av Guði, so at tann, sum veitir yvirvøldini mótstøðu, hann veitir Guðs fyriskipan mótstøðu; men teir, sum veita mótstøðu, skulu fáa dóm sín. Tí at stýrismenninir eru ikki ein ótti hjá góðum verki, men hjá illum. Men vilt tú sleppa frá at óttast fyri yvirvøldini? Ger tað, sum gott er, og tú skalt fáa rós av henni. Tí at hon er tænari Guðs, tær til góða. Men gert tú tað, sum ilt er, tá skalt tú øtast; tí at hon ber ikki svørðið til einkis, av tí at hon er tænari Guðs, hevnari til revsingar fyri tann, sum hevst at tí, sum ilt er. Tess vegna er tað fyri neyðini at verða lýðin, ikki bert fyri revsingarinnar skuld, men eisini fyri samvitskunnar skuld. Tí gjalda tit jú eisini skattir; tí at teir eru tænarar Guðs, sum serliga hava hetta í varðveitslu. Gjaldið øllum tað, sum tit skylda teimum; tí skatt, sum skal hava skatt, tí toll, sum skal hava toll, tí ótta, sum skal hava ótta, tí virðing, sum skal hava virðing. Róm 13,1-7

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Tá fóru Farisearnir og hildu ráð saman um, hvussu teir skuldu seta Jesus fastan í orðum. Og teir senda til hansara lærusveinar sínar saman við Heródesarmonnum og siga: „Meistari, vit vita, at tú ert sannorðaður, og at tú lærir Guðs veg í sannleika og ikki firnast fyri nøkrum, tí at tú gert ikki mannamun. Sig okkum tí, hvat heldur tú? Er

tað beint at gjalda keisaranum skatt ella ikki?“ Men Jesus grunaði illskap teirra og segði: „Tykkara falsarar! Hví freista tit meg? Sýnið mær skattapeningin!“ Men teir fingu honum ein denar. Og Jesus sigur við teir: „Hvørs mynd og yvirskrift er hetta?“ Teir siga: „Keisarans.“ Tá sigur hann við teir: „Gevið tá keisaranum tað, ið keisarans er, og Guði tað, ið Guðs er!“ Og tá ið teir hetta hoyrdu, undraðust teir, og teir gingu frá honum og fóru avstað. Matt 22,15-22

24. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum hevur veitt okkum fyrigeving syndanna og frelsu frá ævigum deyða. Vit biðja teg, styrk okkum við heilaga anda tínum, so at vit dagliga vaksa í trúnni á náði tína í Jesusi Kristi og hava ta føstu vón, at vit ikki skulu doyggja allar ævir, men trygt sovna burtur í honum og á evsta degi verða vakt uppaftur til hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum við deyða og uppreisn sonar tíns gjørdi deyðan til einkis, og við honum eisini vilt vekja

okkum upp á evsta degi. Vit biðja teg, ver okkum miskunnsamur, so at vit, ið ikki kunnu líta á egnar gerningar, mega komast undan dómi og revsing og møta náði tíni og mildni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Ezekiel profetur:

Hond Harrans kom yvir meg og førdi meg í andanum út og slepti mær í miðjum dalinum; hann var fullur av mannabeinum. Og hann leiddi meg um tey allar vegir, og sí, har lógu tey í stórum rúgvum; tey vórðu upptornað. Og hann segði við meg: Mansbarn! Man lív koma aftur í hesi beinini? Eg svaraði: Harri, drottin, tú veitst tað! Tá segði hann við meg: Profetera yvir hesum beinunum og sig við tey: Tit upptornaðu bein, hoyrið orð Harrans! So sigur Harrin, drottin, um hesi bein: Sí, eg lati anda koma í tykkum, so at tit verða livandi. Eg leggi sinar um tykkum og lati hold vaksa á tykkum og dragi húð aftur yvir tykkum; og eg lati anda koma í tykkum, so at tit verða livandi, og tit skulu viðurkenna, at eg eri Harrin. Eg gjørdi tá, sum mær var boðið; men meðan eg profeteraði, sí, tá hoyrdist tysan og brakan, og beinini tóku at nærkast hvørt aftur at øðrum. Og eg sá, hvussu sinar vórðu lagdar um tey, hvussu holdið vaks fram, og hvussu húðin varð drigin aftur yvir; men andi var eingin í teimum. Tá segði hann við meg: Tala við andan, profetera, tú mansbarn, og sig við andan: So sigur Harrin, drottin: Andi, kom úr hinum fýra ættunum og anda í hesar vignu menn, at teir mega livna við aftur! Eg profeteraði nú, eins og mær var

boðið; tá kom andin í teir, og teir livnaðu við og fóru á føtur, ovurstórur herur. Síðan segði hann við meg: Mansbarn! Hesi bein eru allir Ísraelsmenn; sí, teir siga: Bein okkara eru upptornað og vón okkara brotin; vit eru farnir! Profetera og sig við teir: So sigur Harrin, drottin: Eg opni gravir tykkara og lati tykkum, fólk mítt, rísa upp úr gravum tykkara og føri tykkum inn í Ísraels land. Og tit skulu viðurkenna, at eg eri Harrin, tá ið eg opni gravir tykkara og lati tykkum, fólk mítt, rísa upp úr gravum tykkara. Eg leggi tykkum anda mín í bróstið, so at tit livna við aftur, og lati tykkum búgva í landi tykkara; og tit skulu viðurkenna, at eg eri Harrin. Eg havi talað og man útinna tað, sigur Harrin. Ez 37,1-14

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:*
Tess vegna hava vit, frá tí degi vit hoyrdu tað, ikki heldur hildið uppat at gera bøn fyri tykkum og biðja um, at tit mega verða fyltir við kunnleika um vilja hansara í øllum vísdómi og andligari skynsemi, so at tit hava eina slíka atferð, sum tað høvir fyri Harranum, honum til allan hugnað, við tað at tit bera ávøkst og vaksa í øllum góðum verki við kunnleikanum um Guð, av tí at tit verða styrktir við allari kraft eftir dýrdar mátti hansara til alt tolmóð og langmóð við gleði og takka faðirinum, sum gjørdi okkum dúgligar til at fáa part í arvaluti teirra heilagu í ljósinum, hann sum bjargaði okkum út úr valdi myrkursins og flutti okkum inn í ríki elskaða sonar síns, sum vit hava endurloysingina í, fyrigeving syndanna. Kol 1,9-14

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Meðan Jesus talaði hetta til lærusveinar Jóhannesar, sí, tá

kom ein forstøðumaður og fell niður fyri honum og segði: „Dóttir mín er beint nú deyð; men kom og legg hond tína á hana, so livnar hon upp aftur.“ Og Jesus reisti seg upp og fór við honum og lærusveinar hansara. Og sí, ein kona, sum í tólv ár hevði havt blóðsótt, kom til hansara aftaníframá og nam við faldin á kappa hansara. Tí at hon hugsaði við sær sjálvari: „Fái eg eina nomið við kappa hansara, so verði eg frísk.“ Men hann vendi sær á, og tá ið hann sá hana, segði hann: „Hav tú gott treysti, dóttir mín, trúgv tín hevur frelst teg.“ Og konan varð frísk frá teirri somu stund. Og tá ið Jesus kom inn í húsini hjá forstøðumanninum og sá har spælimenninar og eina mongd av fólki, ið grótu og illa lótu, segði hann: „Farið tykkara veg, tí at gentan er ikki deyð, men hon svevur!“ Og tey læðu at honum. Men tá ið fólkamongdin var koyrd út, fór hann innar og tók í hondina á henni, og gentan reisti seg upp. Og hesi tíðindi komu út um alt landið har um vegir. Matt 9,18-26

25. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum á evsta degi letur son tín, Jesus Krist, koma aftur í dýrd at døma livandi og deyð. Vit takka tær, tí at tú hevur givið okkum títt heilaga orð og við heilaga anda tínum letur tað lýsa fyri okkum. Vit biðja teg, gev okkum náði til at ganga í

hesum orðsins ljósi tínum, so at vit mega verða varðveitt frá allari villu og følskum lærdómi, seta alla vón okkara og álit á náði tína eina og vænta komu sonar tíns við gleði, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum á evsta degi letur son tín, Jesus Krist, koma aftur í dýrd at døma livandi og deyð. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við orði og heilaga anda tínum, so at vit vard frá allari villu og følskum lærdómi mega tæna tær av heilum hjarta og vænta komu sonar tíns við gleði, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
So sigur Harrin: Eg, eg eri uggari tín, hví óttast tú tá fyri manni, sum eigur at doyggja, fyri mansbarni, ið følnar sum grasið, at tú gloymir Harran, skapara tín, sum tandi út himinin og legði jarðarinnar grundvøll, at tú tann líðilanga dag støðugt óttast vreiði kúgarans? So skjótt sum hann búði seg til at oyða, hvat varð tá av vreiði hans? Skjótt sleppa hinir bundnu úr fjøtrum; teir skulu ikki doyggja og fara niður í grøv; á breyði skal tá eingin skortur vera. Og eg eri Harrin, Guð tín, sum øsi havið, so at bylgjur tess ymja; Harri herliðanna er navn mítt. Orð míni havi eg lagt í tín munn og lívt tær við skugga handar mínar til tess at tenja út himinin og grundvalla jørðina og siga við Zion: „Tú ert fólk mítt.“ Jes 51,12-16

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Tessalónikumanna:*
Men vit vilja ikki, brøður, at tit skulu vera óvitandi viðvíkjandi teimum, sum sovna burtur, fyri at tit ikki skulu syrgja eins og hinir, sum ikki hava vón. Tí at um vit trúgva tí, at Jesus er deyður og risin upp, tá skal Guð eisini somuleiðis við Jesusi leiða tey fram, sum sovnað eru burtur, saman við honum. Tí at hetta siga vit tykkum, við einum orði Harrans, at vit, sum liva og verða eftir til komu Harrans, skulu als ikki koma undan teimum, sum sovnað eru burtur; tí at sjálvur Harrin skal stíga niður av himni við kallandi rópi, við høvuðseingils rødd og við Guðs básúnu, og tey, sum eru deyð í Kristi, skulu fyrst rísa upp; síðan skulu vit, sum liva, sum verða eftir, saman við teimum verða rykt burtur á skýggjum til fundar við Harran í luftini; og so skulu vit altíð vera saman við Harranum. Troystið tí hvør annan við hesum orðum! 1 Tess 4,13-18

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Tá ið tit tí síggja andstygd oyðingarinnar, sum talað er um av Dánjali profeti, standa á heilagum staði – tann, ið hetta lesur, hann gevi tí gætur – tá rými tey, sum eru í Júdeu, til fjals. Tann, ið er staddur uppi á tekjuni, hann fari ikki niður eftir tí, ið inni er í húsi hansara; og tann, ið er staddur úti á markini, hann vendi ikki heim aftur eftir klæðum sínum! Men tær neyðarkonur, sum í teimum døgum hava barn undir belti og á brósti! Men biðið um, at flýggjan tykkara ikki skal verða um vetrartíð, ikki heldur ein hvíludag. Tí at tá skal verða mikil trongd, slík sum hon ikki hevur verið frá upphavi

heimsins og til henda dag, og sum hon onga tíð skal verða. Og um hesir dagar ikki vórðu styttir, tá varð ikki maður frelstur; men vegna teirra útvaldu skulu hesir dagar verða styttir. Um onkur tá sigur við tykkum: „Sí, her er Kristus!“ ella: „har er hann,“ tá skulu tit ikki trúgva tí. Tí at svikakristusar og svikaprofetar skulu koma upp, og teir skulu gera stór tekin og undurverk, fyri at eisini tey útvaldu skuldu verða villleidd, um tað var gjørligt. Sí, eg havi sagt tykkum tað frammanundan. Um tey tí siga við tykkum: „Sí, hann er í oyðimørkini,“ tá farið ikki út hagar; „sí, hann er í kømurunum,“ tá trúgvið tí ikki. Tí at eins og snarljósið skyggir í eystri og lýsir í vestri, soleiðis skal koma menniskjusonarins verða. Har sum ræið er, har munnu ørnirnar flykkjast.“ Matt 24,15-28

26. SUNNUDAG EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

Litur: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú sáar títt góða sáð, heilaga orð títt, í mannahjørtu. Vit biðja teg, at tú við heilaga anda tínum vilt lata hetta góða sáð títt vaksa og bera ávøkst í hjørtum okkara. Varða okkum fyri hinum ónda fígginda og hjálp okkum í øllum freistingum og vandum, so at sáðið kann búnast til heysta, og vit verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í

einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum ert trúfastur í kærleika og gávumildur sáar títt góða sáð í hjørtu okkara. Vit biðja teg, varðveit fólk títt. Gev øllum, sum einasta vón er himmalska náði tín, altíð at vera undir vernd tíni fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Lít tú á Harran og ger tað góða, búgv tú í landinum og stunda á trúskap, so skalt tú í Harranum hava gleði tína, og hann man tær geva tíni hjartans ynski. Legg tú á Harran tínar leiðir, og lít tú á hann, hann man tað útinna, lata rætt tín koma upp sum ljósið, tína rættferð sum middagskláran. Sl 37,3-6

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:*
So íklæðist tá eins og Guðs útvaldu, heilagu og elskaðu, hjartaliga miskunn, góðvild, eyðmýkt, spaklyndi, langmóð, so at tit umbera hvør annan og fyrigeva hvør øðrum, um einhvør hevur kærumál móti einumhvørjum; eins og Kristus fyrigav tykkum, soleiðis eisini tit! Men fram um alt hetta íklæðist kærleikan, sum er band fullkomileikans! Og latið frið Krists ráða í hjørtum tykkara, sum tit eisini vórðu kallaðir til í einum likami, og verðið takksamir! Latið orð Krists búgva ríkliga hjá tykkum í

øllum vísdómi, so at tit læra og áminna hvør annan við sálmum og lovsongum og andligum ljóðum, og syngja yndisliga Guði lov í hjørtum tykkara. Og alt, hvat tit so gera í orði ella verki, gerið tað alt í Harrans Jesu navni, takkandi Guði faðir við honum. Kol 3,12-17

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus flutti fram eitt annað líknilsi fyri teir og segði: „Himmiríki er líkt einum manni, ið sáaði gott sáð í veltu sína. Men meðan fólkini svóvu, kom óvinur hansara og sáaði illgresi upp í hveitina og fór so avstað. Men tá ið sáðið vaks upp, og akurin var aksaskotin, tá kom eisini illgresið til sjóndar. Og húskallar húsbóndans komu tá og søgdu við hann: „Harri, sáaði tú ikki gott sáð í veltu tína? Hvaðani hevur hon tá fingið illgresið?“ Men hann segði við teir: „Hetta hevur ein illviljaður maður gjørt.“ Men húskallarnir siga við hann: „Vilt tú tá, at vit skulu fara at lúka tað burtur?“ Men hann segði: „Nei, fyri at tit, tá ið tit royta illgresið burtur, ikki skulu slíta hveitina upp við.“ Latið bæði sløgini vaksa saman til heysta; og á heystadegi vil eg siga við akurskurðarmenninar: Hentið fyrst illgresið saman og bindið tað í bundi til at brenna, men berið hveitina inn í løðu mína.“ Matt 13,24-30

SEINASTA SUNNUDAG Í KIRKJUÁRINUM

Litur: Hvítur ella gyltur. Dagin eftir: Grønur.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, vit takka tær, tí

at tú við syni tínum, harra og frelsara okkara, Jesusi Kristi, hevur grundað náðinnar ríki í heilagu kirkju tíni á jørð. Vit biðja teg, gev henni náði til at umsita orð títt og sakramenti tíni rætt og varðveit hana í sannari trúgv og sonnum kærleika, so at vit í henni mega finna hvíld fyri sálum okkara og at enda koma inn til hina ævigu hvíldina hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, vit takka tær, tí at tú í hesum kirkjuári hevur hildið vón okkara uppi við boðskapinum um endurloysn og frelsu. Vit biðja teg, gev okkum við gleði at taka ímóti einborna syni tínum sum frelsara heimsins og møta honum við góðum treysti, tá ið hann kemur aftur í dýrd at døma livandi og deyð, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
So sigur Harrin: Tí, sí, eg skapi nýggjan himin og nýggja jørð, hitt fyrra skal ikki verða mint, og eingin skal huga tað meir; men teir skulu fegnast og gleðast um tað, sum eg skapi; tí, sí, til fagnaðar geri eg Jerúsalem og íbúgvar hennara til gleði. Eg skal fegnast um Jerúsalem og gleðast um fólk mítt; har skal eingin grátur verða meir og eingin venan. Jes 65,17-19

* *Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Tessalónikumanna:*
Men vit biðja tykkum, brøður, um at kennast við teir, sum arbeiða tykkara millum og eru fyristøðumenn tykkara í Harranum og áminna tykkum, og at hava teir í serliga miklum metum í kærleika fyri gerning teirra. Haldið frið tykkara millum! Og vit leggja tykkum tað í sinni: Áminnið tey óflýggjaligu, uggið tey mótlítlu, hjálpið teimum veiku, havið tol við øll! Gevið gætur, at eingin lønar nøkrum ilt aftur við illum; men roynið altíð at gera tað góða, bæði hvør móti øðrum og móti øllum! Verið altíð glaðir! Biðið uttan íhald! Takkið í øllum førum! Tí at hetta er vilji Guðs í Kristi Jesusi til tykkara. Sløkkið ikki andan! Vanmetið ikki profetaorð! Roynið alt, haldið fast á tí, sum gott er! Haldið tykkum frá tí illa av øllum slagi! Men sjálvur Guð friðarins halgi tykkum til fulnar, og gævi, at andi tykkara og sál og likam mega verða varðveitt í heilum líki, ólastandi við komu várs harra Jesu Krists! 1 Tess 5,12-23

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Jesus segði: „Men tá ið menniskjusonurin kemur í dýrd síni og allir einglarnir við honum, tá skal hann sita í dýrdarhásæti sínum. Og øll fólkasløgini skulu koma saman framman fyri honum; og hann skal skilja tey hvørt frá øðrum, eins og hirðin skilir seyðirnar frá geitunum, og seyðirnar skal hann seta høgrumegin við seg, og geitirnar vinstrumegin. Tá skal kongurin siga við tey, sum eru høgrumegin við hann: „Komið higar, tit hini vælsignaðu hjá faðir mínum, og fáið ríkið tað í arv, sum tykkum hevur verið lagað, frá tí at verøldin var grundað! Tí at eg

var svangur, og tit góvu mær at eta; eg var tystur, og tit góvu mær at drekka; eg var ókunnigur, og tit hýstu mær; eg var nakin, og tit klæddu meg; eg var sjúkur, og tit vitjaðu meg; eg sat í fangahúsi, og tit komu at finna meg.“ Tá munnu hini rættvísu svara honum og siga: „Harri, nær sóu vit teg svangan og góvu tær at eta, ella tystan og góvu tær at drekka? Nær sóu vit teg ókunnigan og hýstu tær, ella naknan og klæddu teg? Nær sóu vit teg sjúkan ella í fangahúsi og komu at finna teg?“ Og kongurin skal svara og siga við tey: „Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær.“ Tá skal hann eisini siga við tey vinstrumegin: „Farið burtur frá mær, bannaðu tit, í hin æviliga eldin, sum er ætlaður djevulinum og einglum hansara! Tí at eg var svangur, og tit góvu mær ikki at eta; eg var tystur, og tit góvu mær ikki at drekka; eg var ókunnigur, og tit hýstu mær ikki; eg var nakin, og tit klæddu meg ikki; eg var sjúkur og í fangahúsi, og tit vitjaðu meg ikki.“ Tá munnu eisini tey svara og siga: „Harri, nær sóu vit teg svangan ella tystan ella ókunnigan, ella naknan ella sjúkan ella í fangahúsi, og tæntu tær ikki?“ Tá skal hann svara teimum og siga: „Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit ikki hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu, tá hava tit heldur ikki gjørt tað móti mær.“ Og hesi skulu fara burtur til æviga revsing, men hini rættvísu til ævigt lív.“ Matt 25,31-46

ÓLAVSØKA

Litur: Reyður.

KOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við Ólavi kongi setti upp krossmerkið millum fólk okkara og grundaði tína heilagu kirkju her í heimlandi okkara. Vit biðja teg, vek upp hjørtu okkara við heilaga anda tínum, so at vit í lívi og deyða halda fast við títt heilaga orð og í friði og semju byggja land okkara, tær til heiðurs og fólki okkara til lukku og signingar fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

FYRRA TEKSTARØÐ

Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:

Fegnist fyri Harranum jørðin øll! Harranum tænið við gleði! Fyri ásjón hans komið við frøi! Vitið, at Harrin er Guð! Hann okkum skapaði, og hansara vit eru, hans fólk og tað fylgi, hann røktar. Farið inn í hans portur við lovi, í forgarðar hans við prísi! Lovið honum! Signið hans navn! Tí góður er Harrin. Miskunn hans varir um ævir, trúfesti hans ætt eftir ætt. Sl 100

Epistulin skrivar Jákup ápostul:

Sælur er tann maður, sum heldur út í freisting; tí at tá ið hann er royndur, skal hann fáa lívsins krúnu, sum Harrin hevur lovað teimum, sum elska hann. Ják 1,12

Hetta heilaga evangeliið skrivar Matteus evangelistur:
Tá segði Jesus við lærusveinar sínar: „Vil nakar ganga aftan á meg, tá avnokti hann sjálvan seg og taki upp kross sín og fylgi mær! Tí at tann, ið vil bjarga lívi sínum, skal missa tað; men tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal finna tað. Tí hvat gagnar tað manni, um hann vinnur allan heimin, men má bøta afturfyri við sál síni? Ella hvat skal maður geva í viðurlag fyri sál sína? Tí at menniskjusonurin skal koma í faðirs síns dýrd við einglum sínum, og tá skal hann gjalda einum og hvørjum eftir virki hansara!“ Matt 16,24-27

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær fyri hvønn ein friðardag, tú gevur okkum. Vit biðja teg, varða okkum fyri kríggi og fremmandum harradømi. Gev okkum náði tína, so at vit mega liva eftir vilja tínum í øllum gudsótta og ikki geva orsøk til kríggj ella aðra ólukku. Leið og stýr tú yvirvøld okkara, so at hon ikki forðar, men fremur tað lýdnið, vit skylda tær, til tess at vit mega fáa lukku og signing í landi okkara og at enda koma inn í hitt himmalska heimlandið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Yvirlit yvir bibliulestrar til barnagudstænastu í vanligari kirkjutíð (uppskot)

Í hesum úrvali av bibliulestrum er kirkjuárið býtt í høvuðstíðarskeið, og lestrarnir verða valdir hareftir. Eisini er loyvt at lesa bert ein bibliulestur, tá helst ein úr evangeliunum.

Advent
a. Sl 24,7-10; Matt 21,1-9
Sí 1. sunnudag í advent, fyrru tekstarød

á. Jes 42,1-9; Luk 4,16-30
Sí 1. sunnudag í advent, seinnu tekstarød

b. Jes 11,1-10; Matt 25,1-13
Sí 2. sunnudag í advent, seinnu tekstarød

d. Jes 35; Matt 11,2-10
Sí 3. sunnudag í advent, fyrru tekstarød

Jól og nýggjár
a. Jes 9,1-7; Luk 2,1-14 ella 1-20
Sí jóladag, fyrru tekstarød

á. 1 Mós 1,1-5; Jóh 1,1-14
Sí jóladag, seinnu tekstarød

b. Jes 63,7-9 ella Gal 4,4-7; Luk 2,22-40
Sí jólasunnudag, fyrru og seinnu tekstarød

d. Ják 4,13-17; Matt 6,5-13
Sí nýggjársdag, seinnu tekstarød

Trettanda dag jóla og sunnudagarnar eftir
a. Jes 60,1-6; Matt 2,1-12
Sí trettanda dag jóla

á. 1 Sám 2,18-20 og 26; Luk 2,41-52
Sí 1. sunnudag eftir trettanda, fyrru tekstarød

b. 1 Mós 48,8-12 og 15-16; Mark 10,13-16
Sí 1. sunnudag eftir trettanda, seinnu tekstarød

d. 2 Mós 33,18-23; Jóh 2,1-11
Sí 2. sunnudag eftir trettanda, fyrru tekstarød

ð. Sl 126; Luk 19,1-10
Sí 2. sunnudag eftir trettanda, seinnu tekstarød

e. Jes 40,26-31; Matt 14,22-33
Sí 4. sunnudag eftir trettanda, seinnu tekstarød

f. 2 Mós 34,27-35; Matt 17,1-9
Sí seinasta sunnudag eftir trettanda, fyrru tekstarød

Forføsta
a. Jer 9,23-24; Matt 20,1-16
Sí 3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), fyrru tekstarød

á. Orðt 3,3-6; Matt 25,14-30
Sí 3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), seinnu tekstarød

b. Jes 55,6-11; Luk 8,4-15
Sí 2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), fyrru tekstarød

d. 1 Pæt 3,18-22; Matt 3,13-17
Sí sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), fyrru tekstarød

ð. 1 Kor 13; Luk 18,31-43
Sí sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), seinnu tekstarød

Føsta
a. 1 Mós 3,1-19; Matt 4,1-11
Sí 1. sunnudag í føstu, fyrru tekstarød

á. 2 Mós 16,11-18; Jóh 6,1-15
Sí miðføstu sunnudag, fyrru tekstarød

b. Jes 7,10-14; Luk 1,26-38
Sí boðanardag Mariu, fyrru tekstarød

d. Fil 2,5-11; Matt 21,1-9
Sí pálmasunnudag, fyrru tekstarød

ð. Zak 9,9-10; Mark 14,3-9 ella Jóh 12,1-16
Sí pálmasunnudag, seinnu tekstarød

Páskir
a. 1 Kor 5,7-8; Mark 16,1-8 ella Matt 28,1-8
Sí páskadag, fyrru og seinnu tekstarød

á. Áps 10,34-41; Luk 24,13-35
Sí 2. páskadag, fyrru tekstarød

b. 2 Mós 3,1-7 og 10-14; Jóh 14,1-11
Sí 3. sunnudag eftir páskir, seinnu tekstarød

d. Áps 1,1-11; Luk 24,46-53
Sí Krists himmalsferðardag, seinnu tekstarød

Hvítusunna
a. 1 Mós 11,1-9 ella 1 Mós 2,4b-7 ella Áps 2,1-11; Jóh 14,15-21
Sí hvítusunndag, seinnu tekstarød

á. Áps 2,42-47; Jóh 3,16-21
Sí 2. hvítusunndag, fyrru og seinnu tekstarød

b. Jes 49,1-6; Matt 28,16-20
Sí tríeindardag (trinitatis sunnudag), seinnu tekstarød

Sunnudagar eftir tríeindardag (trinitatis)

a. Jes 25,6-9; Luk 14,16-24
Sí 2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

á. Jes 57,15-19; Luk 15,1-10
Sí 3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

b. Jes 65,1-2; Luk 15,11-32
Sí 3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

d. Jes 6,1-8; Luk 5,1-11
Sí 5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

ð. Jer 1,4-9; Matt 16,13-26
Sí 5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

e. 2 Mós 20,1-17; Matt 19,16-26
Sí 6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

f. Sl 147,1-11; Mark 8,1-9
Sí 7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

g. 1 Kor 15,1-10a; Luk 18,9-14
Sí 11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

h. 3 Mós 19,1-2 og 9-18; Luk 10,23-37
Sí 13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

i. 2 Kong 5,1-19a; Luk 17,11-19
Sí 14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

í. Áps 3,1-10; Jóh 5,1-15
Sí 14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

j. Áps 8,26-39; Luk 10,38-42
Sí 15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

k. 1 Kong 17,8-10a og 17-24; Luk 7,11-17
Sí 16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

l. 1 Jóh 4,12-16; Jóh 15,1-11
Sí 18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), seinnu tekstarød

m. Jes 44,22-28; Matt 9,1-8
Sí 19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

n. Jer 18,1-6; Matt 22,1-14
Sí 20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

o. Opb 21,1-7; Matt 5,13-16
Sí alla halganna sunnudag, seinnu tekstarød

ó. 1 Mós 50,15-21; Matt 18,21-35.
Sí 22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

p. Ez 37,1-14; Matt 9,18-26
Sí 24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), fyrru tekstarød

r. Jes 65,17-19; Matt 25,31-46
Sí seinasta sunnudag í kirkjuárinum, fyrru tekstarød

Pínslusøga várs Harra Jesu Krists

Í GETSEMANE

1. Yvir um løkin Kedron

Og tá ið teir høvdu sungið lovsangin, fór Jesus, sum hann var vanur, yvir um løkin Kedron út til Oljufjallið; men lærusveinar hansara fylgdust eisini við honum. Tá sigur Jesus við teir: „Í hesi nátt munnu tit allir fáa meinboga av mær; tí at skrivað stendur: „Eg skal sláa hirðan, og seyðafylgið skal spreiðast sundur.“ Men aftan á tað, at eg eri upprisin, skal eg fara undan tykkum til Galileu.“ Men Pætur tók til orða og segði við hann: „Um so teir allir fáa meinboga av tær, skal eg tó aldri taka mær meinboga.“ Jesus segði við hann: „Sanniliga sigi eg tær: í dag, í hesi nátt, áðrenn hanin gelur tvær reisir, skalt tú avnokta meg tríggjar ferðir.“ Men hann tók enn treystligari til orða: „Um eg so skal doyggja við tær, skal eg als ikki avnokta teg.“ Sama søgdu eisini allir lærusveinarnir.

Tá kemur Jesus við teimum í ein garð, sum kallaðist Getsemane, har sum ein urtagarður var, sum hann fór inn í við lærusveinum sínum. Men eisini Judas, ið sveik hann, kendi staðin, tí at Jesus var ofta komin saman har við lærusveinum sínum. Tá segði Jesus við teir: „Setist her, meðan eg fari burtur hagar og haldi bøn.“ Og hann tók Pætur og teir báðar synir Sebedeusar, Jákup og Jóhannes, við sær; og hann gjørdist syrgin og tók at nøtra og so sára at kvíða. Tá sigur hann við teir: „Sál mín er sorgarbundin heilt til deyða. Verið her og vakið við mær. Biðið, at tit ikki mega koma í freisting.“

2. Sálarstríðið

Og hann sleit seg frá teimum, okkurt um eitt steinkast, og fell til jarðar, fram eftir grúgvu, og bað, at tann tímin mátti fara um hann, um tað var gjørligt; og hann segði: „Abba, faðir mín! Alt er gjørligt hjá tær; tak hesa skál frá mær; tó ikki sum eg vil, men sum tú vilt.“ Og hann kemur til lærusveinarnar og hittir teir sovandi, og hann sigur við Pætur: „Símun, svevur tú? Vart tú ikki mentur at vaka ein tíma við mær? Vakið og biðið, at tit ikki mega falla í freisting. Andin er fúsur, men holdið er veikt.“ Uppaftur á øðrum sinni fór hann burtur, bað og segði: „Faðir mín, um tað ikki er gjørligt, at henda skál kann ganga um meg, uttan at eg skal drekka hana, so veri vilji tín!“ Og hann kom og hitti teir uppaftur sovandi; tí at eygu teirra vóru tyngd av svøvni, og teir vistu ikki, hvat teir skuldu svara honum. Og hann læt teir vera, fór avstað aftur og bað triðju ferð og segði aftur tey somu orðini: „Faðir! Hevði tú viljað tikið hesa skál frá mær; men veri tó ikki vilji mín, men tín!“

Men ein eingil av himni birtist fyri honum og styrkti hann. Og tá ið hann var staddur í deyðaangist, bað hann enn meira tráliga; og sveitti hansara varð rætt sum blóðsdropar, sum fullu á jørðina. Og tá ið hann reistist frá bønini og kom til lærusveinarnar, hitti hann teir sovandi av trega. Og hann segði við teir: „Sova tit enn og hvíla tykkum? Tað er nóg mikið. Tímin er komin, sí, menniskjusonurin verður givin upp í syndara hendur. Standið upp! Latið okkum fara. Sí, tann, ið meg svíkur, er í nánd. Biðið, at tit ikki mega koma í freisting.“

3. Svik Judasar

Og alt fyri eitt, meðan hann enn talaði, sí, tá kom Judas, ein av teimum tólv, og við honum ein heilur flokkur við svørðum og gøssum frá høvuðsprestunum og Farisearunum og hinum skriftlærdu og fólksins elstu; og teir komu hagar við kyndlum og lampum. Men tann, ið sveik hann, hevði givið teimum eitt avrátt tekin og sagt: „Tann, sum eg kyssi, hann er tað; takið hann og farið tryggiliga avstað við honum."

Men av tí, at Jesus nú visti alt, sum koma skuldi yvir hann, gekk hann fram og segði við teir: „Hvørjum leita tit eftir?" Teir svaraðu honum: „Eftir Jesusi úr Nasaret." Jesus sigur við teir: „Tað eri eg." Men eisini Judas, sum sveik hann, stóð har hjá teimum. Tá ið hann nú segði við teir: „Tað eri eg!" hopaðu teir aftur eftir hæli og fullu til jarðar. Hann spurdi teir tá aftur: „Hvørjum leita tit eftir?" Men teir søgdu: „Eftir Jesusi úr Nasaret." Jesus svaraði: „Eg havi sagt tykkum, at tað eri eg; er tað tá mær, tit leita eftir, so latið hesar fara." Til tess at orðið skuldi ganga út, sum hann hevði sagt: „Eg misti ongan av teimum, sum tú hevur givið mær."

Men Judas nærkaðist Jesusi til at kyssa hann og segði: „Heilur og sælur! Rabbi!" og kysti hann. Men Jesus segði við hann: „Vinur mín, hví ert tú higar komin? Judas, svíkur tú menniskjusonin við einum kossi?" Tá gingu teir at, løgdu hendur á Jesus og tóku hann.

4. Jesus tikin til fanga – Jesus gevur seg yvir

Men tá ið teir, sum hjá honum vóru, sóu, hvussu tað mundi fara at ganga, søgdu teir: „Harri, skulu vit sláa til við svørði?" Men Símun Pætur, sum hevði svørð, brá tí

nú og sló tænaran hjá høvuðsprestinum og høgdi av honum høgra oyrað; men navnið á tænaranum var Malkus. Men Jesus tók til orða og segði: „Latið tað nú vera nóg mikið!“ Og hann segði við Pætur: „Stikk svørð títt aftur í slíðrarnar; tí at allir teir, ið taka til svørðs, skulu falla fyri svørði! Ella heldur tú, at eg ikki kundi biðið faðir mín, so at hann nú í stundini sendi mær meira enn tólv legiónir av einglum til hjálpar? Skal eg ikki drekka skálina, sum faðirin hevur givið mær? Hvussu skuldu tá skriftirnar ganga út, at tað eigur so at verða?“ – Og hann nam við oyrað á honum og grøddi hann.

Í somu stund segði Jesus við mannaskaran: „Sum eftir einum ránsmanni eru tit farnir út við svørðum og gøssum at taka meg. Dag og dagliga var eg hjá tykkum í halgidóminum og lærdi, og tit rættu ikki hendurnar móti mær. Men hetta er tykkara tími og vald myrkursins. Men alt hetta er hent, til tess at skriftir profetanna skulu ganga út.“ Tá fóru allir lærusveinarnir frá honum og rýmdu.

Og ein ungur maður fylgdist við honum, og hann hevði sveipað eitt línklæði uttan um sín bera kropp, og teir tóku hann. Men hann slepti línklæðinum og flýddi nakin burtur.

Vaktarmenninir og høvuðsmaðurin og tænararnir hjá Jødunum tóku nú Jesus og bundu hann.

Í GARÐINUM HJÁ HØVUÐSPRESTINUM

5. Til Annasar

Og teir førdu hann fyrst til Annasar; tí at hann var verfaðir Kajfasar, sum var høvuðsprestur tað árið. Men

tað var Kajfas, sum hevði givið Jødunum tað ráð, at tað var gagnligt, at ein maður doyði fyri fólkið.

Men Símun Pætur og ein annar lærusveinur fylgdu Jesusi langt aftaná líka til borgargarðin hjá høvuðsprestinum; men tann lærusveinurin var kunnigur við høvuðsprestin og fór saman við Jesusi inn í garðin hjá høvuðsprestinum. Men Pætur varð standandi uttanfyri við dyrnar. Tá fór hin lærusveinurin út, sum kunnigur var við høvuðsprestin, og talaði við duraternuna og førdi Pætur inn.

Men tænararnir og sveinarnir stóðu har uttan um ein koleld, sum teir høvdu kynt upp í miðjum garðinum, tí at kalt var, og vermdu seg. Tá sá arbeiðskonan, sum duraterna var, Pætur sita í eldglæmuni, og hon stardi upp á hann og segði: „Tú vart eisini við hesum Jesusi Galileinginum! Ert tú ikki eisini ein lærusveinurin hjá hesum manni!“ Men hann noktaði fyri tí, so allir hoyrdu, og segði: „Nei, eg eri ikki; eg kenni hann ikki, kvinna! Eg veit ikki, hvat tú sigur.“

6. Tann fyrsta avhoyringin

Høvuðspresturin spurdi nú Jesus um lærusveinar hansara og um læru hansara. Jesus svaraði honum: „Eg havi talað opinberliga fyri heiminum; eg havi altíð lært í samkomuhúsum og í halgidóminum, har sum allir Jødarnir koma saman, og í loyndum havi eg einki talað. Hví spyrt tú meg? Spyr teir, sum hava hoyrt, hvat eg havi talað til teirra. Sí, teir vita, hvat eg havi sagt.“ Men í tí hann segði hetta, gav ein av sveinunum, sum hjá stóð, Jesusi høgg á kinn og segði: „Svarar tú soleiðis høvuðsprestinum?“ Jesus svaraði honum: „Havi eg talað illa, tá prógva, at tað er ilt; men havi eg talað væl, hví slært tú meg?“

7. Í forgarðinum – avnoktan Pæturs

Og teir fóru avstað við Jesusi til Kajfasar, høvuðsprestin, har sum allir høvuðsprestarnir og teir elstu og hinir skriftlærdu vóru saman komnir. Men Símun Pætur fór út í forgarðin, og tá gól hanin. Og eitt sindur seinni bar ein onnur genta eyga við hann og fór at siga við teir, ið hjá stóðu: „Hasin var eisini við Jesusi úr Nasaret." Og teir søgdu við hann: „Manst tú ikki eisini vera ein av lærusveinum hansara?" Og ein annar teirra segði: „Jú, tú ert ein teirra!" Og hann noktaði fyri tí aðra ferðina við einum eiði og segði: „Nei, maður, eg eri tað ikki, og eg kenni ikki tann mannin." Og okkurt um ein tíma seinni helt ein annar fyri víst við teir, ið hjá stóðu og segði: „Sanniliga ert tú ein teirra, tí tú ert eisini ein Galileingur, og tú kennist á málinum." Ein av tænarunum hjá høvuðsprestunum, sum var skyldmaður hansara, ið Pætur hevði høgt oyrað av, sigur: „Sá eg teg ikki í urtagarðinum saman við honum?" Men hann tók at biðja ilt og svørja: „Eg kenni ikki henda mannin, sum tit tala um." Og í sama viðfangi, meðan hann enn talaði, gól hanin aðra ferð. Og Harrin vendi sær á og leit til Pæturs. Og orð Harrans runnu Pæturi í huga, at hann hevði sagt við hann: „Áðrenn hanin gelur tvær reisir, manst tú avnokta meg tríggjar ferðir." Og Pætur fór útum og skar í grát.

8. Jesus fyri ráðnum – tey følsku vitnini

Men høvuðsprestarnir og hinir elstu og alt ráðið royndu at fáa rangan vitnisburð móti Jesusi, so at teir kundu fáa hann tiknan av døgum; og teir funnu ongan, tí at mangir søgdu rangan vitnisburð móti honum; men vitnisburðir teirra komu ikki á samt. Men at endanum komu tveir

fram og søgdu rangan vitnisburð móti honum og søgdu: „Vit hava hoyrt hann siga: „Eg eri mentur og skal bróta hetta Guðs templið niður, sum er gjørt við hondum, og eftir trimum døgum byggja eitt annað, sum ikki er gjørt við hondum.“ Og heldur ikki um hetta kom vitnisburður teirra á samt. Og høvuðspresturin reistist og steig fram mitt ímillum teirra og spurdi Jesus og segði: „Svarar tú als einki? Hvat er tað, ið hesir vitna móti tær?“ Men Jesus tagdi og svaraði einki.

Høvuðspresturin spurdi hann uppaftur og sigur við hann: „Ert tú Kristus, sonur hins hálovaða? Eg svørji teg við hin livandi Guð, at tú sigur okkum, um tú ert Kristus, sonur Guðs!“ Jesus segði við hann: „Tú segði tað sjálvur. Eg eri tað. Men eg sigi tykkum, frá hesi stund skulu tit síggja menniskjusonin sita við høgru hond kraftarinnar og koma í skýum himmalsins.“ Tá skræddi høvuðspresturin klæði síni sundur og segði: „Hann hevur spottað Guð! Hvat nýtist okkum nú fleiri vitni? Sí, nú hava tit hoyrt gudsspottanina. Hvat halda tit?“ Men teir dómfeldu hann og søgdu: „Hann er sekur til deyða.“

Og teir menn, ið hildu Jesusi, háðaðu hann, og teir spýttu hann í andlitið og slógu hann við knýttum nevum; men summir tveittu eitt plagg oman yvir hann, bundu fyri eyguni á honum og slógu hann í andlitið og søgdu: „Profetera fyri okkum, Kristus, hvør var tað, sum sló teg?“ Og mong onnur tílík spottorð talaðu teir til hansara.

9. Dómurin yvir Jesus – tann avgerandi dómurin

Og tá ið tað var liðið út móti degi, gingu allir høvuðsprestarnir saman í ráð við teir skriftlærdu og fólksins elstu, alt ráðið, og teir hildu samráð saman móti Jesusi at

fáa hann tiknan av lívi. Og teir førdu hann fram fyri ráðssamkomu sína og søgdu: „Ert tú Kristus, tá sig okkum tað!“ Men hann segði við teir: „Um eg sigi tykkum tað, tá trúgva tit tí ikki; og um eg spyrji, tá svara tit mær ikki ella sleppa mær leysum. Frá hesi stund skal menniskjusonurin eiga sæti við høgru hond Guðs kraftar!“ Og teir søgdu allir: „Ert tú tá sonur Guðs meðni?“ Men hann segði við teir: „Tit siga tað, tí at eg eri tað.“ Men teir søgdu: „Hvat nýtist okkum longur vitnisburðir? Tí at vit hava sjálvir hoyrt tað av hansara egna munni.“ Og allur flokkurin av teimum reistist, og teir bundu Jesus og førdu hann bundnan frá Kajfasi til borgina hjá landshøvdinganum og fingu Pontiusi Pilatusi, landshøvdinganum, hann. Men tað var tíðliga á morgni.

10. Deyði Judasar

Tá ið Judas, ið sveik hann, sá, at hann var dømdur sekur, tá iðraði hann seg eftir tí og fór við teimum tríati silvurpeningunum aftur til høvuðsprestarnar og hinar elstu og segði: „Eg havi syndað, við tað at eg sveik sakleyst blóð.“ Men teir søgdu: „Hvat liggur okkum á tí? Tað fert tú sjálvur at síggja til!“ Og hann kastaði silvurpeningarnar inn í templið og gekk sín veg; og hann fór burtur og hongdi seg. Og hann datt niður og skrædnaði, og allir innvølir hansara komu út. Men høvuðsprestarnir tóku silvurpeningarnar og søgdu: „Tað er ikki beint at leggja teir í tempulkistuna, tí at hetta eru blóðpeningar.“ Men teir hildu saman ráð og keyptu fyri teir pottamakarajørðina at hava til grevstur fyri útlendingar. Og hetta er vorðið øllum teim kunnigt, sum búgva í Jerúsalem, so at hesin jarðarteigur til tann dag í dag á teirra máli nevnist Hakel-

dama, tað er blóðjørðin. Tá gekk tað orðið út,ið er talað av Jeremia profeti, táið hann sigur: „Og teir tóku teir tríati silvurpeningarnar, virði,ið hann var mettur til, hann,ið teir mettu fyri Ísraels børn; og teir lótu teir fyri pottamakarajørðina, soleiðis sum Harrin mær beyð."

Í BORGINI HJÁ LANDSHØVDINGANUM

11. Ákæran – Jesus fyri Pilatusi

Men Jødarnir gingu ikki inn í borgina, at teir ikki skuldu gerast óreinir, men kundu eta páskalambið. Pilatus fór tí út til teirra og segði: „Hvørja klagu føra tit móti hesum manni?" Teir svaraðu og søgdu við hann: „Var hann ikki ein illgerðarmaður, tá høvdu vit ikki verið komnir til tín við honum." Tá segði Pilatus við teir: „Takið tit hann og dømið hann eftir lóg tykkara." Jødarnir søgdu við hann: „Okkum er ikki loyvt at taka mann av lívi." Til tess at orð Jesusar skuldu ganga út, sum hann segði, táið hann kunngjørdi, hvønn deyða hann skuldi doyggja. Men teir tóku at klaga hann og søgdu: „Vit eru vorðnir varir við, at hasin maðurin villir fólk okkara inn á avvegir og forbjóðar at lata keisaranum skatt og sigst sjálvur at vera Kristus, kongur."

Pilatus fór tá inn aftur í borgina, og hann kallaði Jesus til sín og segði við hann: „Ert tú kongur Jødanna?" Jesus svaraði: „Sigur tú hetta av tær sjálvum, ella hava aðrir sagt tær tað um meg?" Pilatus svaraði: „Eri eg tá Jødi? Fólk títt og høvuðsprestarnir hava fingið mær teg; hvat hevur tú gjørt?" Jesus svaraði: „Ríki mítt er ikki av hesum heimi; var ríki mítt av hesum heimi, tá høvdu sveinar

mínir stríðst fyri meg, til tess at eg ikki varð givin upp til Jødarnar; men nú er ríki mítt ikki hiðani." Pilatus segði tá við hann: „Men so ert tú kongur kortini?" Jesus svaraði: „So er, sum tú sigur, eg eri kongur. Til tess eri eg føddur og til tess kom eg í heimin, at eg skal vitna um sannleikan; ein og hvør, sum er av sannleikanum, hoyrir rødd mína." Pilatus sigur við hann: „Hvat er sannleiki?" Og tá ið hann hetta hevði sagt, fór hann út aftur til Jødarnar og sigur við teir: „Eg finni onga søk hjá honum." Og meðan hann var klagaður av høvuðsprestunum og hinum elstu, svaraði hann einki. Tá spurdi Pilatus hann upp aftur og segði: „Svarar tú als einki? Sí, hvussu mikið tað er, sum teir klaga teg fyri. Hoyrir tú ikki?" Og hann svaraði honum ikki aftur, ikki upp á eitt einasta orð, so landshøvdingin undraðist stórliga. Men teir gjørdust enn ágrýtnari og søgdu: „Hann øsir upp fólkið, við tað at hann lærir um alla Júdeu, líka frá Galileu, har sum hann setti á."

12. Jesus fyri Heródesi

Men tá ið Pilatus hoyrdi um Galileu, spurdi hann, um hesin maðurin var Galileingur. Og tá ið hann var vorðin vísur í tí, at hann var úr umdømi Heródesar, sendi hann hann til Heródesar, sum sjálvur eisini var staddur í Jerúsalem í teimum døgunum.

Men tá ið Heródes sá Jesus, varð hann ógvuliga glaður; tí at hann hevði langa tíð fegin viljað sæð hann, av tí at hann hevði hoyrt um hann; og hann gjørdi sær vón um at fáa at síggja eitthvørt tekin gjørt av honum. Og hann spurdi hann mangar spurningar; men Jesus svaraði honum einki. Men høvuðsprestarnir og hinir skriftlærdu

stóðu har og átalaðu hann harðliga. Men tá ið Heródes við hermonnum sínum hevði hildið hann fyri háð og spott, kastaði hann eitt skartaklæði um hann og sendi hann aftur til Pilatusar. Tann dagin vórðu teir Pilatus og Heródes vinmenn báðir; tí at áður hevði verið fíggindaskapur teirra millum.

Men Pilatus kallaði saman høvuðsprestarnar og høvuðsmenninar og fólkið og segði við tey: „Tit hava ført mær higar henda mann sum tann, ið villir fólkið út á avvegir; og sí, eg havi, so tit hava hoyrt, forhoyrt hann, og eg havi onga søk funnið hjá hesum manni í tí, sum tit klaga hann fyri; og heldur ikki Heródes; tí at hann sendi hann aftur til okkara, og sí, hann hevur einki gjørt, sum hann eigur at verða dripin fyri. Eg vil tí revsa hann og sleppa honum leysum."

13. Barrabas

Men um høgtíðina var landshøvdingin vanur at sleppa fólkinum einum fanga leysum, sum tey sjálv vildu. Og ta ferðina høvdu tey ein tiltiknan fanga, nevndur Barabbas, ið var settur fastur saman við ófriðarmonnum, sum í uppreistri í staðinum høvdu gjørt seg sekar í manndrápi. Og mannamúgvan rópaði og fór at biðja hann, at hann skuldi gera teimum soleiðis, sum hann var vanur. Tá ið tey nú vóru saman komin, segði Pilatus við tey: „Tað er siður hjá tykkum, at eg um páskirnar gevi tykkum ein leysan. Hvønn vilja tit, at eg skal geva tykkum leysan, Barabbas ella Jesus, tann Jødakongin, ið kallast Kristus?" Tí at hann skilti, at tað var av øvund, at høvuðsprestarnir høvdu givið hann upp til hansara.

Men meðan hann sat í dómarastólinum, sendi kona

hansara boð til hansara og segði við hann: „Fást tú ikki við henda rættvísa mannin, tí at eg havi útstaðið nógv í dag í einum dreymi fyri hansara skuld."

Men høvuðsprestarnir og hinir elstu elvdu mannamúgvuni til, at tey skuldu biðja um Barabbas, og um at Jesus skuldi verða tikin av lívi. Men landshøvdingin tók til orða og segði við tey: „Hvønn av hesum báðum vilja tit, at eg skal geva tykkum leysan?" Men tey rópaðu øll somul og søgdu: „Burtur við honum og gev okkum Barabbas leysan!" Og Pilatus talaði uppaftur til teirra, av tí at hann hevði hug at lata Jesus leysan og segði: „Hvat skal eg tá gera við Jesus, sum er kallaður Kristus?" Men tey rópaðu øll og søgdu: „Krossfest, krossfest hann! Men triðju ferðina segði hann við tey: „Hvat ilt hevur hann tá gjørt? Eg havi onga deyðasøk funnið hjá honum; eg vil tí revsa hann og lata hann leysan." Men tey rópaðu tað, tey vóru ment, og søgdu: „Krossfest hann!" og tey strongdu á við hørðum rópum og kravdu, at hann skuldi verða krossfestur; og róp teirra vórðu við yvirlutan.

14. Jesus verður tornakrýndur

Tá tók Pilatus Jesus og húðflongdi hann. Men hermenn landshøvdingans fóru við Jesusi inn í borgina og fingu saman um hann alla manningina. Og teir lótu hann úr og hongdu eina skarlaksskikkju upp á hann og flættaðu eina krúnu av tornum og settu honum á høvdið og góvu honum ein sevlegg í høgru hondina; og teir fullu á knæ framman fyri honum og hildu hann fyri háð og tóku at heilsa honum og søgdu: „Heilur og sælur, tú Jødakongur!" Og teir slógu hann í andlitið og spýttu á hann og tóku sevleggin og slógu hann í høvdið á honum og fullu á knæ og tilbóðu hann.

Pilatus fór tá út aftur og sigur við teir: „Sí, eg komi nú við honum út til tykkara, fyri at tit skulu vita, at eg finni onga søk hjá honum.“ Jesus gekk tá út við tornakrúnuni á høvdi og í skarlaksskikkjuni. Og hann sigur við teir: „Sí, her er maðurin!“ Tá ið nú høvuðsprestarnir og sveinarnir sóu hann, rópaðu teir og søgdu: „Krossfest, krossfest!“ Pilatus sigur við teir: „Takið tit hann og krossfestið hann; tí at eg finni onga søk hjá honum.“ Jødarnir svaraðu honum: „Vit hava lóg, og eftir lógini eigur hann at doyggja, tí at hann hevur gjørt seg sjálvan til Guðs son.“

15. Jesus verður dómfeldur

Tá ið nú Pilatus hoydi hetta orðið, kom enn meiri ótti á hann; og hann fór inn aftur í borgina og sigur við Jesus: „Hvaðan ert tú?“ Men Jesus gav honum einki svar. Pilatus sigur tá við hann: „Talar tú ikki til mín? Veitst tú ikki, at eg havi vald at sleppa tær leysum, og at eg havi vald at krossfesta teg?“ Jesus svaraði honum: „Tú hevði als einki vald á mær, um tað ikki var givið tær oman úr erva; tí hevur tann størri synd, sum gav meg upp í hendur tínar.“ Eftir hetta royndi Pilatus at sleppa honum leysum. Men Jødarnir rópaðu og søgdu: „Sleppir tú honum leysum, tá ert tú ikki vinur keisarans. Hvør tann, sum ger seg sjálvan til kong, setur seg upp móti keisaranum.“

Tá ið nú Pilatus hoyrdi hesi orð, førdi hann Jesus út og settist í dómarastólin á tí staðinum, sum nevnist „á Steinsettum“ (á hebráiskum máli: Gabbata). Men tað var atfangadagur fyri páskir. Og hann sigur við Jødarnar: „Sí, her er kongur tykkara!“ Teir rópaðu tá: „Burtur, burtur við honum! Krossfest hann!“ Pilatus sigur við

teir: „Skal eg krossfesta kong tykkara?“ Høvuðsprestarnir svaraðu: „Vit hava ongan kong uttan keisaran.“

Men tá ið Pilatus sá, at hann einki maktaði, men at ófriðurin heldur tók til, vildi hann gera mannamúgvuni til vildar, og hann dømdi, at tað skuldi verða soleiðis, sum tey kravdu. Men hann tók vatn og vaskaði sær um hendurnar, so mannamúgvan sá, og segði: „Eg eri ósekur í blóðinum á hesum rættvísa manni. Síggið tit til tað!“ Og alt fólkið svaraði og segði: „Blóð hansara komi yvir okkum og yvir børn okkara!“

Tá slepti hann teimum Barabbasi leysum, ið var settur fastur fyri uppreistur og fyri manndráp, tí, sum tey bóðu um, men Jesus læt hann húðfleingja og gav hann upp til teirra at verða krossfestur.

16. Á veg út á Golgata

Tá tóku hermenninir Jesus og lótu hann úr skarlaksskikkjuni og lótu hann í hansara egnu klæði og fóru út við honum at krossfesta hann. Og hann bar sjálvur kross sín. Men á veginum út hittu teir ein mann, sum kom gangandi har framvið, Símun frá Kýrenu, sum kom heim av markini, faðir teirra Aleksanders og Rufusar. Hann noyddu teir at bera kross hansara; og teir løgdu krossin upp á hann, at hann skuldi bera hann aftan á Jesus.

Men honum fylgdi ein stórur skari av fólkinum og av kvinnum, sum bæði harmaðu hann og grótu um hann. Men Jesus vendi sær á ímóti teimum og segði: „Jerúsalems døtur! Grátið ikki um meg; men grátið um tykkum sjálvar og um børn tykkara; tí at sí, teir dagar skulu koma, tá ið sagt man verða: „Sælar eru ófruktirnar og sæl eru tey móðurlív, sum ikki hava føtt, og tey bróst,

sum ikki hava givið at súgva!“ Tá skulu tey fara at siga við fjøllini: „Fallið yvir okkum!“ og við heyggjarnar: „Fjalið okkum!“ Tí at gera tey hetta við hitt grøna træið, hvussu fer tá at gangast hinum turra?“

Men tveir aðrir illgerðarmenn vórðu førdir út við at verða tiknir av døgum saman við honum.

Á GOLGATA

17. Krossfestingin

Og teir førdu hann út á tann staðin, sum á hebráiskum máli kallast Golgata (tað merkir: Ennistaðurin). Og teir góvu honum vín at drekka við myrru í, og tá ið hann hevði smakkað tað, vildi hann ikki drekka. Og teir krossfestu hann og teir báðar illgerðarmenninar við honum, annan høgrumegin og annan vinstrumegin, men Jesus í miðjuni. Tá gekk skriftin út, ið sigur: „Og hann var roknaður javnt við lógbrotsmenn.“ Men tað var um landsuðurstíð, tá ið teir krossfestu hann. Men Jesus segði: „Faðir! Fyrigev teimum, tí at teir vita ikki, hvat teir gera!“

Men Pilatus hevði eisini skrivað eina yvirskrift við søk hansara og fest hana á krossin uppi yvir honum. Men har stóð skrivað: „Jesus úr Nasaret, kongur Jødanna.“ Hesa yvirskriftina lósu nú mangir av Jødunum, tí at staðurin, har sum Jesus varð krossfestur, var nær við bygdina; og hon var skrivað á hebráiskum og rómverskum og grikskum máli. Høvuðsprestar Jødanna søgdu tá við Pilatus: „Skriva ikki: „Kongur Jødanna,“ men: „Hann segði: Eg eri kongur Jødanna.“ Pilatus svaraði: „Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað!“

Tá ið nú hermenninir høvdu krossfest Jesus, tóku teir klæði hansara og býttu tey sundur í fýra lutir, hvørjum hermanni ein lut; somuleiðis kyrtilin; men kyrtilin var óseymaður, vovin í einum oman ígjøgnum. Teir søgdu tí hvør við annan: „Latið okkum ikki skera hann sundur, men latum okkum heldur kasta lut um hann, hvør ið skal fáa hann;“ tí at skriftin skuldi ganga út, ið sigur: „Teir býttu klæði míni millum sín og kastaðu lut um klædning mín.“ Og teir sótu har og hildu vakt yvir honum. Hetta gjørdu nú hermenninir; og fólkið stóð og hugdi at.

18. Móðir Jesu

Men við Jesu kross stóð móðir hansara og móðursystir hansara, Maria, kona Kleopasar, og Maria Magdalena. Tá ið nú Jesus sá móður sína og lærusveinin, sum hann elskaði, standa hjá henni, sigur hann við móður sína: „Kvinna, sí, har er sonur tín.“ Síðan sigur hann við lærusveinin: „Sí, har er móðir tín!“ Og frá teirri stund tók lærusveinurin hana heim til sín.

19. Spottanin

Og tey, ið gingu framvið, spottaðu hann, og tey ristu við høvdinum og søgdu: „Tví vorði tær! Tú, sum brýtur templið niður og byggir tað upp eftir trimum døgum, bjarga nú tær sjálvum! Um tú ert sonur Guðs, tá stíg niður av krossinum!“ Somuleiðis hildu eisini høvuðsprestarnir hann fyri spott sínámillum í felagi við hinum skriftlærdu og hinum elstu og søgdu: „Øðrum hevur hann hjálpt, men sær sjálvum er hann ikki mentur at hjálpa. Er hann Kristus, kongur Ísraels, hin útvaldi Guðs, so bjargi hann sær sjálvum og stígi nú niður av

krossinum, so at vit kunnu síggja tað, so skulu vit trúgva á hann. Hann leit á Guð, hann bjargi honum nú, um hann leggur nakað í hann, tí at hann hevur sagt: „Eg eri sonur Guðs!“ Somuleiðis spottaðu eisini hermenninir hann og søgdu: „Ert tú kongur Jødanna, so bjarga tær sjálvum!“

20. Ránsmenninir á krossinum

Men annar av illgerðarmonnunum, sum hongdir vóru, spottaði hann og segði: „Ert tú ikki Kristus? Bjarga tær sjálvum og okkum!“ Men annar svaraði og hevði at honum og segði: „Óttast tú ikki heldur Guð, tá ið tú ert undir sama dómi? Og vit eru tað við rættum, tí at vit fáa tað afturlønt, sum vit hava gjørt; men hesin hevur einki ósámiligt gjørt.“ Og hann segði: „Jesus, minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!“ Og hann segði við hann: „Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við mær í páradís!“

21. Deyði Jesu

Og tá ið middagur var komin, legðist myrkur um alt landið líka til nóns, og sólin myrknaði. Og um nón rópaði Jesus við harðari rødd og segði: „Eli, Eli, lama sabaktani!“ Tað er: „Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær!“ Men nakrir av teimum, ið hjá stóðu, søgdu, tá ið teir hoyrdu tað: „Sí, hann rópar eftir Elia!“

Eftir hetta, tá ið Jesus visti, at alt nú longu var fullgjørt, til tess at skriftin skuldi ganga út, sigur hann: „Eg eri tystur!“ Har stóð eitt ker fult av ediki. Og við tað sama leyp ein teirra til og tók ein svamp og fylti hann við ediki og setti hann á ein ýsopslegg og bar honum at munni og

gav honum at drekka. Men hinir søgdu: „Bíða, latum okkum síggja, um Elia kemur at taka hann niður!“

Tá ið Jesus nú hevði fingið edikin, segði hann: „Tað er fullgjørt!“ Og Jesus rópaði upp aftur við harðari rødd og segði: „Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín!“ Og í tí hann hetta segði, boygdi hann høvdið og gav upp andan.

22. Tekinini

Og sí, forhangið í templinum skrædnaði í tvey úr erva og líka niður ígjøgnum, og jørðin skalv og fjøllini klovnaðu, og gravirnar opnaðust, og mong likam av teimum heilagu, sum farin vóru til hvílu, risu upp, og tey gingu út úr grøvunum aftan á uppreisn hansara og fóru inn í hin heilaga staðin og sýndu seg fyri mongum. Men herhøvdingin, sum stóð har hjá, beint yvir av honum, og teir, sum saman við honum hildu vakt yvir Jesusi, tá ið teir sóu, at hann gav upp andan á slíkan hátt og sóu landskjálvtan og tað, ið til barst, vórðu teir ógvuliga ræddir og góvu Guði æruna og søgdu: „Sanniliga var hesin maður rættvísur og sonur Guðs!“ Og allar tær mannamúgvur, sum saman vóru komnar at síggja hesa sjón, slógu seg fyri bringuna, tá ið tær sóu, hvat ið hendi, og fóru avstað aftur. Men allir kunningar hansara stóðu langt burturi og mangar kvinnur, sum høvdu fylgt honum úr Galileu, og sóu alt hetta. Teirra millum var Maria Magdalena og Maria, móðir teirra Jákups lítla og Jóses, og Salome, móðir at sonum Sebedeusar; hesar høvdu fylgt honum og tænt honum, meðan hann var í Galileu, og mangar aðrar kvinnur, sum høvdu verið í ferðini við honum niðan til Jerúsalem.

23. Likamini verða tikin niður av krossinum
Men fyri at likamini ikki skuldu verða hangandi á krossinum um hvíludagin, við tað at tað var atfangadagur, tí at tann hvíludagurin var mikil, bóðu Jødarnir Pilatus um, at beinini í teimum máttu verða brotin sundur, og at tey máttu verða tikin niður. Hermenninir fóru tí og brutu beinini bæði í hinum fyrra og hinum øðrum, sum hevði verið krossfestur saman við honum. Men tá ið teir komu til Jesus og sóu, at hann longu var deyður, brutu teir ikki bein hansara. Men ein av hermonnunum stakk eitt spjót inn í síðuna á honum, og har kom við tað sama blóð og vatn útúr. Og tann, sum hevur sæð tað, hevur vitnað um tað, og vitnisburður hansara er sannur, og hann veit, at hann sigur tað, sum satt er, til tess at eisini tit mega trúgva. Tí at hetta hendi, til tess at skriftin skuldi ganga út: „Bein skal ikki verða brotið í tí.“ Og upp aftur sigur eitt annað skriftorð: „Teir skulu líta til hansara, sum teir stungu.“

GRAVLEGGINGIN

24. Jósef úr Arimateu
Men tá ið nú var komið at kvøldi, – og atfangadagur var, tað er dagurin fyri hvíludagin, – kom ein ríkur maður, Jósef úr Arimateu, einum staði í Jødalandi, ein mætur ráðsharri, góður og rættvísur, ið ikki hevði samtykt í teirra ráði og verki, sum eisini sjálvur væntaði Guðs ríki – hann var ein lærusveinur Jesu, men í duldum, av ótta fyri Jødunum – hann tók mót til sín og fór inn til Pilatusar og bað um, at hann mátti taka Jesu likam niður. Men

Pilatus undraðist á, at hann longu skuldi vera andaður, og hann kallaði herhøvdingan til sín og spurdi hann, um hann longu var andaður. Og tá ið hann hevði fingið tað at vita av herhøvdinganum, læt hann Jósef fáa líkið og beyð, at teir skuldu lata hann fáa tað. Og Jósef keypti fínt línklæði. Men eisini Nikodemus, sum í fyrstuni var komin til Jesus um náttina, kom og hevði við sær eina blanding av myrru og aloe, okkurt um hundrað pund. Teir tóku nú Jesu likam niður og sveipaðu tað í línklæði saman við angandi urtum, sum siður er hjá Jødum at búgva lík til jarðar. Men á tí staði, har sum hann hevði verið krossfestur, var urtagarður, og í urtagarðinum nýggj grøv, sum Jósef átti, sum hann hevði høgt inn í ein klett, sum eingin enn hevði verið lagdur í. Har løgdu teir nú Jesus fyri atfangadags Jødanna skuld, og hvíludagurin var í hondum, við tað at grøvin var so nær, og teir veltu ein stóran stein fyri gravarmunnan og fóru avstað. Men har vóru Maria Magdalena og hin Maria, móðir Jóses; tær sótu beint yvir av grøvini saman við hinum kvinnunum, sum vóru komnar úr Galileu við honum, og tær sóu grøvina, og hvussu likam hansara var lagt. Tær fóru so avstað aftur og gjørdu til angandi urtir og smyrsl; og hvíludagin hildu tær sær í kvirrum eftir lógini.

25. Vakt verður sett við grøvina

Men dagin eftir, sum er dagurin aftan á atfangadagin, komu høvuðsprestarnir og Farisearnir saman hjá Pilatusi og søgdu: „Harri! okkum rennur í huga, at hesin svikarin segði í livandi lívi: „Um tríggjar dagar rísi eg upp.“ Gev tí boð um, at væl verður hildin vakt yvir grøvini líka til hin triðja dagin, fyri at ikki lærusveinar

hansara skulu koma og stjala hann og siga fyri fólki: „Hann er risin upp frá deyðum;“ og tá munnu hini seinnu svikini verða verri enn hini fyrru.“ Men Pilatus segði við teir: „Her hava tit vaktarmenn; farið avstað og haldið so væl vakt, sum tit vita best.“ Og teir fóru avstað og settu góða vakt við grøvina við vaktarmonnunum, aftan á at teir høvdu sett innsigli á steinin.

Uppskot til lestrar úr Pínslusøguni biðikvøldini í føstu

FYRSTA BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk. 1-2.

ANNAÐ BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk. 3-4.

TRIÐJA BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk. 5-7.

FJÓRÐA BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk.8-10.

FIMTA BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk.11-13.

SÆTTA BIÐIKVØLD Í FØSTU
Tekstur: Stk.14-16.

Inngangur til lesturin:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Pínslusøgu várs Harra Jesu Krists (stk.)

Uppskot til bíbliulestrar biðikvøldini í føstu

FYRSTA BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR
Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Jes 61,1-3

Ella:
Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:
Hebr 2,10-18

2. LESTUR
Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu vár Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 26,1-16 ella *Mark 14,1-11* ella *Luk 22,1-6* ella Jóh 17,1-19

ANNAÐ BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR
Henda heilaga lesturin skrivar Mika profetur:
Mika 7,18-19

Ella:
Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:
Kol 2,6-9

2. LESTUR
Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu várs Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 26,17-29 ella *Mark 14,12-25* ella *Luk 22,7-38* ella Jóh 18,1-11

TRIÐJA BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR
Henda heilaga lesturin skrivar sálmaskaldið:
Sl 38,12-13 og 20-21

Ella:
Epistulin skrivar Paulus ápostul í fyrra brævi sínum til Tessalónikumanna:
1 Tess 5,1-11

2. LESTUR
Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu várs Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 26,30-46 ella *Mark 14,26-42* ella *Luk 22,39-46* ella Jóh 18,12-14

FJÓRÐA BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR
Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Jes 41,8-13

Ella:
Epistulin skrivar Paulus ápostul til Kolossumanna:
Kol 2,12-15

2. LESTUR
Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu vár Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 26,47-56 ella *Mark 14,43-52* ella *Luk 22,47-53* ella Jóh 18,15-27

FIMTA BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR
Henda heilaga lesturin skrivar Jeremia profetur:
Jer 20,7b-11a

Ella:
Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum:
Hebr 5,5-10

2. LESTUR
Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu vár Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 26,57-75 ella *Mark 14,53-72* ella *Luk 22,54-71* ella Jóh 18,28-40

SÆTTA BIÐIKVØLD Í FØSTU

1. LESTUR

Henda heilaga lesturin skrivar Jesaja profetur:
Jes 52,13-15

Ella:
Hesin heilagi lesturin er skrivaður í Jóhannesar opinbering:
Opb 1,4b-8

2. LESTUR

Henda heilaga lesturin úr Pínslusøgu várs Harra Jesu Krists skrivar.....evangelistur.
Matt 27,1-31 ella *Mark 15,1-20* ella *Luk 23,1-25* ella Jóh 19,1-16

Kollekt aftan á prædiku, tá ið ikki er altargangur

(Vanligar sunnudagar og aðrar halgidagar, tá ið einki annað er viðmerkt, og møguliga gerandisdagar):

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú í miklu náði og miskunn tíni hevur givið okkum títt heilaga og sæla orð, og við tí savnar hina kristnu kirkju tína eisini her hjá okkum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit varðveita hetta orð títt í takksomum hjørtum, halda okkum eftir tí og vaksa og fara fram í trúgv, vón og kærleika, til vit at enda verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Kollektir til føstugudstænastu / lestur

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Vit takka tær, Guð faðir, tí at tú hevur givið okkum einborna son tín, Jesus Krist, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Vit takka tær, Jesus Kristus, tí at tú hevur borið á heilaga likami tínum allar syndir okkara og við blóði tínum strikað út allar misgerðir okkara. Vit takka tær, tú góði heilagi andi, tí at tú hevur givið okkum í hjørtu okkara ta trúgv, at vit einki annað vita okkum til sælu uttan hin krossfesta Jesus Krist. Gev okkum, Guð, náði tína, so at vit trúgva av hjarta, at allar syndir okkara eru okkum fyri Jesu Krists líðingar og deyða skuld fyrigivnar, og lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit dag undan degi við Jesu deyða kraft fara fram í kristiligum levnaði og aldri sleppa Jesusi úr hjørtum okkara, fyrr enn vit síggja hann klárliga í hinum æviga lívi, har hann við tær og hinum heilaga anda livir og ræður um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur fríað okkum út úr valdi myrkursins og sett okkum yvir í ríki einborna sonar tíns. Vit biðja teg, at tú fyri líðingar og deyða hans skuld vilt koma okkum til hjálpar við tínum heilaga anda og styrkja okkum við orði tínum, so at hin óndi fíggindin ikki skal fáa vald á okkum, men at vit altíð mega verða verandi í náði tíni og at enda verða

sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum læt frelsara okkara, son tín, Jesus Krist, gerast menniskja og doyggja á krossinum, mannaættini til frelsu og fyrimyndar í eyðmýkt. Vit biðja teg, gev okkum náði til at læra av tolmóði sonar tíns, so at vit fylgja honum eftir í eyðmýkt og lýdni líka til deyða og at enda fáa lut í uppreisn hansara frá deyðum, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, líða krossdeyðan fyri syndir okkara. Vit biðja teg, lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit trygt kunnu líta á fullgjørda verk hansara og fyrigeving syndanna í honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum í faðirligu náði tíni ikki spardi einborna son tín, Jesus Krist, men læt hann doyggja á krossinum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit mega finna troyst í hesi náði tíni, varða okkum fyri syndini, tolin bera tær líðingar, sum verða lagdar á okkum, og um allar ævir verða sæl hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra,

sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella fyrsta inngangskollekt.

Kollektir til messu / gudstænastu / lestur vanligar gerandisdagar

(Aðrar kollektir hóskandi til høvið kunnu tó verða nýttar í staðin):

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, friðskjól okkara og styrki, vit biðja teg, hoyr við mildni bønir okkara, so at vit vard frá øllum illum og varðveitt í øllum freistingum mega lova og takka tær, náðigi Guð og faðir okkara. Gev okkum í hesum heimi rætt at kenna sannleika tín og í komandi heimi hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, vit takka tær, fyri at vit í øllum lutum mega lata alla tráan okkara koma fram fyri teg í ákallan og bøn við tøkk, og fyri at vit hvør við øðrum mega lova og prísa tær og kennast við navn títt. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum altíð at biðja og syngja fyri tær í hjørtum okkara og at halga alt, sum tú í góðsku tíni gevur okkum, við Guðs orði og bøn. Savna tú okkum úr øllum ættum, tá sonur tín, Jesus Kristus, kemur aftur, so at vit saman við øllum tínum heilagu og einglum tínum mega geva tær signing og æru, heiður og mátt um aldur og ævir allar! Amen.

Kollektir og bíbliulestrar til serstakar gudstænastur í kirkjuárinum

Tær flestu av hesum gudstænastum hava ongan serstakan dag ella serstaka dagfesting í kirkjuárinum, men verða hildnar, tá ið hildið verður hóskandi. Biskupur kann við kunngerð mæla til ein ávísan dag.

Er hvørki altargangur ella dópur undir gudstænastuni, eru í flestum førum „kollektin aftan á prædiku, tá ið ikki er altargangur“ á blaðsíðu 278 ella „útgangskollektin til gudstænastu vanligar gerandisdagar“ á blaðsíðu 279 hóskandi sum útgangskollekt.

HEYSTGUDSTÆNASTA

Litur: Kirkjuársliturin – vanliga grønur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, vit lova og prísa tær, tí at tú aftur í ár hevur latið upp mildu hond tína, latið arbeiðið í bø og haga eydnast og givið okkum hitt dagliga breyðið. Vit biðja teg, gev okkum við tøkk at taka ímóti tí, sum jørðin gevur, nýta tað eftir vilja tínum og altíð takka og lovprísa tær fyri góðsku tína og trúfesti fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum í góðsku tíni veitir okkum grøði og allar góðar gávur bæði á sjógvi og á landi. Vit biðja teg, gev okkum í gudsótta og við tøkk at taka ímóti gávum tínum, so at vit nýta tær eftir vilja tínum í øllum skynsemi og altíð lova og prísa heilaga navni tínum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
5 Mós 8,7-18a ella 5 Mós 28,1-6 og 12a ella 1 Krýn 29,10-14 ella Jes 55,8-11 ella Jóel 2,21-24 og 26

2 Kor 9,6-15 ella Fil 4,4-9 og 11b-13 ella Ják 1,17-18 ella Opb 14,14-18

Matt 6,25-34 ella Mark 4,26-32 ella Luk 11,3 ella Luk 12,22-31 ella Jóh 6,25-35

ÚTGANGSKOLLEKT
Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum skapaði jørðina, havið og alt, sum í teimum er, og í náði heldur øllum livandi uppi. Vit lova og takka tær, tí at tú eisini í hesum ári hevur verið okkum góður og latið arbeiðið á sjógvi og á landi eydnast. Vit biðja teg, gev okkum at nýta gávur tínar í sonnum gudsótta og næstakærleika. Gev okkum at seta alt okkara álit á teg og altíð at takka tær av heilum hjarta, so at vit, tá hin stóri heystardagurin kemur, mega fara inn til hina ævigu gleðina hjá tær fyri

einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum ert upphavið til alt tað, ið gott er. Vit biðja teg, at tú vilt vera okkum náðigur og halga tær gávur, sum tú í góðsku tíni gevur okkum. Hjálp okkum at nýta tær í rættvísi og hjartans reinleika eftir heilaga vilja tínum, so at vit altíð mega kenna teg sum tann, ið veitir okkum allar góðar gávur, og fram um alt tráa eftir at liva av orði tínum og sakramentum okkum til æviga føði og signing fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, ið sjálvur er lívsins breyð, og sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi Guð, miskunnsami faðir, tú, sum gevur allar góðar gávur. Vit takka tær, tí at tú hevur vælsignað arbeiði okkara, latið skína og regna yvir bø og haga og latið okkum fáa grøðina til høldar í øllum góðum. Vit biðja teg, gev okkum altíð við takksemi at njóta okkara dagliga breyð og í øllum lívsins viðurskiftum at seta álit okkara til tín. Varðveit okkum frá hugmóð í góðum tíðum og frá mistreysti í ringum tíðum. Hjálp okkum at nýta gávur tínar rætt, næsta okkara og okkum sjálvum at gagni og heilaga navni tínum til heiðurs. Vælsigna tað góða sáð, sum tú sjálvur hevur sáað í hjørtu okkara, so at vit at enda mega bera búnan ávøkst á heystardegi og koma í ríki títt fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran

harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

SKAPANARVERKIÐ

Litur: Kirkjuársliturin – vanliga grønur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum skapað hevur allar lutir, himmal og jørð, havið og alt, sum í teimum er, alt tað, sum livir og andar á foldum og í veldi tínum heldur øllum livandi og alheiminum uppi. Vit biðja teg, tú, sum hevur sett okkum at umsita náttúruna og allar gávur tínar, hjálp okkum at kenna ábyrgd fyri hvør øðrum og øllum skapanarverki tínum, so at vit umsita gávur tínar rætt, og ikki í sjálvsøkni, egingirnd og havisjúku misbrúka og oyðileggja tað, sum tú hevur skapað, men fara væl um náttúruna og umsita hana á skynsaman hátt til gagns fyri øll menniskju og alt livandi, djór og allan vøkstur fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Mós 1,1-2,1-3 ella 1 Mós 2,4-9 og 15-17 ella Job 38,1-11 ella Sl 8,2 og 4-10 ella Sl 19,2-7 ella
Sl 104,1-2 og 5-25 og 27-30 ella Orðt 8,12 og 22-36 ella Jóel 2,21-24 og 26

Róm 8,19-23 ella 1 Kor 8,6 ella 2 Kor 9,8-11 ella Kol 1,9-20 ella 1 Tim 6,6-10 og 17-19 ella Opb 4,11

Matt 6,25-34 ella Matt 13,1-9 ella Mark 4,35-41 ella Mark 6,30-44 ella Luk 12,13-21 ella Jóh 1,1-4

FRIÐUR OG RÆTTVÍSI

Litur: Kirkjuársliturin.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum ert faðir at øllum og við syni tínum, Jesusi Kristi, hevur gjørt øll til eitt. Vit biðja teg, varða okkum fyri ófriði og harðræði, yvirgangi og kríggi. Leið tey, sum vald hava fingið, við ráði tínum, so at tey stýra við vísdómi og kærleika, friði og rættvísi. Hell heilaga anda tín yvir allar tjóðir, til tess at tær mega liva saman í friði og góðum felagsskapi sín-ámillum. Lat frið, rættvísi og kærleika vinna frama mannaheiminum til signingar og tær til heiðurs fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

3 Mós 19,15-18 ella Sl 85,9-14 ella Jes 11,1-10 ella Jes 42,1-7 ella Jes 57,15-19 ella Ámos 5,11-15a ella Mika 4,1-5

Róm 12,9-21 ella Ef 4,22-32 ella Ef 5,8-15 ella Fil 4,6-9 ella Kol 3,12-17 ella Ják 2,5-9 og 12-17

Matt 5,1-16 ella Matt 5,6 og 9 ella Matt 5,43-48 ella Matt 6,10 ella Matt 7,12 ella Matt 25,31-40

FORFYLGD OG KÚGAÐ

Litur: Kirkjuársliturin. Pínslarváttar: Reyður.

Eisini hóskandi pínslarváttardagar. Sí annars 2. jóladag (sankta Stefans dag) á blaðsíðu 33 og alla halganna sunnudag á blaðsíðu 223.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum elskar øll menniskju við ævigum kærleika og ikki gert mannamun. Vit biðja teg, umgirð við kærleika tínum og náði tíni øll tey, ið verða forfylgd, pínd og kúgað vegna aðra trúgv og øðrvísi politiska áskoðan, aðra sannføring og øðrvísi atferð. Gev teimum at kenna tína nærveru og umsorgan, so at tey mega halda á í neyðini og søkja alla hjálp og troyst hjá tær. Og um tey skulu líða deyðan (pínslarváttardeyðan), so styrk tey í vónini um hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella (minningardagar):
Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, kveikti trúarinnar og kærleikans eld í hjørtum pínslarváttanna (í N) og styrkti teir (hann / hana) við heilaga

anda tínum, so at teir hildu (hann / hon helt) á í trúnni á teg og son tín líka til deyða. Vit takka tær fyri hesi trúarvitni tíni (hetta trúarvitni títt). Og vit biðja teg, veit eisini okkum hesa somu trúarinnar og kærleikans megi, so at vit, um vit skuldu komið at liðið fyri navns tíns skuld, mega fylgja í fótasporum teirra (hansara / hennara) og í fastari trúgv (við teimum / honum / henni sum fyridømi) halda út til endan, kirkju tíni til signingar og navni tínum til heiðurs fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
2 Mós 3,7-10 ella 1 Kong 19,1-4 ella 2 Krýn 24,18-22a ella Jer 20,7-11 og 13

Áps 6,8-15 og 7,54-8,1-4 ella 1 Kor 12,26-27 ella 2 Kor 1,3-7 ella 2 Tim 3,10-14

Matt 10,16-22 ella Matt 10,32-42 ella Matt 23,34 ella Jóh 15,17-21

KRISTNIBOÐAN – HEIMA- OG ÚTIMISSIÓN

Litur: Kirkjuársliturin.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum hevur opinberað kærleika tín við at senda son tín, Jesus Krist, í heimin, til tess at øll skulu liva við honum. Vit biðja teg,

hell út heilaga anda tín yvir kirkju tína, so at hon kann vera boðum tínum lýðin og bera gleðiboðskap tín út til øll fólkasløg. Send alsamt arbeiðsfólk út í akurskurð tín og gev teimum at gleðast við góðan ávøkst. Verj kristniboðarar tínar fyri øllum freistingum og vandum. Lat teir ikki missa mótið, um illa gongur í hond, men við treysti boða orð títt í áliti á lyfti títt um, at orðið ikki vendir tómt aftur, men skal útinna tað, sum tær líkar, fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum vilt, at øll menniskju skulu verða frelst og koma at kenna sannleikan. Vit biðja teg, at tú alsamt vilt senda trúføst arbeiðsfólk út í víngarð tín, til tess at gleðiboðskapur tín kann verða borin øllum fólkasløgum. Gev teimum vísdóm og megi til at boða orð títt, so at allar tjóðir mega læra teg at kenna, hin eina, sanna Guð, og tann, sum tú sendi, Jesus Krist, einborna son tín, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Jes 12,2-6 ella Jes 42,5-12 ella Jes 49,1-6 ella Jes 52,7-10 ella Jes 61,1-3a ella Jer 1,4-9

Áps 16,6-10 ella Róm 1,1-17 ella Róm 10,11-17 ella Róm 15,14-21 ella 2 Kor 5,11-6,1-2 ella Kol 1,24-28

Matt 9,35-38 ella Matt 28,16-20 ella Mark 4,1-9 og 26-29 ella Mark 16,15-16 ella Luk 10,1-9 ella Luk 24,44-49

EINLEIKI KIRKJUNNAR – KRISTIN EINLEIKI

Litur: Kirkjuársliturin.

Eisini hóskandi til tvørkirkjuliga gudstænastu.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, harra og frelsara okkara, Jesusi Kristi, hevur grundað hina heilagu kirkju tína á jørð og sært, at kirkjufólk títt er spjatt sundur í nógvar trúarflokkar. Vit biðja teg, fyrigev okkum syndir okkara. Gev okkum at hava virðing hvør fyri øðrum og at semjast í kærleika okkara millum, sum tey, ið eru eitt í Kristi, tó at vit ikki eru eins. Gev okkum skynsemi til at skilja hvør annan, so at vit saman betur kunnu koma at kenna sannleika tín. Eins og likamið er eitt, og ein er andin, ein vónin, sum vit eru kallað til, ein Harri, ein trúgv, ein skírn, ein Guð og faðir at øllum, so gevi tú okkum at sameinast við sannleikans, friðarins, trúarinnar og kærleikans heilaga bandi, so at vit við einum huga og einum munni mega prísa tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
1 Mós 33,1-11 ella 1 Mós 50,14-21 ella Ez 36,23-28 ella Ez 37,15-19 og 21-22 og 26-28

1 Kor 1,10-13 og 30-31 ella Ef 4,1-6 ella Ef 4,30-5,1-2 ella Fil 2,1-11 ella Kol 3,12-17 ella 1 Tim 2,5-8 ella 1 Jóh 4,9-21

Matt 5,23-26 ella Matt 18,19-22 ella Luk 9,49-50 ella Jóh 17,1a og 11b og 17 og 20-26

FØÐINGARDAGSHALD HJÁ EINI KIRKJU (TÁ IÐ KIRKJA FYLLIR RUNT) ELLA GUDSTÆNASTA UM KIRKJUNA

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum ikki býrt í templum, gjørdum við hondum, og tó hevur halgað hetta hús og tikið tær bústað í hesum halgidómi tínum í orði og sakramentum. Vit takka tær, tí at tú framvegis letur heilaga anda tín hvíla yvir heilagu kirkju tíni, og í henni letur okkum hava samfelag við teg, son tín, Jesus Krist, og hvør annan. Vit biðja teg, gev teimum, sum higar leita, at finna hvílu hjá tær og gleðast um miskunn tína og rættlæti fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
1 Mós 28,10-19a ella 1 Kong 8,22-30 og 54-56a ella 1 Krýn 29,6-16 ella 2 Krýn 7,11-16 ella Sl 100 ella Jes 56,1 og 6-7 ella Ez 43,1-2 og 4-7a

Áps 7,44-50 ella 1 Kor 3,9-17 ella Ef 2,19-22 ella Kol 3,16-17 ella Hebr 10,19-25 ella 1 Pæt 2,4-10

Luk 19,1-10 ella Jóh 2,13-22 ella Jóh 4,14 og 23-24 ella Jóh 10,22-30

ÆTTARSAMKOMA

Litur: Kirkjuársliturin.

TEKSTIR:
Sírakur 3,1-15 (Apokrýfurnar); Jeremia 6,16a; Ef 6,1-3

HEILAGA DÓPSINS SAKRAMENTI

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, vit takka tær, tí at tú hevur latið okkum koma til hin náðifulla dóp, har tú veitti okkum fyrigeving syndanna, heilaga andan og hitt æviga lívið fyri sonar tíns, Jesu Krists, skuld. Vit biðja teg, varðveit okkum í trúnni, so at vit aldri ivast um hesa gávu tína. Styrk okkum við heilaga anda tínum til at stríða ímóti syndini og verða í tí náði, sum okkum er

givin í heilagum dópi, til vit verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar!

Ella:
Latið okkum øll biðja!
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum opinberaði teg við heilaga anda tínum, tá ið einborni sonur tín varð doyptur, og við reyst tíni vísti okkum til hansara, sum hevur tikið á seg allar syndir okkara, til tess at vit við honum kunnu fáa náði og fyrigeving syndanna. Vit biðja teg, varðveit okkum, sum eftir boðum sonar tíns eru doypt til at hoyra tær til. Styrk trúgv okkara við heilaga anda tínum og veit okkum hitt æviga lívið fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Jer 17,7-8 ella Ez 36,25a og 26-28 ella Ez 47,1-9 og 12

Áps 2,37-41 ella Áps 8,36-38 ella Róm 6,3-11 ella 1 Kor 12,12-13 ella Gal 3,26-28 ella Kol 2,10-12 ella Tit 3,4-7 ella 1 Pæt 3,18-22

Matt 3,13-17 ella Matt 28,18-20 ella Mark 9,33-37 ella Mark 10,13-16 ella Jóh 3,1-8 ella Jóh 4,5-14 ella Jóh 15,1 og 4-5

HEILAGA ALTARSINS SAKRAMENTI

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harri Jesus Kristus, vit takka tær, tí at tú í miklu náði tíni hevur givið okkum heilagu kvøldmáltíð tína, har tú veitir okkum heilaga likam títt og blóð og sameinir okkum við teg og kirkju tína bæði í himli og á jørð. Vit biðja teg, hjálp okkum við heilaga anda tínum at taka ímóti hesum gávum tínum við røttum sinni, so at vit av hjarta játta syndir okkara, minnast líðing tína og deyða, trúgva, at vit eiga fyrigeving syndanna í tær og soleiðis dag frá degi vaksa í trúgv, vón og kærleika, til máltíð tín verður fullbúgvin í ríki tínum, har tú við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harri Jesus Kristus, vit takka tær fyri heilagu kvøldmáltíð tína, har tú gevur okkum lut í lívsins breyði og frelsunnar kaliki okkum til fyrigevingar syndanna, styrki og sálarbótar. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum í hesi felagsmáltíð við røttum sinni og sannari gleði at taka ímóti gávum tínum, heilaga likami tínum og blóði, so at vit endurnýggjað og frígjørd í fyrigeving syndanna mega vaksa í trúgv, vón og kærleika, til vit verða sæl allar ævir við tær, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harri Jesus Kristus, vit takka tær fyri heilagu kvøldmáltíð tína, har tú sameinir okkum við teg og kirkju tína bæði í himli og á jørð. Vit biðja teg, gev okkum við eyðmjúkum og røttum sinni, gleði og tøkk, at taka ímóti gávum tínum, heilaga likami tínum og blóði, so at vit endurnýggjað og frígjørd í fyrigeving syndanna mega vaksa í trúgv, vón og kærleika, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, veitir okkum lívsins breyð, orð títt og sakramenti tíni. Vit biðja teg, lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit halda okkum at hesum orði tínum og koma til heilagu kvøldmáltíð tína, har tú við syni tínum veitir okkum føði til ævigt lív. Metta okkum við hesum livandi breyði, so at vit at enda mega verða sæl allar ævir fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
2 Mós 12,1-11 ella 2 Mós 16,11-18 ella 2 Mós 24,3-8 ella 5 Mós 8,1-3

1 Kor 10,15-17 ella 1 Kor 11,23-26

Matt 26,17-20 og 26-30 ella Mark 14,12-17 og 22-26 ella Luk 22,7-20 ella Jóh 6,48-58

Kollektir og bíbliulestrar til mishalgidagar og aðrar minnisdagar

Hesir dagar kunnu eisini verða hildnir ein annan dag, um betur liggur fyri, og verða undir øllum umstøðum fluttir, um teir falla ein halgidag. Er talan um sunnudag, kann dagurin tó verða hildin sunnudag seinnapart ella sunnukvøld.

Er hvørki altargangur ella dópur undir gudstænastuni, eru í flestum førum „kollektin aftan á prædiku, tá ikki er altargangur“ á blaðsíðu 278 ella „útgangskollektin til gudstænastu vanligar gerandisdagar“ á blaðsíðu 279 hóskandi sum útgangskollekt.

ÁPOSTLAR
ÁPOSTLADAGUR (EINGIN ÁVÍSUR DAGUR)

Litur: Reyður, verða allir ápostlarnir tiknir undir einum.

Ápostlarnir: Símun Pætur, Andrias (bróðir Símun Pæturs), Jákup (eldri) og Jóhannes (synir Sebedeusar), Filippus, Bartolomeus (Natanael), Matteus (Levi), Tummas, Jákup (yngri – sonur Alfeusar), Símun (Kánanearin ella Selotes), Judas Taddeus og Judas Iskarjot. Seinni Mattias og Paulus.

Allir ápostlarnir kunnu verða tiknir undir einum ein ávísan dag, sum hildin verður hóskandi, ella hvør fyri seg.

Verða allir ápostlarnir tiknir undir einum:

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harri Jesus Kristus, tú, sum sendi út ápostlar tínar við gleðiboðskapinum um náði og frelsu fyri hvønn tann, sum trýr. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum at trúgva gleðiboðskapi teirra og at byggja á tann grundvøll, sum tú við teimum hevur lagt. Gev okkum framvegis trúfastar orðsins tænarar, sum við góðum treysti boða orð títt, til tess at øll menniskju mega fáa at kenna frelsandi gerning tín og liva saman í friði og kærleika, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Sám 3,1-10 ella Jes 43,8-13a ella Jes 52,7-10 ella Jer 1,4-9 ella Ez 2,1-8a

Áps 1,12-14 og 23-26 ella Róm 1,1-7 ella Róm 10,8b-17

Matt 10,1-5a ella Mark 3,13-19 ella Luk 6,12-16

Ella verður hvør ápostul tikin fyri seg ella í einstøkum førum tveir:

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harri Jesus Kristus, tú, sum sendi út ápostulin N / ápostlar tínar, N og N, við gleðiboðskapinum um náði og frelsu fyri hvønn tann, sum trýr. Vit biðja teg, gev okkum við heilaga anda tínum at trúgva gleðiboðskapi hansara / teirra og at byggja á tann grundvøll, sum tú við ápostlum

tínum hevur lagt. Gev okkum framvegis trúfastar orðsins tænarar, sum við góðum treysti boða orð títt, til tess at øll menniskju mega fáa at kenna frelsandi gerning tín og liva saman í friði og kærleika, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

30. NOVEMBER. ANDRASARMESSA – ANDRIAS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
5 Mós 30,11-14 ella Jes 49,1-6 ella Jes 52,7-10 ella Jes 55,1-5

Róm 10,8b-18 ella 1 Kor 1,18-31

Matt 4,12-20 ella Mark 1,14-18 ella Jóh 1,35-43a

21. DESEMBER. TUMMASARMESSA – TUMMAS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Job 42,1-6 ella Jes 35 ella Jes 43,8-13a

Ef 4,7 og 11-16 ella Hebr 10,35-11,1 ella 1 Pæt 1,3-9

Jóh 11,1-16 ella Jóh 14,1-7 ella Jóh 20,24-29

27. DESEMBER. JÓHANNES (ÁPOSTUL OG EVANGELISTUR. SÍ EVANGELISTAR NIÐANFYRI)

25. JANUAR. PÁLSMESSA – PAULUS (UMVENDING PAULUSAR)

Litur: Hvítur ella gyltur.

TEKSTIR:
Jes 45,18-22 ella Jes 49,1-6 ella Jer 1,4-9 ella Ez 2,1-8a

Áps 9,1-22 ella Áps 22,3-21 ella Áps 26,1-23 ella Gal 1,11-24 ella Gal 2,1-9 ella Fil 3,1-13 ella 1 Tim 1,12-17

Matt 10,16-22 ella Mark 13,9-13 ella Mark 16,15-18 ella Luk 21,10-19

22. FEBRUAR. PÆTURSMESSA – PÆTUR (PÆTURSSTÓLUR – JÁTTAN PÆTURS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

TEKSTIR:
Jes 49,1-6 ella Ez 3,4-11 ella Ez 34,11-16

Áps 4,8-13 ella Áps 9,32-42 ella Áps 10,34-44 ella Áps 11,1-18 ella Áps 12,1-11 ella 1 Pæt 1,1-7 ella 1 Pæt 5,1-4

Matt 16,13-19 ella Jóh 21,15-19

24. FEBRUAR. MATTIAS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Áps 1,15-26

Matt 11,25-30 ella Jóh 15,9-17

1. MAI. FILIPPUS OG JÁKUP (YNGRI JÁKUP, SONUR ALFEUSAR)

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Orðt 4 ella Jes 30,18-21 ella Jes 40,27-31

Áps 1,12-14 ella 1 Kor 15,1-8 ella Ef 4,7 og 11-16

Jóh 1,44-52 ella Jóh 12,20-26 ella Jóh 14,1-11

29. JUNI. PÆTURSØKA – PÆTUR OG PAULUS (DEYÐI PÆTURS OG PAULUSAR)

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Jes 49,1-6 ella Ez 2,1-7 ella Ez 3,4-11 ella Ez 34,11-16 ella Zak 4

Áps 12,1-11 og / ella 28,16-31 ella 1 Kor 3,16-23 ella 1 Kor 15,3-5 og 8 ella Gal 1,11-2,1-10 ella 2 Tim 4,1-8 og 16-18

Matt 10,16-22 ella Matt 16,24-28 ella Jóh 21,15-19

25. JULI. JÁKUPSDAGUR (ELDRI JÁKUP – SONUR SEBEDEUSAR)

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
5 Mós 30,11-20 ella Jer 26,1-16

Áps 11,27-12,1-3 ella Áps 15,13b-29 ella 1 Kor 4,9-15 ella 1 Kor 15,1-11 ella 2 Kor 4,7-15

Matt 20,20-28 ella Mark 1,14-20 ella Mark 10,35-45 ella Luk 9,46-56

24. AUGUST. BARTALSMESSA / BARTALSØKA – BARTOLOMEUS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
5 Mós 18,15-18 ella Jes 43,8-13a ella Jes 61,1-3

Áps 5,12-16 ella 1 Kor 4,9-15 ella 1 Kor 12,28-31a ella 2 Kor 4,7-15 ella 2 Kor 6,1-10 ella 1 Pæt 5,1-11

Matt 10,1-20 ella Luk 6,12-16 ella Jóh 1,46-52

21. SEPTEMBER. MATTEUS (ÁPOSTUL OG EVANGELISTUR. SÍ EVANGELISTAR NIÐANFYRI)

28. OKTOBER. TVEGGJA ÁPOSTLA MESSA – SÍMUN SELOTES (KÁNANEARIN) OG JUDAS TADDEUS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
5 Mós 32,1-4 ella Jes 45,18-22 ella Jer 3,12-18 ella Jer 26,1-16

Róm 8,28-31 ella Ef 2,13-22 ella Ef 4,7 og 11-16 ella 1 Pæt 1,3-12 ella 1 Jóh 1,1-2,1-2 ella 1 Jóh 4,1-6

Matt 10,1-5a ella Mark 3,13-19 ella Luk 6,12-16 ella Jóh 14,15-27 ella Jóh 15,12-27

EVANGELISTAR

Evangelistarnir tiknir undir einum ella hvør sær:

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harri Jesus Kristus, tú, sum læt evangelistarnar / evangelistin N bera okkum evangeliið um náði og frelsu fyri hvønn tann, sum trýr. Vit biðja teg, gev okkum við heil-

aga anda tínum at trúgva hesum gleðiboðskapi teirra / hansara og liva saman í friði og kærleika í ljósinum av tí orði, sum tú við teimum / honum hevur givið okkum, tú, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

27. DESEMBER. JÓHANNES (ÁPOSTUL OG EVANGELISTUR)

Litur: Hvítur ella gyltur.

TEKSTIR:
1 Mós 1,1-5a og 14-18 ella 2 Mós 33,7-23 ella Orðt 8,22-30 ella Jes 6,1-8 ella Jes 44,1-8 og 24-26a ella Ez 1,4-14

1 Jóh 1,1-2,1-2 ella 1 Jóh 2,1-12 ella 1 Jóh 5,1-13

Jóh 13,20-35 ella Jóh 20,1-8 ella Jóh 21,20-25

25. APRÍL. MARKUSARMESSA – MARKUS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Jes 52,7-10 ella Jes 62,6-12 ella Ez 1,4-14 ella Mál 3,1-3

Áps 12,25-13,1-13 ella Áps 15,35-41 ella Ef 4,7 og 11-16 ella 2 Tim 4,1-11 ella 1 Pæt 5

Mark 1,1-15 ella Mark 13,5-13 ella Mark 16,15-20 ella Luk 10,1-9 ella Jóh 15,1-11

21. SEPTEMBER. MATTEUS (ÁPOSTUL OG EVANGELISTUR)

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Orðt 3,1-18 ella Jes 33,13-17 ella Ez 1,4-14 ella Ez 2,8-3,1-11

Róm 10,1-15 ella 1 Kor 12,28-31a ella 2 Kor 4,1-6 ella Ef 2,1-10 ella Ef 4,7 og 11-16

Matt 6,19-34 ella Matt 9,9-13 ella Matt 13,44-52 ella Matt 19,16-30

18. OKTOBER. LUKAS

Litur: Reyður.

TEKSTIR:
Jes 35 ella Jes 43,8-13a ella Jes 52,7-10 ella Jes 55 ella Jes 61,1-3 ella Ez 1,4-14

Áps 1,1-8 ella Áps 16,6-12 ella Áps 20,6-12 ella Áps 21,1-19 ella Kol 4,7-18 ella 2 Tim 3,10-17 ella 2 Tim 4,1-11a

Luk 1,1-4 ella Luk 4,14-21 ella Luk 10,1-9 ella Luk 24,44-50 ella Jóh 15,17-20

MEDARBEIÐARAR PAULUSAR

24. JANUAR. TIMOTEUS

Litur: Reyður.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gav Timoteusi dirvi til at fylgja í fótasporum ápostlanna og læra av vísdómi teirra. Gev eisini okkum at læra av fyridømi hansara og við heilaga anda tínum megi og vísdóm til at tæna tær av heilum hjarta, kirkju tíni til uppbyggingar fyri son tín Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Job 29,11-16 ella Jes 6,1-8 ella Jes 42,5-12 ella Jes 52,7-10 ella Jes 61,1-3 ella Jer 1,4-9 ella Jer 9,23-24

Áps 16,1-5 ella 1 Kor 4,16-17 ella 1 Kor 16,10-11 ella Fil 2,19-24 ella 1 Tim 1,1-5 og 18-19 ella 1 Tim 4 ella 1 Tim 6,3-21 ella 2 Tim 1,1-14 ella 2 Tim 3,10-15

Matt 10,7-20 ella Luk 6,17-23a ella Jóh 15,12-20

TITUS (ONGAN ÁVÍSAN DAG)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gav Titusi dirvi til at fylgja í fótasporum ápostlanna og læra av vísdómi teirra. Gev eisini okkum at læra av fyridømi hansara og við heilaga anda tínum megi og vísdóm til at tæna tær av heilum hjarta, kirkju tíni til uppbyggingar fyri son tín Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

Job 29,11-16 ella Jes 6,1-8 ella Jes 42,5-12 ella Jes 52,7-10 ella Jes 61,1-3 ella Jer 1,4-9 ella Jer 9,23-24

2 Kor 7 ella 2 Kor 8,1-6 og 16-24 ella Gal 2,1-8 ella Tit 1,1-5

Matt 10,7-20 ella Luk 6,17-23a ella Jóh 15,12-20

SILAS (ONGAN ÁVÍSAN DAG)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum gav Silasi dirvi til at fylgja í fótasporum ápostlanna og læra av vísdómi teirra. Gev eisini okkum at læra av fyridømi hansara og við heilaga anda tínum megi og vísdóm til at tæna tær av heilum hjarta, kirkju tíni til uppbyggingar fyri son tín Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika

heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Job 29,11-16 ella Jes 6,1-8 ella Jes 42,5-12 ella Jes 52,7-10 ella Jes 61,1-3 ella Jer 1,4-9 ella Jer 9,23-24

Áps 15,22-41 ella Áps 16,16-40 ella 1 Tess 1

Matt 10,7-20 ella Luk 6,17-23a ella Jóh 15,12-20

11. JUNI. BARNABAS

Litur: Reyður.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við boðskapi ápostlanna fylti Barnabas við trúgv og heilagum anda og sendi hann út at boða gleðiboðskapin um son tín, Jesus Krist. Vit biðja teg, hjálp eisini okkum bæði í orði og verki at boða orð títt, so at kirkja tín má búnast og vaksa í sannari trúgv og øllum góðum verki fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Job 29,11-16 ella Jes 6,1-8 ella Jes 42,5-12 ella Jes 52,7-10 ella Jes 61,1-3 ella Jer 1,4-9 ella Jer 9,23-24

Áps 4,32-37 ella Áps 9,26-31 ella Áps 11,19-30 og 13,1-3

ella Áps 13,44-52 ella Áps 14,8-28 ella Áps 15,22-41 ella Gal 2,1-10

Matt 10,7-20 ella Luk 6,17-23a ella Jóh 15,12-20

AÐRIR DAGAR

26. DESEMBER. SANKTA STEFANS DAGUR – 2. JÓLADAGUR (SANKTA STEFAN – DIAKONUR OG HIN FYRSTI KRISTNI PÍNSLARVÁTTURIN).

Sí Altarbók á blaðsíðu 33.

28. DESEMBER. BARNADAGUR – TEY SAKLEYSU BØRNINI

Litur: Hvítur ella gyltur.

Hesir tekstir kunnu eisini verða nýttir:
2 Mós 1,8-22 ella Sl 124

1 Kor 1,26-29 ella 1 Pæt 4,12-16

Matt 2,13-23

Sí annars Altarbók á blaðsíðu 46 – sunnudag eftir nýggjár.

6. JANUAR. TRETTANDI DAGUR JÓLA (OPINBERINGARDAGUR HARRANS)

Sí Altarbók á blaðsíðu 25.

2. FEBRUAR. KYNDILSMESSA (REINSANARDAGUR MARIU MOYAR. MARIA Í HALGIDÓMINUM EFTIR FØÐING JESU. JESUS BORIN FRAM Í HALGIDÓMINUM. SÍMEON OG ANNA

Litur: Hvítur ella gyltur.

Hesir tekstir kunnu eisini verða nýttir:
1 Mós 1,1-5a og 14-18 ella 2 Mós 13,1-3a og 11-16 ella 1 Sám 1,21-28 ella 1 Sám 2,1-10 ella Sl 24 ella Sl 122 ella Mál 3,1-3

Róm 8,14-21 ella Róm 12,1-5 ella 2 Kor 3,18-4,1-6 ella 1 Tim 6,13-16 ella Hebr 2,10-18 ella 1 Pæt 2,4-10 ella 1 Jóh 1,1-7

Matt 5,14-16 ella Jóh 1,1-9 og 14 ella Jóh 8,12 ella Jóh 12,35-36a

Sí annars Altarbók á blaðsíðu 36 – jólasunnudag – og Ritualbók á blaðsíðu 5.

19. MARS. JÓSEF (MAÐUR MARIU MOY OG FOSTURFAÐIR JESU)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum kallaði hin heilaga Jósef til at vera mann og verja hjá Mariu moy og útvaldi hann til fosturfaðir og verja hjá einborna syni tínum, Jesusi Kristi. Vit biðja teg, lat upp oyru og eygu okkara, so at vit eins og Jósef mega hoyra kall títt og síggja tín heilaga vilja. Gev okkum mót og styrki til at vera kalli tínum lýðin og at gera tað, sum tú býður okkum, fyri son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Mós 39,1-5 ella 2 Sám 7,4-16 ella 1 Krýn 17,3-14 ella 2 Krýn 6,12-17 ella Jes 63,7-16 ella Hós 11

Róm 4,13 og 16-18 og 20-22 ella Ef 3,14-21 ella Kol 3,12-15 og 17 ella Hebr 11,1-16

Matt 1,18-25 ella Matt 2,13-23 ella Matt 13,54-58 ella Luk 2,41-52

25. MARS. MARIUMESSA UM VÁRIÐ (BOÐANARDAGUR MARIU MOYAR)

Sí Altarbók á blaðsíðu 91.

24. JUNI. JÓANSØKA (FØÐINGARDAGUR JÓHANNES DOYPARANS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum sendi Jóhannes doyparan at beina vegin fyri einborna syni tínum, Jesusi Kristi, og kalla menniskju til bót og umvending. Vit biðja teg, hjálp eisini okkum at taka ímóti vitnisburði hansara, so at vit ikki ganga í myrkrinum, men koma til ljósið og liva sum ljósins børn í trúnni á hann, ið er ljós heimsins, sonur tín, Jesus Kristus, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

Dóm 13,2-7 og 24 ella Jes 40,1-11 ella Jes 49,1-6 ella Jes 51,3-5 ella Jer 1,4-9 og 17-19 ella Mál 3,1-3 ella Mál 4,4-6

Áps 13,13-26 ella Áps 19,1-6 ella Gal 3,23-29 ella Hebr 11,32b-34 og 38-40 ella 1 Pæt 1,8-12

Matt 11,2-19 ella Luk 1,5-24a ella Luk 1,57-80 ella Luk 3,1-18 ella Jóh 1,1-8 ella Jóh 3,22-30

2. JULI. MARIUMESSA (VITJANARDAGUR MARIU MOYAR. MARIA HJÁ ELISABET, MÓÐUR JÓHANNES DOYPARANS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum útvaldi hina heilagu og sælu Mariu moy til at vera móður at einborna syni tínum, Jesusi Kristi, og soleiðis gjørdi kunnan kærleika tín og náði tína til tey fátæku og lítilsverdu. Vit biðja teg, gev eisini okkum náði til í eyðmýkt at taka ímóti syni tínum og fylgja honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Sám 2,1-10 ella Sl 113 ella Jes 11,1-5 og 10 ella Jes 12,2-6

Róm 12,9-16 ella Gal 4,1-5 ella Kol 3,12-17

Luk 1,39-56

22. JULI. MARIA MAGDALENA

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við syni tínum, Jesusi Kristi, endurnýggjaði Mariu Magdalenu í likami, sál og anda og gav henni at vera vitni um uppreisn hansara. Vit biðja

teg, endurnýggja tú eisini okkum, so at vit eins og hon mega finna vón, troyst og styrki í uppreisn Jesu Krists, sonar tíns og tæna tær í øllum lutum fyri hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Hás 3,1-4 ella Jes 25,1-9

Áps 13,26-33 ella 2 Kor 1,3-7 ella 2 Kor 5,14-17

Matt 27,55-61 og 28,1-10 ella Mark 15,40-16,1-8 ella Luk 8,1-3 ella Jóh 20,1-2 og 11-18

27. JULI. MARIA, MARTA OG LÁZARUS

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Harri Jesus Kristus, tú, sum sýndi systkjunum Mariu, Martu og Lázarusi tann heiður at vera vinur teirra og gestur í heimi teirra í Betánia. Vit biðja teg, gev eisini okkum eins og teimum at halda okkum at tær og tæna tær í medmenniskjum okkara við blíðsemi, so at vit at enda mega koma inn í hitt sanna og æviga heim okkara og verða sæl allar ævir við tær, sum við faðir tínum livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
Orðt 3,3-6 og 27-33
Róm 12,9-13 og Hebr 13,1-2

Luk 10,38-42 ella Jóh 11,19-45 ella Jóh 12,1-11

29. JULI. ÓLAVSØKA (MINNINGARDAGUR ÓLAVS KONGS HARALDSSONAR (HEILAGA) – TJÓÐARHÁTÍÐ FØROYINGA)

Sí Altarbók á blaðsíðu 244.

6. AUGUST. KRISTI DÝRD (JESU UMBROYTING Á FJALLINUM)

Litur: Hvítur ella gyltur.

Hesir tekstir kunnu eisini verða nýttir:
Dán 7,9-10 og 13-14

2 Kor 3,4-9

Mark 9,2-10 ella Luk 9,28-36

Sí annars Altarbók á blaðsíðu 66 – Seinasta sunnudag eftir trettanda.

15. AUGUST. MARIUMESSA (MARIA MOY, MÓÐIR HARRANS)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum við at útnevna hina lítilsverdu Mariu moy til móður at syni tínum, setti hana hátt, so at allar ættir skulu prísa hana sæla. Vit biðja teg, gev eisini okkum, ið eins og hon eru rættvísgjørd við offurdeyða hansara, við henni at fáa lut í hini himmalsku dýrd í æviga ríki tínum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Sám 2,1-10 ella Sl 45,10b-16 ella Jes 61,10-62,1-3 ella Jer 31,1-13 ella Judit 13,18-20 og 15,9b (Apokrýfurnar)

Áps 1,6-14 ella 1 Kor 15,20-26 ella 1 Kor 15,54-57 ella Gal 4,4-7 ella Opb 11,19-12,1-6 og 10-12a

Luk 1,39-55 ella Luk 11,27-28 ella Jóh 2,1-12 ella Jóh 19,25-27

8. SEPTEMBER. MARIUMESSA UM HEYSTIÐ (FØÐINGARDAGUR MARIU MOYAR)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum læt hina heilagu Mariu moy bera í heim og útvaldi hana til at vera móður at syni tínum. Vit biðja teg, gev okkum at læra av lítillæti og lýdni hennara, so at vit eins og hon hoyra orð títt, leggja okkum tað í geyma og lýðin gera eftir tí bæði í ljósum og myrkum tíðum fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

Jes 7,10-14 ella Jes 61,10-62,1-3 ella Mika 5,1-3

Róm 8,28-30

Matt 1,18-23 ella Luk 1,39-49 ella Jóh 2,1-12 ella Jóh 19,25-27

14. SEPTEMBER. DÝRD KROSSINS – KROSSMESSA UM HEYSTIÐ

Litur: Reyður.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, tú, sum læt frelsara okkara, son tín, Jesus Krist, gerast menniskja og doyggja á krossinum, mannaættini til frelsu og fyrimyndar í eyðmýkt. Vit biðja teg, gev okkum náði til at læra av tolmóði sonar tíns, so at vit fylgja honum eftir í eyðmýkt og lýdni líka til deyða og at enda fáa lut í uppreisn hansara frá deyðum, hann, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:

Harra, vár Guð, tú, sum læt son tín, Jesus Krist, líða krossdeyðan fyri syndir okkara. Vit biðja teg, lýs fyri okkum við heilaga anda tínum, so at vit trygt kunnu líta á fullgjørda verk hansara og fyrigeving syndanna í honum, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:

1 Mós 3,1-15 ella 4 Mós 21,4-9 ella Sl 98,1-3 ella Jes 53

1 Kor 1,17-25 ella Gal 6,14 ella Ef 2,11-22 ella Fil 2,5-11 ella Hebr 2,9-10 ella 1 Pæt 1,18-21 ella 1 Pæt 3,18-22

Jóh 3,14-17 ella Jóh 12,20-33

ÚTGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Harra, vár Guð, himmalski faðir, tú, sum í faðirligu náði tíni ikki spardi einborna son tín, Jesus Krist, men læt hann doyggja á krossinum. Vit biðja teg, verð hjá okkum við heilaga anda tínum, so at vit mega finna troyst í hesi náði tíni, varða okkum fyri syndini, tolin bera tær líðingar, sum verða lagdar á okkum, og um allar ævir verða sæl hjá tær fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

29. SEPTEMBER. MIKKJALSMESSA (HØVUÐSEINGILIN MIKKJAL (MIKAEL) OG ALLIR EINGLAR)

Litur: Hvítur ella gyltur.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!

Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum í hátign tíni letur heilagu einglar tínar tilbiðja teg og tæna tær í æviga ríki tínum. Vit takka tær, tí at tú í miklu náði tíni sendir hesar somu heilagu einglar tínar okkum til verndar og verju. Vit biðja teg, at eins og tú veitir okkum vernd teirra í hesum lívi, soleiðis vilt tú eisini veita okkum hina ævigu gleði saman við teimum í tí himmalska fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
1 Mós 28,10-19a ella 2 Mós 23,20-22 ella 2 Kong 6,8-17 ella Sl 34,2-8 ella Dán 6,1-24 ella Dán 10,4-21 og 11,1a og 12,1-3

Áps 12,1-17a ella Hebr 1 ella Hebr 2,2-9 ella Opb 1,1-5 ella Opb 5,11-12 ella Opb 12,7-12a

Matt 18,1-5 og 10 ella Mark 13,21-27 ella Luk 10,17-20 ella Jóh 1,48-52

31. OKTOBER. UPPHAV TRÚBÓTAR LUTHERS (TRÚBÓTARDAGURIN)

Litur: Reyður ella hvítur.

Kann eisini verða hildin ein annan dag nærhendis, um betur liggur fyri. Møguliga eitt sunnukvøld.

INNGANGSKOLLEKT

Latið okkum øll biðja!
Alvaldi, ævigi Guð, tú, sum kallar og vekir upp vitni í kirkju tíni og av nýggjum letur orðsins ljós títt birtast við boðskapi teirra. Vit takka tær fyri kvinnur og menn, sum trúføst í tíni tænastu hava beint kirkju tína aftur á rætta kós. Vit biðja teg, send okkum framvegis vitni og orðsins tænarar, sum boða orð títt reint og rætt. Hjálp okkum við heilaga anda tínum, so at vit varðveita hetta heilaga orð títt í takksomum hjørtum og liva eftir tí fyri einborna son tín, Jesus Krist, váran harra, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

Ella:
Alvaldi, ævigi Guð, friðskjól okkara og styrki. Tú, sum vakti upp tænara tín, Martin Luther, og við honum endurnýggjaði kirkju tína við orðsins ljósi tínum. Vit biðja teg, verj eisini kirkju tína í okkara tíð fyri øllum følskum lærdómi, so at vit við trúgv og treysti mega boða orð títt reint og rætt og taka við boðskapinum um náði tína og frelsu í syni tínum, Jesusi Kristi, sum við tær livir og ræður í einleika heilaga andans, ein sannur Guð um aldur og ævir allar! Amen.

TEKSTIR:
1 Mós 15,1-6 ella Sl 46,2-12 ella Jes 55,6-11 ella Jer 1,4-9 ella Jer 3,14-15 ella Jer 15,19-21 ella Jer 23,25-28a ella Jer 31,31-34

Róm 1,16-17 ella Róm 3,19-28 ella Róm 5,1-11 ella Róm 10,13-17 ella 1 Kor 1,20-25 ella 1 Kor 3,11-23 ella Gal 4,1-7 ella Ef 6,10-20 ella Hebr 4,12-13

Mark 10,42-45 ella Mark 13,21-31 ella Luk 8,4-15 ella Luk 10,16-20 ella Jóh 2,13-22 ella Jóh 7,40-52 ella Jóh 8,31-36

1. NOVEMBER. ALLA HALGANNA DAGUR (MINNINGARDAGUR TEIRRA SJÓLÁTNU OG MØGULIGA HJÁ ØÐRUM)

Litur: Svartur ella viólbláur.

Sí jarðarferðarritualið í Ritualbókini á blaðsíðu 68.

Yvirlit yvir bíbliulestrar í kirkjuárinum, til mishalgidagar og aðrar dagar í raðfylgju

1 talið eftir heitið á sunnu- og halgidøgunum merkir fyrra tekstarød, 2 talið merkir seinna tekstarød.

GAMLA TESTAMENTI

Fyrsta Mósebók (1 Mós – Genesis)	
1,1-5	Jóladag – føðingardag Krists, 2
1,1-5a og 14-18	Jóhannes – ápostul og evangelistur
1,1-5a og 14-18	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føding Jesu.*
1,1-2,1-3	Skapanarverkið
1,27-31	2. sunnudag í føstu, 2
2,4-9 og 15-17	Skapanarverkið
2,5-7	Hvítusunnudag, 1
3,1-15	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
3,1-19	1. sunnudag í føstu, 1
4,1-12	1. sunnudag í føstu, 2
8,20-22 og 9,12-16	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
11,1-9	Hvítusunnudag, 1
15,1-6	3. sunnudag eftir trettanda, 2
15,1-6	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
22,1-18	Langa fríggjadag
28,10-19a	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
28,10-19a	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
28,10-19a	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
32,24-31	5. sunnudag eftir páskir, 1

33,1-11	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
39,1-5	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
48,8-12 og 15-16	1. sunnudag eftir trettanda, 2
50,14-21	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
50,15-21	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
Onnur Mósebók (2 Mós – Exodus)	
1,8-22	Barnadagur – tey sakleysu børnini
1,22-2,1-10	Sunnudag eftir nýggjár, 1
3,1-7 og 10-14	3. sunnudag eftir páskir, 2
3,7-10	Forfylgd og kúgað
12,1-11	Skírhósdag, 1
12,1-11	Heilaga altarsins sakramenti
13,1-3a og 11-16	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
16,11-18	Miðføstu sunnudag, 1
16,11-18	Heilaga altarsins sakramenti
20,1-17	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
23,20-22	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
24,3-8	Heilaga altarsins sakramenti
32,7-10 og 30-32	3. sunnudag í føstu, 2
33,7-23	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
33,18-23	2. sunnudag eftir trettanda, 1
34,27-35	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 1
Triðja Mósebók (3 Mós – Leviticus)	
19,1-2 og 9-18	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
19,15-18	Friður og rættvísi
Fjórða Mósebók (4 Mós – Numeri)	
6,22-27	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 2
21,4-9	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 1
21,4-9	Dýrd krossins – krossmessa um heystið

Fimta Mósebók (5 Mós – Deuteronomium)	
6,4-9	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
8,1-3	Miðføstu sunnudag, 2
8,1-3	Heilaga altarsins sakramenti
8,7-18a	Heystgudstænasta
10,17-21	3. sunnudag eftir trettanda, 1
18,9-15	3. sunnudag í føstu, 1
18,15-18	1. sunnudag eftir trettanda, 1
18,15-18	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
24,17-22	4. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
28,1-6 og12a	Heystgudstænasta
29,2a og 30,11-14	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
30,11-14	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
30,11-20	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
30,15-20	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
32,1-4	Tveggja ápostla messa – *Símun Selotes (Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
Dómarabókin (Dóm)	
13,2-7 og 24	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
Fyrra Sámuelsbók (1 Sám)	
1,21-28	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
2,1-10	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
2,1-10	Boðanardagur Mariu, 2
2,1-10	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
2,1-10	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
2,18-20 og 26	1. sunnudag eftir trettanda, 1
3,1-10	Ápostladagur
7,12	Nýggjársaftan

Seinna Sámuelsbók (2 Sám)	
7,4-16	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
11,26-12,1-7a	4. sunnudag eftir tríeindardagin (trinitatis), 1
Fyrra Kongabók (1 Kong)	
8,1 og 12-13 og 22-30	2. hvítusunnudag, 2
8,22-30 og 54-56a.	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
17,8-10a og 17-24	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
19,1-4	Forfylgd og kúgað
Seinna Kongabók (2 Kong)	
5,1-5 og 9-15	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,8-17	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
Fyrra Krýnikubók (1 Krýn)	
17,3-14	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
29,6-16	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
29,10-14	Heystgudstænasta
Seinna Krýnikubók (2 Krýn)	
6,12-17	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
7,11-16	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
24,18-22a	Forfylgd og kúgað
Jobsbók (Job)	
5,8-16	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
29,11-16	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
29,11-16	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
29,11-16	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
29,11-16	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
38,1-11	4. sunnudag eftir trettanda, 1
38,1-11	Skapanarverkið
42,1-6	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*

Sálmarnir (Sl)	
2,1-8 og 10-12	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 1
16,5-11	2. páskadag, 2
22,23-32	2. páskadag, 1
23	2. sunnudag eftir páskir, 2
24	1. sunnudag í advent, 1
24	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
27,1-6	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og nýggjárs), 2
33,12-21	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga*, 2
34,2-8	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
37,3-6	5. sunnudag eftir trettanda, 1
37,3-6	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
40,2-6	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
42,2-6	2. sunnudag í føstu, 1
45,10b-16	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
46,2-12	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
72,8-14	Sunnudag eftir nýggjár, 1
72,17-19	Nýggjársdag – áttanda dag jóla,1
85,9-14	5. sunnudag eftir trettanda, 2
85,9-14	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
85,9-14	Friður og rættvísi
91,1-4	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
98,1-3	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
100	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga*, 1
100	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
103,1-13	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
103,14-22	Nýggjársaftan

110,1-4	Krists himmalsferðardag, 1
113	Krists himmalsferðardag, 2
113	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
115,1-9	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
116,1-7 og 12-13	Skírhósdag, 2
118,13-24	Páskadag, 1 og 2
121	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
122	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
124	Barnadagur – tey sakleysu børnini
124	4. sunnudag eftir páskir, 2
126	2. sunnudag eftir trettanda, 2
146	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
147,1-11	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
Orðtøkini (Orðt)	
2,1-11	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,1-18	Matteus – *ápostul og evangelistur*
3,3-6	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 2
3,3-6 og 27-33	Maria, Marta og Lázarus
3,27-35	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
4	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
8,12 og 22-36	Skapanarverkið
8,22-30	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
15,31-33 og 16,16-19 og 25,6-7	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
Prædikarin (Præd)	
3,1-2 og 4-7 og 11	Nýggjársaftan
3,1-11	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
5,9-19	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
Hásongurin (Hás.)	
3,1-4	Maria Magdalena

Jesaja (Jes)	
2,2-5	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 2
5,1-7	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
6,1-8	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
6,1-8	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
6,1-8	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
6,1-8	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
6,1-8	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
6,1-8	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
7,10-14	Boðanardag Mariu, 1
7,10-14	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
9,1-7	Jólaaftan
9,1-7	Jóladag – føðingardag Krists, 1
9,1-7	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
10,1-3	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
11,1-5 og 10	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
11,1-10	2. sunnudag í advent, 2
11,1-10	Friður og rættvísi
12	4. sunnudag í advent, 2
12,2-6	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
12,2-6	Kristniboðan – heima- og útimissión
25,1-9	Maria Magdalena
25,6-9	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
26,19	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
30,18-21	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
33,13-17	Matteus – *ápostul og evangelistur*
35	3. sunnudag í advent, 1
35	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
35	Lukas – *evangelistur*

40,1-8	3. sunnudag í advent, 2
40,1-11	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
40,18-25	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
40,26-31	4. sunnudag eftir trettanda, 2
40,27-31	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
42,1-7	Friður og rættvísi
42,1-9	1. sunnudag í advent, 2
42,5-12	Kristniboðan – heima- og útimissión
42,5-12	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
42,5-12	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
42,5-12	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
42,5-12	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
43,8-13a	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
43,8-13a	1. sunnudag eftir páskir, 1
43,8-13a	Ápostladagur
43,8-13a	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
43,8-13a	Lukas – *evangelistur*
44,1-8	5. sunnudag eftir páskir, 2
44,1-8 og 24-26a	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
44,22-28	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
45,5-12	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 2
45,18-22	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
45,18-22	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
49,1-6	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 2
49,1-6	Kristniboðan – heima- og útimissión
49,1-6	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
49,1-6	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
49,1-6	Pætursmessa – Pætur – pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls
49,1-6	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*

49,1-6	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
49,8-13	Alla halganna sunnudag, 1
49,13-18	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
50,4-7	Sankta Stefans dag – 2. jóladag, 2
50,4-10	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 2
51,3-5	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
51,4-8	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
51,12-16	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
52,7-10	4. sunnudag í advent, 1
52,7-10	Kristniboðan – heima- og útimissión
52,7-10	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
52,7-10	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
52,7-10	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
52,7-10	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
52,7-10	Ápostladagur
52,7-10	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
52,7-10	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
52,7-10	Lukas – *evangelistur*
53	Langa fríggjadag
53	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
54,7-10	3. sunnudag eftir páskir, 1
55	Lukas – *evangelistur*
55,1-5	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
55,6-7	Dýra biðidag, 1
55,6-11	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 1
55,6-11	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
55,8-11	Heystgudstænasta
56,1 og 6-7	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
57,15-19	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
57,15-19	Friður og rættvísi

58,5-12	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
60,1-6	Trettanda dag jóla
60,18-22	Alla halganna sunnudag, 2
61,1-3a	Kristniboðan – heima- og útimissión
61,1-3	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
61,1-3	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
61,1-3	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
61,1-3	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
61,1-3	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
61,1-3	Lukas – *evangelistur*
61,10-62,1-3	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
61,10-62,1-3	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
62,6-12	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
63,7-9	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og Nýggjárs), 1
63,7-16	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
65,1-2	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
65,17-19	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 1
Jeremia (Jer)	
1,4-9	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
1,4-9	Kristniboðan heima- og útimissión
1,4-9	Ápostladagur
1,4-9	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
1,4-9	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
1,4-9	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
1,4-9	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
1,4-9	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
1,4-9	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
1,4-9 og 17-19	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
1,13a og 17-19	Sankta Stefans dag – 2. jóladag, 1
3,12-18	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*

3,12-15 og 19-22	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,14-15	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
6,16a	Ættarsamkoma
7,1-11	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
9,23-24	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 1
9,23-24	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
9,23-24	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
9,23-24	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
9,23-24	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
15,19-21	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
17,7-8	Heilaga dópsins sakramenti
17,7-10	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
18,1-6	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
20,7-11 og 13	Forfylgd og kúgað
23,1-4	1. sunnudag eftir páskir, 2
23,16-24	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
23,25-28a	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
26,1-16	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
26,1-16	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
29,11	Nýggjársaftan
29,11-14a	Dýra biðidag, 2
31,1-13	Mariumessa – Maria moy, móðir Harrans
31,15-17	Sunnudag eftir nýggjár, 2
31,31-34	Hvítusunnudag, 2
31,31-34	Upphav trúbótar Luthers – trúbótardagurin
Harmljóðini (Harmlj)	
3,21-26 og 40-41	Nýggjársaftan
3,21-26 og 40-41	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 2
Ezekiel (Ez)	
1,4-14	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*

1,4-14	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
1,4-14	Matteus – *ápostul og evangelistur*
1,4-14	Lukas – *evangelistur*
2,1-7	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
2,1-8a	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
2,1-8a	Ápostladagur
2,8-3,1-11	Matteus – *ápostul og evangelistur*
3,4-11	Pætursmessa – Pætur – *Pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
3,4-11	Pætursøka – Pætur og Paulus – deyði Pæturs og Paulusar
11,19-20	2. hvítusunnudag, 1
33,23 og 30-33	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
34,11-16	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
34,11-16	2. sunnudag eftir páskir, 1
34,11-16	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
36,23-28	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
36,25a og 26-28	Heilaga dópsins sakramenti
36,26-28.	4. sunnudag eftir páskir, 1
37,1-14	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
37,15-19 og 21-22 og 26-28.	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
43,1-2 og 4-7a	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
47,1-9 og 12	Heilaga dópsins sakramenti
Dánjal (Dán)	
6,1-24	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
7,9-10 og 13-14	Kristi dýrd – *Jesu umbroyting á fjallinum*
7,9-10 og 13-14..	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2

10,4-21 og 11,1a og 12,1-3	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
Hósea (Hós)	
11	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
Jóel	
2,21-24 og 26	Heystgudstænasta
3,1-5	6. sunnudag eftir páskir, 2
Ámos (Ám)	
5,11-15a	Friður og rættvísi
8,4-7	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
Jónas (Jón)	
2	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
Mika	
3,5-7	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,1-3	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 2
4,1-5	Friður og rættvísi
5,1-3	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
5,1-4a	Jólaaftan
5,1-4a	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
6,6-8	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
Haggai (Hagg)	
2,4b-9	6. sunnudag eftir páskir, 1
Zakarja (Zak)	
4	Pætussøka – *Pætur og Paulus – deyði Pæturs og Paulusar*
9,9-10	Pálmasunnudag, 1 og 2
Málaki (Mál)	
3,1-3	2. sunnudag í advent, 1
3,1-3	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
3,1-3	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
3,1-3	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*

4,4-6	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
APOKRÝFISKU BØKURNAR	
Juditar bók (Judit)	
13,18-20 og 15,9b	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
Sírakur (Sír)	
3,1-15	Ættarsamkoma
NÝGGJA TESTAMENTI	
Evangeliið eftir Matteus (Matt)	
1,18-23	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
1,18-25	Jólaaftan
1,18-25	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
1,18-25	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
2,1-12	Trettanda dag jóla
2,13-18	Sunnudag eftir nýggjár, 2
2,13-23	Barnadagur – tey sakleysu børnini
2,13-23	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
2,19-23	Sunnudag eftir nýggjár, 1
3,1-10	Dýra biðidag, 1
3,13-17	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 1
3,13-17	Heilaga dópsins sakramenti
4,1-11	1. sunnudag í føstu, 1
4,12-20	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
5,1-12	Alla halganna sunnudag, 1
5,1-16	Friður og rættvísi
5,6 og 9	Friður og rættvísi
5,13-16	Alla halganna sunnudag, 2
5,14-16	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
5,20-26	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1

5,23-26	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
5,43-48	Friður og rættvísi
5,43-48	4. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
6,5-13	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 2
6,1	Friður og rættvísi
6,19-34	Matteus – *ápostul og evangelistur*
6,24-34	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,25-34	Heystgudstænasta
6,25-34	Skapanarverkið
7,7-14	Dýra biðidag, 2
7,12	Friður og rættvísi
7,15-21	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
7,22-29	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
8,1-13	3. sunnudag eftir trettanda, 1
8,23-27	4. sunnudag eftir trettanda, 1
9,1-8	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
9,9-13	Matteus – *ápostul og evangelistur*
9,18-26	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
9,35-38	Kristniboðan – heima- og útimission
10,1-5a	Ápostladagur
10,1-5a	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
10,1-20	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
10,7-20	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
10,7-20	Titus – *medarbeiðari Paulusa*r
10,7-20	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
10,7-20	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
10,16-22	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
10,16-22	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
10,16-22	Forfylgd og kúgað
10,24-31	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2

10,32-42	Sankta Stefans dag – 2. jóladag, 2
10,32-42	Forfylgd og kúgað
11,2-10	3. sunnudag í advent, 1
11,2-19	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
11,16-24	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
11,25-30	Mattias – *ápostul*
11,25-30	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 2
11,28-30	Nýggjársaftan
12,31-42	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
13,24-30	5. sunnudag eftir trettanda, 1
13,24-30	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
13,44-52	5. sunnudag eftir trettanda, 2
13,44-52	Matteus – *ápostul og evangelistur*
13,44-52	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
13,54-58	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
14,22-33	4. sunnudag eftir trettanda, 2
15,21-28	2. sunnudag í føstu, 1
16,13-19	Pætursmessa- Pætur – *Pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
16,13-26	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
16,24-27	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga,* 1
16,24-28	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
17,1-9	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 1
18,1-5 og 10	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
18,1-14	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
18,19-22	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
18,21-35	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
19,16-26	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
19,16-30	Matteus – *ápostul og evangelistur*
20,1-16	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 1

20,20-28	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
20,20-28	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
21,1-9	1. sunnudag í advent, 1
21,1-9	Pálmasunnudag, 1
21,28-44	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
22,1-14	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
22,15-22	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
22,34-46	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
23,34.	Forfylgd og kúgað
23,34-39	Sankta Stefans dag – 2. jóladag, 1
24,15-28	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
25,1-13	2. sunnudag í advent, 2
25,14-30	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 2
25,31-40	Friður og rættvísi
25,31-46	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 1
26,17-20 og 26-30.	Heilaga altarsins sakramenti
26,17-30	Skírhósdag, 1
27,31-56	Langa fríggjadag
27,55-61 og 28,1-10	Maria Magdalena
28,1-8	Páskadag, 2
28,16-20	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 2
28,16-20	Kristniboðan – heima- og útimission
28,18-20	Heilaga dópsins sakramenti
Evangeliið eftir Markus (Mark)	
1,1-15	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
1,14-18	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
1,14-20	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
2,14-22	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,13-19	Ápostladagur

3,13-19	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
4,1-9 og 26-29	Kristniboðan – heima- og útimissión
4,26-32	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 2
4,26-32	Heystgudstænasta
4,35-41	Skapanarverkið
6,30-44	Skapanarverkið
7,31-37	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
8,1-9	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
9,2-10	Kristi dýrd – *Jesu umbroyting á fjallinum*
9,14-29	2. sunnudag í føstu, 2
9,33-37	Heilaga dópsins sakramenti
10,13-16	1. sunnudag eftir trettanda, 2
10,13-16	Heilaga dópsins sakramenti
10,35-45	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
10,42-45	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
12,38-44	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
13,5-13	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
13,9-13	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
13,21-27	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
13,21-31	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
14,3-9	Pálmasunnudag, 2
14,12-17 og 22-26	Heilaga altarsins sakramenti
15,20-41	Langa fríggjadag
15,40-16,1-8	Maria Magdalena
16,1-8	Páskadag, 1
16,14-20	Krists himmalsferðardag, 1
16,15-16	Kristniboðan – heima- og útimissión
16,15-18	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
16,15-20	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*

Evangeliið eftir Lukas (Luk)	
1,1-4	Lukas – *evangelistur*
1,5-24a	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
1,26-38	Boðanardag Mariu, 1
1,39-49	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
1,39-55	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
1,39-56	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
1,46-56	Boðanardag Mariu, 2
1,57-80	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
1,67-80	3. sunnudag í advent, 2
2,1-14	Jólaaftan
2,1-14	Jóladag – føðingardag Krists, 1
2,1-14	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
2,1-20	Jólaaftan
2,1-20	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
2,15-20	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
2,21.	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 1
2,22-32	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og nýggjárs), 2
2,33-40	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og nýggjárs), 1
2,41-52	1. sunnudag eftir trettanda, 1
2,41-52	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
3,1-18	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
4,14-21	Lukas – *evangelistur*
4,16-30	1. sunnudag í advent, 2
5,1-11	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,12-16	Ápostladagur
6,12-16	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
6,12-16	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*

6,17-23a	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
6,17-23a	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
6,17-23a	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
6,17-23a	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
6,36-42	4. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
7,11-17	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
7,36-50	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
8,1-3	Maria Magdalena
8,4-15	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 1
8,4-15	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
9,28-36	Kristi dýrd – Jesu umbroyting á fjallinum
9,46-56	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
9,49-50	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
10,1-9	Kristniboðan – heima- og útimission
10,1-9	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
10,1-9	Lukas – *evangelistur*
10,16-20	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
10,17-20	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
10,23-37	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
10,38-42	Maria, Marta og Lázarus
10,38-42	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
11,3	Heystgudstænasta
11,14-28	3. sunnudag í føstu, 1
11,14-28	Heystgudstænasta
11,27-28	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
12,13-21	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
12,22-31	Heystgudstænasta
12,32-48	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
13,6-9	Nýggjársaftan
14,1-11	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1

14,16-24	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
14,25-35	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
15,1-10	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
15,11-32	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
16,1-9	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
16,19-31	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
17,5-10	3. sunnudag eftir trettanda, 2
17,11-19	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
17,20-33	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
18,9-14	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
18,31-43	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 2
19,1-10	2. sunnudag eftir trettanda, 2
19,1-10	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
19,41-48	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
21,10-19	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
21,25-36	2. sunnudag í advent, 1
22,7-20	Heilaga altarsins sakramenti
22,14-20	Skírhósdag, 1
22,24-32	1. sunnudag í føstu, 2
23,26-49	Langa fríggjadag
24,1-12	Páskadag seinnapart ella um kvøldið
24,13-35	2. páskadag, 1
24,44-49	Kristniboðan – heima- og útimission
24,44-50	Lukas – *evangelistur*
24,46-53	Krists himmalsferðardag, 2
Evangeliið eftir Jóhannes (Jóh)	
1,1-4	Skapanarverkið
1,1-8	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
1,1-9 og 14	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
1,1-14	Jóladag – føðingardag Krists, 2

1,19-28	4. sunnudg í advent, 1
1,35-43a	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
1,35-52	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
1,44-52	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
1,46-52	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
1,48-52	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
2,1-11	2. sunnudag eftir trettanda, 1
2,1-12	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
2,1-12	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
2,13-22	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
2,13-22	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
3,1-8	Heilaga dópsins sakramenti
3,1-15	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 1
3,14-17	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
3,16-21	2. hvítusunnudag, 1
3,22-30	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
3,25-36	4. sunnudg í advent, 2
4,5-14	Heilaga dópsins sakramenti
4,5-26	2. hvítusunnudag, 2
4,14 og 23-24	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
4,34-42	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,46-53	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
5,1-15	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
5,17-29	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
6,1-15	Miðføstu sunnudag, 1
6,25-35	Heystgudstænasta
6,35-51	Miðføstu sunnudag, 2
6,48-58	Heilaga altarsins sakramenti

7,40-52	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
8,12	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
8,28-36	4. sunnudag eftir páskir, 2
8,31-36	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
8,42-51	3. sunnudag í føstu, 2
10,11-16	2. sunnudag eftir páskir, 1
10,22-30	2. sunnudag eftir páskir, 2
10,22-30	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
11,1-16	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
11,19-45	Maria, Marta og Lázarus
11,19-45	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
12,1-11	Maria, Marta og Lázarus
12,1-16	Pálmasunnudag, 2
12,20-26	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
12,20-33	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
12,23-33	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 2
12,24-26	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga*, 2
12,35-36a	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jes*u
13,1-15	Skírhósdag, 2
13,20-35	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
14,1-7	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
14,1-11	3. sunnudag eftir páskir, 2
14,1-11	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
14,15-21	Hvítusunnudag, 2
14,15-27	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
14,22-31	Hvítusunnudag, 1
14,27	Nýggjársaftan

15,1 og 4-5	Heilaga dópsins sakramenti
15,1-11	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
15,1-11	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
15,9-17	Mattias – *ápostul*
15,12-20	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
15,12-20	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
15,12-20	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
15,12-20	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
15,17-20	Lukas – *evangelistur*
15,17-21	Forfylgd og kúgað
15,12-27	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes (Kánanearin) og Judas Taddeus – *ápostlar*
15,26-16,1-4	6. sunnudag eftir páskir, 1
16,5-15	4. sunnudag eftir páskir, 1
16,16-22	3. sunnudag eftir páskir, 1
16,23b-28	5. sunnudag eftir páskir, 1
17,1-11	5. sunnudag eftir páskir, 2
17,1a og 11b og 17 og 20-26	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
17,20-26	6. sunnudag eftir páskir, 2
19,17-37	Langa fríggjadag
19,25-27	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
19,25-27	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*
20,1-8	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
20,1-2 og 11-18	Maria Magdalena
20,1-18	2. páskadag, 2
20,19-31	1. sunnudag eftir páskir, 1
20,24-29	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
21,15-19	Pætursmessa- Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
21,15-19	1. sunnudag eftir páskir, 2

21,15-19	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
21,20-25	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
Ápostlasøgan (Áps)	
1,1-8	Lukas – *evangelistur*
1,1-11	Krists himmalsferðardag, 1 og 2
1,6-14	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
1,12-14	6. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
1,12-14	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
1,12-14 og 23-26	Ápostladagur
1,15-26	Mattias – *ápostul*
2,1-11	Hvítusunnudag, 1 og 2
2,22-28	1. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
2,36-41	2. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
2,37-41	Heilaga dópsins sakramenti
2,42-47	2. hvítusunnudag, 2
3,1-10	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,7-12	3. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
4,8-13	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
4,23-31	Sunnudag eftir nýggjár, 2
4,32-37	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
5,12-16	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
6,1-4	5. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
6,8-14 og 7,54-60	Sankta Stefans dag – 2. jóladag, 1 og 2
6,8-15 og 7,54-8,1-4	Forfylgd og kúgað
7,44-50	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
8,26-39	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
8,36-38	Heilaga dópsins sakramenti
9,1-18	4. sunnudag eftir páskir, 1 og 2
9,1-22	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*

9,26-31	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
9,32-42	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
10,34-41	2. páskadag, 1
10,34-44	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
10,42-48a	2. hvítusunnudag, 1
11,1-18	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
11,19-30 og 13,1-3	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
11,27-12,1-3	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
12,1-11	Pætursmessa – Pætur – *pætursstólur – játtan Pæturs ápostuls*
12,1-11	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
12,1-11 og / ella 28,16-31	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
12,1-17a	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
12,25-13,1-13	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
13,13-26	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
13,26-33	Maria Magdalena
13,44-52	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
14,8-28	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
15,13b-29	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
15,22-41	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
15,22-41	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
15,35-41	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
16,1-5	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
16,6-10	Kristniboðan – heima- og útimissión
16,6-12	Lukas – *evangelistur*
16,16-40	Silas – *medarbeiðari Paulusar*

17,22-34	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 2
19,1-6	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
20,6-12	Lukas – *evangelistur*
20,24-35	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
21,1-19	Lukas – *evangelistur*
22,3-21	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
26,1-23	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
28,16-31	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
Rómverjabrævið (Róm)	
1,1-7	Ápostladagur
1,1-17	Kristniboðan – heima- og útimission
1,16-17	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
3,19-22a	Sunnudag eftir nýggjár, 1
3,19-28	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
3,23-28	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,13 og 16-18 og 20-22	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
4,18-25	4. sunnudag eftir trettanda, 2
5,1-11	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
6,3-11	Heilaga dópsins sakramenti
6,3-11	6. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,19-23	2. sunnudag eftir trettanda, 2
8,1-4	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
8,12-17	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
8,14-21	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
8,18-23	4. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
8,19-23	Skapanarverkið
8,24-28	5. sunnudag eftir páskir, 2
8,28-30	Mariumessa um heystið – *føðingardagur Mariu moyar*

8,28-31	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
8,31b-39	Nýggjársaftan
8,31b-39	6. sunnudag eftir páskir, 2
10,1-15	Matteus – *ápostul og evangelistur*
10,4-17	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
10,8b-17	Ápostladagur
10,8b-18	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*
10,11-17	Kristniboðan – heima- og útimission
10,13-17	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
11,25-32	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
11,33-36	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 1
12,1-5	1. sunnudag eftir trettanda, 1
12,1-5	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
12,6-16a	2. sunnudag eftir trettanda, 1
12,9-13	Maria, Marta og Lázarus
12,9-16	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
12,9-21	Friður og rættvísi
12,16b-21	3. sunnudag eftir trettanda, 1
13,1-7	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
13,8-10	4. sunnudag eftir trettanda, 1
13,11-14	1. sunnudag í advent, 1 og 2
14,7-13	4. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
15,4-7	2. sunnudag í advent, 1
15,14-21	Kristniboðan – heima- og útimission
Fyrra Korintbrævið (1 Kor)	
1,4-8	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
1,10-13 og 30-31	Einleiki kirkjunna – kristin einleiki
1,17-25	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
1,18-25	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 1
1,18-31	Andrasarmessa – Andrias – *ápostul*

1,20-25	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
1,21-31	Boðanardag Mariu, 2
1,26-29	Barnadagur – tey sakleysu børnini
3,3b-17	5. sunnudag eftir trettanda, 2
3,3b-17	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,9-17	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
3,11-23	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
3,16-23	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
4,1-5	3. sunnudag í advent, 1
4,9-15	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
4,9-15	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
4,16-17	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
5,7-8	Páskadag, 1
8,6	Skapanarverkið
9,24-27	3. sunnudag fyri føstu (sunnudag septuagesima), 1
10,15-17	Skírhósdag, 2
10,15-17	Heilaga altarsins sakramenti
11,23-26	Skírhósdag, 1
11,23-26	Heilaga altarsins sakramenti
12,1-11	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
12,12-13	Heilaga dópsins sakramenti
12,12-27	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
12,26-27	Forfylgd og kúgað
12,28-31a	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
12,28-31a	Matteus – *ápostul og evangelistur*
13	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 2
15,1-8	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
15,1-10a	11. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1

15,1-11	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
15,3-5 og 8	Pætursøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
15,12-20	2. páskadag, 2
15,20-26	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
15,21-28	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
15,54-57	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
16,10-11	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
Seinna Korintbrævið (2 Kor)	
1,3-7	Forfylgd og kúgað
1,3-7	Maria Magdalena
1,18-22	4. sunnudag í advent, 2
3,4-9	Kristi dýrd – *Jesu umbroyting á fjallinum*
3,4-9	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,18-4,1-6	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
4,1-6	Matteus – *ápostul og evangelistur*
4,5-10	3. sunnudag í advent, 2
4,7-15	Jákupsdagur – *Eldri Jákup, sonur Sebedeusar – ápostul*
4,7-15	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
5,1-10	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
5,11-6,1-2	Kristniboðan – heima- og útimissión
5,14-17	Maria Magdalena
5,14-21	4. sunnudag eftir páskir, 2
6,1-10	1. sunnudag í føstu, 1
6,1-10	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – *ápostul*
7	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
8,1-6 og 16-24	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
9,6-11	Miðføstu sunnudag, 1
9,6-15	Heystgudstænasta

Galatabrævið (Gal)	
1,11-24	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostul*
1,11-2,1-10	Pæturssøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
2,1-8	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
2,1-9	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
2,1-10	Barnabas – *medarbeiðari Paulusar*
2,16-21	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,13-14	Langa fríggjadag
3,23-29	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 1
3,23-29	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
3,26-28	Heilaga dópsins sakramenti
4,1-5	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
4,1-7	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og nýggjárs), 1
4,1-7	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
4,4-7	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
5,16-25	14. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
5,25-6,1-9	15. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,14	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
Efesusbrævið (Ef)	
1,3-14	Tríeindardag (trinitatis sunnudag), 2
2,1-10	Matteus – *ápostul og evangelistur*
2,11-22	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
2,13-22	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes (Kánanearin) og Judas Taddeus – *ápostlar*
2,17-22	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
2,19-22	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
3,13-21	16. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,14-21	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
4,1-6	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1

4,1-6	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
4,7 og 11-16	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
4,7 og 11-16	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
4,7 og 11-16	Filippus og Jákup – *Yngri Jákup, sonur Alfeusar – ápostlar*
4,7 og 11-16	Matteus – *ápostul og evangelistur*
4,7 og 11-16	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
4,22-28	19. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
4,22-32	Friður og rættvísi
4,30-32	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,30-5,1-2	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
5,1-9	3. sunnudag í føstu, 1
5,8-15	Friður og rættvísi
5,15-21	20. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,1-3	Ættarsamkoma
6,1-4	1. sunnudag eftir trettanda, 2
6,10-17	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
6,10-20	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
Filippibrævið (Fil)	
1,6-11	22. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
2,1-11	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
2,5-11	Pálmasunnudag, 1
2,5-11	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
2,19-24	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
3,1-13	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
3,17-21	23. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,4-7	4. sunnudag í advent, 1
4,6-9	Friður og rættvísi
4,4-9 og 11b-13	Heystgudstænasta
Kolossubrævið (Kol)	
1,9-14	24. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1

1,9-20	Skapanarverkið
1,19-23a	Langa fríggjadag
1,24-28	Kristniboðan – heima- og útimission
1,25d-28	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 2
2,10-12	Heilaga dópsins sakramenti
3,12-17	Friður og rættvísi
3,12-17	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
3,12-15 og 17	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
3,12-17	5. sunnudag eftir trettanda, 1
3,12-17	Mariumessa – *vitjanardagur Mariu moyar. Maria hjá Elisabet, móður Jóhannes doyparans*
3,12-17	26. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,16-17	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
4,7-18	Lukas – *evangelistur*
Fyrra Tessalónikubrævið (1 Tess)	
1	Silas – *medarbeiðari Paulusar*
4,1-7	2. sunnudag í føstu, 1
4,13-18	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
5,12-23	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 1
Fyrra Timoteusarbrævið (1 Tim)	
1,1-5 og 18-19	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
1,5-17	13. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
1,12-17	Pálsmessa – Paulus – *umvending Paulusar ápostuls*
2,1-4	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga*, 1
2,5-8	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
4	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
6,3-21	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
6,6-12	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
6,13-16	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*

Seinna Timoteusarbrævið (2 Tim)	
1,1-14	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
1,6-14	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,10-14	Forfylgd og kúgað
3,10-15	Timoteus – *medarbeiðari Paulusar*
3,10-17	2. sunnudag fyri føstu (sunnudag seksagesima), 2
3,10-17	Lukas – *evangelistur*
4,1-11a	Lukas – *evangelistur*
4,1-11	Markusarmessa – Markus – *evangelistur*
4,1-8 og 16-18	Pæturssøka – Pætur og Paulus – *deyði Pæturs og Paulusar*
Titusarbrævið (Tit)	
1,1-5	Titus – *medarbeiðari Paulusar*
2,11-14	Jólaaftan
2,11-14	Jóladag seinnapart ella um kvøldið
3,4-7	Trettanda dag jóla
3,4-7	Heilaga dópsins sakramenti
Hebrearabrævið (Hebr)	
1	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
1,1-5	Jóladag – *føðingardag Krists*, 1
2,2-9	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
2,9-10	Dýrd krossins – *krossmessa um heystið*
2,10-18	Kyndilsmessa – *reinsanardagur Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
3,12-14	10. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,9-13	Seinasta sunnudag í kirkjuárinum, 2
4,12-13	Upphav trúbótar Luthers – *trúbótardagurin*
4,14-16	Langa fríggjadag
4,14-16	3. sunnudag eftir páskir, 2
5,7-9	Langa fríggjadag
8,10-12	Dýra biðidag, 1

10,19-25	Dýra biðidag, 2
10,19-25	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
10,35-11,1	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
11,1-6	3. sunnudag eftir trettanda, 2
11,1-16	Jósef – *maður Mariu moy og fosturfaðir Jesu*
11,32b-34 og 38-40	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
12,1-3	Pálmasunnudag, 2
13,1-2	Marta, Maria og Lázarus
13,12-16	3. sunnudag eftir páskir, 1
13,20-21	2. sunnudag eftir páskir, 2
Jákupsbrævið (Ják)	
1,9-16	1. sunnudag í føstu, 2
1,12	Ólavsøka – *minningardagur Ólavs kongs Haraldssonar (Heilaga) – tjóðarhátíð føroyinga*, 1
1,17-18	Heystgudstænasta
1,17-21	4. sunnudag eftir páskir, 1
1,22-27	5. sunnudag eftir páskir, 1
2,5-9 og 12-17	Friður og rættvísi
2,15-18	7. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,1-12	12. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,13-17	Nýggjársaftan
4,13-17	Nýggjársdag – áttanda dag jóla, 2
5,7-8	2. sunnudag í advent, 2
5,13-20	2. sunnudag í føstu, 2
Fyrra Pætursbrævið (1 Pæt)	
1,1-7	Pætursmessa – Pætur – pætursstólur – *játtan Pæturs ápostuls*
1,3-9	Tummasarmessa – Tummas – *ápostul*
1,3-9	Páskadag, 2
1,3-12	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes (Kánanearin) og Judas Taddeus – *ápostlar*

1,8-12	Jóansøka – *føðingardagur Jóhannes doyparans*
1,17-2,1-3	1. sunnudag eftir páskir, 2
1,18-21	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
1,22-25	Nýggjársaftan
2,1-5	Jólasunnudag (sunnudag millum jóla og Nýggjárs), 2
2,4-10	Kyndilsmessa – *reinsanardag Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*
2,4-10	Føðingardagshald hjá eini kirkju ella gudstænasta um kirkjuna
2,4-10	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
2,20-25	2. sunnudag eftir páskir, 1
3,8-15a	5. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
3,18-22	Sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi), 1
3,18-22	Heilaga dópsins sakramenti
3,18-22	Dýrd krossins – krossmessa um heystið
4,7b-11	6. sunnudag eftir páskir, 1
4,12-16	Barnadagur – sakleysu børnini
5,1-4	Pætursmessa – Pætur – pætursstólur – *játtan Pæturs ápostuls*
5,1-11	Bartalsmessa / bartalsøka – Bartolomeus – ápostul
5,6-11	3. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
5	Markusarmessa – Markus – evangelistur
Seinna Pætursbrævið (2 Pæt)	
1,3-11	Miðføstu sunnudag, 2
1,16-18	Seinasta sunnudag eftir trettanda, 1
3,3-4 og 8-13	25. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,13-15a og 17-18	Nýggjársaftan
Fyrsta Jóhannesarbrævið (1 Jóh)	
1,1-3	Boðanardag Mariu, 1
1,1-7	Kyndilsmessa – *reinsanardag Mariu moyar. Maria í halgidóminum eftir føðing Jesu*

1,1-2,1-2	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
1,1-2,1-2	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
1,5-7	Nýggjársaftan
1,5-2,1-2	9. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
2,1-12	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
3,13-18	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
4,1-6	8. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,1-6	Tveggja ápostla messa – Símun Selotes *(Kánanearin)* og Judas Taddeus – *ápostlar*
4,7-11	Jóladag – føðingardag Krists, 2
4,9-21	Einleiki kirkjunnar – kristin einleiki
4,12-16	18. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,16b-21	1. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 1
5,1-13	Jóhannes – *ápostul og evangelistur*
5,4-12	1. sunnudag eftir páskir, 1
Judasarbrævið (Jud)	
20-25	17. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
Jóhannesar opinbering (Opb)	
1,1-5	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
2,1-7	3. sunnudag í føstu, 2
3,7-13	21. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
3,14-22	2. sunnudag eftir tríeindardag (trinitatis), 2
4,11	Skapanarverkið
5,11-12	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*
7,9-17	Alla halganna sunnudag, 1
11,19-12,1-6 og 10-12a	Mariumessa – *Maria moy, móðir Harrans*
12,7-12a	Mikkjalsmessa – *høvuðseingilin Mikkjal (Mikael) og allir einglar*

14,14-18	Heystgudstænasta
21,1-7	Alla halganna sunnudag, 2

Yvirlit yvir kirkjuárið

ADVENT – JÓLAFØSTA

1. sunnudagur í advent 8
2. sunnudagur í advent 10
3. sunnudagur í advent 13
4. sunnudagur í advent 16

JÓL

Jólaaftan 19
Jóladagur - føðingardagur Krists. 25
2. jóladagur - Sankta Stefans dagur. 33
Jólasunnudagur – sunnudagur millum jóla og nýggjárs 36
Nýggjársaftan 38
Nýggjársdagur - áttandi dagur jóla 44
Sunnudagur eftir nýggjár. 46
Trettandi – trettandi dagur jóla 49

SUNNUDAGAR EFTIR TRETTANDA

1. sunnudagur eftir trettanda 53
2. sunnudagur eftir trettanda 56
3. sunnudagur eftir trettanda 59
4. sunnudagur eftir trettanda 62
5. sunnudagur eftir trettanda 64
Seinasti sunnudagur eftir trettanda 66

FORFØSTA

3. sunnudagur fyri føstu – sunnudagur septuagesima 70
2. sunnudagur fyri føstu – sunnudagur seksagesima 72
Sunnudagur fyri føstu – sunnudagur í føstuinngangi 75

FØSTA

Byrjar øskudag – fyrsta mikudag eftir sunnudag fyri føstu (sunnudag í føstuinngangi).

1. sunnudagur í føstu 78
2. sunnudagur í føstu 82
3. sunnudagur í føstu 84
Miðføstu sunnudagur 87
Boðanardagur Mariu. 91
Pálmasunnudagur Inngangur til dimbildagaviku 94
Skírhósdagur 96
Langi fríggjadagur. 101

PÁSKIR

Páskadagur 116
2. páskadagur 120
1. sunnudagur eftir páskir 124
2. sunnudagur eftir páskir 128
3. sunnudagur eftir páskir 131
Dýri biðidagur. 134
4. sunnudagur eftir páskir 136
5. sunnudagur eftir páskir 140
Krists himmalsferðardagur 143
6. sunnudagur eftir páskir 146

HVÍTUSUNNA

Hvítusunnudagur 150
2. hvítusunnudagur 154
Tríeindardagur (trinitatis sunnudagur). 157

SUNNUDAGAR EFTIR TRÍEINDARDAG (TRINITATIS)

1. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 161
2. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 164
3. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 167
4. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 170
5. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 173
6. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 176
7. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 179
8. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 181
9. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 185
10. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 188
11. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 190
12. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 193
13. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 196
14. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 199
15. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 202
16. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 206
17. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 209
18. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 211
19. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 214
20. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 217
21. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 220
Alla halganna sunnudagur. 223
22. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 226
23. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 229
24. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 232
25. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 235
26. sunnudagur eftir tríeindardag (trinitatis) . . 238
Seinasti sunnudagur í kirkjuárinum. 240

YVIRLIT YVIR SERSTAKAR GUDSTÆNASTUR Í KIRKJUÁRINUM

Heystgudstænasta 283
Skapanarverkið 286
Friður og rættvísi 287
Forfylgd og kúgað 288
Kristniboðan - heima- og útimissión 289
Einleiki kirkjunnar - kristin einleiki. 291
Føðingardagshald hjá eini kirkju *(tá kirkja fyllir runt)* ella gudstænasta um kirkjuna 292
Ættarsamkoma 293
Heilaga dópsins sakramenti 293
Heilaga altarsins sakramenti 295

YVIRLIT YVIR MISHALGIDAGAR OG AÐRAR MINNISDAGAR

Ápostladagur. 297
30.11. Andrasarmessa – Andrias 299
21.12. Tummasarmessa – Tummas 299
26.12. Sankta Stefans dagur. 33
27.12. Jóhannes 304
28.12. Barnadagur - tey sakleysu børnini 309
06.01. Trettandi dagur jóla. 310
24.01. Timoteus 306
25.01. Pálsmessa - Paulus 300
02.02. Kyndilsmessa. 310
22.02. Pætursmessa – Pætur. 300
24.02. Mattias 301
19.03. Jósef 311
25.03. Mariumessa um várið 312
25.04. Markusarmessa – Markus 304

01.05. Filippus og Jákup. 301
11.06. Barnabas 308
24.06. Jóansøka 312
29.06. Pætursøka - Pætur og Paulus. 301
02.07. Mariumessa. 313
22.07. Maria Magdalena 314
25.07. Jákupsdagur 302
27.07. Maria, Marta og Lázarus 314
29.07. Ólavsøka 244/315
06.08. Kristi dýrd. 315
15.08. Mariumessa. 316
24.08. Bartalsmessa / Bartalsøka – Bartolomeus303
08.09. Mariumessa um heystið. 317
14.09. Dýrd krossins - krossmessa um heystið . 317
21.09. Matteus. 302
29.09. Mikkjalsmessa 319
18.10. Lukas 305
28.10. Tveggja ápostla messa - Símun Selotes
(Kánanearin) og Judas Taddeus. 303
31.10. Upphav trúbótar Luthers 320
01.11. Alla halganna dagur 321

Hesir hava ongan ávísan dag:

Titus 307
Silas 307

Inngangsbøn

Latið okkum øll biðja:
Harri! Eg eri inn komin í hetta heilaga hús títt at hoyra, hvat ið tú, Guð faðir, skapari mín, tú Harri Jesus, frelsari mín, tú góði heilagi andi, uggari mín í lívi og deyða, vilt við meg tala.

Harri! Opna tú nú soleiðis við tínum heilaga anda fyri Jesu Krists skuld hjarta mítt, at eg av orði tínum kann læra at bera angur um syndir mínar, í lívi og deyða at trúgva á Jesus og hvønn dag í heilagum lívi og levnaði at batna. Tað hoyri og bønhoyri Guð fyri Jesus Krist! Amen.

Útgangsbøn

Latið okkum øll biðja:
Harri, eg takki tær av øllum hjarta mínum, fyri at tú hevur lært meg, hvat tú vilt, at eg skal trúgva og gera.

Hjálp mær nú, Guð mín, við heilaga anda tínum fyri Jesu Krists skuld, at eg má varðveita orð títt í reinum hjarta, av tí styrkjast í trúnni, í heilagum levnaði batna og meg við tað í lívi og deyða ugga!

Faðir vár, tú sum ert á himnum! Heilagt verði navn títt; komi ríki títt; verði vilji tín, sum í himni so á jørð; gev okkum í dag okkara dagliga breyð; og fyrigev okkum syndir okkara, so sum vit eisini fyrigeva teimum, ið móti okkum synda; og leið okkum ikki í freistingar; men frels okkum frá tí lla; tí at títt er ríkið, valdið og heiðurin um allar ævir! Amen.

FØROYSKT KIRKJUMÁL